LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2020

Ársfrágreiðing

latin
løgtingsgrannskoðarunum

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
“um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

September 2021

Innihaldsyvirlit

0. FRAMLØGA 7

1. INNGANGUR 9

1.1 LANDSROKNSKAPURIN 2020 9
1.2 GRANNSKOÐAN AV ROKNSKAPINUM 9

2. ALMENNAR VIÐMERKINGAR 13

2.1 SKIPAN AV ROKNSKAPARHALDINUM 13
2.2 ROKNSKAPAREFTIRLIT, EISINI VIÐ FÍGGJARSTØÐUM 13
2.3 TÝDNINGUR AT HALDA VANLIGAR BÓKHALDSREGLUR 14
2.4 STUÐULSJÁTTANIR OG VANLIGAR RAKSTRARÚTREIÐSLUR 15
2.5 INNHEINTING AV SKULD TIL TAÐ ALMENNA 15
2.6 REGLUR VERÐA IKKI HILDNAR 17
2.7 ATKOMULIGHEIT TIL REGLUGERÐIR HJÁ STOVNUM 17
2.8 VANDI FYRI MISTØKUM OG SVIKI 18

3. LØGMANSFYRISITINGIN 19

3.1 UMBYGGING Í TINGANESI (LG 2019/202-0111) 19
3.2 LØGMANSSKRIVSTOVAN (LG 2020/202-0111) 19
3.3 DÁTUEFTIRLITIÐ (LG 2017/202-0142) 20

4. FÍGGJARMÁL 21

4.1 LANDSROKNSKAPURIN IKKI FULLFÍGGJAÐUR (LG 2014/100-0001) 21
4.2 TALGILDU FØROYAR (LG 2018/203-0111) 22
4.3 LANDSINS OGNIR (LG 2020/203-0111) 24
4.4 VEÐHALDS- OG EFTIRLØNARSKYLDUR (LG 2020/203-0151) 25
4.5 DAGFØRING AV ROKNSKAPARRUNDSKRIVI (LG 2016/203-0151) 26
4.6 KERVISGRANNSKOÐAN (LG 2020/203-0151) 26
4.6.1 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ TAKS 26
4.6.2 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ GJALDSTOVUNI 26
4.6.3 KERVISGRANNSKOÐAN HJÁ KT LANDSINS 28
4.7 FØROYA GJALDSTOVA (LG 2020/203-0151) 30
4.8 TAKS (LG 2020/203-0151) 30
4.9 INNHEINTING AV BARNAPENINGI (LG 2017/203-0151) 37
4.10 BÚSKAPARRÁÐIÐ (LG 2020/203-0151) 38

4.11 LANDSBANKI FØROYA (LG 2020/203-0151) 39
4.12 HAGSTOVA FØROYA (LG 2020/203-0152) 41
4.13 EFTIRLØNIR HJÁ FÓLKASKÚLALÆRARUM (LG 2020/203-0181) 43
4.14 LANDSVERK (LG 2020/203-0381) 44
4.15 ASFALTVERK, LØGUJÁTTAN (LG 2020/203-0381) 55
4.16 NÝGGIR LANDSVEGIR (LG 2019/217-0381) 56
4.17 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAR (LG 2020/203-0382) 57
4.18 STRANDFARASKIP LANDSINS (LG 2020/203-0382) 58
4.19 STRANDFARASKIP LANDSINS, LØGUJÁTTAN (LG 2020/203-0382) 70
4.20 KT LANDSINS (LG 2020/203-0383) 71
4.21 AKSTOVAN (LG 2020/203-0384) 73
4.22 LØNARHÆDDARAVGJALD (LG 2020/220-0522) 75
4.23 LOYVISGJALD Á ALIVINNU (LG 2020/220-0522) 78
4.24 ONNUR GJØLD/AVGJØLD 80
4.24.1 AVGJALD AV KAPITALEFTIRLØNUM (LG 2017/220-0521) 80
4.24.2 BRENNIOLJUGJALD (LG 2019/220-0522) 80
4.24.3 FRAMLEIÐSLUGJALD (LG 2019/220-0522) 81
4.24.4 FERÐAAVGJALD (LG 2019/220-0522) 83
4.24.5 VIÐMERKINGAR FRÁ LANDSSTÝRISMANNINUM 83

5. FISKIVINNUMÁL 85

5.1 FISKIMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/205-0111) 85
5.2 FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ (LG 2017/205-0342) 85
5.3 NÝTT HAVRANNSÓKNARSKIP, LØGUJÁTTAN (LG 2019/205-0343) 86
5.4 FISKIVINNUROYNDIR (LG 2018/205-0343) 86
5.5 EFFEKTIVAR VEÐHALDSÚTREIÐSLUR (LG 2017/205-0345) 87
5.6 AVGJALD Á FISKATILFEINGI (LG 2020/220-0522) 87

6. UMHVØRVIS- OG VINNUMÁL 91

6.1 UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/206-0111) 91
6.2 MARITIMUR TÆNASTUDEPIL (LG 2020/206-0111) 91
6.3 STUÐUL TIL UMHVØRVISVERNDARTILTØK (LG 2020/206-0301) 91
6.4 NÁTTÚRUFRIÐINGARNEVNDIR (LG 2020/206-0301) 93
6.5 STUÐUL TIL SPILLOLJU (LG 2020/206-0301) 94
6.6 LANDBÚNAÐARSTUÐUL (LG 2020/206-0332) 94
6.7 FØROYSK HÚSDJÓR OG FØROYSK ROSS (LG 2020/206-0332) 97
6.8 JARÐFEINGI (LG 2017/206-0321) 101
6.9 SJÓVINNUSTÝRIÐ (LG 2020/206-0351) 102
6.10 SJÓVINNUSTÝRIÐ, BYGNINGUR (LG 2015/206-0351) 105
6.11 LOYVISNEVNDIN (LG 2019/206-0371) 106
6.12 VINNUSTOVNURIN (LG 2017/206-0371) 106
6.13 BRÚKARAUMBOÐ (LG 2020/206-0371) 106
6.14 FILMSHÚS (LG 2020/206-0371) 107
6.15 ENDURGJALD TIL FILMSVERKÆTLANIR (LG 2020/206-0372) 108
6.16 TÓNLEIKAÚTFLUTNINGSSTOVA (LG 2020/206-0372) 109
6.17 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAMENNING (LG 2019/206-0372) 110
6.18 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LG 2018/206-0373) 110
6.19 UMHVØRVISSTOVAN (LG 2017/211-0374) 111

6.20 UMHVØRVISSTOVAN, KASSAEFTIRLIT (LG 2020/206-0374) 112
6.21 HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN (LG 2017/206-0375) 112
6.22 BARSILSSKIPANIN (LG 2020/206-0394) 113
6.23 BARSILSGRUNNURIN 119

7. UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁL 123

7.1 UNDIRVÍSINGARSTÝRIÐ (LG 2020/207-0231) 123
7.2 FØROYSKT SUM ANNAÐMÁL, VAKSIN (LG 2020/207-231) 124
7.3 NÁM (LG 2017/207-0231) 125
7.4 FÓLKASKÚLIN (LG 2020/207-0232) 125
7.5 RÁSIN (LG 2020/207-0232) 126
7.6 GLASIR (LG 2020/207-0233) 128
7.7 LØNIR Á SERBREYTUNUM (LG 2018/207-0233) 134
7.8 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK, LØGUJÁTTAN (LG 2018/207-0233) 135
7.9 SKÚLADEPIL VIÐ MARKNAGIL, LØGUJÁTTAN (LG 2020/207-0233) 136
7.10 FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING (LG 2019/207-0235) 136
7.11 VINNUHÁSKÚLIN (LG 2018/207-0236) 137
7.12 SJÓNÁM (LG 2020/207-0236) 137
7.13 FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA (LG 2018/207-0236) 139
7.14 GRANSKINGARRÁÐIÐ (LG 2020/207-0236) 141
7.15 TJÓÐPALLUR FØROYA (LG 2020/207-0242) 143
7.16 TJÓÐSAVNIÐ (LG 2019/207-0243) 145
7.17 TJÓÐSKJALASAVNIÐ (LG 2020/207-0243) 146
7.18 LANDSBÓKASAVNIÐ (LG 2020/207-0243) 148
7.19 UMSITINGIN AV MIÐLASTUÐLI (LG 2020/207-0244) 150
7.20 KRINGVARP FØROYA, LØGUJÁTTAN (LG 2019/207-0244) 151
7.21 KIRKJUGRUNNURIN OG TILTAKSGRUNNURIN (LG 2018/207-0245) 153
7.22 ÍTRÓTTAHØLL Á SANDOYNNI (LG 2018/207-0246) 154

8. HEILSUMÁL 155

8.1 FÓLKAHEILSURÁÐIÐ (LG 2020/211-0201) 155
8.2 HEILSUTRYGDARVEITINGAR (LG 2020/211-0202) 158
8.3 HEILSUTRYGD (LG 2019/211-0202) 161

9. ALMANNAMÁL 163

9.1 ALMANNAMÁLARÁÐIÐ (LG 2016/212-0111) 163
9.2 FAMILJUFYRISITINGIN (LG 2019/212-0141) 163
9.3 ALMANNAVERKIÐ (LG 2017/212-0211) 164
9.4 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LG 2015/212-0213) 165
9.5 EINKJUBARNASTYRKUR (LG 2014/212-0213) 165
9.6 BARNAÍSKOYTI (LG 2015/212-0213) 165
9.7 BÚSTOVNAR O.A., LØGUJÁTTAN (LG 2019/212-0216) 166
9.8 ALMANNAVERKIÐ, TRIVNAÐARTÆNASTUR (LG 2018/212-0216) 172
9.8.1 TRIVNAÐARTÆNASTUR 172
9.8.2 FELAGSRAKSTUR Í TRIVNAÐARDEPLINUM 173
9.8.3 EIND 1 173

9.8.4 UPPFYLGING AV GRANNSKOÐAN, EIND 4 173
9.8.5 LØNARGRANNSKOÐAN Í EIND 6 175
9.8.6 EIND 11 Í TRIVNAÐARTÆNASTUM 175
9.9 KASSAEFTIRLIT Á VERKSTAÐNUM VÓN (LG 2020/212-0216) 177
9.10 FELAGSKASSAR (LG 2020/212-0216) 177
9.11 FYRIBILS FORSORGARHJÁLP § 9 (LG 2020/212-217) 177
9.12 HJÁLPARAMBOÐ V.M. § 18 (LG 2019/212-0217) 179
9.13 ÍSKOYTI TIL HOYRITÓL SAMBÆRT § 18B (LG 2020/212-0217) 180
9.14 ARBEIÐSFREMJANDI TILTØK (LG 2017/212-0217) 182

10. FÍGGJARSTØÐA 183

10.1 FÍGGJARSTØÐA (LG 2020/300-0000) 183
10.1.1 KAPITALINNSKOT (LG 2020/300-0102) 183
10.1.2 VIRÐISBRØV 185
10.1.3 ÚTLÁN 187
10.1.4 ÁOGN O.A. 187
10.1.5 TØKUR PENINGUR 189
10.1.6 SKULD 191
10.2 ÚTJAVNINGARKONTA (LG 2020/300-0203) 192
10.3 FYRISITING AV GJALDFØRI OG SKULD (LG 2020/300-0104 OG 0202) 193
10.3.1 PORTEFØLJUSKIPANIN 193
10.3.2 GJALDFØRIÐ HJÁ LANDINUM 193
10.3.3 LANDSKASSASKULD - BRÆVALÁN 195

11. ORÐALISTI 201

0. Framløga

Sambært § 12, stk. 2, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”, skal roknskapargrannskoðanin innan 8 mánaðir eftir fíggjarárslok lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing um úrslitið av grannskoðanini. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu leingja freistina.

Við hesum letur Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum ársfrágreiðing sína í sambandi við, at løgtingsgrannskoðararnir skulu leggja landsroknskapin 2020 fyri Løgtingið til samtyktar.

Frágreiðingin er løgd fyri teir landsstýrismenn til viðmerkingar, sum hava umsitið málsøkini. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnunum um tiltøk og ætlanir, frágreiðingin hevur elvt til, eru tiknar við.

Landsgrannskoðanin roknar grannskoðanina av landsroknskapinum 2020 sum lidna. Kortini kann Landsgrannskoðanin seinni fara at kanna mál og spurningar, sum viðvíkja bæði 2020 og eldri árum. Upplýsingar kunnu koma fram, sum elva til, at tey mál, sum eru umrødd í hesari frágreiðing, verða mett og viðgjørd av nýggjum.

Argir, 15. september 2021

Beinta Dam
landsgrannskoðari

1. Inngangur

1.1 Landsroknskapurin 2020

§ 45, stk. 1, í stýrisskipanarlógini ásetir, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." skal Landsstýrið, innan mai mánaður er liðin, leggja samlaða landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár fyri Løgtingið.

Landsstýrið skal, áðrenn mai mánaður er liðin, leggja fram samlaðan landsroknskap.

Landsroknskapurin fyri fíggjarárið 2020 var latin Løgtinginum 28. mai 2021.

Tað er eisini ásett í § 11, stk. 1, í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.", at landsstýrismaðurin í seinasta lagi fimm mánaðir eftir fíggjarárslok skal lata løgtingsgrannskoðarunum og Landsgrannskoðanini tann árliga landsroknskapin fyri undanfarna fíggjarár.

Neyvari reglur um roknskaparhaldið eru ásettar í K. nr. 22 frá 14. mars 2007 "um roknskaparverk landsins o.t."[1] Aðalráðini og teir stovnar, sum hoyra undir aðalráðini, skulu leggja fram ársroknskap, sum er gjørdur í Búskaparskipan landsins, og sum gevur eina rætta mynd av inntøkum og útreiðslum í fíggjarárinum og av ognum og skuld við fíggjarárslok.

Aðalráð og stovnar skulu leggja fram ein rættan roknskap – gjørdur í Búskaparskipan landsins.

Aðalráðini og stovnar teirra skulu eisini støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini verða roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setir upp.

Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

1.2 Grannskoðan av roknskapinum

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðan av almennum roknskapum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

Sambært grannskoðanarlógini er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir,

Endamálið við grannskoðanini.

- at allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- at eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,

[1] Broytt við K. nr. 110 frá 14. juli 2017.

at hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um, og
at roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin

Ábyrgd grannskoðarans.

Landsgrannskoðanin er stovnur undir Løgtinginum og er óheft í virki sínum. Landsgrannskoðanin skal grannskoða árliga landsroknskapin, t.e. samlaða roknskapin fyri landsumsitingina og allar landsstovnar.[2]

Grannskoðanin skal fevna um fíggjarliga grannskoðan, løgfrøðiliga-kritiska grannskoðan og fyrisitingargrannskoðan. Harafturat skal grannskoðanin regluliga kanna, um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Landsgrannskoðanin ger sjálv av, hvussu grannskoðanin verður útint. Grannskoðanin verður løgd soleiðis til rættis, at øki og stovnar verða grannskoðað við jøvnum millumbili. Landsgrannskoðanin fer út á stovnar og deildir at kanna t.d. roknskapar- og lønarviðurskifti ella at kanna mannagongdir fyri umsiting av lóggávu og játtanum. Aðrar uppgávur eru t.d. játtanareftirlit, gjøgnumgongd av fíggjarstøðu og avstemman.

Privatir grannskoðarar

Hjá nøkrum landsstovnum og grunnum er tað við lóg, kunngerð ella viðtøkum ásett, at grannskoðanin skal verða útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum. Í øðrum førum verður grannskoðanin útint sambært avtalu ella siðvenju.

Grannskoðararnir lata løgtingsgrannskoðarunum frágreiðingar um úrslitini av grannskoðanunum. Seinnu árini hava løgtingsgrannskoðararnir gjørt ein samandrátt av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum, sum er latin Løgtinginum saman við uppskoti til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum.

Frágreiðingar umbidnar av løgtingsgrannskoðarunum

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu áleggja Landsgrannskoðanini at gera frágreiðingar um viðurskifti, sum teir vilja hava lýst. Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini áleggja Landsgrannskoðanini at gera víðkaða fyrisitingargrannskoðan á ávísum økjum ella at gera tvørgangandi fyrisitingargrannskoðan, sum fevnir um fleiri játtanir, stovnar o.a.

Viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismonnum

Í § 12, stk. 1, í grannskoðanarlógini er ásett, at landsstýrismaðurin skal hava eina skrivliga fráboðan um úrslitið av grannskoðanini. Vanligt er, at stovnsleiðslan frammanundan fær høvi at gera sínar viðmerkingar til frágreiðingina. Tað er fyri at tryggja, at ongar misskiljingar eru, og at tey skriv, sum verða send landsstýrismanninum, eru so rætt sum gjørligt, og at allir partar fáa høvi at lýsa síni sjónarmið.

Landsstýrismaðurin skal hava frágreiðingar til viðmerkingar.

Í § 12, stk. 3, er ásett, at áðrenn frágreiðing um úrslitið av einari grannskoðan verður latin løgtingsgrannskoðarunum, skal hon verða løgd fyri viðkomandi landsstýrismann til viðmerkingar. Møguligar viðmerkingar og fráboðanir frá landsstýrismanninum um tiltøk og ætlanir, sum frágreiðingin hevur elvt til, skulu takast við í frágreiðingina til løgtingsgrannskoðararnar.

Frágreiðingin skal sendast landsstýrismanninum til viðmerkingar til tess at tryggja, at tað tilfar, sum verður latið løgtingsgrannskoðarunum, verður so objektivt rætt sum gjørligt, og at landsstýrismaðurin eisini fær høvi at lýsa síni sjónarmið.

Stuðul frá Norðurlendska Ráðharraráðnum (LG 2020/409-0005)

Hvørt ár sendir danska ríkisgrannskoðanin eitt yvirlit yvir stovnar og verkætlanir í Føroyum, sum hava fingið stuðul frá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Talan er um

[2] Tó ikki roknskapirnar hjá teimum, har tað í lóg, kunngerð, viðtøkum, siðvenju e.l. er ásett, at grannskoðanin verður útint av løggildum ella skrásettum grannskoðarum.

norðurlendskar stovnar í Føroyum, so sum Norðurlandahúsið og Norrønt Atlants-samstarv (NORA). Eisini stuðlar Ráðharraráðið fleiri prosjektum í Føroyum, t.d. tænastumannaumbýti.

Landsgrannskoðanin ger ein samandrátt av árligu grannskoðanini av norðurlendsku stovnunum, og hyggur eftir, um roknskapur ella váttan fyriliggur fyri prosjektini. Samandrátturin verður sendur donsku ríkisgrannskoðanini, sum hevur ábyrgd av at grannskoða Norðurlendska Ráðharraráðið og Norðurlandaráðið. Samandrátturin er partur av samlaða roknskapinum hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum og Norðurlandaráðnum.

Millumlanda samstørv

Landsgrannskoðanin er við í norðurlendskum samstarvi ímillum ríkisgrannskoðanirnar í Danmark, Finnlandi, Íslandi, Norra, Svøríki og Føroyum. Landsgrannskoðanin er eisini við í norðuratlantiskum samstarvi ímillum grannskoðanirnar í Íslandi, Grønlandi og Føroyum.

Sum skrivari hjá løgtingsgrannskoðarunum, er landsgrannskoðarin við á fundum ímillum skrivararnar hjá parlamentarisku grannskoðarunum í Norðurlondum.

Landsgrannskoðanin hevur umboð í grannskoðaranevndini, ið grannskoðar ES-stuðul frá Northern Periphery and Arctic Programme.

2. Almennar viðmerkingar

2.1 Skipan av roknskaparhaldinum

Ll. nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.” og K. nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins o.t.” áseta, hvussu roknskaparhaldið hjá landinum skal vera skipað. Ein týðandi partur er, at stovnar o.o. gera eina roknskaparreglugerð[3], sum sigur, hvussu roknskaparhaldið á stovninum skal vera fyriskipað, og at reglugerðin verður dagført. Stovnsleiðarin skal ansa eftir, at roknskaparreglugerðin við ábyrgdar- og heimildarreglum verður hildin.

Síðani í januar 1995 hevur lóg ásett, at landsumsitingin og landsstovnar skulu gera eina reglugerð um roknskaparhaldið.

Landsstýrismaðurin og aðalráðið hava skipað roknskaparøkið forsvarliga, tá ið allar roknskaparreglugerðir eru gjørdar og góðkendar, og tá ið eftirlit er við, at ásettu mannagongdirnar verða hildnar.

Grannskoðanir hjá Landsgrannskoðanini seinastu nógvu árini hava víst, at roknskaparreglugerðirnar eru ikki dagførdar. Tær eru tí í besta føri til onga nyttu og í ringasta føri villeiðandi og spill av tilfeingi.

Ásetingin í roknskaparlógini verður ikki tikin í álvara.

Aftur í hesari ársfrágreiðingini má Landsgrannskoðanin ásanna, at langt er ímillum dagførdar roknskaparreglugerðir.

2.2 Roknskapareftirlit, eisini við fíggjarstøðum

Sambært § 10 í roknskaparkunngerðini skulu roknskaparupplýsingar samsvarandi góðkendum ársroknskapum verða tiknar við í landsroknskapin, sum Gjaldstovan setur upp.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at áseting um roknskapareftirlit fevnir eisini um at kanna fíggjarstøðuna.

Roknskapareftirlit fatar eisini um at kanna fíggjarstøðuna.

Í § 9 er ásett, at stovnsleiðararnir skulu góðkenna roknskapirnar viðvíkjandi stovnunum mótvegis hægri myndugleika. Sum liður í góðkenningini skal eftirlit vera við, um ogn og skuld og nýtslan av veittum játtanum er gjørd rætt upp.

Í frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu í 2020, sum Landsgrannskoðanin lat løgtingsgrannskoðarunum í august 2021, hava vit fyrstu ferð eisini lagt dent á og spurt um postar i fíggjarstøðuni. Tað hevur fört til, at fleiri stovnar hava vent sær til Gjaldstovuna um at fáa rættingar gjørdar, tí at fíggjarstøðurnar vóru ikki rættar.

Hjá fleiri stovnum var fíggjarstøðan ikki røtt.

[3] § 5, stk. 1, í Ll. nr. 33/1994: *“Landsumsitingin og teir landsstovnar v.m., sum koma undir § 2, stk. 1, skulu gera eina reglugerð um roknskaparhaldið í landsumsitingini ella á stovninum”.*

2.3 Týdningur at halda vanligar bókhaldsreglur

Uppgávur roknskaparverksins eru at tryggja eina munadygga búskaparfyrisiting við at skráseta upplýsingar, sum skulu verða nýttar til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit við virkseminum á øllum stigum í landsfyrisitingini.

Roknskaparverkið eigur at verða skipað soleiðis, at útvegast kunnu neyðugar upplýsingar at nýta til innanhýsis roknskapareftirlit, framløgu av tíðarskeiðsroknskapum og at gera landsroknskapin. Endamálið er at kunna lýsa, hvat einstaka virksemið og ymisku veitingarnar kosta ella væntandi koma at kosta, og eisini hvørji viðurskifti eru avgerandi fyri, hvussu tilfeingið verður nýtt.

Sambært rundskrivinum um roknskaparreglugerðir er tað eitt grundleggjandi krav, at stovnur konterar sambært Kontuskipan landsins og eftir konteringarleiðbeiningini, ið hoyrir til.

Í sambandi við eftirlit á stovnum kannar Landsgrannskoðanin við stakroyndum keyp, sølu, konteringar o.a.

Landsgrannskoðanin hevur vísst á nógvar skeivar konteringar. Útreiðslur eru bókaðar á skeivar kontur og inntøkur verða mótbókaðar í útreiðslum. Landsgrannskoðanin heldur, at skeivar bókingar koma alt ov ofta fyri, við tí úrslitið at roknskapurin hjá nøkrum stovnum er gruggaður.

Konteringar mugu vera rættar og neyvar.

Um ein innanvirkis roknskapur skal kunna geva munagóðar upplýsingar um virksemið, er treytin, at konteringarnar eru rættar. Er roknskapurin fyri t.d. verkætlan, sambýli ella byggiprojekt liðaður sundur í staðartátt, endamál e.a., er týdningarmikið at skráseta rætt.

Sum dømi kann nevnast, at tá ið landið luttekur í altjóða granskingarverkætlanum, har roknskapurin fyri verkætlanina skal latast fyriskiparum, er tað av alstórum týdningi, at arbeiðstíðin hjá starvsfólkum verður skrásett rætt og regluliga, soleiðis at roknskapirnir kunnu vera álítandi arbeiðsamboð. Í teimum førum er eisini týdningarmikið, at stovnar hava neyvar konteringar av virkseminum.

Bruttomeginreglan er høvuðsregla.

Roknskaparliga skal skrásetast eftir bruttomeginregluni, t.e. útreiðslur á útreiðslukontu og inntøkur á inntøkukontu. Um inntøkur verða bókaðar á útreiðslukontur, gruggar tað roknskapin, tí lesarin sær ikki veruligu roknskapartølini. Eitt dømi er at stovnur hevur nettoútreiðslur av keypi av vørum fyri 2,1 mió.kr., men tá er 1 mió.kr. mótbókað. Útreiðslan er tí 3,1 mió.kr.

Inntøkur og útreiðslur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, skulu verða skrásettar, tá ið vøran/tænastan er latin, og skrásetingin skal verða prógvað við skjali. Er eitt uttanhýsisskjal, skal tað verða nýtt. Skjalið skal vísa tað, sum er neyðugt fyri at eyðmerkja eftirlitsslóðina.

Um inntøkur eru bókaðar eftir inngjaldi ella peningastovnsflyting kann grannskoðanin ikki eftirkanna, um øll inntøkan er skrásett í bókhaldinum ella um onkur vantar at rinda. Dømi er um at stovnur, sum letur hjálparamboð har borgarar rinda egingjald, skrásetir inntøkurnar eftir inngjaldinum, og ikki eftir krøvum, rokningum e.t.

Eftirlitsslóðin skal kunna knýta útreiðslur og/ella inntøkur til heimild.

Nøktandi goymslustýring skal tryggja virðini.

Á lógarbundnu játtanunum skal eftirlitsslóðin eisini vísa, at útreiðsla hevur heimild í lóg. Tað er serliga galdandi á almannaøkinum, har peningur verður goldin borgara ella fyri keyp av vøru til borgara. Um tól kunnu keypast niðurfyri, má stovnurin hava nøktandi goymslustýring til at tryggja tólini. Landsgrannskoðanin hevur í fleiri førum staðfest, at stovnar ikki hava nøktandi goymslustýring, sum kann tryggja virðini. Vandi er tá fyri, at lógarhavdar útreiðslur hjá landinum eru til fánýtis.

2.4 Stuðulsjáttanir og vanligar rakstrarútreiðslur

Fyrisitingarútreiðslur eru útreiðslur, sum ein stovnur hevur av at útinna tað virksemi, sum stovninum er álagt at fremja sambært fíggjarlóg og aðrari lóggávu. Landsgrannskoðanin hevur fleiri ferðir áður reist spurningin um at spjaða fyrisitingarútreiðslur, og hevur eisini gjøgnum árini gjørt stovnar varugar við, at tað er ikki rætt at blanda fyrisitingarútreiðslur hjá einum stovni saman við øðrum játtanum, ið stovnurin umsitur.

Ivamálini kunnu vera um, nær útreiðslur kunnu haldast av løgujáttan, stuðulsjáttan, inntøkufíggjaðum virksemi, og nær tær eru natúrligur partur av rakstrinum hjá stovninum sjálvum.

Dømi í hesari frágreiðing er, at stovnur hevur vístá, at tað er einfaldari og gjøgnumskygdari loysn, at stovnurin sjálvur brúkar stuðulsjáttan, sum hann umsitur, heldur enn at fáa onkran uttanhýsis at søkja um fígging av stuðulsjáttanini til samsvarandi verkætlanir.

Landsgrannskoðanin heldur, at roknskapurin gevur ikki rætta mynd av virkseminum hjá stovni, um reglurnar um játtanarslag ikki eru hildnar, og at tað gruggar roknskapin, at stovnurin brúkar aðrar játtanir at reka stovnin við.

Gevur ikki rættvísandi mynd, um stovnar við rakstrarjáttan brúka aðrar játtanir til at fíggja sítt virksemi.

2.5 Innheinting av skuld til tað almenna

Í fleiri førum hevur Landsgrannskoðanin vístá, at ivasamt er, um skuldin til tað almenna verður kravd inn. Eisini er ógreitt, hvussu stór skuldin er.

Ivasamt, um skuld til tað almenna verður kravd inn og ógreitt, hvussu stór skuldin er.

Viðvíkjandi rokningum, sum Gjaldstovan sendir, er mannagongdin ásett í vegleiðing frá 8. mai 2000. Gjaldstovan sendir skuldara tvær áminningar, og í seinnu áminningini stendur, at um ikki er goldið innan 14 dagar, verður kravið sent tí stovni, sum eigur kravið. Stovnurin tekur síðani støðu til, um málið skal sendast til advokat.

Frá 1. mai 1998 var innkrevjing og panting av skatti, avgjaldi o.ø. flutt frá Gjaldstovuni til TAKS.

Lógin um innheinting av skattum og avgjøldum til tað almenna er nr. 85/1935.

Í fleiri lógum um ásetan av gjøldum til tað almenna er ásett, at um kravið ikki er goldið innan ávísa freist, hevur TAKS heimild at heinta kravið inn, um neyðugt við panting. Dømi eru heilsutrygdargjald, kringvarpsgjald o.a. Eisini krevur TAKS skuld inn viðvíkjandi barnapeningi, ið Almannaverkið hevur lagt út.

Landsgrannskoðanin hevur vístá, at tað hevur týdning, at stovnur, sum eigur útistandandi krøv ella hevur ábyrgd av at heinta skuld inn, átekur sær ognarskapin av kravinum.

Landsgrannskoðanin hevur seinastu árini umrøtt dømi um vantandi innkrevjing, t.d. av vinnulánum frá 80'unum, og av barnapeningi.

Um myndugleikin ikki tekur neyðug stig til at halda lív í krøvunum, er vandi fyri at krøv fyrnað, og at landskassin av teirri orsøk missir inntøkur.

Landið missir inntøkur, um krøv fyrna.

Landsgrannskoðanin skal eisini vísa á, at tað er týdningarmikið, at innheintingarmyndugleikin hevur skil á, hvør tað er, ið skyldar tí almenna pening, annars er vandi fyri, at borgarar verða ikki viðgjørdir eins, t.v.s. at onkur rindar, meðan kravið ímóti onkrum øðrum fyrnar.

Effektivar veðhaldsútreiðslur

Í ársfrágreiðingini 2017 gjørdi Landsgrannskoðanin eina støðulýsing av vinnulánum, sum landið veðhelt fyri í 80'unum og fyrst í 90'unum.

Sambært frágreiðingini um 80-árini, sum § 19-nevndin gjørdi um aldarskiftið, byrjaðu effektivu veðhaldsútreiðslurnar at vaksa í 1987, og vórðu tær, sum stavaðu frá 80'árunum, gjørdar upp til at vera áleið 1,6 mia.kr.

Í 1997 var ábyrgdin av innkrevjingini av vinnulánum flutt frá Fíggjar- og Búskapardeildini til Gjaldstovuna, og flutt til TAKS í 1998, um sama mundi sum almenna innkrevjingin og pantifútarnir vóru flutt frá Gjaldstovuni til TAKS.

Einki skipað eftirlit hevur verið við at halda lív í krøvunum.

Fiskimálaráðið varðar av játtanini, og teimum kunnugt var einki skipað eftirlit við at halda lív í krøvunum. Ráðið vísti á, at TAKS kundi ikki siga, hvørji krøv vóru fyrnað ella hvørji vóru tætt at fyrningarfreistini. Nøkur partsreiðarí vóru ikki blivin individualiserað.

Í 2014 gjøgnumgekk TAKS saldulistan við hjálp frá advokati, og tað endaði við, at fleiri vinnulán vóru fult avskrivað tí feløgini vóru strikað í partafelagsskránni. Í 2014 vóru 20,2 mió.kr. avskrivaðar, og í 2017 vóru 18,4 mió.kr. avskrivaðar.

Við árslok 2017 var eftirstøðan góðar 110 mió.kr., og einans 277 t.kr. vóru goldnar inn á lánini seinastu fimm árini.

Í 2019 gjøgnumgekk TAKS allar skuldarar við vinnulánum í saldulistanum hjá Gjaldstovuni og skrivaði frágreiðing um tey innheintingarstig, sum TAKS hevur tikið mótvegis skuldarum/skuldini.

Gjøgnumgongdin vísti, at 104 skuldarar við einari skuld á í alt 185,5 mió.kr. vóru til innheintingar hjá TAKS. Av teimum vóru 160,8 mió.kr. fyrnaðar til innheintingar. Skuldin, sum ikki var fyrnað til innheintingar, var íalt 24,7 mió.kr. hjá 45 skuldarum.

161 mió.kr. eru avskrivaðar.

Niðurstøðan var at skuldin, sum var fyrnað til innheintingar, varð avskrivað.

Innheinting av barnapeningi

Í 2017 var eftirstøðan av barnapeningi 37,1 mió.kr., og slakar 17 mió.kr. av teimum vóru í IK-skipanini[4] hjá TAKS.

TAKS hevur ábyrgd av innheintingini, og tí skyldu til at taka ímóti krøvunum.

Í 2007 gjørdi TAKS eitt átak at rudda upp í skuldarunum og niðurskrivaði ein part av áognini. Ivasamt er, um stovnurin hevði heimild at avskriva, og tí er sannlíkt, at áognin hjá landskassanum átti at verið størri, enn hon er.

Í 2019 ætlaði Fíggjarmálaráðið saman við TAKS, Almannamálaráðnum og Almannaverkinum at viðgera málið, fyri at finna eina nøktandi loysn viðvíkjandi innheinting av barnapeningi og eftirgeving av skuld. Landsgrannskoðanini kunnugt er einki hent síðani.

[4] Innheintingarskipanin hjá TAKS.

2.6 Reglur verða ikki hildnar

Fleiri reglur verða áhaldandi ikki hildnar. Dømi, sum eru umrødd í frágreiðingini, eru um reglur um útboð, tíðaravmarkingar av lønum og ferðaútreiðslur.

Útboð

Í fleiri førum eru reglurnar um alment útboð ikki hildnar. Fleiri almennir stovnar nýta ikki Keypsportalin, og hava heldur ikki brúkt møguleikan at søkja um undantøku at bjóða uppgávur út.

Fleiri stovnar umbera seg við, at teir hava serligan tørv, og at tað er orsøkin til, at teir ikki bjóða út. Sambært rundskrivinum um Keypsportalin, eru reglurnar um útboð fyri at stuðla undir eitt skynsamt vinnulív/kapping har allar fyritøkur, sum eru skikkaðar sleppa at bjóða, og at tryggjað, at landið fær bestu tilboðini og bestu loysnirnar.

Tíðaravmarkan av lønum

Í desember 2017 kom í gildi rundskriv um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum. Meginreglan er, at tímasaldur skulu tíðaravmarkast, tá ið starvsfólk eigur fleiri enn 40 á ella skyldar fleiri enn 30 tímar.

Sum tað framgongur av hesari frágreiðingini, er reglan í fleiri førum ikki hildin. Fleiri stovnar tíðaravmarka ikki lønarútreiðslurnar, tó at tímasaldurnar sambært rundskrivi skulu tíðaravmarkast. Tað hevur við sær, at roknskapurin er ikki rættur. Eisini er ein avleiðing, at landið hevur skyldur, sum ikki er skrásettar.

Ferðaútreiðslur

Fleiri stovnar hava ikki hildið reglurnar um ferðauppgerðir. Rundskriv nr. 9001/2019 ásetir, at ferðaavrokningaskipanin hjá Gjaldstovuni skal nýtast, og at allar útreiðslur, ið verða rindaðar av landinum, skulu vera skjalprógvaðar. Tískil skulu upplýsingar um ferðina, skrá fyri fundir/skeið o.a. liggja við, fyri at fáa endurgjald.

2.7 Atkomuligheit til reglugerðir hjá stovnum

Reglugerðir, sum stovnar ella aðalráð hava gjørt um útgjaldingar av stuðli úr landskassanum, eru ikki altíð alment atkomuligar.

Tá ið neyðugar reglur um, hvussu stuðul úr landskassanum kann latast og um t.d. nýtslu, málsviðgerð, skjalfesting og roknskap, ikki eru í heimildarlógum, galda ásetingarnar í K. nr. 125/2011 “um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan”[5], sum hevur neyðugar og fullgóðar ásetingar.

Í hesari frágreiðing eru nøkur dømi:

Sambært LI. nr. 32/2003 “um landbúnaðarstuðul”, og K. nr. 76/2018 “um stuðul til landbúnaðin” er heimild at rinda landbúnaðarstuðul. Tær reglurnar hava ikki fullgóðar og ítøkiligar ásetingar, eitt nú um málsviðgerð, eftirlit, fíggjarætlan, roknskap og grannskoðan, soleiðis at umsøkjarar eru kunnaðir um stuðulin.

Til umsiting av landbúnaðarstuðli hevur Búnaðarstovan brúkt reglugerð frá 2018 “fyri umsiting av stuðulsjáttan til føroysk húsdjórasløg”. Tann reglugerðin er ikki longur at finna sum alment atkomuligt skjal.

[5] Seinast broytt við K. nr. 129/2021.

Í játtanini til stuðul til umhvørvisverndartiltøk 2020 er viðmerkt í fíggjarlógini, at stuðulin verður veittur sambært reglugerð nr. 8001 frá 21. januar 2016 “fyri stuðul til umhvørvisverndartiltøk”. Eisini stendur í viðmerkingunum, at stuðulin verður játtaður eftir umsókn. Umsóknir skulu innihalda upplýsingar um endamál og lýsing av verkætlanini, kostnaðarmeting og fíggjarætlan. Reglur, um hvussu stuðulin verður goldin út, og reglur um roknskap o.a., eru eisini í viðmerkingunum.

Reglugerðin lá í lógarsavninum[6], men er í 2021 tikin burtur haðani. Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísti á, at tað hevði ikki verið vanligt, at reglugerðir eru kunngjørdar í lógarsavninum, og at tað var ein feilur, at Løgmansskrivstovan hevði lagt reglugerðina í savnið. Eisini vísti ráðið á, at reglugerð verður gjørd fyri stuðulsveitingina hvørt ár, at reglugerðin ásetir, hvat stuðul skal nýtast til, og at tað ikki skal lýsast alment eftir umsóknum.

Gjøgnumskygni

Møguleikin at fáa stuðul úr landskassanum, ið er ætlaður øllum at søkja, skal verða kunnaður alment, um játtandi myndugleikin skal hava vissu fyri, at øll, sum hava tørv á og rætt til at søkja, vita um møguleikan at søkja um stuðul. Tí er tað av stórum týdningi, at allar reglur eru alment atkomuligar.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað er sera óheppið, um ein stovnur ella eitt aðalráð ger av, ikki at lýsa alment eftir umsóknum til stuðulsjáttan ætlað til umhvørvisverndartiltøk, tó at tað er ásett í viðmerkingunum í fíggjarlógini, at umsókn skal til. Tá ið játtanin ikki hevur avmarkingar um, hvønn stuðul kann latast til, ella hvør kann søkja um stuðul, skal almenningurin verða kunnaður á bestan hátt.

Reglugerð um stuðul til umhvørvisverndartiltøk er ikki almenn longur.

Tað fremur ikki gjøgnumskygni í almennari fyrisiting, at ásetingar í reglugerðum fyri stuðul úr landskassanum ikki eru alment atkomuligar.

2.8 Vandi fyri mistøkum og sviki

Ábyrgdin av roknskapinum ber í sær, at aðalráðini og stovnarnir støðugt hava tað innanhýsis eftirlit, ið skal til, fyri at ársroknskapur kann verða gjørdur, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan stórvegis skeivleikar.

Í sambandi við eftirlitini seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin spurt leiðslurnar, um tær hava mett um vandan fyri, at stórvegis skeivleikar eru í roknskapinum, tað veri av mistøkum ella sviki. Samanumtikið kann sigast, at leiðslurnar hava ikki hugsað um vandan fyri feilum, og leiðslurnar hava heldur ikki sett nøkur tiltøk í verk at forða fyri sviki.

Flestu stovnsleiðarar vísa á, at teir brúka Rokningaverkgongd í Búskaparskipan landsins, sum hevur innbygdan skilnað millum tey, sum skráseta og tey, sum leysgeva. Teir halda tí ikki vandar vera fyri stórvegis skeivleikum í roknskapinum. Flestu stovnsleiðarar siga seg ikki hava kunnleika ella illgruna um svik, ella hoyrt um skuldsetingar um svik.

[6] www.logir.fo

3. Løgmansfyrisitingin

3.1 Umbygging í Tinganesi (LG 2019/202-0111)

Í seinastu frágreiðing greiddi Landsgrannskoðanin frá um grannskoðan av høvuðskontu 2.11.1.21 “Umbygging í Tinganesi”.

Í sambandi við umvælingar av bygningunum í Tinganesi var eitt mál ímillum Landsverk og eina fyritøku, ið legði nýtt teppi á í Tinganesi í 2014 fyri slakar 200 t.kr. Eftir stutta tíð vísti tað seg, at arbeiðið var ikki nøktandi, og drúgv togtogan var ímillum Landsverk og veitaran. Niðurstøðan var, at Landsverk skifti teppið, og kravdi veitaran eftir endurgjaldi.

Arbeiðið ikki nøktandi og tí gjørt av nýggjum.

Í august 2021 hevur Løgmansskrivstovan greitt frá, at kostnaðurin fyri at leggja nýtt teppið á verður lægri enn mett. Løgmansskrivstovan skal einans rinda fyri áleggingina, 36.400 kr., tí framleiðarin rindar fyri sjálvt teppið.

Landsverk kravdi veitaran eftir endurgjaldi.

Løgmansskrivstovan vísir á, at málið hevur verið kostnaðarmikið, tí tað byrjaði í 2014, og drúgva tíðin hevur havt við sær, at fleiri fólk hava brúkt nógva tíð upp á tað. Løgmansskrivstovan hevur saman við Landsverki mett um tímatalið, sum er beinleiðis avleiðing av málinum, og sum er goldið av kontuni “Umbygging í Tinganesi”.

Løgmansskrivstovan hevur goldið 54 t.kr. til ráðgeva, 34 t.kr. til Landsverk og 36 t.kr. fyri áleggjan, tilsamans 124 t.kr.

Landsverk hevur onnur endurgjaldskrøv ímóti sama veitara, og Løgmansskrivstovan heldur, at tær 124 t.kr. skulu leggjast afturat, og gerast partur av samlaðum kravi ímóti veitaranum.

3.2 Løgmansskrivstovan (LG 2020/202-0111)

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað lønir hjá Løgmansskrivstovuni. Vit kannaðu um lýsingar, setanarskriv, prógv o.a. vóru í málunum.

Einki at finnast at lønarmálunum.

Sambært Løgmansskrivstovuni er orsøkin til, at tað í onkrum lønarmálum manglaði lýsing, umsókn ella setanarskriv, at starvsfólkini eru sett aðrastaðni í landsumsitingini, áðrenn tey, í sambandi við bygnaðarbroytingar, eru vorðin partur av Løgmansskrivstovuni.

Landsgrannskoðanin hevði annars einki at finnast at.

3.3 Dátueftirlitið (LG 2017/202-0142)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Dátueftirlitinum. Landsgrannskoðanin mælti til at gera mannagongdir, ið tryggja, at váðameting og KT-trygdarpolitikkur verða integreraðir partar av innaneftirlitinum.

Dátueftirlitið hevði bíðað við at skifta KT-útbúnaðin út og at dagføra netið og skipanina, tí eingin tænasta var veitt til verandi útbúnað eftir 2020, og stovnurin arbeiddi við at endurskoða KT-viðurskiftini.

Í 2019 greiddi Dátueftirlitið frá, at trygdarskjøl, váttanir og KT-trygdarpolitikkur vóru nútímansgjørd og avgreidd, men at enn manglaði at avgreiða eina trygdarskoðan.

Í 2020 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at sambært Dátueftirlitinum var trygdarskoðanin framvegis ikki gjørd. Dátueftirlitið hevði verið í drúgvum samskifti við Elektron og Formula, tí partarnir vóru ikki samdir um, hvørjar leiklutir teir høvdu, eitt nú dátuábyrgdari og dátuviðgeri.

Í august 2021 hevur Løgmansskrivstovan kunnað um, at Dátueftirlitið og KT Landsins hava gjørt sáttmála um tænastustig av Landsnet grundtænastum. Tað merkir m.a., at spurningurin um, hvussu ábyrgdarbýtið var skipað millum Elektron, Formula og Dátueftirlitið ikki longur er viðkomandi.

Dátueftirlitið hevur gjørt dátuviðgerar-avtalu við KT Landsins.

Dátueftirlitið hevur eisini dátuviðgeraravtalu við KT Landsins, sum m.a. tilskilar, at KT Landsins er dátuviðgeri hjá Dátueftirlitinum, og at bæði Elektron og Formula eru undirdátuviðgerar. Harumframt er tilskilað í avtaluni, at dátuviðgerin – t.e. KT Landsins – árliga fyri egna rokning skal útvega eina skoðanarváttan frá óheftum triðjaparti um, at dátuviðgerin (t.e. KT Landsins) og undirdátuviðgerar (t.e. m.a. Elektron og Formula) halda dátuverndarlógina umframt aðra lóggávu um dátuvernd.

Dátueftirlitið og Gjaldstovan gjørdu í juli 2021 avtalu um Trygdarpakkan, sum m.a. hevur við sær, at Gjaldstovan eina ferð um árið skipar fyri, at Dátueftirlitið fær eina skoðan/váttan av tí virksemi, sum liggur hjá stovninum.

4. Fíggjarmál

4.1 Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (LG 2014/100-0001)

Í 2013 setti Fíggjarmálaráðið í gildi K. nr. 95/2013 "um at lata inn roknskapar-upplýsingar um alment virksemi til búskaparliga ráðlegging, stýring og eftirlit". Endamálið við kunngerðini var at fáa til vega upplýsingar um alment virksemi, sum ikki er við í fíggjarlógini, men er fevnt av almennu roknskaparlógini.

Landsroknskapurin fevnir um næstan allar landsstovnar og alment virksemi, sum landið varðar av. Somuleiðis er við gjaldføri o.ø. hjá landinum.

Landsroknskapurin er ikki fullfíggjaður.

Dømi um almennar stovnar og virksemi, sum ikki eru við í landsroknskapinum, eru Føroya Realkreditstovnur og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, sum hava einar 2,5 mia.kr. í eginogn.

Í svari til løgmann í sambandi við Lm. nr. 37/2016 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað *"framhaldandi og áhaldandi verður arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fer sostatt fram í stigum. Bústaðir og Búnaðargrunnurin eru aftur tiknir við í landsroknskapin fyri 2016. Arbeitt verður við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini verður tikin til tilknýti til landsroknskapin."*

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir "Eksternir grunnar". Ætlanin var, at eginpeningurin í Bústøðum, Búnaðargrunninum, Granskingar-grunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframa í framtíðini verður tikin við í landsroknskapinum undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Sambært landsstýrismanninum var eftir at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðs-marknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kundu verða tikin við í landsroknskapin.

Rákið er at leggja virksemið hjá landinum í eindir uttan fyri fíggjarlóg og landsroknskap.

Seinastu árini er alsamt meira virksemi hjá landinum lagt í virkiseindir, sum eru skildar frá landsfyrisitingini, t.d. í partafeløg. Flestu almennu reglur og fyriskipanir galda ikki almennu partafeløgini. Feløgini eru heldur ikki partur av fíggjarlóg ella roknskapum, sum verða lagdir fyri Løgtingið. Landsroknskapurin avspeglar tí í minni mun veruliga virksemið, váðar o.a. hjá landinum, umframt at tílíkt virksemi í stóran mun ikki skal fylgja øðrum almennum reglum.

Í 2016 segði Fíggjarmálaráðið seg vera samt við Landsgrannskoðanina um vandan, ið kann standast av, at ov nógv virksemi verður lagt í almenn partafeløg uttan fyri fíggjar-lóg, har ikki sama gjøgnumskygni, almenn stýring og almennar reglur eru galdandi.

Fíggjarmálaráðið arbeiddi fram ímóti, at eginpeningurin í eksternu grunnunum fór at verða tikin við í landsroknskapin fyri 2017 undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Arbeitt varð við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini fór at verða tikin til tilknýtið til landsroknskapin.

Landsstýrismaðurin greiddi í 2018 og aftur í 2019 frá, at tað var framhaldandi arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Í 2018 var miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Tað bleiv ikki gjørt kortini.

Málið er at fáa ein meiri fullfíggjaðan landsroknskap.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at *"sitandi samgongan og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava sett sær fyri at fáa ein meira fullfíggjaðan almennan roknskap."*

Lógaruppskot um broyting í lógini fyri Realin

Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at nýggja lógaruppskotið fyri Realin var sent til hoyringar í apríl 2019. Í uppskotinum var ásett, at Realurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men verður ikki tikin við í fíggjarlógini. Tað eydnaðist ikki at fáa uppskotið fyri Løgtingið, áðrenn Løgtingið fór heim í mai.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin vísst á, at uppskotið um broyting í lógini fyri Realin var til almenna hoyring í apríl 2019. Politiskar raðfestingar gjørdu, at uppskotið varð ikki latið Løgtinginum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur í sambandi við løgmansrøðuna á ólavsøku 2021 boðað frá, at ætlanin er at leggja uppskot fyri Tingið um dagførda lóg fyri Realin í hesari tingsetuni. Eftir ætlan verður uppskotið klárt til politiska støðutakan tíðliga í 2022.

4.2 Talgildu Føroyar (LG 2018/203-0111)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin verkætlanina Talgildu Føroyar. Landsgrannskoðanin spurdi m.a., hvussu langt verkætlanin var komin pr. apríl 2019 samanborið við tíðarætlanina, um kostnaðarætlanin helt, og um fíggingin var komin upp á pláss.

Í 2015 vóru 2 mió.kr. játtaðar Vinnumálaráðnum á undirkontu 6.11.1.06.23 at seta sjøtul á at talgilda tænastur til borgarar og vinnu. Í eykajáttanarlóg fyri oktober 2015 vóru 2 mió.kr. játtaðar afturat til m.a. at fyrireika útboð av talgildum samleika og at gera pilotverkætlan til Heldina. 4 mió.kr. vóru nýttar í 2015.

Í 2016 vóru 10 mió.kr. játtaðar í verklagslóg til Talgildu Føroyar, og í 2017 var nýggj verklagslóg samtykt, galdandi til 31. desember 2023, har útreiðslurnar í mesta lagi kunnu verða 145 mió.kr. Útreiðslurnar hjá landinum kunnu í mesta lagi verða 85 mió.kr. Sambært verklagslógini er landsstýrismanninum heimilað at gera avtalur við fyritøkur, kommunur og grunnar um at fíggja part av verkætlanini.

Í 2016 vóru 5,9 mió.kr. nýttar, tí er samlaða upphæddin, sum kann nýtast til verkætlanina 150,9 mió.kr. Við árslok 2018 vóru tilsamans 57 mió.kr. nýttar, harav hevði landið goldið 47,5 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til verklagslógina frá 2017, er fíggingarleisturin hesin:

t.kr.

	Ár 2016 til 2020
Landið	90.000
Ymiskir samstarvsfelagar	19.500
Peningastovnar	15.000
Kommunur	25.500
Tilsamans	**150.000**

Seinkingar og ymiskar avbjóðingar hava gjørt, at ætlaði fíggingarleisturin var broyttur nakað. Sambært Talgildu Føroyum var tillagaði fíggingarleisturin tá:

	t.kr.
	Ár 2016 til 2020
Landið	90.214
Ymiskir samstarvsfelagar	17.200
Peningastovnar	9.000
Kommunur	10.600
Tilsamans	**127.014**

Allar kommunurnar, uttan Tórshavnar Kommuna, høvdu boðað frá, at tær fyribils ikki ynsktu at luttaka í fíggingini av Talgildu Føroyum.

Í september 2021 hevur leiðslan greitt frá, at nú hava 18 kommunur gjørt avtalu um at fíggja og verða partur av Talgildu Føroyum. T.e. Tórshavnar, Klaksvíkar, Runavíkar, Eystur, Vága, Tvøroyrar, Sunda, Vágs, Nes, Sørvágs, Sjóvar, Eiðis, Hvannasunds, Viðareiðis, Kunoyar, Hovs, Skúvoyar og Fugloyar kommuna. Samanlagt fíggja tær verkætlanina við 11,74 mió.kr., býtt á árini 2020, 2021 og 2022, so samlaði fíggjarkarmurin fyri verkætlanina er nú 138,74 mió.kr.

Enn vanta 11 kommunur, sum eftir ætlan skuldu fíggja verkætlanina við 3,1 mió.kr.

Tíðarætlanin 2021

Seinkingar hava gjørt, at verkætlanin dýrkar.

Leiðslan hevur greitt frá, at av tí at fíggingin varð seinkað so nógv, var neyðugt at leingja verkætlanina við tveimum árum. Virkisskráin, sum varð steðgað í 2018 vegna vantandi fígging, kundi nú setast í gongd aftur, men neyðugt var við meirfígging til verkætlanin, tí seinkingin hevði við sær at verkætlanin dýrkaði. Ítøkiliga eru 8 mió.kr. játtaðar til Talgildu Føroyar í 2022, harav størsti parturin fer til menning av Virkisskránni. Seinkingin og meirfíggingin hevði eisini við sær, at neyðugt var at tillaga verandi verklagslóg.

Á heysti 2020 vóru stóru loysnirnar hjá Talgildu Føroyum, Samleikin og Vangin, liðugt mentar og settar í verk. Við hesari verkseting, var komið á mál við øllum teimum verkætlanum, sum til bar at fara í gongd við, við tí fígging, sum var tøk, til upprunaligu ásettu tíð fyri Talgildu Føroyar verkætlanina. Samleikin hevði frammanundan verið ígjøgnum eina skoðan og fingið sertifisering mótvegis ES lóggávu fyri talgildar samleikar.

Í 2021 hevur serligur dentur verið lagdur á, at fyrireika menning av Virkisskránni, at fáa fleiri tænastuveitarar at brúka Samleikan og Vangan, og at breiða loysnirnar út til borgarar. Í september 2021 hava fleiri enn 25.000 brúkarar fingið sær Samleikan (sum er á leið 70% av teimum, sum kunnu fáa Samleikan), og brúka hann til teir 9 tænastuveitararnar, sum hava knýtt sínar tænastur til Samleikan. Vangin hevur nú 40 tænastur frá 7 ymiskum tænastuveitarum. Harafturat verður arbeitt saman við nógvum øðrum tænastuveitarum, privatum og almennum, um at leggja tænastur á Vangan.

Í 2021 byrjaði arbeiðið at fáa peningastovnarnar knýttar í Samleikan av álvara. Henda verkætlan er væl ávegis, og væntа peningastovnarnir, at teir kunnu taka Samleikan í nýtslu á teirra netbankaskipanum við ársbyrjan 2022.

Virkisskráin er nú komin so langt, at klárt er at fara undir menning í oktober 2021. Verkætlanin hevur verið í útboði, og ætlanin er at skipanin er klár at taka í nýtslu um ársskiftið 2022/2023. Verkætlanin er mett at kosta 12 mió.kr.

Viðvíkjandi teimum írestandi tveimum pørtunum av upprunaligu heildarætlanini fyri Talgildu Føroyar, Heldin og Grundardátur, hevur leiðslan greitt frá, at:

- Heldin verður brúkt meira og meira av teimum, ið ynskja at flyta dátur millum KT-skipanir, og er í 2021 uppstigað.

- Kravfesting er gjørd til nýggja tinglýsingarskipan, tinglýsing og matrikkul arkiv eru skannað inn og skjølini eru tøk á internetinum, betringar eru gjørdar á fólkayvirlitsskipanini og nýggjur portalur er gjørdur fyri kortskipanir, foroyakort.fo

4.3 Landsins ognir (LG 2020/203-0111)

Sambært fíggjarlógini varðar landið av oljutangum landsins, og landskassin fær 1,2 mió.kr. um árið í leiguinntøkum. Í fíggjarlógini fyri 2020 eru játtaðar 1,2 mió.kr. í inntøku.

Í sambandi við grannskoðan av landsroknskapinum hevur Landsgrannskoðanin gingið ígjøgnum undirkontu 20. "Oljugoymslur o.a." á høvuðskontu 3.11.1.23 "Landsins ognir o.a."

Játtanar- og roknskapartøl fyri høvuðskontuna:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
20. Oljugoymslur o.a.	-1.200	-1.200	-1.200	-1.200	-1.200
21. Húsaleiga og íbúðargjald	49	45	37	-212	-49
22. Leiga av økjum, uppisitaragjald o.a.	11	16	-72	-154	-175
23. Yvirtiknar ognir	-87	328	287	45	450
Tilsamans	**-1.227**	**-811**	**-948**	**-1.521**	**-974**
Játtan	*-908*	*-908*	*-1.108*	*-2.210*	*-1.200*

Undirkonta 20. Oljugoymslur o.a.

Í frágreiðing í 2003 umrøddi Landsgrannskoðanin undirkontuna "Oljugoymslur o.a." Inntøkan av goymslunum hevði tá verið óbroytt í 25 ár. Í 2001 var avtala gjørd, har oljufelagið bant seg til at gjalda 1,2 mió.kr. um árið fyri at leiga oljugoymslurnar móti at halda tær viðlíka og hava tilbúgving klára. Avtalan skuldi vera galdandi í 5 ár. Landsverk hevur greitt frá, at avtalan seinast er dagførd í 2007.

Sambært Búskaparskipan landsins er inntøkan 1,2 mió.kr. um árið, og hevur verið óbroytt seinastu 43 árini. Landsverk veit ikki, hvussu komið er til leiguprísin, tí tað er so langt síðan, hann var ásettur. Landsverk vísir á, at tað, at leiguprísurin ikki er broyttur, kann forklárast við, at eingin verulig avgerð er tikin um, hvørt landið framhaldandi skal eiga tangarnar ella ikki.

Landsverk hevur í summar (2021) avtalað við Fíggjarmálaráðið, at stovnurin tekur upp samráðingar við oljufelagið um, hvat framhaldandi skal henda og fær gjørt eina nýggja avtalu.

Oljufelagið hevur leigað tangarnar í 73 ár.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Effo hevur leigað, røkt og rikið oljutangar landsins í Sørvági og í Søldarfirði í 73 ár. Landið hevur ongar útreiðslur havt av leigumálunum, undantikið trygging av oljutangunum, 35 t.kr. árliga til og við 2002.

Fíggjarmálaráðnum kunnugt hevur landið, í øllum førum í nýggjari tíð, bert í einum føri arbeitt við málinum um at selja oljutangar landsins. Fíggjarlig heimild (játtan í fíggjarlógini) var til at selja tangarnar í 2006, 2007 og 2008. Landsstýrismaðurin fekk í 2007 politiska undirtøku fyri at fara undir eina tilgongd at selja oljutangar landsins.

Sambært sáttmálanum skulu Landsverk og Effo samráðast um málið, áðrenn landsstýrið kundi taka endaliga avgerð um, hvat skuldi henda. Oljutangarnir eru ein týðandi partur av goymsluskipanini hjá Effo. Um Effo ikki keypti tangaranar, var neyðugt av

taka atlit at, at tað tekur tíð hjá felagnum at tillaga virksemi, fáa nýggjar oljutangar til vega o.t.

Samanumtikið vóru oljutangarnir ikki seldir, tí eingin nøktandi sølutilgongd var funnin. Síðani 2008 hevur tað ikki verið frammi aftur at selja oljutangarnar.

Fíggjarmálaráðið er samt við Landsverk um, at Landsverk eigur at taka upp samráðingar við Effo um dagføra leiguavtaluna um oljutangarnar.

Leiguavtalurnar eiga at verða dagførdar.

4.4 Veðhalds- og eftirlønarskyldur (LG 2020/203-0151)

Eftirlønarskyldur landskassans[7]

Gjaldstovan hevur seinastu árini skrásett allar tænastumannaeftirlønarskyldurnar, og fekk fyri nøkrum árum síðani ein aktuar at meta um, hvat tað hevði kostað, hevði landið keypt seg leyst frá skyldunum. Skyldan hjá landskassanum verður roknað av nýggjum 3. hvørt ár. Eftirlønarskyldan var roknað seinast til roknskapin 2019. Sambært landsroknskapinum 2020 er samlaða eftirlønarskyldan hjá landskassanum 5.670 mió.kr.

Samlaða eftirlønarskyldan er 5.670 mió.kr.

Veðhaldsskylda vegna tryggingaravtalur hjá Føroya Lívstrygging

Sambært § 3 í Ll. nr. 105/1999 "um umskipan av Føroya Lívstrygging" er landskassaábyrgdin framvegis galdandi fyri tær tryggingaravtalur, sum Føroya Lívstrygging hevði, tá ið lógin kom í gildi. Roknskaparreglurnar vórðu broyttar við virknaði fyri roknskaparárið 2012, so heimild ikki longur er at innrokna landskassaveðhaldið í roknskapin. Avleiðingin av tí var, at eginognin hjá P/f LÍV lívs- og pensjónstryggingarfelag, hvørs skyldur landskassin veðheldur fyri, gjørdist negativ.

Sambært ársfrásøgnini fyri 2020 er eginognin negativ við 1.502 mió.kr. Roknaðu skyldurnar eru umleið 3.520 mió.kr., og íløguognirnar eru 2.023 mió.kr.

Sambært § 3, stk. 2, í Ll. nr. 53/2015 hevur landsstýrismaðurin heimild til at rinda til felagið, tá ið felagnum tørvar pening at halda verandi tryggingaravtalur.

Heimild at rinda felagnum pening, um tørvur er.

Veðhaldsskylda vegna P/f Eystur- og Sandoyartunlar

Partafelagið Eystur- og Sandoyartunlar hevur tikið 2,7 mia.kr. í láni[8]. Lánið verður fast rentað við 2,73% fram til 2040, tá ið tað skal vera goldið aftur. Pr. 31. desember 2020 var tunnilsverkætlanin gjørd upp til 2.335 mió.kr. Í 2020 var tilgongdin 486 mió.kr.

Sambært § 5 í Ll. nr. 30/2014 setir landið 400 mió.kr. í partapeningi í felagið tíðarskeiðið fram til 2024. Til og við 2020 eru 200 mió.kr. goldnar felagnum.

Sambært lógini hevur landsstýrismaðurin heimild at hækka partapeningin ella at veita felagnum trygd fyri minstuferðslu í Eysturoyartunlinum og Sandoyartunlinum. Felagið kann tiltransportera hesa játtan og trygd fyri minstuferðslu sum trygd í sambandi við fígging av verkætlanum felagsins. Harafturat kann felagið tiltransportera í mesta lagi 10 mió.kr. um árið í møguligum rakstrarstuðli, sum landsstýrismaðurin eftir umsókn kann veita felagnum, tá ið Sandoyartunnilin er tikin í nýtslu.

Heimild at hækka partapening ella veita trygd fyri minstuferðslu.

Rættarmál mótvegis Føroya landsstýri

Føroya Reiðarafelag hevur stevnt Føroya landsstýri í sambandi við lógaráseting fyri skipan av sølu av veiðirættindum á uppboði í 2016. Úrskurður er gjørdur í Føroya Rætti, men Føroya landsstýri hevur skotið úrskurðin inn fyri Landsrættin. Um Føroya landsstýri hevur endurgjaldsábyrgd í hesum máli, verður møguliga eitt endurgjald at rinda fyri 2016, sum Føroya Reiðarafelag hevur uppgjørt til slakar 18 mió.kr., harumframt er eisini eitt krav fyri 2017, sum ikki er gjørt upp enn.

[7] Kelda: s. 246 í Landsroknskapinum 2020.
[8] Kelda: s. 247 í Landsroknskapinum 2020.

P/f Northwest Pelagic hevur sent Fiskimálaráðnum eitt endurgjaldskrav uppá umleið 80,5 mió.kr. í sambandi við úrskurð í Føroya Rætti um afturtøku av einum veiðiloyvi.

Hesi bæði málini eru ikki liðugt viðgjørd og eingin endalig niðurstøða er.

4.5 Dagføring av roknskaparrundskrivi (LG 2016/203-0151)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Gjaldstovuni og KT Landsins, herundir at roknskaparreglugerðin, sum var góðkend av Fíggjarmálaráðnum í 2001, ikki var dagførd. Gjaldstovan hevði gjørt uppskot til nýggja roknskaparreglugerð eftir nýggjum leisti, sum Gjaldstovan sjálv hevði gjørt. Ætlanin var at nýggi leisturin skuldi gerast til eitt roknskaparrundskriv fyri landsumsitingina.

Í 2017 segði Fíggjarmálaráðið, at ráðið fór at gjøgnumganga uppskotið til dagført roknskaparrundskriv og uppskotið til dagførda roknskaparreglugerð saman við Gjaldstovuni, soleiðis at tey kundu verða sett í gildi og góðkend á heysti 2017.

Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið hjá Gjaldstovuni og Fíggjarmálaráðnum at gera eitt dagført roknskaparrundskriv var komið so mikið áleiðis, at tað væntandi kundi verða lýst tíðliga á heysti 2019.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin vísst á, at sambært § 4, stk. 2 í roknskaparkunngerðini skal Fíggjarmálaráðið senda út rundskriv um roknskaparreglugerð saman við vegleiðing um, hvussu reglurnar skulu verða gjørdar. Ráðið hevur í samstarvi við Gjaldstovuna gjørt eitt uppskot til dagført rundskriv um roknskaparreglugerðir o.a. Arbeitt verður nú við einari vegleiðing. So skjótt tað arbeiðið er liðugt, verður uppskotið sent til hoyringar.

4.6 Kervisgrannskoðan (LG 2020/203-0151)

Kervisgrannskoðari grannskoðar hvørt ár skipanir og kervi hjá TAKS, Gjaldstovuni, KT Landsins og ávísum veitarum hjá KT Landsins. Um viðurskifti eru, sum ikki eru nøktandi, gevur kervisgrannskoðarin ítøkilig tilmæli, sum eru raðfest soleiðis:

- Høg: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag sum skjótast,
- Miðal: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 6 mánaðir, og
- Lág: týðandi veikleiki, sum eigur at fáast í rættlag innan 12 mánaðir.

4.6.1 Kervisgrannskoðan hjá TAKS

Av tí at TAKS hevur upplýsingar, sum eru serliga týðandi fyri føroyska samfelagið, er stovnurin fevndur av punkti 7 í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um KT-trygd. KT-viðurskiftini hjá stovnum sum TAKS skulu skoðast árliga av KT-grannskoðara við viðkomandi royndum og útbúgving, og sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent.

Í 2019 skoðaði KT-grannskoðari skipanirnar og KT-kervið. Skoðanin er umrødd í brotinum um grannskoðan av TAKS aðrastaðni í frágreiðingini.

4.6.2 Kervisgrannskoðan hjá Gjaldstovuni

Kervisgrannskoðarin hevur gjørt avtalu við leiðsluna á Gjaldstovuni um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá stovninum í mun til tænastuveitingar til stovnarnar, sum nýta skipanirnar hjá Gjaldstovuni (Búskaparskipan landsins), eins og tað verður gjørt fyri Elektron, sum er høvuðsveitari hjá Gjaldstovuni. Fyri árið 2020 hevur kervisgrannskoðarin gjørt fýra frágreiðingar um KT-viðurskiftini hjá Gjaldstovuni:

- Frágreiðing 2020, grannskoðan av almennum KT-stýringum á Elektron fyri Føroya Gjaldstovu,
- Frágreiðing 2020, um grannskoðan av almennum KT-stýringum á Føroya Gjaldstovu,
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-stýringar hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2020 í mun til SLA avtalu við Gjaldstovuna, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-stýringar hjá Føroya Gjaldstovu í veitingini av Búskaparskipan Landsins (BSL) fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2020.

KT-stýringar á Gjaldstovuni

Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2016 til 2020:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2016	2017	2018	2019	2020
Høg raðfesting	0	0	0	0	0
Miðal raðfesting	1	4	2	1	0
Lág raðfesting	7	5	2	2	2
Tilsamans	**8**	**9**	**4**	**3**	**2**
Av hesum eldri enn eitt ár	6	6	3	2	2

Úrslitið av kervisgrannskoðanini var tvey tilmæli, bæði við lágari raðfesting. Eitt miðal raðfest tilmæli var lokað í 2020. Bæði tilmælini eru eldri enn eitt ár.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at Gjaldstovan framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av KT-umhvørvi sínum á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini.

Veitingin frá Elektron, sum Búskaparskipan landsins í týðandi mun byggir á, er somuleiðis grannskoðað fyri árið 2020. Niðurstøðan av tí grannskoðanargjøgnum-gongdini er, at veitingin sum heild er í tráð við avtalaða trygdarstøðið, og við lýsing av trygdarstøðinum, sum Elektron hevur latið Gjaldstovuni. Einstakir veikleikar eru tó staðfestir og umrøddir í váttanini og frágreiðingini.

Sum heild er fatanin hjá kervisgrannskoðaranum, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-stýringarnar hjá Gjaldstovuni við atliti at veitingini av Búskaparskipan landsins, við undantaki av viðmerktu veikleikunum, er trygdargott.

KT-stýringar á Elektron fyri Gjaldstovuna

Talvan niðanfyri vísir gongdina í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2018 til 2020:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2018	2019	2020
Høg raðfesting	0	0	0
Miðal raðfesting	3	4	8
Lág raðfesting	1	0	1
Tilsamans	**4**	**4**	**9**
Av hesum eldri enn eitt ár	-	3	3

Úrslitið av kervisgrannskoðani var níggju tilmæli, átta við miðal raðfesting og eitt við lágari raðfesting.

Niðurstøðan hjá kervisgrannskoðaranum er, at tænastusáttmálin sum heild er nøktandi og verður fylgdur á trygdargóðan hátt av Elektron. Gjøgnumgongdin av útvaldum økjum innan almennar KT-stýringar vísti nakrar nýggjar veikleikar, sum góvu orsøk til seks nýggj tilmæli. Eitt av hesum er loyst og lokað í árinum.

Elektron hevur arbeitt við øllum teimum eldru veikleikunum í longri tíð, og hevur boðað frá, at teir ætlandi verða avgreiddir í 2021. Elektron hevur somuleiðis boðað frá, at nýggju tilmælini ætlandi verða loyst í 2021.

Sum heild er niðurstøðan, at eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur, sum Gjaldstovan nýtir hjá Elektron, er nøktandi, burtursæð frá teimum viðmerktu viðurskiftunum. Somuleiðis er niðurstøðan, at Elektron, burtursæð frá einstøkum viðurskiftum, sum eru fevnd av tilmælunum, livir upp til ásetingarnar í SLA-avtaluni partanna millum.

4.6.3 Kervisgrannskoðan hjá KT Landsins

Kervisgrannskoðarin hevur í 2020 grannskoðað almennu KT-kontrollarnar í sambandi við, at Elektron veitir tænastur til KT Landsins og kundar stovnsins. Kervisgrannskoðarin hevur eisini grannskoðað KT-kontrollarnar v.m. í sambandi við KT-tænastur, sum Formula veitir KT Landsins. Grannskoðanin er framd sambært SLA-avtalum partanna millum.

P/f Elektron

Fyri 2020 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini ímillum KT Landsins og Elektron:

- Frágreiðing 2020, grannskoðan av almennum KT-eftirlitsskipanum á Elektron fyri KT Landsins, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-stýringar hjá P/f Elektron fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2020 í mun til SLA-avtalu við KT Landsins.

Úrslitið av grannskoðanini av almennum KT-eftirlitsskipanum hjá Elektron er, at tænastusáttmálin sum heild er nøktandi og Elektron fylgir honum á trygdargóðan hátt. Við árslok 2020 vóru 8 tilmæli opin, 7 miðal raðfest og eitt lágt raðfest. 7 nýggj tilmæli vóru givin í árinum; tvey av teimum vóru loyst áðrenn árslok.

Gongdin í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2016 til 2020:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2016	2017	2018	2019	2020
Høg raðfesting	0	0	0	0	0
Miðal raðfesting	1	3	2	3	7
Lág raðfesting	1	3	1	0	1
Tilsamans	**2**	**6**	**3**	**3**	**8**

Kervisgrannskoðarin heldur, at tá ið sæð verður burtur frá nevndu manglum og veikleikum, er eftirlits- og trygdarstigið kring skipanir og dátur, sum KT Landsins nýtir hjá Elektron, trygdargott. Kervisgrannskoðarin heldur eisini, at Elektron hevur hildið krøvini í SLA-avtaluni í tíðarskeiðnum burtursæð frá einstøkum viðurskiftum, sum eru fevnd av tilmælunum.

P/f Formula

Formula og KT Landsins gjørdu SLA-avtalu galdandi frá 1. september 2016, sum ásetir tænastustøðið fyri veitingina. Fyri 2020 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tvær frágreiðingar um KT-viðurskiftini millum KT Landsins og Formula:

- ISAE 3402 váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT-eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2020, og
- Frágreiðing um ISAE 3402 váttan frá óheftum grannskoðara um almennar KT-eftirlitsskipanir í tænastuveiting hjá P/f Formula mótvegis KT Landsins fyri árið 2020.

Gongdin í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini frá 2016 til 2020:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2016	2017	2018	2019	2020
Høg raðfesting	2	2	2	0	0
Miðal raðfesting	9	6	5	2	3
Lág raðfesting	6	1	3	1	2
Tilsamans	**17**	**9**	**10**	**3**	**5**
Av hesum eldri enn eitt ár	9	5	2	1	1

Kervisgrannskoðarin sigur m.a., at Formula hevur lokað tvey tilmæli, sum bæði høvdu miðal raðfesting. Fýra nýggj tilmæli eru givin í 2020, trý við miðal raðfesting og eitt við lágari raðfesting. Sostatt eru fimm tilmæli opin við árslok 2020.

Kervisgrannskoðarin sigur eisini, at sum heild eru flestu lýsingarnar av eftirlitum væl grundaðar við støði í teimum leiðreglum, ið eru settar í verk. Somuleiðis eru flestu eftirlitini tilevnað á hóskandi hátt, og eru í tráð við ásetingarnar í ISO 27002:2013 standardinum, ið Formula brúkar sum starvskarm fyri váttanina. Harafturat hava flestu eftirlitini virkað munadygt í árinum. Einstøk undantøk eru tó staðfest.

KT-eftirlitsskipanir á KT Landsins

Kervisgrannskoðarin og leiðslan á Gjaldstovuni hava avtalað, at kervisgrannskoðarin skal grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýringar hjá KT Landsins í mun til tænastuveitingarnar til stovnarnar, sum nýta Landsnet. Endamálið við grannskoðanini er at tryggja, at grundleggjandi og týðandi viðurskifti viðvíkjandi almennum KT-eftirliti eru í samsvari við trygdarásetingarnar hjá KT Landsins, umframt at meta um, hvørt nøktandi trygdar- og eftirlitsstig eru sett í verk.

Fyri 2020 hevur kervisgrannskoðarin gjørt tríggjar frágreiðingar um KT-viðurskiftini á KT Landsins:

- Ársfrágreiðing frá kervisgrannskoðan, kervisgrannskoðanararbeiðið fyri KT Landsins í 2020,
- Frágreiðing 2020, grannskoðan av almennum KT-stýringum hjá KT Landsins, og
- ISAE 3402 váttan um almennar KT-stýringar hjá KT Landsins í veitingini av Landsneti fyri árið 2020.

Gongdin í óavgreiddum tilmælum frá kervisgrannskoðanini árini 2016 til 2020:

Óavgreidd tilmæli við árslok	2016	2017	2018	2019	2020
Høg raðfesting	0	0	0	0	0
Miðal raðfesting	3	2	1	1	1
Lág raðfesting	8	5	3	2	2
Tilsamans	**11**	**7**	**4**	**3**	**3**
Av hesum eldri enn eitt ár	8	6	2	2	3

Úrslitið av grannskoðanini er, at trý tilmæli eru opin við árslok 2020, eitt miðal raðfest, og tvey lágt raðfest.

Niðurstøðan hjá grannskoðaranum er m.a., at KT Landsins framvegis hevur gjølliga og nøktandi stýring av sínum KT-umhvørvi á flestu økjum, og at tað støðugt verður arbeitt við at bøta um trygdarviðurskiftini.

Veitingarnar frá Elektron og Formula, sum Landsnet í týðandi mun byggir á, eru somuleiðis grannskoðað fyri árið 2020. Niðurstøðan av hesum grannskoðanar-gjøgnumgongdum er í báðum førum, at veitingarnar sum heild eru í tráð við tað avtalaða trygdarstøðið, og við ta lýsing av trygdarstøðinum, sum veitararnir hava givið KT Landsins. Einstakir veikleikar eru tó staðfestir og umrøddir í váttanunum og frágreiðingunum.

Sum heild er fatanin hjá kervisgrannskoðaranum, at trygdar- og eftirlitsstigið, ið er sett í verk innan almennu KT-eftirlitsskipanirnar hjá KT Landsins, við atliti at veitingini av Landsneti, er trygdargott, við undantaki av viðmerktu veikleikunum.

4.7 Føroya gjaldstova (LG 2020/203-0151)

Játtanin til Føroya gjaldstovu er á høvuðskontu 3.15.1.07, og stórur partur av játtanini fer til lønir.

Einki at finnast at lønarumsiting.

Í sambandi við grannskoðan av landsroknskapinum 2020 hevur Landsgrannskoðanin framt lønargrannskoðan á Gjaldstovuni. Við stakroyndum kannaðu vit nøkur lønarmál, um lønirnar vóru rættar, og um lýsingar, umsóknir, setanarskriv, prógv o.a. vóru í lønarmálunum. Einki var at finnast at.

4.8 TAKS (LG 2020/203-0151)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá TAKS á høvuðskontu 3.15.1.04, fyri m.a. at kanna, um stovnurin hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Endamál og uppgávur hjá TAKS eru lýst í Ll. nr. 169/1997 “um Toll- og skattafyrisiting”. Har er m.a. ásett, at TAKS er líkningarvald, tekur sær av allari skattaálíkning, og er toll- og avgjaldsvald.

Toll- og Skattaráð Føroya fastleggur tey stevnumið, ið TAKS skal arbeiða eftir á toll-, avgjalds- og skattaøkinum. Ráðið hevur saman við TAKS eftirlit við skattaálíkningini og ansar eftir, at farið verður fram á rættan og samlíkan hátt, og í samsvari við galdandi lóggávu.

Í Toll- og Skattaráðnum eru fimm limir. Ráðið hevur fýra fundir um árið, og tá tørvur er. Stjórin á TAKS luttekur á fundunum.

Ongar reglur ásettar fyri virkið hjá Toll- og Skattaráðnum.

Í lógini er ásett, at landsstýrismaðurin kann gera reglur fyri virkið hjá Toll- og Skattaráðnum. TAKS kunnaði um, at Toll- og Skattaráðið, uttan úrslit, hevur heitt á Fíggjarmálaráðið um at lýsa arbeiðsuppgávurnar hjá ráðnum neyvari.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at mett verður, at tíðin er farin frá Toll- og Skattaráðnum, og hevur samgongan sett sær fyri at minka um talið av nevndum og ráðum. Tær yvirskipaðu uppgávurnar kunnu leggjast til Fíggjarmálaráðið, men uppgávurnar annars verða lagdar til TAKS.

Lógin verður broytt, og Toll- og Skattaráðið tikið av.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur í sambandi við løgmansrøðuna á ólavsøku 2021 boðað frá, at Løgtingslógin um Toll- og Skattafyrisitingina verður broytt, og at ráðið verður tikið av.

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini er fremsta endamálið hjá TAKS at tryggja tí almenna skatta- og avgjaldsinntøkur, at umsita gjøld og veitingar, og at fyribyrgja ólógligum inn- og útflutningi.

TAKS fremur lógararbeiði og ráðgevur um viðurskifti á skatta- og avgjaldsøkinum. Stovnurin krevur inn skuld til tað almenna, og umsitur stuðulslóggávur. TAKS umsitur frítíðarløn, trygdargrunn løntakaranna, Barsilsskipanina og FAS-skipanina. Stovnurin krevur inn gjøld til Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og Vinnusjúkugrunnin, og rindar út úr grunnunum. Eisini krevur TAKS inn gjøld til Arbeiðsloysisskipanina, Heilsutrygd og Kringvarpið.

Roknskaparviðurskifti

Játtanin á høvuðskontu 3.15.1.04, undirkontu 20 er til umsitingina av TAKS.

Roknskapartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	52.094	53.963	54.611	56.564	56.020
Keyp av vørum og tænastum	11.302	10.657	9.961	10.411	10.363
Keyp av útbúnaði, netto	1.930	751	1.694	1.025	2.344
Leiga, viðlíkahald og skattur	2.732	2.172	2.016	1.986	3.056
Ymsar rakstrarútreiðslur	43	50	59	59	53
Søla av vørum og tænastum	-1.569	-1.655	-1.595	-1.513	-1.570
Eftirlits- og umsjónaravgjøld	-140	-191	-167	-155	-200
Kravd gjøld, bøtur o.a.	-9.797	-9.733	-9.776	-10.256	-9.696
Innanh. flyt. millum alm.stovn. (útr)	4	6	5	9	0
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	-4.037	-3.972	-4.131	-4.188	-4.533
Tilsamans	**52.560**	**52.048**	**52.677**	**53.943**	**55.837**
Játtan	*53.838*	*53.658*	*53.672*	*54.634*	*56.198*

117 fólk eru í starvi, sum svarar til 109 ársverk.

Á undirkontu 24. “KT-skipanir hjá TAKS” eru inntøkur og útreiðslur av KT-skipanum hjá TAKS. Inntøkurnar eru slakar 3,5 mió.kr. í 2020.

Fíggjarstøðan 2018 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Materiellur útbúnaður	4.290	4.990	4.621	4.734	4.353
Goymslur og áogn	-995.106	-1.045.505	-1.083.608	-1.158.297	-1.238.580
Virðisbrøv og tøkur peningur	4.324	6.056	7.870	2.105	2.105
Útjavningarkonta	991.245	1.043.105	1.095.522	1.148.086	1.202.411
Stuttfreistað skuld	-57.313	-60.694	-77.082	-50.572	-26.126

Materiellur útbúnaður er bygningurin á matr. nr. 163o í Klaksvík, sum Fíggjarmálaráðið keypti í 2002 fyri 5,7 mió.kr. Akfør eru skrásett fyri 787 t.kr.

Roknskaparreglugerð v.m.

Roknskaparreglugerðin er frá 2018, og Fíggjarmálaráðið hevur góðkent hana.

Roknskaparreglu-gerðin er góðkend.

Í innanvirkis roknskapinum eru lønarútreiðslurnar greinaðar á staðartátt. TAKS fer at broyta sundurgreiningina, eftir at fleiri deildir eru savnaðar á einum staði.

Roknskapargóðkenning

TAKS hevur virkisgongdir, sum skulu tryggja rættan roknskap. Deildarleiðararnir góðkenna roknskapin fyri síni økir, og bókhaldsdeildin góðkennir fíggjarstøðuna. Stjórin góðkennir endaligu roknskapirnar fyri øll ábyrgdarøkini mótvegis Fíggjarmálaráðnum.

Gjaldkort

TAKS hevði trý gjaldkort, sum heimildarváttanir ikki vóru gjørdar til. Í apríl 2021 hevur TAKS kunnað um, at heimildarváttanir til tvey gjaldkort eru sendar Gjaldstovuni til góðkenningar, og eitt kort er gjørt óvirkið.

Umboðan

Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin nágreinar umboðanarútreiðslurnar betur í roknskapinum, fyri at tryggja, at stovnurin einans rindar útreiðslur, ið hoyra til stovnin.

TAKS hevur ikki havt siðvenju at lata starvsfólkunum jólagávur. Í 2020 lat stovnurin tó jólagávur fyri 350 kr. til hvønn fyri tilsamans 40.600 kr. TAKS letur gávur á serligum starvsdøgum í samsvari við almennu reglurnar.

Inntøkur

Partur av rakstrinum hjá TAKS eru inntøkur av ymiskum tænastugjøldum; 9,7 mió.kr. í 2020.

Tænastugjøld uttan fyri avgreiðslutíð (reinførisváttanir)

Inntøkurnar fyri reinførisváttanir hava ligið millum 175 t.kr. og 200 t.kr. um árið síðani 2015. Taksturin er 1.800 kr. fyri hvørja váttan.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar fakturar. Á øllum fakturunum er viðmerkt, at rokning er skrivað við loyvi í K. nr. 14/2010 "um tænastugjøld uttanfyri arbeiðstíð". Landsgrannskoðanin heldur, at tilvísingin er misvísandi, tí tær 1.800 kr., sum TAKS krevur fyri reinførisváttanir, eru ikki ásettar í K. nr. 14/2010.

TAKS vísti á, at upphæddin er ásett við heimild í § 22 í Bek. nr. 515/2012 "for Færøerne om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme". Har er ásett, at Heilsumálaráðið ásetir prís- og lønarreguleringar. Upphæddin er ikki broytt, síðani uppgávan var løgd til TAKS at umsita.

Samsvar er ikki millum gjald og heimild.

Landsgrannskoðanin mælti til at rætta tilvísingarnar í fakturunum, soleiðis at samsvar er millum gjald og heimild.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært TAKS verður tilvísingin á fakturunum rættað. TAKS hevur ikki funnið nakað skjalatilfar um, hvussu tær 1.800 kr. eru ásettar. TAKS fer at venda sær til Heilsumálaráðið um at eftirmeta kostnaðin.

Umsitingargjald, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

Sambært TAKS hevur stovnurin heimild at krevja gjald fyri at umsita AMEG-grunnin sambært tænastuavtalu frá 8. november 2011 ímillum partarnar. Í 2020 rindaði AMEG 596 t.kr. fyri umsiting. Afturat tí hevur AMEG goldið 862 t.kr. fyri KT, sum eru skrásettar á undirkontuna "KT-skipanir hjá TAKS".

Frítíðarløn

Sambært § 20a, stk. 6, í Ll. nr. 30/1986 "um frítíð við løn", fyrisitur Toll- og Skattstova Føroya inn- og útgjalding av frítíðarløn og frítíðarkontu. TAKS hevur onga skrivliga avtalu um, hvat Frítíðargrunnurin og løntakarafeløgini skulu rinda fyri fyrisitingina.

Í 2020 hevur TAKS fakturerað 1,5 mió.kr., nøkulunda helvt um helvt til Frítíðargrunnin og fakfeløgini. Býtislykilin er roknaður út eftir tali av transaktiónum.

Frítíðargrunnurin og fakfeløgini hava rindað TAKS 641 t.kr. fyri løn og hølisútreiðslur í 2020. Harafturat hava grunnurin og fakfeløgini rindað 811 t.kr. fyri KT-útreiðslur, sum eru skrásettar á undirkontuna "KT-skipanir hjá TAKS".

Innanhýsis flytingar (inntøkur)

Størri parturin av innanhýsis flytingum, tilsamans 4,5 mió.kr. í 2020, er húsaleiga og avrokningar, sum TAKS sendir øðrum stovnum fyri umsiting.

Arbeiðsloysistrygging

TAKS krevur inn og avroknar gjøld vegna Arbeiðsloysistryggingina. Sambært § 10 í ALS-lógini[9] rindar ALS fyri umsiting av skipanini. Eingin avtala er millum TAKS og ALS

[9] Ll. nr. 113/1997 "um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing".

um, hvussu gjaldið verður roknað. Sambært TAKS rindar ALS einans fyri nýtslu av KT-skipanum. Í 2020 hevur ALS rindað 261 t.kr. til undirkontu 24. “KT-skipanir hjá TAKS”.

Vinnusjúkugrunnurin
Í 2010 er tænastuavtala gjørd millum Vinnusjúkugrunnin og TAKS, har m.a. er ásett, at grunnurin endurrindar útreiðslur, ið TAKS hevur í sambandi við tænastuveitingarnar. Eisini er ásett, at nærri avtala kann gerast um vavið av tænastum, hvussu gjøld verða útroknað v.m. Landsgrannskoðanini kunnugt er nærri avtala ikki gjørd.

Endurgjald fyri umsiting á 300 t.kr. er bókað á undirkontu 20. “Vanligt virksemi” og KT-raksturin 186 t.kr. er bókaður á undirkontu 24. “KT-skipanir hjá TAKS”.

Trygdargrunnurin
TAKS fær ikki samsýning fyri at umsita Trygdargrunnin.

Heilsutrygd
TAKS hevur ikki gjørt skrivliga tænastuavtalu við Heilsutrygd. Í 2016 gjørdi TAKS eitt uppskot til tænastuavtalu, har eitt fast árligt gjald er ásett fyri KT-rakstur og umsiting, umframt broytiligt gjald fyri at senda út brøv.

Í 2020 hevur TAKS skuldskrivað Heilsutrygd fyri 1,2 mió.kr. og 176 t.kr. fyri KT-rakstur, bókað á “KT-skipanir hjá TAKS”. Landsgrannskoðanin mælti til, at avtala verður góðkend og undirskrivað av báðum pørtum.

Lógarásett, at TAKS skal gera uppgávurnar, men einki ásett um kostnað.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at higartil hevur Heilsutrygd ikki skriva undir tann partin, sum er um umsitingarkostnað til TAKS, tí tað er lógarásett, at TAKS skal gera hesa uppgávu. Heilsutrygd er tó sinnað at skriva undir part av avtaluni um, hvussu uppgávan verður umsitin (hvør hevur ábyrgd av hvørjum).

Barsilsgrunnurin
Í 2011 er avtala gjørd millum TAKS og Vinnumálaráðið um umsiting av pørtum av lógini um barsilsskipan. Í 2020 rindaði Barsilsgrunnurin 1,8 mió.kr. til TAKS, og 120 t.kr. fyri KT-rakstur, bókað á “KT-skipanir hjá TAKS”

Kringvarp Føroya
Eingin undirskrivað tænastuavtala er millum TAKS og Kringvarp Føroya. Í 2016 gjørdi TAKS eitt uppskot til tænastuavtalu, har eitt fast árligt gjald er ásett fyri KT-rakstur og umsiting, umframt variabult gjald fyri at senda út brøv.

Í 2020 hevur TAKS fingið 802 t.kr. frá Kringvarpinum, og 175 t.kr. fyri KT-rakstur, bókað á “KT-skipanir hjá TAKS”. Landsgrannskoðanin mælti til, at avtalan verður góðkend og undirskrivað av báðum pørtum.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Kringvarp Føroya í juni 2021 hevur undirskrivað avtaluna.

Farsóttartilbúgvingin
16. juli 2020 gjørdi TAKS avtalu við Heilsumálaráðið. Tá var mett, at kostnaðurin fór at verða 50 t.kr. um mánaðin. Í 2020 hevur TAKS fingið 249 t.kr.

Lønir
Lønir eru størstu útreiðslurnar hjá TAKS. Seinastu árini hava tær ligið um 55 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað nøkur lønarmál, um lýsingar, umsóknir, prógv, tilboð um setan og setanarbræv eru í lønarmálunum. Vit kannaðu eisini um tíðarskrásetingar eru í samsvari við innanhýsis reglurnar.

TAKS hevur skrivligar reglur um arbeiðstíðir, og flextíð +37 og -15 tímar. Reglurnar eru ikki galdandi fyri tollararnar; teir skráseta bert, nær teir eru tøkir, og skráseta tímarnar á vikuuppgerðir.

Sambært yvirlitinum frá februar 2021 eru tímasaldurnar ikki í samsvari við innanhýsis reglurnar. 16 starvsfólk áttu ímillum 37 og 109 tímar á, og 17 starvsfólk skyldaðu ímillum 15 og 204 tímar. Í apríl 2021 hevur TAKS kunnað um, at saldan hjá einum starvsfólki upp á 204 tímar var ikki røtt, men saldan skuldi vera 33 tímar.

TAKS tíðaravmarkar ikki ágóðar og skyldur av tímum.

TAKS heldur, at tímasaldurnar hava lítlan og ongan týdning, og tí tíðaravmarkar stovnurin ikki ágóðar og skyldur í roknskapinum við ársenda.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar lønir hjá tollarum, um lýsingar, umsóknir, prógv, tilboð um setan og setanarbræv eru í lønarmálunum. Einki var at finnast at setanunum.

Tollararnir eru settir í tænastumannastørv ella tænastumannalíknandi størv.

Sambært arbeiðstíðaravtalu frá 2017, er arbeiðstíðin 39,5 tímar um vikuna, og yvirtíð verður ikki roknað, fyrr enn vanligir arbeiðstímar eru arbeiddir. Sambært avtaluni verður yvirarbeiði gjørt upp í byrjaðum hálvum tímum hvønn dag. Í einum 8-viku skeiði skulu starvsfólk hava arbeitt 316 tímar, áðrenn yvirtíð verður roknað.

Tollararnir lata umsitingini vikuseðlar. Umframt vanliga arbeiðstíð arbeiða teir vaktir og yvirtíð. Á vikuseðlunum sæst ikki, nær teir 39,5 vikuligu arbeiðstímarnir, ið eru grundarlagið undir føstu lønini, liggja.

Tveir tollarar skiftast um at hava vakt aðru hvørja viku. Teir taka sær m.a. av fráboðanum frá skipum, sum koma inn á tolløki. Yvirtíðin, sum teir fáa fyri hvørja ferð boð er eftir teimum, er altíð í minsta lagi 2 tímar, og ongantíð í hálvum tímum.

Spurt, hvussu TAKS tryggjar sær, at starvsfólk hava arbeitt tímarnar, ið arbeiðstíðar-avtalan ásetir, áðrenn yvirtíð verður roknað, svaraði TAKS, at stovnurin sendir reiðaríum ella umboðsmanni teirra rokningar fyri avgreiðslu uttan fyri arbeiðstíð, og at rokningarnar eru prógv fyri, at yvirtímarnir eru arbeiddir.

Landsgrannskoðanin heldur, at rokningarnar prógva ikki talið á yvirtímum.

Fíggjarmálaráðið er samt við TAKS um, at rokningar sendar reiðaríum, eru prógv fyri at arbeiði er gjørt, men tað er ikki í sær sjálvum prógv fyri talinum av yvirtímum. Hetta verður stýrt við vikuseðlunum við yvirtímum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at í 2020 vóru 345 tímar á muni í yvirtímunum hjá báðum tollarunum, sum skiftast at ganga vakt aðruhvørja viku, og spurdi TAKS um orsøkina. TAKS hevur ikki svarað.

Landsgrannskoðanin spurdi TAKS, um tað er rætt, at tollarar sjáldan halda frí serstøku frívikuna, men heldur fáa hana útgoldna. Eisini spurdi Landsgrannskoðanin um orsøkina til, at annar tollarin ongan vikuseðil hevði fyri 12 vikur, og hin í 10 vikur í 2020. TAKS svaraði ikki spurningunum.

Sambært arbeiðstíðaravtaluni skulu 12% í frítíðarløn einans roknast av yvirarbeiði. Spurt, hví frítíðarløn er roknað av tilkallivaktum, svaraði TAKS, at frítíðarløn hevur altíð verið roknað av tilkallivaktum. Sambært landsstýrismanninum er Gjaldstovan samd við TAKS.

Ófullfíggjað skráseting.

Tað er ikki í samsvari við roknskaparkunngerðina, at dagliga arbeiðstíðin ikki verður skrásett, og at skrásetingin av tímum út yvir vikunormin er ófullfíggjað. Landsgrann-skoðanin kann tí ikki við vissu siga, at lønirnar hava verið rættar.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hereftir fara tollarar at stempla, soleiðis at arbeiðstíðin verður skrásett.

Tollarar fara nú at skráseta (stempla) arbeiðstíðina.

Keyp av vørum og tænastum

Í 2020 hevur TAKS bjóðað keyp av bilum og reingerð av skrivstovuhølunum í Tórshavn út á Keypsportalinum. Í øðrum førum hevur stovnurin biðið um tilboð og skrásett samskiftið í journal.

Starvsfólk, sum keypa fartelefonir, ið kosta meir enn 5.000 kr., rinda meirkostnaðin. TAKS arbeiðir við at gera politikk um keyp av fartelefonum, og um at beina telefonirnar burtur í samsvari við reglurnar.

Húsaleiga

Í desember 2020 flutti TAKS í hølir á Smyrilsvegi í Tórshavn. Leigusáttmálin er frá 8. november 2019, og kann ikki sigast upp fyrr enn 1. januar 2027. Landsverk hevur ikki formliga góðkent sáttmálan, vegna óavkláraðar spurningar um útlufting o.l.

Leigan er 2 mió.kr. um árið frá 1. januar 2021. Sambært stjóranum hækkar leigan væntandi til 2,4 mió.kr. í 2022.

Sambært sáttmálanum rindar leigarin fyri serlig ynski um innrættingar í leigumálinum. Í januar 2020 rindaði TAKS eigaranum eina góða mió.kr. fyri innrættingar, keypti hurða- og lásaskipan fyri 153 t.kr. og rindaði 85 t.kr. fyri timburarbeiði í sambandi við ein køk.

Fyri hølini í Rættará rindaði TAKS 924 t.kr. um árið. TAKS hevur kunnað um, at innrættingar og innleggingar, sum stovnurin hevur ynskt og rindað fyri í Rættará, eru partur av bygninginum, og kunnu ikki takast við.

Innrættingar, innleggingar og tillaðingar í leigaðum hølum, falla til eigaran.

Flestu innrættingarnar og tillagingarnar, sum TAKS hevur goldið í nýggju hølunum falla eisini til eigaran, tá ið leigusáttmálin gongur út.

Í Saltangará leigar TAKS fyri 355 t.kr. um árið, og á Tvøroyri fyri 292 t.kr. um árið.

Kassar

Landsgrannskoðanin var í november 2020 á ófráboðaðum kassaeftirliti hjá tolleftirlitinum á Eystaru bryggju í Tórshavn. Einki var at finnast at.

Peningastovnskontur

Kontur, skrásettar í Búskaparskipan landsins

Til dagliga raksturin, hevur TAKS fimm kontur í føroysku peningastovnunum, sum eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. TAKS hevur eina kontu í Danske Bank til inngjøld frá norðurlendska innheintingarsamstarvinum.

Kontur uttan fyri Búskaparskipan landsins

Á ársyvirlitinum 2020 yvir kontur hjá TAKS í Suðuroyar Sparikassa er ein konta, sum ikki er skrásett í Búskaparskipan landsins. 31. desember 2020 var saldan 0,00 kr. Sambært TAKS var kontan stovnað í 2018 og ætlað til eftirlønargjøld, men kontan er ongantíð brúkt. TAKS hevur heitt á Suðuroyar Sparikassa, um at strika kontuna. Landsgrannskoðanin bað TAKS um útskrift ella váttan frá peningastovninum, at kontan ikki hevur verið brúkt, og at kontan er ella verður strikað, men TAKS hevur ikki svarað.

Á ársyvirlitinum frá Betri Banka 2020 er ein konta, sum ikki er skrásett í Búskaparskipan landsins. Talan er um samlikontu til inngjøld av eftirlønum av B-inntøkum, sum verða fluttar føroyskum eftirlønarveitarum. Útgjøldini til eftirlønarveitararnir verða goldin av kontuni, áðrenn inngjøldini koma næsta bankadag. Saldan á kontuni gerst negativ, til inngjøldini eru komin. Av tí at kontan er negativ, skuldskrivar bankin rentu. Í desember 2020 vóru 5.332 kr. bókaðar sum rentuútreiðsla hjá TAKS. Sambært TAKS

er talan um tekniskan spurning, tá ið útgjøldini til eftirlønarveitararnar verða goldin, áðrenn inngjøldini koma.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at TAKS hevur biðið Elektron broyta mannagongdina soleiðis, at inngjøld og útgjøld eru sama dag.

Landsgrannskoðanin mælti til, at loyvi verður fingið frá aðalráðnum, tá ið kontur hjá landinum verða upprættaðar, og at tær verða skrásettar í Búskaparskipan landsins.

Kontur, upprættaðar til avrokning av donskum eftirlønum

Lógin um bundna eftirløn kom í gildi 1. januar 2014. Fleiri løntakarar høvdu danskar eftirlønarveitarar, og skattaskipanin kundi ikki ávísa lønir og eftirlønir til danskar kontur. Donsku eftirlønarveitararnir høvdu tá ikki áhuga í at stovna føroyskar kontur.

Fyri at avrokna eftirlønirnar, sum fóru um skattaskipanini, gjørdi TAKS munnliga avtalu við Elektron og Suðuroyar Sparikassa um at stovna kontur fyri hvønn einstakan danskan eftirlønarveitara. Loyvi er ikki fingið frá aðalráðnum til at stovna konturnar, og tær eru ikki skrásettar í Búskaparskipan Landsins. TAKS eigur konturnar, sum eru skrásettar í bankanum við einum øðrum kundanummari.

Kontur, skrásettar í navninum hjá TAKS, sum TAKS sigur seg í roynd og veru ikki eiga.

Sambært TAKS eru konturnar "einans" snúningspunkt um eftirlønir, sum TAKS í roynd og veru ikki eigur. Upp í 25 kontur hava verið skrásettar á kundanummarinum. Fleiri vóru stovnaðar í 2013, sum eftirsíðan eru gjørdar upp, og onkur nýggj er stovnað í 2018. Í 2021 eru 8 tílíkar samlikontur aktivar.

Sambært TAKS hevur Suðuroyar Sparikassi ræði á kontunum; sparikassin stovnar og ger upp kontur eftir áheitan frá eftirlønarveitarunum. Tá ið broytingar verða gjørdar, boðar Suðuroyar Sparikassi Elektron frá, sum ger neyðugar broytingar í skattaskipanini. TAKS hevur ikki ávirkan á arbeiðið.

TAKS hevur eftirlit við, at konturnar verða tømdar.

TAKS hevur eftirlit við, at samlikonturnar verða tømdar, men hevur einki eftirlit við, at kontunummurini hjá eftirlønarveitarunum eru røtt. Út frá flytingunum ber heldur ikki til at gera eftirlit, tí einki móttakaranavn stendur á flytingunum, og kontunummarið, eftirlønin er flutt á, sæst ikki altíð. Frá stovnan til 31. mai 2021 eru 46,1 mió.kr. fluttar á og av teimum 8 kontunum, sum eru aktivar í 2021.

Einki eftirlit við um flytingarnar eru rættar.

TAKS hevur einki eftirlit við, um eftirlønirnar verða fluttar til rætta móttakaran, tó at TAKS er kontuánarin.

Landsgrannskoðanin mælti til:

1. at TAKS setur í verk eitt virkið innaneftirlit, sum skal tryggja, at øll inn- og útgjøld eru røtt, feilir verða funnir og rættaðir, og í samráð við aðalráðið og Gjaldstovuna, tekur støðu til, um konturnar skulu verða skrásettar í Búskaparskipan landsins, ella
2. at TAKS fær avtalur í lag við eftirlønarveitararnar um, at danskar eftirlønir, sum verða avroknaðar um skattaskipanina, verða goldnar á kontur, sum veitararnir eiga.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at TAKS fer at senda donsku eftirlønarveitarunum skriv, um at eftirlønir verða goldnar á kontur, sum veitarin sjálvur eigur. Gjaldstovan tekur undir við TAKS.

Fulltrúir til kontur

Í fylgiskjali til roknskaparreglugerðina er yvirlit yvir, hvørji starvsfólk hava atgongd til netbankan, og hvørjar atgongdir tey hava. Fulltrúirnar og tænastuavtalurnar eru ikki dagførdar síðani 2018. Í apríl 2021 kunnaði TAKS um, at stovnurin fer at dagføra roknskaparreglugerðina og atgongdirnar í næstum.

KT-viðurskifti
Teldurnar hjá TAKS eru knýttar í Landsnet. Stovnurin hevur egið KT-trygdararbeiði, og hevur aðrar skipanir, sum hava stóran týdning fyri stovnin og landið sum heild, m.a. skattaskipanirnar.

Stovnar, sum TAKS, skulu skoðast árliga av KT-grannskoðara við viðkomandi royndum og útbúgving, og sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent. KT-grannskoðari hevur skoðað skipanirnar og KT-kervið í 2019, og skoðan fyri 2020 skuldi gerast í juni 2021.

KT-grannskoðarin vísti á nakrar veikleikar, harav ein hevði høga raðfesting, sjey høvdu miðal raðfesting og tveir lága raðfesting. Sambært KT-grannskoðaranum er tað av stórum týdningi, at TAKS bøtir um fráboðaðu veikleikarnar.

Sambært stjóranum arbeiðir TAKS við at bøta um veikleikarnar. Øll tilmælini eru sett á lista, sum vísir tilmæli, raðfesting og mál, ið eru loyst ella eru í gongd. Av 11 tilmælum í 2019, eru 4 loyst.

Landsgrannskoðanin mælti til, at veikleikarnir, sum KT-grannskoðarin vísir á, verða fingnir í rættlag, so skjótt til ber.

Brúkarastýring
TAKS brúkar kekklista at stovna ella strika atgongdir, tá ið starvsfólk vera sett í starv ella fara úr starvi. TAKS sendir oyðibløð til Elektron, sum ger broytingarnar. KT-deildin kannar atgongdirnar árliga fyri at tryggja, at tær eru rættar.

Persónupplýsingar
Dátueftirlitið hevur verið á eftirlitsvitjan hjá TAKS í 2018 og 2019 og hevði 19 tilmæli. TAKS kunnaði um, at øll tilmælini eru loyst.

4.9 Innheinting av barnapeningi (LG 2017/203-0151)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av innheintingini av barnapeningi.

TAKS hevði ikki sett nakra innheinting í verk uttan fyri Norðurlond, tí tað var ov kostnaðarmikið. TAKS sendi fráboðan til skuldarar, tá ið stovnurin fekk mál frá Almannaverkinum. Óvist var, um fráboðanirnar yvirhøvur komu fram, og ofta gekk long tíð, áðrenn einstøk brøv komu retur.

Spurdur, um TAKS hevði skyldu til at taka ímóti krøvum, sum kortini ikki vórðu heintað inn, svaraði landsstýrismaðurin, at TAKS hevði ábyrgd av innheintingini, og tí skyldu til at taka ímóti krøvunum.

Eftirgeving av skuld
Sambært § 13, stk. 1, í Ll. nr. 71/1996 “um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl.” skal Almannaverkið eftirgeva forskotsvís útgoldin gjøld, sum ikki eru afturgoldin av tí gjaldskylduga, tá ið einki gjald er útgoldið síðsta árið, ella tá ið tann gjaldskyldugi hevur verið innsettur á stovni undir Kriminalforsorgini.

Ein fyritreyt fyri at eftirgeva eftir stk. 1 er, at gjaldskyldugi ikki er førur fyri at rinda.

Einki yvirlit yvir eftirgivin krøv.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS einki yvirlit hevði yvir, hvussu nógv var eftirgivið sambært § 13.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið fer at heita á TAKS um frameftir at skráseta eftirgivin barnagjøld soleiðis, at yvirlit kann fáast yvir samlaðu eftirgivnu upphæddirnar. Eisini átti at verið møguligt hjá TAKS og Almannaverkinum at endurskapa slíkt yvirlit fyri nøkur ár aftur.

Avskriving og avseting móti tapi
Í 2007 gjørdi TAKS eitt átak at rudda upp í skuldarunum og niðurskrivaði part av áognini. Ivasamt var, um stovnurin hevði heimild at avskriva, og tí var sannlíkt, at áognin hjá landskassanum átti at verið størri, enn hon var. TAKS helt, at ein triðingur av skuldini kundi verðið avskrivaður, tí TAKS fær ongantíð peningin inn.

Landsstýrismaðurin vísti á, at fíggjarstøðan í landsroknskapinum skal vera so rættvísandi sum gjørligt. Í hesum føri var talan um persónar, sum eingi gjaldsevni høvdu og fóru tí helst ikki at kunna rinda. Vóru als eingi útlit fyri, at skuldin fór at verða afturgoldin, átti hon at verða avskrivað roknskaparliga.

Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fíggjarmálaráðið, saman við TAKS, Almannamálaráðnum og Almannaverkinum, fór at viðgera málið, fyri at finna eina nøktandi loysn viðvíkjandi innheinting av barnapeningi og eftirgeving av skuld.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fíggjarmálaráðið hevur einki at leggja afturat í málinum um avskrivingar av skuld, íkomin vegna forskotsrindað barnagjald.

4.10 Búskaparráðið (LG 2020/203-0151)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin og umsitingina av Búskaparráðnum. Búskaparráðið er skipað sambært Ll. nr. 50/2009 “um Búskaparráð”. Endamálið við Búskaparráðnum er at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum, og koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Búskaparráðið ger konjunkturfrágreiðingar, sum verða almannakunngjørdar 1. mars og 1. september hvørt ár.

Búskaparráðið hevur tríggjar limir, sum landsstýrismaðurin setir eftir tilmæli frá stýrinum fyri Fróðskaparsetur Føroya. Valskeiðið hjá ráðnum var úti 1. januar 2021, men landsstýrismaðurin longdi valskeiðið til 1. apríl 2021. Fróðskaparsetur Føroya røkir skrivarauppgávuna og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum.

Limirnir fáa mánaðarliga samsýning, formaðurin 8.000 kr. og hini fáa 4.000 kr. hvør.

Roknskaparviðurskifti
Í 2020 eru játtaðar 2.450 t.kr. til Búskaparráðið á høvuðskontu 3.15.1.13. Av játtanini er raksturin av Búskaparráðnum mettur til umleið 1 mió.kr., av hesum eru 200 t.kr. til nevndarsamsýningar, og umleið 1,4 mió.kr. verða nýttar til gransking og undirvísing í búskapi á Fróðskaparsetrinum.

Fróðskaparsetur Føroya hevur við innanhýsis flyting fingið 2,2 mió.kr. Góðar 1,8 mió.kr. eru nýttar til lønir í sambandi við skrivarauppgávuna hjá Búskaparráðnum og til undirvísing og gransking í búskaparfrøði. Útreiðslurnar verða bókaðar á høvuðskontu 7.23.6.16 “Fróðskaparsetur Føroya”.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum keyp av tænastuveitingum, samsýningar til ráðslimir, samsýningar til meting av vísindafólki v.m. Einki var at finnast at.

Í juni 2021 vísti landsstýrismaðurin á, at *"við Ll. nr. 72/2021 um Búskaparráð, sum kemur ístaðin fyri lógina frá 2009 um Búskaparráð, er ásett í § 2, at Landsbanka-nevndin er Búskaparráðið, og í § 4, at Landsbankin røkir skrivarauppgávuna og hevur dagligu umsitingina hjá Búskaparráðnum. Væntandi verður í uppskotinum til løgtings-fíggjarlóg fyri 2022 tikið við, at játtanin til Búskaparráðið verður niðurløgd, men at játtanin til skrivarauppgávuna verður flutt til Landsbankan, sum frameftir verður stovnur við vanligari rakstrarjáttan í fíggjarlógini."*

Játtanin til Búskaparráð væntandi niðurløgd.

4.11 Landsbanki Føroya (LG 2020/203-0151)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Landsbanka Føroya. Endamálið var m.a. at kanna, um stovnurin hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Landsbankin virkar sambært Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð". Landsbankin er almennur fíggjar- og greiningarstovnur, ið virkar fyri støðufesti í Føroyum. Uppgávurnar eru m.a. at umsita ogn og skuld landsins, landsins gjaldføri, lántøkuna hjá landinum og at gera fíggjarligar váðagreiningar. Harumframt er Landsbankin skrivstova hjá Føroya Váðaráð. Landsbankin, sum er sjálvstøðugur og óheftur av politisku skipanini, er undir leiðslu av nevnd og stjóra.

Landsbankin er stovnaður við 20 mió.kr. í fæi. Fæið kann nýtast at javna inntøkur og útreiðslur í mun til virksemi bankans. Sambært lógini skal nevndin gera nærri reglur um, hvat fæið kann brúkast til.

Í juni 2021 hevur landsstýrismaðurin vísst á, at við broytingini í Ll. nr. 73/2021 er ásetingin um stovnsfæið strikað. Landsstýrismaðurin væntar at taka við í uppskoti til løgtingsfíggjarlóg fyri 2022, at tær 20 mió.kr. í stovnsfæið verða fluttar í Búskapar-grunnin.

Ásetingin um stovnsfæ strikað.

Roknskapartøl 2017 til 2020, høvuðskonta 3.15.1.20:

t.kr.

Heiti	2017	2018	2019	2020
Lønir	3.993	4.662	5.930	6.456
Keyp av vørum og tænastum	1.809	1.689	1.697	1.656
Keyp av útbúnaði	720	247	313	49
Leiga, viðlíkah. v.m.	805	54	0	0
Søla av vørum og tænastum	-1.265	-1.492	-1.613	-1.714
Innanh. fl. ml. alm. stovnar, netto	-6.062	-5.160	-6.327	-6.447
Tilsamans	**0**	**0**	**0**	**0**

Nettojáttanin til Landsbankan var 0 kr. Landsbankin fekk sambært lógini 4‰ av ásetta minstagjaldførinum fyri at røkja gjaldføri og skuld landsins. Harumframt fær Lands-bankin inntøkur av at umsita fíggjarligar ognir hjá AMEG og øðrum almennum grunnum.

Í juni 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at við lógarbroytingini í Ll. nr. 73/2021 er ásetingin um, at rakstur Landsbankans verður fíggjaður við gjaldi upp til 4‰ av minstagjaldføri landsins, strikað. Landsbankin verður frameftir stovnur við vanligari rakstarjáttan í fíggjarlógini. Landsstýrismaðurin væntar, at tað verður tikið við í uppskotið til fíggjarlóg 2022, samstundis sum játtanin á undirkontu 02. "Samsýning til Landsbankan" á høvuðskontu 20.50.2.01 "Rentuinntøkur av innistandandi", fellur burtur.

Roknskaparviðurskifti v.m.

Stjórin góðkennir mánaðarroknskapirnar mótvegis Fíggjarmálaráðnum. Landsbankin nýtir kekklistar sum part av grundarlagnum at góðkenna roknskapirnar, og hvønn

mánað sendir Landsbankin eina frágreiðing til Landsgrannskoðanina um ymisk viðurskifti, m.a. um avstemmingar.

Roknskaparreglu-gerðin ikki góðkend.

Landsbankin hevur ikki góðkenda roknskaparreglugerð, men sambært stjóranum er uppskot gjørt, sum tó skal lagast til. Tá ið uppskotið er lagað til, verður tað sent Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar.

Landsbankin hevur ikki gjørt yvirlit yvir ognir og útbúnað. Bankin eigur bert innbúgv og KT-útbúnað, har virðið er undir 50 t.kr.

Landsbankin hevur eitt Eurocard, sum verður nýtt til keyp á netinum og til smærri keyp annars. Gjaldstovan hevur givið loyvi til kortið.

Í mannagongdunum fyri Landsbankan eru reglur um telefon og hald. Landsbankin rindar fyri telefon til nýggj starvsfólk. Tá ið telefonin skal skiftast, rindar Landsbankin í mesta lagi 3.000 kr. Bankin rindar í mesta lagi 400 kr. um mánaðin fyri hald.

Landsbankin heldur seg til rundskrivið um keyp av vørum og tænastum. Seinastu árini hava tey ikki keypt vørur ella tænastur, sum kosta meira enn 500 t.kr. Um upphæddin fer upp um 50 t.kr., biðja tey um tilboð frá fleiri.

Í 2019 hevur Landsbankin avtalað við felagsfyrisitingina í Kvíggjartúni, at bankin rindar 340 t.kr. um árið. Gjaldið er roknað sum ein samanrenning av fermetragjaldi og tali av starvsfólkum. Gjaldið verður prístalsviðgjørt.

Lønarumsiting

Átta fólk starvast hjá Landsbankanum. Harumframt var eitt fólk sett at arbeiða við einari verkætlan í 4 mánaðir. Landsgrannskoðanin kannaði tvey starvsfólkamál. Einki var at finnast at.

Landsbankin nýtir Totalview at skráseta nær starvsfólk koma og nær tey fara. Sambært reglugerð stovnsins um arbeiðstíð, arbeiðsstað og tíðarskráseting kunnu starvsfólk eiga 40 tímar á ella skylda upp til 20 tímar.

Inntøkur

Landsins minstagjaldføri skal vera 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Í 2020 var minstagjaldføri 2.890 mió.kr.; Landsbankin kundi sostatt nýta 11,6 mió.kr. til raksturin í 2020. Brúktar vóru 6,9 mió.kr.

Landsbankin fyrisitur Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin (AMEG). Sambært avtaluni fær Landsbankin ómaksgjald, svarandi til 0,025% av ultimo marknaðarvirðinum av fænum fyri hvønn farnan ársfjórðing. Í 2020 vóru inntøkurnar av at fyrisita AMEG 1,5 mió.kr. Landsbankin hevur ikki kannað, um fyrisitingargjaldið frá AMEG svarar til veruliga kostnaðin.

Landsbankin kann eisini umsita ognir fyri almennar grunnar og stovnar. Í 2018 gjørdi bankin reglugerð, ið ásetir, at umsitingargjaldið til Landsbankan er 0,1%-point av avkastinum. Bankin umsitur ognir fyri nakrar almennar grunnar.

KT-viðurskifti

Teldurnar eru knýttar í Landsnet og eru undir trygdartiltøkunum hjá Landsneti. Landsbankin tekur lut í Trygdarpakkanum hjá KT Landsins, og er í tí sambandi blivin skoðaður. KT-grannskoðarin hevði nøkur tilmæli. Sambært stjóranum arbeiðir Landsbankin við at loysa tey.

Umframt standardskipanir á Landsneti, nýtir Landsbankin skipan til íløgurøkt, ið nevnist PandaConnect. Landsbankin hevur bert rætt til at spyrja í skipanini. Landsbankin fær hvørt ár grannskoðaraváttan frá veitaranum.

Sambært rundskrivi um KT-trygd frá apríl 2019, skulu aðrar skipanir enn tær, sum KT Landsins veitir, góðkennast av Fíggjarmálaráðnum. Landsbankin bað í 2017 um formligt loyvi til at nýta PandaConnect, men hevur ikki fingið svar.

Í juni 2021 greiddi landsstýrismaðurin frá, at formliga er ásett, at Fíggjarmálaráðið skal góðkenna KT-skipanir, men í roynd og veru viðger Gjaldstovan umsóknirnar og mælir til góðkenningar. Góðkenningin av PandaConnect, sum egin búskaparaskipan, og sum týðandi KT-skipan uttanfyri Landsnet, er framvegis til viðgerðar hjá Gjaldstovuni. Fíggjarmálaráðið hevur heitt á Gjaldstovuna um at skunda undir viðgerðina.

KT-skipanin er framvegis ikki góðkend av Gjaldstovuni.

4.12 Hagstova Føroya (LG 2020/203-0152)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Hagstovuni á høvuðskontu 3.15.2.01, fyri m.a. at kanna, um stovnurin hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Hagstovan er almenni hagtalsmyndugleikin, og er skipað sum stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Mest avgerandi hagtølini, sum stovnurin framleiðir, eru tjóðarroknskapurin, hagtøl um gjaldsjavna, uttanlandshandil, arbeiðsmarknað, íbúgvaviðurskifti, vinnugreinar, inntøkur og brúkaraprístal.

Hagstovan virkar sambært Ll. nr. 33/1991 “um Hagstovu Føroya”. Lógin gevur Hagstovuni heimild at krevja upplýsingar frá almennum myndugleikum og stovnum, einstaklingum, fyritøkum o.ø. við heimstaði í Føroyum. Hinvegin kann Hagstovan ikki nýta upplýsingar, sum ikki eru almennar, til annað enn hagfrøðiligar uppgerðir.

Játtanin til Hagstovuna er nettojáttan. Umframt játtan í fíggjarlóg, fær Hagstovan inntøkur av hagtalsframleiðslu og verkætlanarstuðli.

Roknskapartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir	10.327	9.571	10.172	10.767	10.652
Keyp av vørum og tænastum	1.261	1.011	1.677	1.823	1.653
Keyp av útbúnaði	110	396	358	346	433
Leiga, viðlíkah. v.m.	776	532	86	74	7
Søla av vørum og tænastum	-760	-593	-648	-821	-723
Innanh. fl. ml. alm. stovnar, netto	4	4	-252	-347	11
Tilsamans	**11.718**	**10.921**	**11.393**	**11.842**	**12.033**
Játtan, netto	*11.793*	*10.925*	*11.398*	*11.838*	*12.049*
Herav játtan til inntøkur	-90	-90	-200	-1.065	-300

Nettojáttanin hevur ligið ímillum 10,9 mió.kr. og 12,0 mió.kr. Í 2016, 2017 og 2018 var játtanin til inntøkur 90 t.kr., og staðfestu inntøkurnar vóru millum 593 t.kr. og 760 t.kr. Í 2018 og 2019 fekk Hagstovan eisini stuðul frá Fiskivinnuroyndum til verkætlanina Fiskiveiðidátuvøruhús, ávikavist 255 t.kr. og 355 t.kr. Samlaðu útreiðslurnar eru tí nakað hægri enn játtanin í fíggjarlógini.

Mánaðarroknskapirnir eru góðkendir mótvegis Fíggjarmálaráðnum. Hagstovan vísir á, at tey m.a. hava lýst mannagongdir í roknskaparreglugerðini at tryggja, at roknskapurin er so rættur sum gjørligt.

Stovnurin hevur ment eina skipan, nevnd Torg, at leggja ætlanir fyri arbeiðsøkir og starvsfólk, til leypandi skráseting av arbeiðsuppgávum, og sum grundarlag undir rokningum.

Hagstovan er óheftur stovnur, og leiðslan hevur valt at skipa og bólka virksemið eftir altjóða standardi hjá ST fyri hagtalsframleiðslu, nevndur Classification of Statistical Activities.

Roknskaparreglugerð

Roknskaparreglu-gerðin ikki góðkend.

Hagstovan dagførdi roknskaparreglugerðina í 2017 og sendi Fíggjarmálaráðnum hana. Fíggjarmálaráðið góðkendi ongantíð reglugerðina, og ein nýliga dagførd reglugerð er hjá Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar. Hagstovan arbeiðir eftir reglugerðini.

Í juni 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at góðkenningin av roknskaparreglugerðini hevur bíðað eftir dagføring av rundskrivinum um roknskaparreglugerðir o.a.

Ognaryvirlit

Hagstovan hevur dagført yvirlit yvir innbúgv og KT-útbúnað.

Keyp av vørum og tænastum

Sambært Hagstovuni heldur stovnurin seg til rundskrivið frá Fíggjarmálaráðnum um keyp av vørum og tænastum. Seinastu árini hava tey hava ikki keypt vørur ella tænastur, sum kosta meira enn 500 t.kr.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið bókingar fyri 2019 og 2020, og hevði okkurt tilmæli.

Fartelefonir og teldubrillur

Í roknskaparreglugerðini hevur Hagstovan ásett reglur um fartelefonir og teldubrillur. Reglur um teldubrillur eru í "Reglugerð um arbeiði við telduskipanum" frá Arbeiðseftirlitinum.

Stovnurin rindar í mesta lagi 3.200 kr. fyri hvørja fartelefon. Um starvsfólk vilja hava dýrari telefon, rinda tey meirkostnaðin sjálvi. Stovnurin keypir telefonirnar og starvsfólk rinda Hagstovuni munin, uttan MVG. Starvsfólk kunnu keypa telefonirnar, tá ið tey fara úr starvi. Um starvsfólk hava ampa av at arbeiða við telduskíggja, rindar stovnurin upp til 3.000 kr. fyri hvønn til teldubrillur. Ynskja starvsfólk dýrari brillur, rinda tey munin sjálvi.

Gjaldkort

Stjórin hevur eitt Eurocard hjá stovninum, sum Gjaldstovan hevur givið loyvi til. Sambært roknskaparreglugerðini verður kortið nýtt til keyp á netinum og til smærri keyp annars. Landsgrannskoðanin mælti til, at kortið sum minst verður nýtt til annað enn til keyp á netinum, og at allar rokningar verða rindaðar um rokningaverkgongd.

Lønir

Landsgrannskoðanin kannaði tvey starvsfólkamál. Einki var at finnast at.

Tíðarskráseting

Hagstovan hevur ment eina klokkuskipan, har starvsfólk skráseta nær tey koma og nær tey fara. Í skipanini Torg er eisini møguligt at skráseta tíðarnýtslu fyri hvørja uppgávu.

Tímasaldur í meira lagi.

Stovnurin hevur reglugerð um arbeiðstíð, arbeiðsstað, og tíðarskráseting. Starvsfólk kunnu eiga ella skylda upp til 30 tímar, tá ið mánaðaruppgerð verður gjørd. Í oktober 2020 áttu 4 starvsfólk ímillum 50 og 94 tímar á, og 5 starvsfólk skyldaðu ímillum 31 og 179 tímar. Landsgrannskoðanin helt tað vera í meira lagi.

Stjórin hevur eftirlit við tímaskrásetingunum. Um útlit ikki eru til at skyldugir tímar verða arbeiddir, verður drigið frá í lønini. Avtala um avspáking verður gjørd við tey, ið eiga nógvar tímar á.

Landsstýrismaðurin hevur í juni 2021 kunnað um, at hann fer at mæla Hagstovuni til at nýta ásettu mørkini fyri +/-tímar í rundskrivinum um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum.

Inntøkur
Heimildin at krevja inntøkur er í § 2, stk. 4, í lógini um Hagstovu Føroya. Stovnurin fær inntøkur fyri at framleiða og selja hagtøl o.a. til stovnar, fyritøkur og einstaklingar.

Í 2016 kunnaði Hagstovan um, at prísirnir tóku støði í prísunum, sum Danmarks Statistik tók fyri líknandi uppgávur. Prísirnir eru óbroyttir.

Hagstovan sendir rokningar fyri uppgávurnar um debitorskipanina hjá Gjaldstovuni. Hagstovan hevur gjørt reglur um innkrevjing, og sendir árligar áminningar til skuldarar. Krøv, sum ikki eru goldin innan 5 ár, verða avskrivað. Einki er avskrivað síðani 2018.

KT-viðurskifti
Teldurnar hjá Hagstovuni eru knýttar í Landsnet. Til hagtalsvirksemi nýta tey skipanir, sum ikki liggja á Landsneti.

KT-viðurskiftini hjá stovnum sum Hagstovuni skulu skoðast árliga av KT-grannskoðara við viðkomandi royndum og útbúgving, og sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent. Skoðan er gjørd í 2020. KT-grannskoðarin hevði nøkur tilmæli.

4.13 Eftirlønir hjá fólkaskúlalærarum (LG 2020/203-0181)

Endurrindan frá statinum 2020
Undir hesa skipan koma tænastumenn, sum hava verið settir í føroyska skúla-verkinum, og tey, sum hava verið sett við eftirlønarrætti sum tænastumenn í fólkaskúlanum. Eftirlønirnar vera veittar eftir somu reglum sum hjá teimum, ið fáa tænastumannaeftirløn.

Ll. nr. 32/1971 “um tænastumannaeftirlønir” er galdandi fyri tænastumenn, sum eru eftirløntir eftir 30. juni 1997. Teir, sum eru eftirløntir fyri 30. juni 1997, eru eftirløntir eftir danskari lóg.

Staturin endurrindar 80% av útreiðslunum til tænastumenn v.fl. í fólkaskúlanum, sum eru farnir frá áðrenn 1. januar 1988, herundir eftirsitandi, sum hava rætt til eftirlønina. Harafturat endurrindar staturin 80% av tí parti av eftirlønunum, sum rættur var vunnin til inntil 31. desember 1987.

Gjaldstovan sendir Moderniseringsstyrelsen krav um endurgjald fyri læraraeftirlønir eina ferð um mánaðin. Eina ferð um árið ger Gjaldstovan upp, hvat staturin skal endurrinda. Í uppgerðini fyri 2020 eru upphæddirnar:

kr.

Ár	Endurgjaldskrav frá Gjaldstovuni	Endurgjaldskrav smb. eftirlønarlistunum	Munur
2020	30.809.994	30.773.558	-36.436

Við støði í lógum, avtalum og grannskoðanarleiðbeining kannaðu vit nøkur eftirlønarmál, um:

- eftirlønarmóttakararnir á teimum báðum yvirlitunum uppfylla ásetingarnar,
- útgoldnu eftirlønarupphæddirnar geva rætt til endurgjald, og
- endurgjaldskrøvini eru rætt roknað.

Niðurstøðan er, at eftirlønarmóttakararnir høvdu rætt til eftirløn, og at landsstýrið hevði rætt til endurgjald frá statinum fyri útgoldnu eftirlønarupphæddirnar.

4.14 Landsverk (LG 2020/203-0381)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Landsverk á høvuðskontu 3.38.1.02.

Stýring av verkætlanum

Í 2020 greiddi Landsverk frá, at stovnurin yvirskipað fór at flyta seg frá at vera ein projektorganisatión til at verða ein byggiharri.

Í mars 2021 fekk Landsverk nýggja fíggjarstýringsskipan, sum er ment at kunna skráseta metingar um, hvat ein verkætlan fer at kosta, og disponeringar, sum henda tá ið sáttmáli fyriliggur, og áðrenn nakað er bókað. Við tí fær Landsverk fullfíggjaðar kostnaðarmetingar frá byrjan til enda, hvussu nógv er disponerað og veruligu nýtsluna, sum stemmar við Búskaparskipan landsins.

Loyvi til egna búskaparskipan

Fíggjarmálaráðið kann loyva stovnum við heilt serligum tørvi heilt ella lutvíst at nýta egnar búskaparskipanir. Landsverk hevur greitt frá, at stovnurin hevur ikki enn fingið formligt loyvi til at hava egnar búskaparskipanir, tó at stovnurin hevur skipanir og hevur søkt um loyvi.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fíggjarmálaráðið gevur stovnum loyvi til egna búskaparskipan, men skipanin skal lúka ávísa treytir, sum Gjaldstovan ásetir, herundir at skrivlig rakstraravtala skal gerast. Landsverk hevur áður samskift við Gjaldstovuna um egnar skipanir.

Landsstýrismaðurin vísir á, at Fíggjarmálaráðið fyrr í ár svaraði Landsgrannskoðanini upp á spurning um, hvussu reglan um loyvi til egna búskaparskipan skuldi skiljast.

Ráðið og Gjaldstovan høvdu umrøtt sama spurning í sambandi við, at eitt uppskot var gjørt til nýtt rundskriv um roknskaparreglugerðir o.a.

Fíggjarmálaráðið hevur gjørt mannagongd fyri góðkenning av egnum búskapar-skipanum hjá stovnum.

Sambært landsstýrismanninum heldur Fíggjarmálaráðið samanumtikið, at ein egin búskaparskipan er ein skipan, sum letur upplýsingar til Búskaparskipan landsins, men ikki er partur av skipanini. Mannagongdin at góðkenna slíka skipan er:

1. Stjórnarráðið hjá viðkomandi stovni sendir Fíggjarmálaráðnum umsókn um, at stovnurin kann fáa loyvi til egna búskaparskipan.
2. Fíggjarmálaráðið sendir umsóknina til Gjaldstovuna, sum viðger umsóknina og ger tilmæli.
3. Fíggjarmálaráðið tekur støðu til umsóknina.
4. Skrivlig rakstraravtala, sum nágreinar vavið á loyvinum, samstarvið við Gjaldstovuna o.a., skal vera gjørd millum stjórnarráðið/stovnin og Gjaldstovuna, áðrenn skipanin kann setast í verk.

Fíggjarmálaráðið fer at seta seg í samband við Gjaldstovuna um møguligar búskapar-skipanir, sum enn ikki eru góðkendar eftir hesum leisti.

Landsverk hevur higartil brúkt Navision til sølu og vektarskipan á framleiðsluverkunum. Landsverk er farið at brúka skipanina til fíggjarstýring av verkætlanum eisini og til skráseting av verkætlanartímum. Ætlanin er eisini at brúka Navision til at handfara byggisáttmálar.

Fíggjarmálaráðið fer at biðja Landsverk koma við dagførdari umsókn sambært umrøddu mannagongdini skjótast møguligt.

Landsverk er í holt við at broyta bókingarmannagongdirnar soleiðis, at “Inntøkufíggjað virksemi” í framtíðini er ein eind, sum framleiðir skerv og asfalt til egið brúk og til sølu.

Á ymisku stovnsnumrunum skal síggjast, hvat uppgávurnar veruliga kosta, og ikki sum higartil, har tað hava verið hópur av bókingum um ársskifti.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin er frá juli 2019; hon er dagførd og send til Fíggjarmálaráðið at góðkenna.

Yvirlit yvir prísir á gróti, skervi og asfalti eru á heimasíðuni hjá Landsverki. Asfaltprísir fyri Eysturoyar- og Sandoyartunlar eru gjørdir serstakt.

Dagførda roknskapar-reglugerðin ikki góðkend.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Landsverk hevur sent Fíggjarmálaráðnum roknskaparreglugerð til góðkenningar, men hevur síðani greitt frá, at neyðugt er at gera aðrar broytingar í reglugerðini. Ráðið fer at viðgera dagførdu roknskaparreglugerðina, tá ið ráðið hevur fingið hana.

Roknskapur og játtan 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	62.514	63.909	67.685	70.408	69.333
Keyp av vørum og tænastum	75.127	70.796	78.863	81.819	114.785
Keyp av útbúnaði, netto	3.732	8.963	9.755	21.330	12.324
Leiga, viðlíkah. og skattur, avskr.	17.659	21.377	18.576	11.009	23.496
Søla av vørum og tænastum	-82.929	-85.014	-90.708	-105.571	-133.424
Útv. av løgu o.ø., søla og rentuútr.	1.261	-12	0	250	30
Innanh. flyt. m. alm. stovn. (útr)	10.952	16.793	13.703	14.320	15.047
Innanh. flyt. m. alm. stovn. (innt)	-24.454	-34.346	-36.478	-33.323	-33.232
Tilsamans	**63.862**	**62.466**	**61.395**	**60.241**	**68.359**
Játtan	*63.585*	*62.135*	*61.355*	*61.995*	*64.318*

Í 2020 eru “Innanhýsis flytingarnar (innt)” t.d. 8,6 mió.kr. lønir, sum eru fluttar millum løgur og rakstur, afturat tí eru 3,4 mió.kr. í umsitingargjaldi.

Keyp av vørum og tænastum

Í seinastu frágreiðingini viðgjørdi Landsgrannskoðanin spurningin, um Landsverk á nakran hátt tryggjar sær, at vøra er ogn hjá Landsverki, tá ið peningurin er goldin útlendskum fyritøkum forút fyri keyp.

Frammanundan goldið keyp.

Landsverk hevur kunnað um, at stovnurin keypir bara frá veitarum, sum hava eina ávísa tign og tyngd, og at stovnurin rindar ikki allan kostnaðin forút. Stovnurin rindar seinasta gjaldið, tá ið vøran er liðugt framleidd og latin.

Í 2020 eru útreiðslurnar til grannskoðanar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur 7 mió.kr., í 2019 vóru tær 4 mió.kr. og 0,9 mió.kr. í 2018. Størstu útgjøldini í 2020 eru til Sirius advokatar og til Voldgiftsnævnet. Landsverk hevur ikki samlað yvirlit yvir kostnaðin í sambandi við gerðarrættamálið um Glasir.

Landsverk hevur goldið einari fyritøku góðar 17 mió.kr. við MVG fyri skerv. Keypið er ikki boðið út, tí sambært Landsverki er eingin valmøguleiki til hendan skervin, og fyritøkan hevur einkarættindi at selja norska skervin í Føroyum.

Tænastuveitingar annars

Í 2020 vóru útreiðslurnar 36,5 mió.kr., í 2019 vóru tær 21,3 mió.kr.

Uppgávur ikki bodnar út.

Landsverk hevur ikki boðið arbeiði at spreingja og dronuflúgving v.m. fyri 8,3 mió.kr. út. Stovnurin sendi tilboðsfyrispurningar til tvær størri fyritøkur, sum eru tær einastu í landinum, sum Landsverk metti hava neyðuga útgerð.

Ráðgevingin viðvíkjandi umvælingini av bitumengoymsluni kostaði 601 t.kr., og var ikki boðin út. Sambært Landsverki eru tað ikki nógv feløg í Føroyum, ið hava servitan innan

bitumentangar ella tangar sum heild. Einans fyritøka var áhugað, og prísurin bleiv munandi hægri, enn væntað.

Útbúnaður og verkætlanarleiðsla
Í oktober 2020 bjóðaði Landsverk veiting av gummihjólslessara út á Keypsportalinum. Prísurin varð 1,4 mió.kr. Í desember 2019 bjóðaði Landsverk lating av 2 lastbilum út á Keypsportalinum. Samlaði prísurin varð 2,7 mió.kr.

Felag hjá fyrrverandi starvsfólki fær uppgávur, uttan at arbeiðið er boðið út.

Landsverk hevur gjørt avtalur við eitt felag hjá fyrrverandi starvsfólkum um keyp av tænastuveitingum, uttan at arbeiðini eru boðin út. Eisini hevur stovnurin gjørt avtalu við felagið um verkætlanarsamskipan á Landssjúkrahúsinum, galdandi í eitt ár frá 1. mars 2021, sum í mesta lagi skal kosta 1.140 t.kr. Uppgávan er ikki boðin út, tí tað sambært Landsverki hevði verið ov trupult at sett ein ókendan til uppgávuna, nú verkætlanin er komin so langt. Felagið ger eisini aðrar uppgávur fyri Landsverk.

Nýgerð skervverk, Hústoft
Í 2020 hevur Landsverk brúkt 5,3 mió.kr. til nýgerð av skervverki á Hústoft, og í 2019 eru 3,9 mió.kr. brúktar. Uppgávurnar eru ikki bodnar út.

Arbeiði at gera veg móti Glyvradali kostaði góðar 3,3 mió.kr. Landsverk spurdi nakrar fyritøkur, um tær høvdu útgerð tøka at leiga stovninum, og tað var bara hendan fyritøkan, ið sambært Landsverki hevði tøka útgerð.

31. desember 2019 keypti Landsverk 2 keyluknúsarar fyri 2,5 mió.kr., sum eru goldnir 10. februar 2020, og bókaðir í roknskapin fyri 2019. Sambært Landsverki eru maskinurnar komnar til landið í mai 2020.

Landsverk rindaði einari fyritøku góðar 500 t.kr. fyri niðurtøku av forknúsara v.m. uttan at bjóða arbeiðið út, tí stovnurin metti, at hendan fyritøkan megnaði uppgávuna, og tí at hon er í landinum og kann harvið veita tænastur í framtíðini.

Góðar 900 t.kr. eru goldnar einari fyritøku, uttan at uppgávan er boðin út, tí talan var um arbeiði, sum ikki kundi bíða, og sum smiðjurnar hjá stovninum fyrr hava gjørt, men nú tær hava færri starvsfólk, má stovnurin keypa meira hjálp frá privatum.

Reglur um alment útboð og fyrispurningar eru ikki altíð hildnar.

Landsgrannskoðanin vísti á almennu reglurnar um keyp av vørum og tænastum hjá landinum og reglurnar um at taka fíggjarlig atlit. Í fleiri førum eru reglurnar um alment útboð ella prísfyrispurningar ikki hildnar.

Fíggjarmálaráðið fer at taka málið upp, um at halda reglurnar í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað er ein aðaltreyt, hvørja ferð almennur peningur skal brúkast, at vera búskaparliga skynsamur. Tað hevur m.a. við sær, at fleiri veitarar skulu hava møguleika at bjóða upp á almennar uppgávur. Fíggjarmálaráðið ásannar, at tað kunnu vera støður, tá ið málið um búskaparligt skynsemi ikki verður nátt við at bjóða onkra uppgávu út. Hvør orsøkin so er til ikki at bjóða út, skulu stovnsleiðslur o.o. venda sær til Keypsportalin við grundgivnum fyrispurningi um undantak. Fíggjarmálaráðið fer at taka málið upp við Landsverk um at fylgja reglunum í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum.

Langtíðarleiga av maskinum
Landsverk hevur tvær avtalur um langtíðarleigu av maskinum. Annar sáttmálin er frá 2017 til 2022, og samlaða upphæddin fyri leigutíðarskeiðið er 4,4 mió.kr. Hin sáttmálin er frá 2018 til 2023, og samlaða upphæddin fyri leigutíðarskeiðið er 2,6 mió.kr.

Landsverk hevur greitt frá, at maskinurnar vóru alneyðugar fyri at halda verandi virksemi koyrandi, og stovnurin hevði ikki pening at keypa tær. Tað hevði verið best og bíligast fyri landið, um maskinurnar vóru keyptar í ár eitt.

Í 2021 hevur Landsverk biðið Fíggjarmálaráðið um loyvi at leiga eina maskinu afturat, fyri at skifta eina gamla viðlíkahaldstunga maskinu út, men fekk noktandi svar. Fáar mánaðir eftir brotnaði hendan maskinan enn eina ferð, og tað hevði við sær ein størri viðlíkahaldskostnað, enn munin millum keyp og langtíðarleigu.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at sambært játtanarreglunum er ikki loyvt at gera avtalu um langtíðarleigu. Landsverk hevur ikki fingið loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at gera avtalur um langtíðarleigu. Tá ið leiguavtalur eru komnar í lag í staðin fyri keyp, eiga tær roknskaparliga at viðgerast sum keyp, og tí tyngja roknskapin tað árið, avtalurnar eru gjørdar.

Roknskaparliga skal langtíðarleiga viðgerast sum keyp, og útreiðsluførast ár 1.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fíggjarmálaráðið hevur samskift við Landsverk um tørvin á maskinum og møguleikar fyri at útvega tær. Landsverk hevur tørv á maskinunum, sum verða leigaðar, fyri at kunna røkja álagdar uppgávur. Ráðið heldur tó ikki, at stovnurin skal leiga maskinur í longri tíð, um tørvurin er áhaldandi. Landsverk er í holt við at fáa greiðu á, hvussu keyp av maskinum kann leggjast soleiðis til rættis, at tað verður gjørt við jøvnum millumbilum, og soleiðis at keypini kunnu rúmast innan játtanina. Landsverk hevur greitt frá, at ein av leigaðu maskinunum nú er keypt, og tí er bert ein leigusáttmáli eftir.

Fíggjarmálaráðið heldur ikki, at stovnur skal leiga maskinur í longri tíð, um tørvurin er áhaldandi.

Tænastuveitingar frá Landsverki

Vetrarhaldið hjá Landsverki tekur sær av fráboðanum um koyrilíkindini, kavarudding og ástroying fyri hálku. Afturat tí átaka tey sær at sleipa akfør, ið t.d. hava rent seg føst í kava. Landsverk krevur ikki gjøld fyri tænastuna, og vísir á, at rættast hevði helst verið at sent eigarunum rokning fyri sleip. Mannagongdin hjá stovninum er annars, at um ein bilur stendur fastur, og ikki er til ampa, so verður víst eigaranum til sløkkilið ella bjargingarlið at fáa hjálp.

Landsgrannskoðanin mælti til at áseta mannagongdir fyri tílíkar tænastur, soleiðis at borgararnir hava somu atgongd til tænasturnar. Stovnurin fer at gera nýggjar almennar mannagongdir fyri sleip o.a.

Mælt til at áseta mannagongdir fyri veitingar av tænastum.

Byggideildin og Inntøkufíggjað virksemi

Roknskapartøl, býtt á undirkontur:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
20. Landsverksskrivstovan	8.160	8.027	6.581	7.764	8.406
22. Byggi- og bygningsum. landsins	2.619	3.454	3.064	7.430	13.866
23. Roynd.verk. orkuspar.í lands. bygn.	0	-20	26	30	-150
30. Landsvegahald	46.394	45.078	44.934	44.704	45.154
35. Havnir	5.167	4.878	4.830	5.365	5.513
38. Flogferðsla	1.182	1.089	1.284	1.472	1.037
40. Inntøkufíggjað virksemi	340	-39	676	-6.525	-5.468
Tilsamans	**63.862**	**62.466**	**61.395**	**60.241**	**68.358**

Í 2020 er meirnýtslan 4,0 mió.kr.; á Byggi- og bygningaumsiting landsins er meirnýtslan 9,5 mió.kr., og á Inntøkufíggjaða virkseminum er minninýtslan 5,5 mió.kr.

Víst verður anars til síðu 18 í frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu, ið er latin løgtingsgrannskoðarunum í augsut 2021.

Inntøkufíggjaða virksemið

Sambært § 21 í kunngerðini um rakstrarjáttan skal prísur fyri vørur ella tænastur ikki vera hægri enn miðal langtíðarkostnaðurin, um inntøkufíggjað virksemi hevur einkarætt ella støðan líkist einkarætti.

Prísurin skal ikki vera hægri enn miðal langtíðarkostnaður.

Landsgrannskoðanin ivast í, um Landsverk hevur heimild til at hava nógv størri avlop av inntøkufíggjaðum virksemi, enn játtanin er. Í viðmerkingunum í fíggjarlógini stendur

m.a., at raksturin av inntøkufíggjaðum virksemi skal hvíla í sær sjálvum. Yvirskotið av inntøkufíggjaðum virksemi var 6,5 mió.kr. í 2019 og 5,5 mió.kr. í 2020.

Landsverk hevur kunnað um, at orsøkin til at inntøkufíggjaða virksemið hevur givið yvirskot er, at maskinur og rakstrartól eru ikki endurnýggjað, tí yvirskotið er brúkt til annað, í 2019 til íløguna í Asfaltverkið á Sundi, og í 2020 til sakarmálskostnað.

Sambært Landsverki er yvirskotskravið á inntøkufíggjaða virkseminum í 2021, 2022 og 2023 felt í fíggjarlógina við 10 mió.kr. um árið, og skal útlíknast við íløgurnar í asfaltverkið á Sundi og mobila skervverkið, sum eisini hava fingið tilsamans 30 mió.kr. í 2021, 2022 og 2023. Tað er gjørt, fyri at vísa íløgurnar í framleiðsluna á nýggjum íløgukontum, og raksturin uttan íløgur á gomlu rakstrarkontuni.

Til ber ikki at flyta játtanir millum høvuðskontur.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at sambært játtanarlógini ber ikki til at flyta játtan millum høvuðskontur, men innanhýsis flytingar millum høvuðskontur kunnu tó verða loyvdar við átekningum.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini 2021 stendur m.a. undir høvuðskontu 3.38.1.02, undirkontu 40. "Inntøkufíggjað virksemi", at *"Landsverk fer frameftir at leggja seg eftir at hava størri avlop í inntøkufíggjaðum virksemi frá asfalt- og skervframleiðslu, sum kann verða nýtt til at endurnýggja verandi asfalt- og skervverk. Hesar útskiftingar fara fram komandi trý árini.*
Eftir hetta kann avlopið vegna effektivari rakstur og lægri útreiðslur til viðlíkahald av framleiðsluverkunum gerast enn størri, og kann hetta m.a. nýtast til hægri játtan til Landsvegahald.
Vanliga verða avlopini í inntøkufíggjaðum virksemi nýtt í sama fíggjarári til útskiftingar av rakstrartólum. Í 2021 væntast avlopið í inntøkufíggjaða virkseminum at verða 10 mió.kr."

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum greitt frá, at Í §§ 20-21 í kunngerðini um rakstrarjáttan stendur:

"§ 20. Søluprísurin á vørum og tænastum skal ásetast soleiðis, at hann ikki er kappingaravlagandi mótvegis privatum og almennum útbjóðarum, og soleiðis at meðal langtíðarkostnaðurin verður fíggjaður.
Stk. 2. Meðal langtíðarkostnaður er tað, sum tað í meðal kostar at framleiða ávísa vøru ella tænastu gjøgnum eitt longri tíðarskeið. Uppí kostnaðin verður roknað:
1) Beinleiðis útreiðslur, t.v.s. útreiðslur sum beinleiðis eru knýttar at framleiðsluni av vøruni ella tænastuni (t.d. løn, tilfar og uttanhýsis tænastur).
2) Óbeinleiðis útreiðslur, tvs. útreiðslur sum ikki beinleiðis kunnu knýtast at vøruni ella tænastuni, men sum kunnu roknast við grundarlagi í útreiðslum, stovnurin hevur yvir eitt tíðarskeið (t.d. høli, skrivstovulutir, KT og leiðsla)
3) Aðrar óbeinleiðis útreiðslur, sum kunnu vera rakstrarútreiðslur frá farnum árum ella útreiðslur, sum eru tiknar við aðrastaðni á fíggjarlógini (t.d. avskrivingar og kapitalkostnaður).
§ 21. Hevur inntøkufíggjað virksemi einkarætt ella støðan líkist einkarætti, so kann prísurin fyri vøruna ella tænastuna ikki vera hægri enn miðal langtíðarkostnaðurin."

Landsstýrismaðurin sigur, at langtíðarkostnaður eisini kann vera útreiðsla á øðrum høvuðskontum.

Sambært landsstýrismanninum fevnir langtíðarkostnaðurin um beinleiðis og óbeinleiðis útreiðslur, umframt útreiðslur, sum kunnu vera á øðrum høvuðskontum í fíggjarlógini. Inntøkufíggjaða virksemið eigur tískil yvir áramál at geva yvirskot.

Landsstýrismaðurin vísir á, at skiftandi viðurskifti hava seinastu árini merkt inntøkufíggjaða virksemið hjá Landsverki, tað veri seg stórar inntøkur frá tunnilsverkætlanum, munandi nýgerð og umvælingar av asfalt- og skervverkunum o.t. Tað kann órógva, at inntøkufíggjaða virksemið gevur munandi yvirskot yvir fleiri ár.

Sambært landsstýrismanninum ger Fíggjarmálaráðið vart við, at talan er ikki um at flyta játtan millum høvuðskontur. Tó ásannar ráðið, at tað kann vera ein avbjóðing, at høvuðskontur hava munandi frávik. Í játtanini fyri 2021 hevur Fíggjarmálaráðið lagt inn eitt krav um yvirskot upp á 10 mió.kr., soleiðis at inntøkufíggjaða virksemið tekur hædd fyri løgukostnaði seinastu árini.

Fíggjarstøða

Goymslur

Landsverk hevur skrásett bitumengoymslu í Búskaparskipan landsins 31. desember 2020 fyri 2.867.739 kr.

Í desember 2020 hevur Landsverk gjørt goymslurnar av gróti og skervi upp:

	kr.
Goymsla	**Upphædd**
Hústoft	6.882.900
Porkeri	7.799.840
Hundsarabotnur	6.310.160
Norskt/danskt tilfar	1.271.350
Sund	924.500
Tilsamans	**23.188.750**

Goymsluvirðini í grótbrotunum og á asfaltverkunum eru ikki skrásett í Búskaparskipan landsins. Sambært Landsverki hava grót- og asfaltgoymslurnar ongantíð verið gjørdar upp, møguliga tí at tað hevur verið torført at gera tær upp. Landsverk ætlar, saman við Gjaldstovuni at viðgera, um goymslan í framtíðini skal teljast á henda hátt og bókast.

Landsverk hevur ikki talt goymsluna hjá Maskinmiðstøðini í Kollafirði í 2020, men tey ætla at telja hana í desember 2021.

Skuldarar

31. desember 2020 vóru skuldararnir 16,9 mió.kr.; 31. desember 2019 vóru teir 25 mió.kr. Upphæddirnar stemma við roknskapartølini í Navision, og Landsverk hevur stemmað skuldararnar av 31. desember 2020. Sambært Landsverki er eingin nýggj kredittavtala gjørd í 2020.

Ognarar

Landsverk hevur stemmað ognarar av ímillum roknskapartølini í Navision og Búskaparskipan landsins 31. desember 2020. Upphæddirnar stemmaðu.

Peningastovnskontur og kassar

Landsverk hevur stemmað peningastovnskontur av 31. desember 2020 við uttanhýsis skjøl, og ímillum Navision og Búskaparskipan landsins. Upphæddirnar stemmaðu. Landsverk hevur ein forskotskassa á høvuðsskrivstovuni.

Lønir

Í 2020 eru lønarútreiðslurnar hjá Landsverki 69,3 mió.kr. Í 2019 vóru tær 70,4 mió.kr.

Landsverk hevur reglur um flekstíð, t.e. +/- 32 og 16 tímar. Reglurnar eru bert galdandi fyri funktionerar. Siðvenja er, at starvsfólk á Virkisdeildini, sum arbeiða kring landið, fáa yvirtíðina goldna út. Stovnurin hevur ikki skrivligar mannagongdir viðvíkjandi yvirtíðararbeiði, men ætlar at seta tær í roknskaparreglugerðina.

Fleiri fastlønt starvsfólk hava fingið nærum líka nógv í yvirtíð, sum í fastari løn.

Sambært Landsverki skráseta arbeiðsfólk á vegunum arbeiðstíðina í TotalView, og formaðurin góðkennir lønirnar, áðrenn tær verða avgreiddar.

Arbeiðsfólkini í asfaltinum, vetrarhaldinum og í tunnilsliðnum arbeiða nógvar tímar. Flestu arbeiðsfólkini á vegunum eru vorðin fastlønt í 2021.

Fleiri starvsfólk arbeiða nógvar yvirtímar.

Í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Handverkarafelagið er m.a. ásett, at yvirtíð skal helst ikki koma fyri. Spurt, hvussu Landsverk heldur hesa ásetingina, svaraði stovnurin, at fólk arbeiða bara yvir, tá tað er neyðugt.

Sambært § 42 í Ll. nr. 70/2000 "um arbeiðsumhvørvi" skal arbeiðstíðin skipast soleiðis, at í hvørjum samdøgri, roknað frá tí at arbeiðið byrjar, skulu arbeiðsfólk hava eina hvíldartíð, ið er minst 11 samfeldar tímar. Í stk. 2 eru ávís undantøk.

Fleiri starvsfólk hjá Landsverki hava arbeitt upp í 40 til 50 tímar yvirtíð um vikuna.

Landsverk kunnaði um, at hvíldartíð verður so vítt gjørligt hildin, tó kunnu vera dagar, at undantak er gjørt. Landsverk hevur skyldu at halda reglurnar um hvílutíð, men hevur samstundis skyldu til at virka fyri, at øll kunnu sleppa til og frá húsum.

Stórt arbeiðstrýst hevur við sær brot á reglur um hvíldartíð.

Vetrartænastan hevur við verandi tilfeingi við sær yvirtíð og brot á hvíldartíð. Landsverk hevur roynt at sett mannagongdir í verk fyri at skjalfesta, nær hvíldartíð er brotin, men enn hava tær ikki riggað fullvæl. Tað ber til at hækka starvsfólkahópin í tænastuni, men so skulu meira pengar til. Landsverk fer at royna at minna á verandi mannagongd og í aðru syftu gera nýggjar mannagongdir, sum herða krøvini um skjalfesting av broti á hvílitíð.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Landsverki hevur vetrartænastan/tilbúgvingin við verandi tilfeingi við sær yvirtíð og brot á hvílitíð. Tað kann ikki sleppast undan í avmarkaðum tíðarskeiðum. Landsverk hevur roynt at sett mannagongdir í verk fyri at skjalfesta nær hvílitíðin er brotin, men enn hava tær ikki riggað fullvæl.

Kanning av lønarmálum

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur lønarmál, harav nøkur mál, har starvsfólk eru farin úr starvi, og serliga lønir hjá teimum, ið hava fingið útgoldna yvirtíð og serstakar frívikur. Vit høvdu nakrar spurningar og viðmerkingar, ið Landsverk hevur svarað.

Yvirtíð og løn undir koyring til arbeiðis

Landsverk setir starvsfólk í vakt frá kl. 05 til kl. 21, og alt eftir hvussu veðrið er, skulu tey rokna við at arbeiða alla ta tíðina.

Starvsfólk hava í onkrum førum fingið løn fyri sera nógvar yvirtíðartímar.

Starvsfólk á Hústoft, ið eru lønt eftir m.a. sáttmálanum hjá Starvsfelagnum og Maskinmeistarafelagnum fáa viðbót fyri ávikavist 3,5 og 2,5 tímar yvirtíð um vikuna. Viðbótin er fyri, at tey, eins og tímalønir arbeiðarar, eru á arbeiðsplássinum 40 tímar. Afturat tí fáa tey løn fyri tíðina, tað tekur at koyra til arbeiðis. Starvsfólkini stempla inn kl. 8 og fáa yvirtíð frá kl. 16, umframt føstu yvirtíðina.

Landsverk hevur greitt frá, at tað er gomul siðvenja, og vísir á áseting í sáttmálanum millum Føroya arbeiðarafelag og Føroya arbeiðsgevarafelag, har tað í § 33a, er ásett, at *"fyri almenn arbeiði, ið liggja so langt uttan fyri bygdina/býin, at neyðugt er at flyta arbeiðararnar, verða teir at fáa frían flutning til og frá við løn fyri koyritíðina fyri úttúrin."*

Royndarverkætlan við orkusparing í landsins bygningum

Í fíggjarlógini 2020 eru játtaðar 3.060 t.kr. í útreiðslum og 3.060 t.kr. í inntøkum, t.v.s. at nettojáttanin er 0 kr.

t.kr.

Undirkonta 23	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	0	0	590	619
Keyp av vørum og tænastum	-20	-1.109	-1.132	-1.318
Keyp av útbúnaði, netto	0	-35	348	481
Leiga, viðlíkahald og skattur	0	1.063	312	69
Søla av vørum og tænastum	0	0	-134	0
Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr)	0	107	47	0
Tilsamans	**-20**	**26**	**30**	**-150**

Avsláttur av oljukeypi hjá stovnum er skrásettur sum inntøka á útreiðslu-kontu hjá Landsverki.

Lønarútreiðslurnar eru til Landsverk. Góðar 1,3 mió.kr. eru komnar inn fyri avsláttur av oljukeypi í 2020, og slakar 1,2 mió.kr. eru brúktar.

Samsvarar ikki við roknskaparreglurnar at bóka inntøkur á útreiðslukontu.

Landsgrannskoðanin vísti enn eina ferð á, at tað er ikki í samsvari við roknskapar-reglurnar at bóka inntøkur á útreiðslukontu. Landsverk hevur sett fyrispurning til Gjaldstovuna um málið, og um mannagongdin er skeiv, verður hon rættað.

Útreiðslurnar eru spjaddar til t.d. Suðuroyar sjúkrahús, Umhvørvisstovuna, Kringvarpið og Maskinmiðstøðina hjá Landsverki. Landsgrannskoðanin vísti enn eina ferð á, at tað er ein óskikkur at spjaða útreiðslur hjá einum stovni á fleiri játtanir. Tað ger m.a. at gjøgnumskygni í roknskapinum hvørvur, og at einki yvirlit er yvir, hvat umvæling av einum bygningi kostar. Hevur Løgtingið játtað stovnum meira til olju og el, enn stovnarnir brúka, eigur tað at síggjast aftur í nýtsluni hjá einstaka stovninum

Í 2019 kunnaði Landsverk um, at tey umhugsaðu at flyta sparingina í oljukeypinum til "Viðlíkahald av almennum bygningum". Eingin broyting er gjørd. Landsverk vísti á, at stovnurin kann ikki gera av, hvar sparingin skal bókast, og at málið verður sett á skrá til fund við Fíggjarmálaráðið og seinni við Gjaldstovuna.

Landsgrannskoðanin hevur áður mælt til, at avslátturin fyri oljukeyp varð rindaður á kontu hjá Gjaldstovuni, og at skjøl vóru løgd við øllum bókingunum. Landsverk tók undir við tilmælinum, men mannagongdin er enn ikki broytt.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið fer at taka málið upp við Landsverk og Gjaldstovuna, herundir um royndarverkætlanin skal halda fram, hvussu hon skal skipast, hvussu orkusparingin bókingartøkniliga skal umsitast, hvussu orkusparingin verður nýtt til ætlaða endamálið, og hvussu tað skal fremjast játtanarliga.

HJ-LV Tunnil (konsortieavtala)

Í februar 2018 skrivaðu Landsverk og Sp/f HJ Asfalt undir konsortieavtalu í sambandi við, at tey skuldu gera sáttmála við NCC Føroyar um at gera enterprisuna: *Asfalt-arbeiðið Eysturoyartunnilin við grundarlagi í tilboði, sum partarnir í felag høvdu givið.*

Í februar 2018 var fakenterprisuavtala um asfaltering í Eysturoyartunlinum gjørd ímillum Konsortie Sp/f HJ Asfalt og Landsverk sum fakarbeiðstakara og NCC Føroyar sum høvuðsarbeiðstakara.

Eingin roknskapur fyri konsortie.

Sambært Landsverki er eingin roknskapur gjørdur fyri konsortie.

Í mai 2021 sendi Landsverk Landsgrannskoðanini *"yvirlit yvir tilfar/asfalt viðvíkjandi HJ-LV Tunnil Eysturoy"* fyri tíðarskeiðið 2017 til 2021, sum veitarin av asfalteringini hevur gjørt í mai 2021. Tilsamans eru inntøkurnar 76,9 mió.kr. og útreiðslurnar 49,2 mió.kr.

Í mai 2021 skrivar veitarin til Landsverk, at hann hevur gjørt upp tølini, sum hava við konsortie at gera.

Veitarin viðmerkir, at munurin millum givið tilboð og inntøkurnar, er størsti parturin asfaltsprísbroyting vegna bitumen. Tað eru eisini onkur smá eykaarbeiði sum veitarin er biðin um gera, og leggur afturat, at tað er sera lítið í einum annars so stórum projekti.

Veitarin vísir á prísirnir, sum givnir vóru í sambandi við arbeiði:

Tilboð NCC, arbeiði inni í tunlinum:	Kr. 59.624.302,50 u/MVG
Tilboð J&K, arbeiði uttanfyri:	Kr .15.361.852,00 u/MVG
Samlað**:**	**Kr. 74.986.154,50 u/MVG**

Sambært Landsverki eru tær 59,6 mió.kr. tilboðið, sum NCC fekk fyri samlaða asfalt-arbeiðið inni í Eysturoyartunlinum, tilfar íroknað.

Tær 15,4 mió.kr. eru fyri alt asfaltarbeiðið uttan fyri Eysturoyartunnilin, har J&K ger vegir fyri NCC. HJ Asfalt letur asfaltarbeiði til J&K, og Landsverk letur asfalt til HJ Asfalt fyri sama prís sum til arbeiðið inni í tunlinum.

Viðmerkingar til konsortieavtaluna

Ikki fingið nøktandi svar um konsortie-avtaluna.

Landsgrannskoðanin hevur í fleiri umførum spurt Landsverk og Fíggjarmálaráðið, hvussu konsortieavtalan frá februar 2018 nú er skipað, uttan at hava fingið nøktandi svar.

Í juni 2021 hevur Landsverk greitt frá, at fakenterprisuavtalan er galdandi, og at konsortieavtalan er galdandi, men HJ-LV er ikki til sum juridisk eind ella samtak, men at talan er um asfaltáleggjaran í báðum førum.

Serskildur roknskapur er ikki gjørdur fyri konsortie. Sambært Landsverki kann veitarin tó í sínum roknskapi síggja bókingar, sum hava við hendan tunnilin at gera. Í skipanini hjá Landsverki er konsortie bert til fyri at halda skil á serliga avsláttrinum, sum er nevndur í fakenterprisuavtaluni.

Landsverk sett trygd fyri 6 mió.kr.

6. februar 2018 skrivaði Landsverk undir trygd á 6.082 t.kr. fyri Eysturoyartunnilin sambært ABF06. Eysturoyartunnilin var liðugur í fjør, og har er, sambært Landsverki, ein ósemja um prísregulering av bitumen í asfaltinum, sum í ringasta føri kann kosta Landsverki 0,5 mió.kr. Verður ikki sett krav um manglar innan eitt ár eftir avhendan, lækkar trygdarupphæddin sambært Landsverki til 811 t.kr., sum verður galdandi 5 ár eftir avhendan.

Sambært Landsverki skal konsortie ikki vera partur av roknskapinum hjá Landsverki, men leiðslan fer at spyrja Gjaldstovuna/Fíggjarmálaráðið um hendan eventualskyldan skal nevnast í teksti. Um veitarin fer konkurs, má Landsverk finna onkran annan at gera arbeiðið liðugt.

Spurt, um Landsverk hevur sett trygd fyri øðrum líknandi arbeiðum, svaraði stovnurin, at Landsverk er ikki vitandi um aðrar trygdir fyri líknandi arbeiðir.

Landsgrannskoðanin undrast á svarið um konsortieavtaluna.

Í pkt. 1.1 í konsortieavtaluni frá 6. februar 2018 stendur, at avtalan er gjørd í sambandi við, at ein sáttmáli skuldi gerast við NCC Føroyar (hereftir nevndur byggiharrin) um at gera arbeiðstøkuna “Asfaltarbeiði Eysturoyartunnilin”, við útgangsstøði í tilboði, sum báðir partar í felag hava givið.

Konsortieavtalan er einans galdandi fyri hesa arbeiðstøkuna og møguligar broytingar innan karmarnar av avtaluni ella av øðrum arbeiði, sum partarnir átaka sær, og sum

báðir partar góðtaka. Avtalan kann á ongan hátt leingjast til at fevna um aðrar arbeiðstøkur.

Avtalan kemur í gildi, tá hon er undirskrivað, og hon heldur á til endalig avrokning er gjørd partanna millum og allar skyldur eru loknar yvir fyri byggiharranum, og møgulig trygdartíðarskeið eru endað.

Spurt, um endalig avtala er gjørd partanna millum, svaraði Landsverk, at Sandoyar-tunnilin er eisini fataður av enterprisuni sambært "Fagenterpriseaftale".

Sambært avtaluni skal privati veitarin syrgja fyri útlegging av asfalti og Landsverk skal syrgja fyri at lata asfalt, og partarnir lata asfaltlatingarnar sambært sjálvstøðugari avtalu ímillum partarnar, vísandi til at privati veitarin ábyrgist sum sjálvskuldari fyri øllum latingum frá Landsverki.

Spurt, hvat hugtakið sjálvskuldari fyri øllum latingum frá Landsverki merkir, svaraði Landsverk, at í praksis sendir Landsverk rokning til privata veitaran fyri asfaltið, sum sendir rokning til NCC fyri lidna arbeiðið.

Sambært avtaluni verða limirnir í konsortieleiðsluni útnevndir í einum sjálvstøðugum ískoyti til avtaluna. Kallað verður inn til fundir við avtalaðum millumbili, ella tá ið ein av konsortielimunum biður um tað. Prosjektleiðslan skal skriva fundarfrágreiðingar eftir konsortiefundirnar og senda pørtunum avrit innan 7 dagar.

Í avtaluni er ásett, at konsortie skal stovna eina kontu í peningastovni við navninum á konsortienum, og allar upphæddir, sum byggiharrin ella aðrir triðjapartar rinda í sambandi við sáttmálan, skulu beinanvegin rindast á kontuna hjá konsortienum. Ongar útgjaldingar skulu gerast av peningastovnskontuni, uttan at tað er til at uppfylla sáttmálan.

Upphæddir frá byggi-harra e.ø. skuldu rindast á kontu hjá konsortienum.

Spurt, um kontan er stovnað, svaraði Landsverk, at Landsverk veit ikki um nakra kontu, sum er serstøk fyri konsortie. Landsverk leggur afturat, at í øllum førum kann HJ Asfalt gera eina uppgerð yvir júst hesa verkætlan.

Landsverk veit ikki um nakra kontu.

Sambært konsortieavtaluni verða møguligar felagsútreiðslur hjá samtakinum, sum eru nágreinaðar nærri í serstakari avtalu, býttar ímillum partarnar. Landsverk hevur greitt frá, at tað merkir, at talan kann vera break-down í asfaltframleiðsluni, har Landsverk rindar fyri bíðitíðina, sum lastbilarnir hava í asfaltverkunum.

Hvørgin parturin kann fáa gjald fyri annað enn tað, sum er ásett í avtaluni, t.e. ávikavist asfaltálegging og lating av asfalti.

Sambært avtaluni vísa partarnir í felag á eitt felag/persón at taka sær av rokn-skapunum hjá konsortienum og syrgja fyri, at roknskapur, konta og skjøl viðvíkjandi konsortienum vera hildin í góðum ordan og soleiðis, sum konsortieleiðslan hevur góðkent. Tað skal eisini haldast atskilt frá umsitingini hjá "firmanum". Avrit av nevndu roknskapum og skjøl skulu sendast limunum í konsortienum.

Partarnir skuldu vísa á persón at taka sær av roknskapinum.

Eingin roknskapur er gjørdur, og eingin persónur er at taka sær av tí.

Samtaksleiðslan ásetir treytirnar fyri grannskoðan av roknskapinum hjá samtakinum og øllum øðrum fíggjarligum viðurskiftum. Partarnir eru samdir um, at ríkisgóðkent grannskoðanarvirki grannskoðar. Spurt, hvussu hesar treytir eru uppfyltar, hevur Landsverk svarað, at tey fara at spyrja grannskoðanarvirkið um tað, og at vitanin um tað er burtur á Landsverki.

Ríkisgóðkendur grannskoðari skuldi grannskoða.

Sambært avtaluni skal ein nærri avtalað upphædd "reserverast" sum innanhýsis trygd fyri, at partarnir fremja sín avtalaða part av verkætlanini. Upphæddin skal rindast á

eina serskilda kontu í navninum á konsortienum. Landsverk veit ikki um, at upphæddin er rindað á serskilda kontu.

Fíggjarmálaráðið harmast um vantandi svar.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið harmast um, at Landsgrannskoðanin ikki hevur fingið nøktandi svar um, hvussu avtalan millum Sp/f H.J. Asfalt og Landsverk er skipað. Ráðið fer saman við Landsverki at lýsa málið betur fyri at fáa greiðu á spurningum og ivamálum.

Inntøkufíggjað virksemi, asfaltverk

Roknskapartøl fyri asfaltverkini:

t.kr.

	2016	2017	2018	2019	2020	Tilsamans
Hundsarabotnur	-4.043	-3.174	-4.405	-3.415	-16.411	-31.448
Sund	6.882	4.034	2.461	-1.745	798	12.430
Tilsamans	**2.839**	**860**	**-1.944**	**-5.160**	**-15.613**	**-19.018**

Verkið í Hundsarabotni hevur havt avlop hvørt ár síðani 2016, tilsamans 31 mió.kr., og er avlopið serliga nógv vaksið frá 2019 til 2020. Verkið á Sundi hevur havt tilsamans 12 mió.kr. í halli somu ár.

Landsverk hevur greitt frá, at Asfaltverkið á Sundi varð steðgað í august 2019 vegna eina arbeiðsvanlukku, sum førdi stórar ábøtur við sær, og verkið framleiddi ikki asfalt aftur fyrr enn í august 2020.

NPA verkætlan

I 2019 og 2020 hevur Landsverk fingið 143 t.kr. frá NPA[10], og í 2021 hevur Landsverk fingið 97 t.kr. Upphæddirnar eru bókaðar uttan viðløgd skjøl.

EU endurrindar part av útreiðslum fyri starvsfólk hjá Landsverki, sum luttekur í, verkætlan, sum byrjaði í 2018 og endar í 2022. Fimm lond og seks verkætlanir eru við, undirheitið er ”Near Zero Energy in Historical Buildings”. Ískoytið hjá Landsverki er prestagarðurin á Viðareiði.

Fullfíggjaður roknskapur er ikki gjørdur.

Í juni 2021 hevur Landsverk sent Landsgrannskoðanini roknskapartøl fyri 2018 til 2020:

Løn til starvsfólk hjá Landsverki	384.302 kr.
Samsýning til First Line Controller	13.987 kr.
Ferðaútreiðslur	10.387 kr.
Umsiting	57.645 kr.
Inntøka	-305.575 kr.
Úrslit	160.746 kr.

Inntøkan í 2021 er fyri seinast uppgjørda tíðarskeið, mitt í 2020. Landsverk er í holt við at rapportera seinasta tíðarskeiðið, sum er frá 2020 til juni 2021 og at gera endaliga uppgerð, tá ið verkætlanin er liðug.

Landsgrannskoðanin vísti á, at Landsverk hevur inntøkuført pening fyri Prestagarðin á Viðareiði, sum løgujáttanin “Umvæling av almennum fygningum” hevur goldið, og spurdi, um endurgjaldið frá NPA ikki eigur at vera mótbókað á tí játtanini.

Landsverk hevur greitt frá, at arbeiðið upp á prestagarðin, sum er goldið av ”Umvæling av almennum bygningum” var liðugt, áðrenn NPA-verkætlanin kom í lag. Mann vildi hava eina føroyska verkætlan við í samstarvið, og prestagarðurin var mettur sum tann best egnaða, hóast verkætlanin longu var liðug. Tí var verkætlanin við í eini monitoring fasu. Landsverk heldur, at inntøkurnar eru bókaðar á rætta stað.

[10] Northern Periphery and Arctic Programme.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið tekur undir við Landsverki um, at rætt er farið fram. Landsverk hevur greitt frá, at stovnurin fer at gera tað meira gjøgnumskygt frameftir, hvat monitoring verkætlanin veruliga kostar.

Sakarmál
Landsverk hevur í løtuni trý rættarmál í sambandi við byggimál.

Landsverk hevur stevnt ARK99 eftir 1,4 mió.kr. av tí at ósemja er um ráðgevarafeil í sambandi við verkætlan hjá Tekniska Skúla í Klaksvík. Landsverk hevur skotið upp fyri sínum sakførara, at hann skal royna at finna eina semju.

MT Højgaard hevur stevnt Landsverki eftir góðum 5 mió.kr. í sambandi við verkætlanina Glasir. Málið er í fyrstu fasu, og Landsverk fyrireikar svar til fyrsta kæruritið frá MT Højgaard.

Landsverk hevur stevnt TG-Verk Føroyar eftir 11 mió.kr. orsakað av feilum og manglum í sambandi við bygging av Hamragarði í Vági.

Manglar fyri 11 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur spurt landsstýrismannin, um feilirnir og manglarnir eru bøttir, og um so er, hvør hevur goldið fyri tað. Eisini spurdi Landsgrannskoðanin, um ognin formliga er latin kommununum.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin svarað, at Landsverk hevur staðfest nógvar manglar við klimaskerminum, og síðsti parturin av sakarmálinum snýr seg um hesar manglar. Umvælingarnar eru ikki gjørdar enn. Fyri tað fyrsta hevur tað verið stríðsmál við arbeiðstakaran um at umvæla manglarnar. Um manglarnir skulu umvælast, áðrenn sakarmálið er avgreitt, er neyðugt við játtan til endamálið. Síðani er avbjóðingin eisini, at eldraøkið í síni heild er lagt til kommunurnar.

Verkætlanin er ongantíð endaliga og formliga latin kommununum í Suðuroy, tí bygningurin enn hevur umrøddu manglarnar. Landsverk væntar tí, at tá ið sakarmálið er liðugt, og umvælingin er framd, kann formliga handanin fara fram.

Hamragarður er ikki formliga latin kommununum.

4.15 Asfaltverk, løgujáttan (LG 2020/203-0381)

Í desember 2019 játtaði Løgtingið 7,5 mió.kr. í eykajáttanarlóg til Asfaltverk, løgujáttan, og átekning til løgujáttanina var eisini samtykt.

Í 2019 eru 1,2 mió.kr. brúktar og 6,3 mió.kr. eru fluttar til 2020. Í 2020 eru 8,3 mió.kr. brúktar.

Í roknskapargóðkenningini hevur Landsverk viðmerkt, at væntandi fór meirnýtslan í 2020 at vera 1.918 t.kr., tí fleiri íløgur máttu gerast í 2020, enn játtan var til, fyri at forða framleiðslusteðgi. Yvirskotið hjá asfaltverkinum á undirkontuni “Inntøkufíggjað virksemi” skal rinda meirnýtsluna sambært avtalu við Fíggjarmálaráðið.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er einans Løgtingið, ið sambært játtanarlógini kann játta almennum stovni pengar. Fíggjarmálaráðið hevur ikki heimild at játta stovninum at hava meirnýtslu.

Spurt, um avtalan við Fíggjarmálaráðið er skrivlig, svaraði Landsverk, at stovnurin hevur samskift við ráðið. Landsverk vísir til skriv frá Samferðslumálaráðnum til Landsgrannskoðanina, 10. apríl 2019, har ráðið m.a. sigur, at *“Landsverk hevur fingið álagt, at inntøkufíggjaða virksemið hjá stovninum tey næstu 3 árini, sum nú útgoldni*

leigusáttmálin var galdandi fyri, skal hava avlop upp á minst hesa meirnýtsluna á 8,8 mió.kr."

Ein treyt fyri at Landsverk fekk pening til at gera íløgur í asfaltverkið var, at peningurin skuldi gjaldast aftur á rakstrinum, so íløgan yvir ár varð útreiðsluneutral.

Í 2021 eru játtaðar 10 mió.kr. á løgujáttan til endurnýggjan av verandi asfalt- og skervvirki, og ætlanin er at játta 10 mió.kr. um árið næstu tvey árini eisini.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at aðalmálið hjá Fíggjarmálaráðnum er, at inntøkufíggjaða virksemið er skipað sambært ætlan, sum tekur hædd fyri langtíðarkostnaðinum sambært kunngerðini, undir hesum løgukostnaðinum. Fíggjarmálaráðið hevur tí, sum eisini umrøtt, álagt stovninum at hava yvirskot at samsvara samlaða kostnaðinum av virkseminum. Endamálið við inntøkufíggjaða virkseminum er ikki at rinda fyri meirnýtslu á øðrum kontum. Ráðið kann heldur ikki veita tílíka játtan, men kann bert staðfesta, at stovnurin hevur havt meirnýtslu.

Eingin verklagslóg gjørd.

Løgujáttanin er ætlað til at umvæla og endurnýggja verandi asfaltverk og skervverk. Tað hevur verið óvist, hvussu nógv skuldi brúkast upp á umvæling og nýgerð upp á verkini hvør sær. Eingin verklagslóg er gjørd um løgurnar upp á 10 mió.kr. í 2021. Fíggjarmálaráðið fer at taka spurningin um verklagslóg upp í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2022.

4.16 Nýggir landsvegir (LG 2019/217-0381)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. játtanina til Nýggjar landsvegir, sum er ein løgujáttan.

Amboð, goldin av løgujáttanini

Landsverk hevði keypt nakað av amboðum, sum vóru goldin av løgujáttanini. Stovnurin hevði fingið álagt at keypa amboð, sum tunnilsliðið skuldi brúka til at bora smærri tunlar. Eisini hevur stovnurin keypt onnur amboð, t.d. ein persónbil til Hvalbiartunnilin. Tá ið verkætlanin er liðug, er ætlanin at selja bilin. Onnur tól, amboð v.m., sum eru goldin av játtanini 2019 eru lyftimaskina, sum serliga er ætlað til at brúka í teimum minnu og smølu tunlunum, høll til starvsfólkarúm v.m. og tjald at brúka til verkstað í Húsavík.

Í 2019 og 2018 eru ávikavist goldnar 2.645 t.kr. og 6.690 t.kr. av játtanini Nýggir landsvegir, fyri keyp av amboðum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at løgujáttanir verða vanliga ikki brúktar til at reka t.d. útleigan av amboðum, heldur ikki er tað góður bókhaldssiður at bóka inntøkur sum negativar útreiðslur undir løguútreiðslum.

Landsverk er samt við Landsgrannskoðanina, at rakstur ikki eigur at liggja í løgujáttanum. Hesin leisturin hevur tó verið valdur fyri at fáa veruliga virksemið á Landsverki at passa inn í Búskaparskipan landsins. Landsverk leggur afturat, at tey fara at leggja allar maskinurnar aftur til Virkisdeildina, og at hinar deildirnar skulu leiga maskinur frá tí deildini.

Rakstur eigur ikki at liggja í løgujáttanum.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fíggjarmálaráðið fer at viðgera dagførdu roknskaparreglugerðina, tá ið ráðið hevur fingið hana. Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at rakstur ikki eigur at liggja í løgujáttanum, og tað verður greiður skilnaður lýstur í reglugerðini.

4.17 Stuðul til útoyggjar (LG 2020/203-0382)

Í 2020 eru 1,5 mió.kr. játtaðar til "Stuðul til útoyggjar", høvuðskonta 3.38.2.21. Útjavningarstuðulin kann gjaldast sambært Ll. nr. 86/1998 til útjaðaraøki. Upphæddin er goldin til Strandfaraskip landsins, Atlantsflog og Posta.

Strandfaraskip landsins hevur bókað 830,7 t.kr. fyri flutning sambært reglunum um útjavningarstuðul til útjaðaraøki. Upphæddin er skrásett sum inntøka fyri farm.

Yvirlit frá Strandferðsluni yvir, hvussu nógv hvørt øki hevur fingið í stuðli:

kr.

Øki	Ikki leigutúrar	Leigutúrar	Sertúrur	Tilsamans
Fugloy/Svínoy	79.257,00		112.500,00	191.757,00
Hestur	6.140,00			6.140,00
Kallsoy	96.379,75			96.379,75
Mykines	96.040,00			96.040,00
Nólsoy	34.591,25		243.750,00	278.341,25
Skúvoy	11.259,00	70.312,50	53.562,50	135.134,00
Sandoy	26.862,50			26.862,50
Tilsamans	**350.529,50**	**70.312,50**	**409.812,50**	**830.654,50**

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað, um skrásetingarnar lúka treytirnar í reglugerð fyri útjavningarstuðul til útjaðaraøki, t.e. um:

1. *Útjavningarstuðulin bert verður latin til fastbúgvandi á oyggj/bygd smb. §§ 1, 2 og 5.*
2. *Vørubólkur og stødd/vekt eru smb. § 3.*
3. *Farmatúrar eftir tørvi smb. § 3, stk. 2.*

Í øllum málunum, Landsgrannskoðanin kannaði, eru móttakararnir búsitandi á útoyggj sambært Landsfólkayvirlitinum.

Vegleiðing er ikki í samsvari við lóg.

Innlendismálaráðið gjørdi í 2011 innanhýsis vegleiðing um, at flutningur av olju til ikki fastbúgvandi er partur av stuðlinum, um upphæddin ikki fer upp um 20 t.kr. Landsgrannskoðanin undrast á ta tulkingina.

Strandfaraskip landsins hevur í 2020 bókað 10.180 kr. av stuðulsjáttanini fyri olju, ið er send til móttakarar, sum ikki eru fastbúgvandi á útoyggj.

Landsgrannskoðanin staðfesti, at upphæddirnar fyri leigutúrar og sertúr eru sambært takstunum hjá Strandferðsluni. Vit hava eisini tikið nakrar stakroyndir av rokningum fyri ikki leigutúrar. Landsgrannskoðanin hevur áður vístá, at tað er óheppið, at tað ikki sæst á fakturunum, hvør móttakarin er.

Burtursæð frá viðmerkingunum omanfyri hevði Landsgrannskoðanin einki at finnast at.

4.18 Strandfaraskip landsins (LG 2020/203-0382)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Strandfaraskip landsins. Rakstrarjáttanin er á høvuðskontu 3.38.2.01, og løgujáttanin á høvuðskontu 3.38.2.02.

Roknskaparviðurskifti

Høvuðstøl á rakstrarjáttanini 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Rakstrarútreiðslur	216.804	215.482	223.879	245.224	257.799
Rakstrarinntøkur	-67.502	-67.372	-72.116	-76.573	-63.985
Flytingarútreiðslur	249	295	305	315	309
Skattir og flytingarinntøkur	0	0	0	0	-60
Flytingar millum alm. myndugleikar	-621	-653	-690	-799	-791
Tilsamans	**148.930**	**147.752**	**151.379**	**168.167**	**193.272**
Játtan	*148.791*	*147.541*	*151.459*	*166.795*	*192.176*

Høvuðstøl á løgujáttanini 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Sandoyarskip	726	316	0	3.529	5.166
Suðuroyarskip	531	23.129	3.506	29.520	0
Eykabátur	0	0	0	23.728	11.947
Sam	1.206	0	0	0	0
Tilsamans	**2.463**	**23.445**	**3.506**	**56.777**	**17.112**
Játtan	*2.463*	*23.446*	*3.500*	*56.777*	*16.723*

Strandferðslan er í holt við at dagføra roknskaparreglugerðina, og ætlar at senda hana til góðkenningar í ár.

Strandferðslan hevur mannagongdir í sambandi við roknskapargóðkenningar, men hevur slept ISMS-kekklistaskipanini, og ætlar ístaðin at útvega eina skipan at stýra mannagongdum.

Ikki nóg greiður innanvirkis roknskapur.

Roknskapurin er í ávísan mun býttur sundur, men Landsgrannskoðanin heldur, at tað út frá verandi sundurbýtingum sæst ikki, hvat einstøk virksemi ella veitingar kosta, sum t.d. raksturin av kafeteria ella størri umvælingar av skipum. Strandferðslan ætlar at skipa bókhaldið soleiðis, at betri yvirlit verður yvir verkætlanir.

Í september 2021 hevur Fíggjarmálaráðið víst á, at roknskapurin hjá Strandferðsluni er væl útgreinaður á endamál, stað, virksemi, verkætlan o.a. Fíggjarmálaráðið fer at heita á Strandferðsluna um at gera neyvari útgreiningar, soleiðis at tað sæst, hvat hvør umvæling av skipum kostar.

Lønir

Síðani 2019 hevur Strandferðslan brúkt skipanina Vaktætlan til avrokning av lønum hjá manningunum. Starvsfólkini á landi brúka tíðarskrásetingarskipanina Totalview.

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin lønarviðurskiftini hjá manningunum á Teistanum, og staðfesti, at samsvar var ikki ímillum útgoldnu lønirnar og tal av arbeiddum tímum.

Starvsviðurskiftini á Teistanum eru sambært Strandferðsluni fingin í rættlag, við at manningarnar avloysa hvønn annan og traðka annars til uttan at fáa samsýning. Harvið er avbjóðingin við at manningarnar fingu løn fyri fleiri tímar, enn tær arbeiddu, loyst. Skipanin er m.a. gjørd við tí í huga, at um eini tvey ár verður koyrandi til Sandoynna.

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur lønarmál, um almenni setanarpolitikkurin er hildin, um størvini eru lýst leys, um umsóknir og prógv eru í málunum, viðgerð av umsóknum,

og at størvini eru flokkað sambært sáttmálunum á almenna arbeiðsmarknaðinum. Einki var at finnast at.

Lønir hjá umsitingini eru ikki tíðar-avmarkaðar.

Í 2020 vóru skyldugar lønir hjá starvsfólkum, sum eru við í vaktætlanarskipanini, 2,8 mió.kr. Í 2019 vóru tær 2 mió.kr. Skyldugar lønir hjá umsitingini eru ikki tíðarav-markaðar í Búskaparskipan landsins, tó at starvsfólk áttu nógvar tímar á. Strand-ferðslan er í holt við at rudda upp í tíðarskrásetingarskipanini.

Landsgrannskoðanin mælti til at halda reglurnar um tíðarskrásetingar, serstaka fríviku og um at tíðaravmarka løn.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Strandferðslan miðar eftir at fáa øll viðurskifti viðvíkjandi tíðarnýtslu hjá starvsfólki, tíðarskrásetingum, bókingum o.a. í rættlag, og at Fíggjarmálaráðið fylgir gongdini.

Keyp

Í 2020 eru slakar 240 t.kr. bókaðar sum "Gjald fyri gjaldsmiðlan", størsti parturin uttan skjalprógv. Landsgrannskoðanin mælti til, at skjalprógv verða løgd við øllum bókingum.

Mælt til, at skjalprógvini eru neyvari.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað ferðaútreiðslur uttanlands og mælti til, at skjalprógv fyri útreiðslunum eru neyvari.

Í 2020 eru útreiðslur til árlig gjøld fyri rættindi 1,9 mió.kr. Stovnurin hevur rindað fyri langtíðarleigu av gjaldsterminalum til bussfelag. Sambært Strandferðsluni er tað bíligari at langtíðarleiga enn at keypa.

Strandferðslan hevur rindað KT-fyritøku 10,8 t.kr. um mánaðin fyri nýtslugjald "Klintra Fólk og Klintra Crew". Sambært Strandferðsluni fær stovnurin við hesari loysnini eina fullfíggjaða og væl samansjóðaða loysn til handfaring av manningar-, compliance- og starvsfólkaviðurskiftum.

Inntøkur

Í roknskaparreglugerðini er ásett, at ferðaseðlaavgreiðslufólk við skipum og bussum hava ábyrgd av teirra kassa, samsvarandi skrásetingum í ferðaseðlaskipanini, við persónligum lykli. Daglig uppgerð skal gerast fyri hvønn kassa samsvarandi innanhýsis vegleiðingum.

Landið er býtt í sonur, sum takstirnir fyri ferðaseðlar til sjó- og bygdaleiðirnar eru ásettir eftir. Sambært Strandferðsluni virkar FARA-skipanin soleiðis, at til ber ikki at ferðast uttan gildugt atgongumerki. Á mánaðarkortum er navn og føðingardagur hjá eigara prentað, men eingin mynd, tí er tað ikki eins lætt hjá bussførarum at sanna, at rætti persónurin brúkar kortið.

Inntøkur hjá Sjóleiðum seinastu fimm árini.

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Útleigan av útbúnaði	-570	-697	-547	-611	-527
Innt. frá ferðaseðl. og atgongum.	-20.684	-22.946	-23.835	-27.927	-21.535
SSL - Farmagj. innanl. og lestrarkort	-9.167	-8.523	-8.897	-9.516	-12.078
SSL - Ferðaseðlar ítróttafólk	0	-194	-3.845	-6.106	-6.893
Ferðaætlan og tænastuseðlar	-4.858	-4.107	-3.286	0	0
SSL - Ferðaloyvir	-264	-270	-313	-3	0
Tilsamans	**-35.543**	**-36.737**	**-40.723**	**-44.163**	**-41.033**

Orsøkin til at inntøkurnar av tænastuseðlum og ferðaloyvum eru 0 kr. í 2020 og 2019 er, at Strandferðslan hevur broytt meginregluna fyri bókingunum á útgreiningar, soleiðis at allar inntøkur av ferðaseðlasølu eru "Inntøkur frá ferðaseðlum og atgongumerkjum".

Landsgrannskoðanin hevur kannað mánaðaravrokningar til busseigarar.

Inntøkur hjá Bygdaleiðum seinastu fimm árini:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Søla av vørum og tænastum	-18.194	-17.474	-17.487	-18.163	-11.779

Strandferðslan eigur inntøkurnar av ferðaseðlasølu v.m., sum bussførarar krevja inn. Atgongumerki við bussum eru goldin við gjaldkortum ella við tøkum peningi. Strandferðslan fær ikki kontanta peningin, tí hann verður mótroknaður í avrokningunum, sum busseigararnir lata Strandferðsluni hvønn mánað. Peningurin frá gjaldkortum kemur beinleiðis á peningastovnskontu hjá Strandferðsluni.

Strandferðslan gjøgnumgongur uppgerðirnar fyri hvønn mánað, áðrenn tey avrokna busseigararnar. Strandferðslan kannar ikki uppgerðirnar, sum bussfররararnir gera til busseigara.

Strandferðslan stemmar inngjøld frá gjaldkortum av við peningastovnskontu.

Landsgrannskoðanin mælti til betri eftirlit við inntøkunum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Strandferðslan hevur eftirlit við inntøkunum, tá ið stovnurin sambært sáttmálunum eigur allar inntøkurnar, ið bussarnir fáa. Onkur av størru leiðunum hjá Bygdaleiðum tekur ikki ímóti gjaldkortum, tí eru sannlíkindi fyri, at munandi upphæddir eru í kontantum peningi.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at gjaldterminalar verða í hesum døgum settir í allar bussar, sum ikki hava havt gjaldterminal. Tað merkir, at tað verður væl minni av kontantum peningi.

Busssáttmálar

Í 2020 vóru sáttmálabundnu útreiðslurnar fyri busssáttmálar 47,1 mió.kr. og í 2019 vóru tær 48,6 mió.kr.

Landsgrannskoðanin kannaði avrokningar, við at samanhalda tær við sáttmálarnar um Bygdaleiðir frá juli 2019. Í sáttmálunum stendur, at sáttmálatíðarskeiðið byrjar væntandi 1. apríl 2020 og er galdandi til 30. apríl 2027. Í sáttmálunum eru ásetingar um tal av ferðaætlanartímum um árið, tímakostnað og kostnað fyri busstongdar útreiðslur pr. mánað.

Tímaløn sambært sáttmála við fyritøku og tímaløn sambært avrokning:

kr.

Fyritøka 1	Tímaløn sáttmáli (-MVG)	Tímaløn avrokning	Munur
Bussførari	355,00	352,78	2,22
Tímatongdar útreiðslur	185,00	183,64	1,36
Busstongdar útreiðslur	174,43	175,10	-0,67

Á avrokning fyri oktober 2020 er upplýst, at sáttmálabundni kostnaðurin er 7.881 t.kr. um árið fyri 11.076 tímar um árið. Strandferðslan rindar 443,75 kr./t. fyri bussførara og 231 kr./t. fyri tímatongdar útreiðslur. Busstongdu útreiðslurnar eru 40 t.kr. um mánaðin fyri hvønn buss.

Tímaløn sambært sáttmála við aðra fyritøku og tímaløn sambært avrokning:

kr.

Fyritøka 2	Tímaløn sáttmáli (-MVG)	Tímaløn avrokning	Munur
Bussførari	394,00	388,38	5,62
Tímatongdar útreiðslur	128,00	126,75	1,25
Busstongdar útreiðslur	245,00	242,00	3,00

Á avrokningini fyri desember 2020 er upplýst, at sáttmálabundni kostnaðurin er 15.091 t.kr. um árið fyri 19.679 tímar. Strandferðslan rindar 492 kr./t. fyri bussførara og 160,56 kr./t. fyri tímatongdar útreiðslur. Busstongdu útreiðslurnar eru 245 kr./t. Sambært Strandferðsluni er kostnaðurin lækkaður frá 15.091 t.kr. um árið til 14.665 t.kr., tí talið av ferðaætlanartímum er lækkað.

Strandferðslan hevur kunnað um, at takstirnir eru prístalsreguleraðir, og at sáttmála-upphæddirnar tí ikki eru heilt í samsvari við tímatal og tímasats.

Umvælingar av skipum

Niðanfyri eru roknskapartøl fyri umvælingar og viðlíkahaldsútreiðslur av maskinum, innbúgvi og øðrum útbúnaði:

t.kr.

Stað	2016	2017	2017	2019	2020
1400 Tekniska-/sjódeildin	23	236	68	225	603
1500 Fugloy-Svínoyarleiðin	1.164	601	809	1.587	2.876
1520 Kallsoyarleiðin	1.314	1.714	2.385	1.073	812
1540 Mykinesleiðin	0	44	12	69	132
1560 Nólsoyarleiðin	3.768	947	4.424	2.330	6.038
1580 Sandoyarleiðin	3.486	4.431	4.109	4.727	931
1585 Farmaflutningur Sandoy	0	0	0	0	809
1590 Hestleiðin	0	0	0	667	69
1600 Skúvoyarleiðin	937	649	1.202	284	584
1620 Suðuroyarleiðin	10.589	8.448	8.069	11.900	11.782
1650 Tríkilja	0	0	0	0	184
Tilsamans	**21.280**	**17.070**	**21.078**	**22.864**	**24.820**

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um Strandferðslan hevur boðið umvælingar av skipum út, og um stovnurin hevur boðið keyp av eykalutum v.m. út sambært reglunum í rundskrivi um keyp av vørum og tænastum.

Trupult at bjóða út.

Strandferðslan hevur greitt frá, at tað er trupult at bjóða størru umvælingarnar av skipunum út á Keypsportalinum. Stovnurin bjóðar flestu uppgávurnar út ímillum nakrar veitarar og vísti á dømi, tá ið Strandferðslan skuldi umvæla stabilisatorar, sum í síni tíð eru keyptir úr Japan. Strandferðslan noyðist tí at bíleggja eykalutirnar haðani, og tað er hálvtannað ára latingartíð.

Í summum førum hevur Strandferðslan útvegað eykalutir v.m. úr útlondum, tí tað hevur verið munandi bíligari, enn at fáa teir sum part av samlaðum tilboði um at umvæla skipini.

Sambært Strandferðsluni er útgerðin á skipunum fyri tað mesta IMO-stemplað, og tí kann stovnurin einans nýta eykalutir, ið eru IMO-góðkendir. Sambært stovninum er tað sum oftast bert ein veitari í Føroyum, og í fleiri førum eru eykalutirnir so gamlir, at trupult er at finna nakran, ið kann veita somu eykalutir.

Í september 2021 vísir landsstýrismaðurin á, at Strandferðslan bjóðar flestu uppgávur út ímillum tveir ella fleiri veitarar. Tað er trupult at bjóða størri umvælingar av skipum út á Keypsportalinum, ofta er bert ein veitari av útbúnaði. Eykalutir verða keyptir úr útlondum, tí teir fáast ikki í Føroyum, ella eru bíligari.

Ritan

Í november 2020 bað Strandferðslan um tilboð upp á umvæling av Rituni. Tilboðið, sum stovnurin tók av, var 772.535 kr.

Sambært Búskaparskipan landsins eru 2,7 mió.kr. goldnar fyri 50 ára klassing av Rituni. Spurd, hvussu endaligi kostnaðurin samsvarar við tilboðið, svaraði Strand-ferðslan, at *"í mun til sjálvt útboðið og dokklistan helt tilboðsprísurin, men tað komu*

stór krøv frá DNV um m.a. stál, ið mátti skiftast, um Ritan skuldi fáa siglingarloyvið endurnýggjað. Kostnaðurin var tilsamans slakar 6 mió.kr."

Ternan

Strandferðslan fekk tvey tilboð/kostnaðarmetingar viðvíkjandi umvæling av Ternuni og tók av lægru kostnaðarmetingini.

Kostnaðarmeting 1: Ávikavist 1.883 t.kr. og 1.458 t.kr.
Kostnaðarmeting 2: Ávikavist 4.225 t.kr. og 3.003 t.kr.

Umvælingin bleiv størri, enn ætlað.

Tað vísti seg, at umvælingin var nógv størri, enn av fyrstantíð hildið. Slakar 6,8 mió.kr. eru brúktar til umvælingar av Ternuni í 2020. Strandferðslan vísti á, at klassakrøvini vóru ógvuslig, og í fíggjarlógini 2021 eru 4 mió.kr. játtaðar eyka til arbeiðið.

Kostnaðurin nógvar ferðir størri, enn upprunaliga mett.

Strandferðslan hevur greitt frá, at kostnaðurin at umvæla Ternuna verður helst millum 18 og 20 mió.kr.

Smyril

Landsgrannskoðanin hevur ikki sæð samlaðan innanvirkis roknskap fyri umvælingarnar av Smyrli.

Strandferðslan hevur greitt frá, at tað er bert ein fyritøka, ið er góðkend at hava eftirlit við MOB-bátunum og teimum stóru bjargingingarbátunum. Fyritøkan er eisini einasti veitarin í Føroyum, ið er góðkendur til at kunna skifta veirarnar á heingidekkinum og at hava eftirlit við dekkskrananum.

Sambært Strandferðsluni hava tilboðini frá fyritøkuni hildið. Arbeiðið er liðugt á hesum sinni, men eftirlit við bjargingarútgerð, kranum og veirum á heingidekkum er aftur-vendandi hvørt ár.

Strandferðslan keypti tænastuveiting frá einari fyritøku fyri 952 t.kr., uttan at biðja um tilboð frá fleiri. Sambært Strandferðsluni er orsøkin, at arbeiðið kann bert gerast um næturnar, og er sera tíðarkrevjandi av somu orsøk.

Arbeiðir ikki boðin út.

Frá einari aðrari fyritøku keypti Strandferðslan tænastuveiting fyri 891 t.kr., uttan at bjóða veitingina út. Strandferðslan hevur greitt frá, at tað var eitt ógvuliga umfatandi umvælingararbeiði, sum mátti gerast um náttina, meðan Smyril liggur, og tí siglir skipið eisini ofta við 3 motorum.

Leiga - Mykinessigling

Strandferðslan hevur gjørt leigusáttmála við fyritøku um leigu av M/S Jósup frá 1. apríl 2018 til 31. mars 2023. Í sáttmálanum er m.a. ásett, at eftir 5 ára skeiðið skal Strandferðslan keypa bátin ella halda áfram við at leiga hann til 31. mars 2028.

Roknskapartøl fyri Mykinessiglingina 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Keyp av vørum og tænastum	79	132	469	536	560
Keyp av útbúnaði, netto	35	35	0	8	10
Leiga, viðlíkahald og skattur	946	894	1.810	2.132	2.005
Søla av vørum og tænastum	-22	-16	-899	-1.340	-586
Tilsamans	**1.037**	**1.044**	**1.380**	**1.335**	**1.989**

Sambært sáttmálanum er leigan 3.300 kr. um dagin. Eftir fyrstu 5 árini kann Strand-ferðslan keypa bátin fyri 5,5 mió.kr. Frá 1. apríl 2023 til 31. mars 2028 er kostnaðurin 2.900 kr. um dagin, og kann Strandferðslan tá keypa bátin fyri 2 mió.kr.

Fyri skipara og manning rindar Strandferðslan 3.661,73 kr. um dagin í tíðarskeiðnum mai til august.

Strandferðslan ber allan kostnaðin av rakstrinum av bátinum og 4/5 av viðlíkahalds-kostnaðinum.

Eigarin hevur ábyrgd av, at skipari er tøkur til sigling uttan fyri tíðarskeiðið mai til august. Strandferðslan rindar tá 1.942,50 kr. um dagin fyri skiparan, og skipar fyri aðrari manning. Fyri farmaflutning fær eigarin 20 t.kr./mór.

Eigarin hevur fullan rætt til at brúka bátin til aðra sigling í tíðarskeiðnum mai til august og fær inntøkurnar av tí. Siglingin skal tó ikki órógva føstu rutusiglingina hjá Strand-ferðsluni.

Sambært játtanarreglunum er ikki loyvt at gera avtalu um langtíðarleigu. Í serligum førum kann loyvi tó fáast til tað frá Fíggjarmálaráðnum, um landsstýrismaðurin metir, at slíkar avtalur hava munandi og eyðsýndar fyrimunir fyri landið.

Avtalan ber brá av at vera langtíðarleiga.

Landsgrannskoðanin vísti á, at oman fyri nevnda avtala ber brá av at vera avtala um langtíðarleigu/leasing, sum er komin í lag í staðin fyri keyp. Um so er, eigur avtalan roknskaparliga at viðgerast sum keyp og tí tyngja roknskapin tað árið, avtalan er gjørd.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at beint eftir at lógin um fólka- og farmaflutning var samtykt í 2001, varð farið undir fyrireikingarnar at útveita Mykines-leiðina. Í 2002 var ein roynd gjørd at bjóða farleiðina út, men útbjóðingin var ógyldað. Aðrar fyrireikingar hava verið

Sambært landsstýrismanninum var Mykinesleiðin boðin út alment í 2006 til privat at røkja, og leiðin er boðin út nakrar ferðir síðani tað. Sp/f Mykines hevur røkt siglingina meginpartin av tíðini. Eftir leigusáttmálanum frá 2018 skal sáttmálin í fyrsta umfari galda í fimm ár, t.v.s. til 2023. Síðani skal sáttmálin leingjast við fimm árum, ella skal skipið keypast fyri 5,2 mió.kr. Um sáttmálin verður longdur við fimm árum, kann skipið tá keypast fyri 2 mió.kr.

Leigusáttmálin longdur til 2028.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at ískoytisavtala til sáttmálan var gjørd í summar, at galda til 20. november 2028. Ávísar tillagingar eru gjørdar. Dagstaksturin er lækkaður til 2.800 kr., og siglingartíðin á hvørjum ári er longd við tveimum mánaðum, umframt annað.[11] Samanumtikið hevur tað verið eitt politiskt ynski, at Mykinesfarleiðin verður rikin av privatum.

Fíggjarstøða

Støðisogn

Nøkur skip, bilar o.a. eru skrásett í støðisognaryvirlitinum í Búskaparskipan landsins, men yvirlitini eru ikki fullfíggjað.

Lutir á goymslu hjá øðrum

Strandferðslan hevur síðani 2014 havt eykalutir til ein heilan motor liggjandi á goymslu hjá fyritøku í Havn. Strandferðslan rindar ikki leigu fyri goymsluna. Sambært Strand-ferðsluni eru eykalutirnir merktir sum ogn hjá stovninum og skildir at frá vørunum hjá fyritøkuni. Strandferðslan hevur munnliga avtalu við fyritøkuna um, at fyritøkan altíð hevur lutir til ein motor liggjandi, og kann brúka av eykalutunum til sín sjálvs, men skal innan einar tveir dagar leggja sama slag lut aftur á goymsluna.

[11] Ískoytisavtala til avtalu dagfest 25. mai 2018 millum Sp/f Mykines og Strandfaraskip landsins.

Peningastovnskontur og kassar
Strandferðslan hevur 11 peningastovnskontur. Eisini hevur stovnurin eina útlendska kontu, har 45 t.kr. hava staðið bókaðar í nógv ár. Strandferðslan hevur roynt at fáa peningin, men tað er ikki eydnast enn.

Í 2020 hevur Landsgrannskoðanin gjørt ófráboðað kassaeftirlit á Smyrli. Einki var at finnast at kassauppgerðunum.

Tænastu- og vøruskuldarar
Áognin í Navision 31. desember 2020 stemmar við salduna í Búskaparskipan landsins. 31. desember 2020 var avsetingin ímóti tapi av skuldarum 130.801 kr.

Sølufakturar og kreditnotur hava ikki sama nummar í Búskaparskipan landsins, sum tey hava í Navision. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er ikki nøktandi, at fakturanummarið ikki sæst í Búskaparskipan landsins, og at fakturar og kreditnotur ikki eru hjáløgd.

Strandferðslan arbeiðir saman við sínum veitara at fáa skjølini frá Navision løgd við í Búskaparskipan landsins. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa tað í lag sum skjótast.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar kreditnotur, og fekk skjøl og tilhoyrandi fakturar frá bókhaldinum. Landsgrannskoðanin hevði nakrar viðmerkingar viðvíkjandi avsláttri til viðskiftafólk.

Strandferðslan hevur nakrar fastar avsláttrar, t.d. virðiskort sum geva 15% avsláttur. Studni fær 30% og ÍSF fær 15% avsláttur. Landsgrannskoðanin mælti til at áseta mannagongdir viðvíkjandi avsláttri í roknskaparreglugerðini.

Strandferðslan sendir kontuavrit til skuldarar hvønn mánað. Um teir ikki gjalda, sperrar bókhaldið kontuna. Um skuld ikki verður goldin, sendir stovnurin kravið til innheintingar.

Telduútbúnaður og KT-menning

Sambært Búskaparskipan landsins er samlaði kostnaðurin á kontu "Telduútbúnaður og KT-menning" seinastu fimm árini hesin:

t.kr.

	2016	2017	2018	2019	2020	Tilsamans
Telduútb. og KT-menning	457	778	1.810	962	3.732	7.739

Av teimum 7,7 mió.kr. eru 4 mió.kr. til hardware, 1,5 mió.kr. til software og 1,7 mió.kr. til forrit-menning. Nakað av útreiðslum til KT eru eisini bókaðar á "Keyp av vørum og tænastum".

Nýggj KT-skipan

Um KT-skipanina
Strandferðslan fór í 2018 undir at gera nýggja ferðaseðla- og bíleggingarskipan, kallað BPS, tí FARA-ferðaseðla- og bíleggingarskipanin nøktar ikki allar tørvir hjá stovninum. Sambært Strandferðsluni var samskiftið við FARA vorðið ov stirvið, síðani fyritøkan var keypt av einum enskum felagi, og uppstiging av FARA-skipanini hevði í longdini kostað meira enn ein nýggj skipan.

Flestu av verandi KT-veitarum søgdu seg, sambært Strandferðsluni, ikki kunna átaka sær slíka uppgávu. Stovnurin spurdi seg eisini fyri hjá donskum ferjufeløgum, hvar til bar at finna veitara. Ein donsk fyritøka bjóðaði sær at lata eina skipan, ið Strandferðslan ynskti, fyri 18 mió.kr.

Eingin skrivlig avtala gjørd, áðrenn verkætlanin byrjaði.

Tá ið samanum kom valdi Strandferðslan Sp/f Norliga sum veitara. Eingin skrivlig avtala er gjørd við veitaran um, hvør veitingin er, hvussu nógv hon kostar, ella nær hon

skal veitast, men sambært Strandferðsluni hava partarnir avtalað at gera eina skipan, sum nøktar tørvin hjá stovninum.

Sambært Strandferðsluni tekur loysnin støði í tilboðstilfarinum frá Sp/f Norliga. Fyri at skapa fíggjarligt rúm til at gera skipanina, fann Strandferðslan ein veitara, sum kundi gera loysnina, sum danska fyritøkan hevði skotið upp, í smáum. Sambært Strandferðsluni kann veitarin gera arbeiðið bíligari, tí hann krevur ikki alla upphæddina fyri menningarkostnaðin beinanvegin, men fær hann heldur inn við árligum gjøldum, tá ið skipanin er tikin í nýtslu. Árliga gjaldið verður áleið 2 mió.kr.

Strandferðslan hevur ikki skjalfest nakra samlaða avtalu, tí talan er um fleiri deilmál, og Strandferðslan vildi ikki binda seg til ein stóran kostnað og langa avtalu, uttan at kunna tryggja sær, at veitarin kundi loysa uppgávuna. Tá ið ein grundskipan er gjørd, verður endalig avtala gjørd um at gera skipanina lidna, umframt víðari rakstur.

Sambært Strandferðsluni ger veitarin avtalu við Elektron um skipanina og um rakstur av servarum. Servararnir skulu standa hjá Elektron. Strandferðslan rindar síðani haldaragjald fyri nýtslu av skipanini. Rakstrarligar uppgávur sum t.d. backup vera partur av avtaluni. Strandferðslan fær atgongd til allar dátur úr skipanini, sum skulu innganga í greiningar hjá stovninum.

Verklagslóg, útbjóðing, kostnaður v.m.

Eingin verklagslóg.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at í § 1, stk. 5, í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan” er ásett, at KT-verkætlanir vera tiknar við undir rakstrarjáttan. Sambært § 7 skulu størri KT-verkætlanir, t.e. verkætlanir fyri 5 mió.kr. ella meira, hava heimild í og fremjast sambært verklagslóg.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin víst á, at verkætlanin er gjørd í stigum, og er uppstigað til betri tólbúnað og skráir, eftir at farið er undir at menna bíleggingarskipanina, og tað dýrkar verkætlanina nakað. Allur tólbúnaður er fingin til vega, og skráir eru lidnar, soleiðis at tað ber til at royndarkoyra nú, og seta bíleggingarskipanina í verk næsta ár (2022) fyri bæði Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Landsstýrismaðurin ásannar, at tá ið komið er so væl áleiðis við verkætlanini, er tað helst ov seint at gera eina verklagslóg, og vísir landsstýrismaðurin á, at rakstrarjáttanin hjá Strandferðsluni fevnir eisini um at menna og reka KT-skipanir, og tessvegna er heimild til at brúka pening til endamálið.

Skipanin ikki boðin út.

Landsgrannskoðanin hevur eisini víst á, at útveganin av nýggjari KT-skipan er ikki boðin út á Keypsportalinum.

Strandferðslan hevur greitt frá, at stovnurin hevur tørv á einari nýggjari ferðaseðlaloysn, og at um bíðað verður ov leingi við loysnini, kann tað blíva hættisligt fyri framhaldandi rakstur hjá stovninum. Strandferðslan setti seg í samband við verandi veitarar av KT-skipanum stovnsins umframt aðrar veitarar, og bað um prísir frá fimm veitarum upp á menning av skipan, rakstur í fimm ár, umframt alt hardware. Tríggir veitarar svaraðu.

Úrslitið var, sum fyrr nevnt, at ein donsk fyritøka bjóðaði sær at lata eina skipan, og lat Strandferðsluni eina frágreiðing við uppskoti til loysn. Danska fyritøkan kundi gera arbeiðið fyri 17,8 mió.kr., FARA 10,1 mió.kr. og Sp/f Norliga 3,9 mió.kr.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Strandferðslan metir, at verkætlanir hjá stovninum kunnu vera av slíkum slag og vavi, at tær ikki hóska serliga væl til at bjóða út á Keypsportalinum. Tað er partvíst rætt, t.d. tá ið talan er um eykalutir til skip, sum ikki verða framleiddir í Føroyum.

Átti at verið boðin út á Keypsportalinum.

Landsstýrismaðurin er annars samdur við Landsgrannskoðanina, at KT-verkætlanin átti at verið boðin út á Keypsportalinum. Í øllum førum tá fyrireikingarnar til at menna bíleggingarskipanina vóru lidnar.

Verkætlanar-roknskapur vantar.

Vísandi til §§ 6 og 7 í roknskaparkunngerðini, heldur Landsgrannskoðanin, at KT-verkætlanin roknskaparliga átti at verði greinað soleiðis, at eftirlit kann vera við, hvussu nógv skipanin kostar hvørt árið, hvussu nógv hon kostar tilsamans, og um kostnaðarætlanin hevur hildið.

Strandferðslan hevur hinvegin víst á, at verkætlanin higartil hevur verið eitt menningarprosjekt, sum í sambandi við pilottest og útrulling nú verður umskipað, soleiðis at fíggjarstýringin verður umsitin av fíggjardeildini, og fíggjarleiðarin er í tí sambandi innsettur sum partur av stápsfunktiónini.

Samlaður kostnaður fyri útveganina av KT-skipanini sæst ikki í roknskapinum. Frá 2018 til apríl 2021 eru hesar útreiðslur til KT-skipan:

kr.

	2018	2019	2020	04-2021	Tilsamans
Veitarin	89.195	623.822	3.444.375	195.600	4.352.992
Ráðgevi			544.073	612.129	1.156.202
Annar veitari			50.000		50.000
Annar veitari			96.000		96.000
Tilsamans	**89.195**	**623.822**	**4.134.448**	**807.729**	**5.655.194**

Í teimum 5,7 mió.kr. eru tær 1,2 mió.kr., sum eru metti kostnaðurin sambært Projection 2021[12], ikki við. Rakstrarútreiðslur til Elektron eru heldur ikki taldar við.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í fyrireiking av verkætlanini vórðu tørvslýsing og útgreining gjørdar av skipanini. Menningin hevur støði í fyrireikingini, og Strandferðslan hevur nú gjørt støðulýsing av skipanini í mun til upprunaligu tørvslýsingina og eftirfylgjandi tillagingum av skipanini. Yvirlit er gjørt yvir funkur og eindir á skipanini, sum er klárt til pilottest og tað, sum er eftir at menna. Til víðari menning eru játtaðar 1,85 mió.kr. fyri 2021, og tí fer tað ikki at ávirka raksturin restina av árinum.

Sambært Strandferðsluni hevur verkætlanin higartil kostað 4,7 mió.kr.

Sáttmálaviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin ásetir krøv um sáttmála.

Í roknskaparreglugerðini hevur Strandferðslan ásett, at sáttmáli eigur at gerast, tá slagið av keypi ger, at neyðugt er at hava trygd fyri, at partarnir eru samdir um treytirnar. Sáttmálin ásetir skyldur og rættindi hjá pørtunum mótvegis hvørjum øðrum og verður undirskrivaður av báðum pørtum. Eisini er ásett, at innan ávís øki t.d. KT, eru standardsáttmálar gjørdir.

Strandferðslan heldur, at menningartíðin higartil hevur víst, at veitarin kann lyfta uppgávuna; Strandferðslan er sloppin undan at gera langtíðar bindingar, áðrenn stovnurin hevur sæð úrslit. Strandferðslan hevur fingið roynt samstarvið og partar av skipanini, verið við til at formgeva skipanina, og er sloppin undan framtíðar broytingum o.s.fr.

Landsgrannskoðanin skilir ikki grundgevingina fyri ikki at gera sáttmála, tá ið avtalan er inngingin.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Strandferðslan ásannar, at formligu viðurskiftini kundu verið skipað betur í menningartilgongdini, men at tað var átrokandi neyðugt at fara undir at menna eina dagførda bíleggingarskipan. Strand-

[12] BPS kostnaðarmeting frá veitaranum 21. desember 2020.

ferðslan leggur seinastu hond á at gera ein formligan sáttmála við veitaran fyri restina av verkætlanini.

Treytir um nóg stóran fíggingarmøguleika

Í roknskaparreglugerðini hjá Strandferðsluni eru ásett kriterie fyri val av veitara, m.a. at tann veitarin, sum verður valdur framum, eigur at lúka treytir um m.a. at hava nóg stórar fíggingarmøguleikar.

Roknskaparreglugerðin ásetir kriterie fyri val av veitara.

Spurd, um Strandferðslan hevur tikið atlit at fíggingarmøguleikunum hjá veitaranum, tá ið stovnurin valdi hann at menna KT-skipanina, sum skal stýra øllum inntøkum stovnsins, svaraði Strandferðslan, at stovnurin serliga hevur hugt at, um og hvussu veitarin kann lyfta eina so stóra uppgávu tøkniliga. Sambært Strandferðsluni *"koyrir [veitarin] rættliga konservativt við ikki at bókføra menningararbeiðið"*. Strandferðslan leggur afturat, at "*bókført "immateriel" virðir kunnu eisini geva eina skeiva fatan av einum virki, serliga tí hesi lættliga kunnu broytast og ofta eru ein metan. [Veitarin] stendur ikki í skuld, og sær Strandferðslan hetta sum eina jaliga mynd av felagnum".*

Landsgrannskoðanin hevur vísst á, at sambært ársfrásagnunum hevur smápartafelagið hjá veitaranum havt negativan eginpening øll árini síðani 2016, og hevur frávalt grannskoðan, síðani felagið var stovnað. Í roknskapinum fyri 2016 stendur, at *"Felagið hevur ment telduskipanir, sum ikki eru ognarførdar, men er menningarkostnaðurin rakstrarførdur. Tó væntar felagið at nevndu telduskipanir fara at geva inntøkur í komandi árum*."

Felagið negativa eginogn og frávalt grannskoðan.

Strandferðslan hevur áður greitt Landsgrannskoðanini frá, at Strandferðslan skuldi rinda menningarkostnaðin, sum veitarin hevur havt av skipanini, við gjøldum yvir tíð, og at júst tað var fortreytin fyri, at veitarin var valdur at gera uppgávuna. Landsgrannskoðanin hevur tí ilt við at skilja, hví hesin menningarkostnaður ikki sæst aftur at vera bókaður hjá felagnum.

Landsgrannskoðanin ivast í, um Strandferðslan kann hava ætlað um fíggjarligu orkuna hjá felagnum, sum stovnurin ætlar at gera eina langtíðaravtalu við, havandi í huga at felagið hevur havt negativan eginpening øll árini síðani 2016; t.e. í tvey ár, áðrenn Strandferðslan fór í samstarv við felagið.

Strandferðslan ikki mett um fíggjarligu orkuna.

Sambært landsstýrismanninum hevur Strandferðslan ikki mett um fíggjarligu orkuna hjá smápartafelagnum, sum hevur ment skipanina, men hevur stiðjað seg til tilvísingar, sum smápartafelagið hevur.

Landsstýrismaðurin hevur eisini greitt frá, at Strandferðslan hevur biðið smápartafelagið um nýggjastu fíggjartølini, og Strandferðslan leggur dent á, at nýggjur sáttmáli verður ikki undirskrivaður, fyrr enn fíggjartølini fyriliggja, og fer at krevja eitt kravsprógv frá felagnum, sum skal tryggja at Strandferðslan frameftir ikki verður fyri fíggjarligum missi, um felagið av onkrari orsøk ikki røkir sínar skyldur mótvegis Strandferðsluni.

Sambært Strandferðsluni er eitt av krøvunum frá stovninum til sáttmálan við veitaran, at smápartafelagið í framtíðini skal grannskoðast av einum ríkisgóðkendum grannskoðara.

Fíggjarmálaráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at sjálvandi skuldi sáttmáli verið undirskrivaður, áðrenn farið var undir KT-verkætlanina. Bíleggingarskipanin verður royndarkoyrd nú, og verður innført á øllum leiðum næsta ár. Tá ið Strandferðslan nú krevur, at roknskapurin hjá smápartafelagnum skal grannskoðast av ríkisgóðkendum grannskoðara, verður fyrsta fíggjarár 2021. Tá er skipanin longu implementerað. Sambært Fíggjarmálaráðnum eigur langtíðarsáttmáli (rakstrarsáttmáli) helst ikki at verða gjørdur, áðrenn roknskapurin fyri 2021 er liðugur.

Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at sáttmáli skuldi verið gjørdur, áðrenn farið var undir verkætlanina.

Goldið aðrari fyritøku fyri ráðgeving.

Gjald fyri ráðgeving

Sambært Búskaparskipan landsins er ein ensk fyritøka ráðgevi hjá Strandferðsluni viðvíkjandi útvegan av KT-skipan. Tann, sum umboðar ensku fyritøkuna er sami persónur, sum umboðar veitaran.

Spurd, í hvørjum málum enska fyritøkan ráðgevur Strandferðsluni, svaraði leiðslan, at *"fyri at framskunda arbeiðið var givið boð um at seta meiri ferð á arbeiðið, so at komast kundi til at hava eina grundskipan og gera endaligan sáttmála. Av tí at [veitarin] ikki vildi gera størri bindingar uttan sáttmála, vóru partar gjørdir í samstarvi við forritarar, ið [veitarin] nýtir í øðrum verkætlanum. Fyri at halda hendan partin sundurskyldan, eru hesar rokningar sendar beinleiðis".*

Rindað triðjaparti fyri partar av KT-skipanini.

Strandferðslan hevur ikki svarað spurninginum, um í hvørjum málum enska fyritøkan ráðgevur stovninum. Stovnurin sigur einki um, hvat innihaldið í ráðgevingini frá ensku fyritøkuni fevndi um. Landsgrannskoðanin skilir ikki, hví Strandferðslan rindar triðjaparti fyri partar av skipanini, sum veitarin hevur bundið seg til at gera.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Strandferðslan ásannar, at fakturar frá ensku fyritøkuni eru ikki nøktandi lýstir, og Strandferðslan hevur tí biðið um eina frágreiðing frá veitaranum um samanhangin ímillum rokningar frá ensku fyritøkuna og veitaran.

Sambært landsstýrismanninum hevur veitarin í skrivi til Strandferðsluna m.a. greinað leiklutin hjá ensku fyritøkuni í mun til samlaðu BPS-verkætlanina. Ein partur av arbeiðinum í sambandi við menningina er KT-ráðgeving, sum er faktureað frá ensku fyritøkuni.

Fíggjarmálaráðið heldur tað vera óheppið, at SSL rindar triðjaparti fyri skipan, ið veitarin skal fremja.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at Fíggjarmálaráðið metir, at viðurskiftini ímillum veitaran og ensku fyritøkuna eru ógreið, og at tað er óheppið, at Strandferðslan rindar triðjaparti fyri eina skipan, ið veitarin skal fremja. Fíggjarmálaráðið vísir eisini á, at ársfrásøgnin hjá smápartafelagnum/veitaranum fyri 2020 lýsir ikki virksemi felagsins á nakran hátt; t.d. er eingin starvsfólkakostnaður, og roknskapurin verður ikki grannskoðaður. Fíggjarmálaráðið heldur tað als ikki vera nøktandi.

Fíggjarmálaráðið leggur afturat, at Strandferðslan hevur kravt, at roknskapurin hjá smápartafelagnum skal grannskoðast, bæði fyri inniverandi ár og frameftir.

Avstemman millum skipanir

Sambært Strandferðsluni skal BPS-skipanin stýra øllum inntøkum stovnsins.

Landsgrannskoðanin spurdi, hvussu stemmað verður av millum BPS, fíggjarskipanina og Búskaparskipan landsins. Strandferðslan svaraði, at stovnurin er í holt við at samstarva við veitararnar um, hvussu øll skjøl fara frá BPS skipanini til Navision. Sambært Strandferðsluni verður tað stemmað av regluliga við at eftirkanna høvuðsupphæddir og mannagongdir, og at gera testir.

Strandferðslan hevur eisini greitt frá, at *"krav er sett til [veitarin], at skipanin skal lúka ISAE 3402 og skal váttast og undirskrivast á hvørjum ári av ríkisgóðkendum grannskoðara. Í verandi løtu er [veitarin] í ferð við at leggja hetta arbeiðið til rættis saman við grannskoðanarvirki. Hetta vil tryggja, at allar mannagongdir vera væl skrásettar og lætt grannskoðaðar".*

Strandferðslan leggur afturat, at *"tøl, leypandi støðufrágreiðingar v.m. til Búskaparskipan landsins vera gjørdar í samstarvi við Gjaldstovuna. Hetta arbeiðið byrjar fyrst eftir, at royndarkoyringin er byrjað, so stovnurin hevur nakað av data at fyrihalda seg til".*

Landsstýrismaðurin hevur kunnað um, at fyri at tryggja peningarenslið ímillum bíleggingarskipanina, Navision og Búskaparskipan landsins, hevur Strandferðslan vent sær til Gjaldstovuna fyri at tryggja, at hesin parturin er í samsvari við krøvini til markamót millum egnar búskaparskipanir og Búskaparskipan landsins.

Landsstýrismaðurin vísir á, at krøv um ISAE 3402 og grannskoðanarváttan mugu metast at vera í samsvari við reglurnar um egnar búskaparskipanir.

Fíggjarlig stýring av verkætlanini

Óvanligt at gera nýggja skipan uttan kostnaðarætlan.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er sera óvanligt, at farið er undir at gera eina nýggja skipan uttan fyrst at gera kostnaðarætlan. Landsgrannskoðanin vísti eisini á, at innaneftirlitið var ikki nøktandi, tá ið fíggjardeildin so at siga ikki hevði verið við í verkætlanini.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hvussu Strandferðslan tryggjar sær at fáa ta skipan, sum ætlanin var, og hvussu stovnurin tryggjar sær, at peningur ikki kemur at mangla aðrastaðni í rakstrinum.

Í mai 2021 hevur Strandferðslan greitt frá, at *"higartil hava allar útreiðslur verið innanfyri karmarnar hjá SSL. Tá ið ivamál hevur verið, hevur SSL steðgað við gjaldingunum inntil greiða er fingin á støðuni, so at SSL ongantíð hevur verið í tí støðu, at vanta pening til uppgávurnar, ið SSL vanliga røkir"*.

Strandferðslan greiðir frá, at nú stovnurin er komin til seinna partin í menningarætlanini, er eykajáttan fingin til tað, so at skipanin kann koyra fyrst í komandi ári. Royndarkoyringar og útvaldar leiðir vera longu nú næstu mánaðirnar.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at í eykajáttanaruppskotinum stendur, at biðið verður um eykajáttan til eykakostnað fyri bíleggingarskipanina.

Í mai 2021 greiddi Strandferðslan frá, at *"kostnaðurin higartil er kendur og kostnaðurin frameftir er avtalaður í endaliga sáttmálanum. Í skrivandi løtu verður síðsta hond løgd á sáttmálan so ynski, krøv v.m. samsvara kostnaðinum og fíggjarætlanini hjá Strandferðsluni. Endaligu tølini eru tí fyrst klár, tá ið sáttmálin er liðugur og báðir partar hava góðtikið hann. Fíggjardeildin verður sum nevnt nú, størri partur av projektinum, har fíggjarleiðarin eisini er vorðin partur av stýringsbólkinum"*.

Landsgrannskoðanin hevur eftirsíðan biðið Strandferðsluna um kostnaðarætlanina, sum stovnurin nú sigur er gjørd.

Í mai 2021 sendi Strandferðslan yvirlitið "BPS Menning og kostnaður". Yvirlitið vísir, at metti kostnaðurin fyri 2021 er 3,7 mió.kr., fyri 2022 er hann 4,9 mió.kr. og fyri 2023 er kostnaðurin 2,9 mió.kr. Útreiðslurnar eru til veitaran, við undantaki av 1,2 mió.kr. fyri 2021 og 1,2 mió.kr. fyri 2022, ið eru hald og support til FARA.

Landsgrannskoðanin heldur, at yvirlitið er ikki ein kostnaðarætlan, har til ber at samanbera ætlaða upphædd og faktiska upphædd árini 2018 til 2020. At síggja til er skjalið ein yvirskipað meting av útreiðslum næstu trý árini.

Svarið frá Strandferðsluni er ónøktandi. Verkætlanin byrjaði í 2018, uttan at kostnaðarmeting er gjørd av verkætlanini, sum ger tað møguligt at halda kenda kostnaðin upp ímóti ætlaða kostnaðinum.

Fíggjarleiðarin fær virknan leiklut í verkætlanini frameftir.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at fyri at tryggja neyvari stýring frameftir, hevur Strandferðslan m.a. gjørt av, at fíggjarleiðarin fær ein virknan leiklut í fíggjarstýringini av verkætlanini, og altjóða viðurkendur prosjektleistur verður brúktur at stýra verkætlanini.

Landsstýrismaðurin vísir á, at samanumtikið hækkar bíleggingarskipanin tænastustøði stovnsins, og verður grundarlag fyri neyvum hagtalsgreiningum, sum kunnu brúkast til at rationalisera stovnin.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at KT-verkætlanin átti at verið boðin út á Keyps-portalinum, sáttmáli gjørdur við veitara fyri alla verkætlanina, og fíggjarstýring og verkætlanarstýring kundi verið betri. Fíggjarmálaráðið metir, at flestu viðurskifti eru komin í rættlag.

4.19 Strandfaraskip landsins, løgujáttan (LG 2020/203-0382)

Løgujáttanin er á høvuðskontu 3.38.2.02. Undirkonturnar eru Sandoyarskip og Eykabátur.

Sandoyarskip

Við eykajáttanarlóg desember 2019 vóru 10 mió.kr. játtaðar. Tilsamans eru 3,5 mió.kr. brúktar í 2019 og 5,2 mió.kr. í 2020, harav 3,6 mió.kr. til umvælingar.

Keypssáttmálin fyri Hasfjord er 521.000 USD.

Í august 2020 eru m.a. 949.924 kr. goldnar til P/f Mest fyri eina pumpu, har viðmerkt er, at Betri trygging skuldi gjalda 450 t.kr. fyri skaða á Hasfjord.

Í desember 2020 vísir Betri trygging á skaða á Hasfjord í Skopun, juni 2020. Sambært Betri trygging var einki krav móttikið, og sambært teirra sýnsmanni var umvælingar-kostnaðurin fyri skaðan mettur at vera undir sjálvsábyrgdina, ið er 500 t.kr., og boðar tryggingarfelagið frá, at tí verður málið ætlandi lokað áðrenn ársskiftið 2020. Tryggingarfelagið vísir á, at tó at skaðaumvælingin ikki kemur upp um sjálvsábyrgdina, eru klassaútreiðslurnar í sambandi við skaðan fevndar av tryggingini.

Strandferðslan hevur eftirsíðan fingið 7.197 kr. í endurgjaldi, sum er fyri eina rokning at sýna Hasfjord.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Strandferðsluni var umvælingarkostnaðurin minni enn eginábyrgdin, og er tí ikki fevndur av tryggingini.

Eykabátur

Í 2018 samtykti Løgtingið Ll. nr. 137/2018 “um at byggja eykabát til Strandfaraskip landsins”. Byggiútreiðslur kunnu í mesta lagi vera 34 mió.kr., og lógin fer úr gildi 31. desember 2021.

Roknskapar- og játtanartøl:

t.kr.

Eykabátur	2018	2019	2020	Tilsamans
Keyp av vørum og tænastum	0	136	219	355
Keyp av útbúnaði, netto	0	0	1	1
Leiga, viðlíkahald og skattur	0	0	15	15
Ymsar rakstrarútreiðslur	0	-136	-235	-371
Bygging og løguframleiðsla	0	23.728	11.947	35.675
Tilsamans	**0**	**23.728**	**11.947**	**35.675**
Játtan	*16.000*	*23.728*	*10.272*	*34.000*
Flutt til næsta ár	*16.000*	*10.272*	*0*	
Flutt frá síðsta ár		*16.000*	*10.272*	

Báturin kostaði 1,7 mió.kr. meira, enn játtað er í verklagslógini. Strandferðslan hevur greitt frá, at báturin bleiv dýrari orsakað av klassakrøvum, og tí at eyka myndatól vóru keypt.

4.20 KT Landsins (LG 2020/203-0383)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá KT Landsins, fyri m.a. at kanna, um stovnurin hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Játtanin til KT Landsins er á høvuðskontu 3.38.3.19. KT Landsins er skipað sum deild undir Gjaldstovuni, og hevur felagsfyrisiting saman við Gjaldstovuni og Talgildu Føroyum. Gjaldstovan tekur sær av bókhaldi, hýsing, leiðslu, trygd o.a. Starvsfólkini hjá KT Landsins taka sær av kjarnuuppgávunum, sum hava við KT-infrakervið at gera.

KT Landsins hevur til endamáls at virka fyri skynsamari og tryggari KT-nýtslu í almennu fyrisitingini.

KT Landsins hevur eitt Brúkararáð, ið hevur sum høvuðsuppgávu at ráðgeva leiðsluni innan skipan og stýring av Landsneti, herundir vavi av tænastum, prísáseting, bygnaðarligum viðurskiftum, útveiting og KT-trygd. Aðalráðini hava hvør sín lim, kommunurnar ein, stovnar undir Løgtinginum ein og KT Landsins tríggjar. Ráðið hevur mánaðarligir fundir við fastari skrá.

Sambært upplýsingum úr fíggjarlógini vóru um 2700 brúkarar á Landsneti við ársenda 2019. 12 fólk starvast hjá KT Landsins. Deildarstjórin á KT Landsins vísir til stjóran á Gjaldstovuni, sum er stovnsleiðari.

Roknskaparviðurskifti

Játtanin til KT Landsins er nettojáttan. Roknskapartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir	3.455	3.253	3.585	3.641	4.678
Keyp av vørum og tænastum	17.334	17.704	17.919	20.160	21.223
Keyp av útbúnaði	666	132	365	1.889	2.275
Leiga, viðlíkah. v.m.	0	5	2	2	4
Søla av vørum og tænastum v.m.	-18.122	-17.574	-18.458	-22.193	-24.421
Innanh. fl. ml. alm. stovnar (útr)	1.187	775	878	868	836
Tilsamans	**4.520**	**4.296**	**4.291**	**4.365**	**4.594**
Játtan, netto	*4.540*	*4.300*	*4.315*	*4.417*	*4.538*

Nettojáttanin hevur seinastu fimm árini ligið ímillum 4,3 mió.kr. og 4,5 mió.kr. KT Landsins fær inntøkur av at selja ella víðarifakturera vørur og tænastur til almennar stovnar. Játtanin til inntøkur var 17 mió.kr. í 2020.

Roknskaparreglugerðin ikki dagførd.

KT Landsins hevur ikki sjálvstøðuga roknskaparreglugerð. Gjaldstovan hevur eina roknskaparreglugerð, sum er góðkend av Fíggjarmálaráðnum í 2001, og sum ikki er dagførd síðani.

Felagsrakstur

KT Landsins rindar Gjaldstovuni 67 t.kr. um mánaðin fyri felagsrakstur. Í 2017 roknaði Gjaldstovan út, hvussu nógv orka varð brúkt til KT Landsins. Gjaldstovan heldur, at størri orka verður brúkt til KT Landsins nú. Umframt at KT Landsins rindar fast gjald til felagsrakstur, rinda tey eisini aðrar útreiðslur, sum ikki eru íroknaðar, so sum viðlíkahald og starvsfólkadagar, býtt í mun til starvsfólkatalið.

Keyp av vørum og tænastum

Sambært KT Landsins fylgir stovnurin rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um keyp av vørum og tænastum. Biðið verður um tilboð frá minst 2 veitarum ella verður boðið út um Keypsportalin.

Tá ið talan er um ávísar KT-veitarar, er stovnurin meira ella minni bundin av at keypa frá teimum. M.a. liggja fleiri stórar telduskipanir á P/f Elektron og aðrir veitarar, m.a.

P/f Formula hava latið stórar skipanir. Tað er trupult at biðja um tilboð frá øðrum, tá ið onkur meirveiting skal keypast til hesar skipanir.

KT Landsins keypir javnan teldur, sum verða seldar víðari til almennar stovnar, og leggur vanliga umsitingargjald á. Keypini verða boðin út á Keypsportalinum. Teldurnar, sum ikki eru seldar, verða lagdar á goymslu. KT Landsins telur goymsluna hvønn mánað. Goymsluvirðið var 400 t.kr. við árslok 2020.

KT-loysn ikki boðin út.

Í 2020 hevur KT Landsins rindað 1,5 mió.kr. til P/f Formula fyri eina Darktrace loysn (tilgjørt vit) uttan at uppgávan er boðin út. Sambært Gjaldstovuni lýkur Darktrace krøvini, sum Gjaldstovan setti, og Gjaldstovan hevur ikki funnið aðra líknandi skipan. Gjaldstovan samráddist við Darktrace, og Formula kom við í myndina, tá ið samráðingarnar vóru lidnar. Darktrace ger ikki sáttmálar beinleiðis við kundar, men gjøgnum millumhandlara. Endaligi prísurin bleiv umleið 3 mió.kr. fyri eitt fýra ára tíðarskeið, og sambært Gjaldstovuni er tað munandi lægri, enn tá ið samráðingarnar byrjaðu.

Ognaryvirlit

Gjaldstovan hevur yvirlit, har innbúgv er skrásett fyri hvørt rúm, og yvirlitið verður dagført eina ferð um árið. Gjaldstovan hevur eisini útgreinað yvirlit yvir teldur og telefonir, sum verður dagført so hvørt. Yvirlitini fevna eisini um KT Landsins.

Lønarumsiting

KT Landsins hevur ikki egnar reglur um lønarumsiting, men nýtir reglurnar hjá Lønardeildini hjá Fíggjarmálaráðnum. KT Landsins fylgir eisini setanarpolitikki landsins. Landsgrannskoðanin kannaði tvey starvsfólkamál og hevði onkran spurning.

KT Landsins hevur saman við Gjaldstovuni reglugerð um arbeiðstíð og tíðarskráseting. Starvsfólkini skráseta nær tey koma og fara, feriur o.a. Sambært innanhýsis reglunum kunnu starvsfólk eiga upp til 32 tímar á ella skylda í mesta lagi 16 tímar.

Inntøkur

KT Landsins fær endurgjøld fyri útlegg fyri teldur, sambond, veitarauppgávur, brúkaragjøld og teldugjøld. Sambært Gjaldstovuni eru gjøldini roknað út frá kostnaðinum av at reka Landsnet. Afturvendandi rokningar frá veitarum av KT-tænastum verða víðarifaktureraðar til stovnarnar, sum eru limir í Landsneti. Skipanin, sum verður nýtt til at víðarifaktureað við, verður nevnd Billing. Gjøldini verða trekt sjálvvirkandi, og stovnarnir í Landsneti fáa fráboðan nakrar dagar frammanundan um, hvussu nógv verður trekt. Príslistin er seinast dagførdur í 2017.

Stakar rokningar, t.d. rokningar fyri eykatænastur, sum KT Landsins fær frá KT-veitarum, og sum viðvíkja øðrum stovnum, verða faktureraðar víðari til stovnarnar gjøgnum debitorskipanina. Gjaldstovan kunnaði um, at bert í undantaksførum rinda stovnarnir ikki til tíðina.

KT-viðurskifti

KT Landsins hevur ikki egnar skipanir, sum hava stóran týdning fyri onnur, men hevur vegna Landsnet gjørt veitaraavtalur við m.a. P/f Formula og P/f Elektron um ávísar skipanir og tænastur til almennar stovnar. P/f Formula og P/f Elektron umsita trygdartiltøkini av teimum skipanunum og tænastunum, og tey verða grannskoðaði av privatum grannskoðarum.

Teldurnar hjá KT Landsins eru undir trygdartiltøkunum hjá Landsneti og KT-trygdarfólk á Gjaldstovuni kannar, um KT-viðurskiftini eru í lagi. Avtala er gjørd millum Gjaldstovuna og uttanhýsis grannskoðara um at grannskoða innanhýsis KT-viðurskifti og KT-stýring hjá KT Landsins í mun til tænastuveitingarnar til stovnarnar, sum nýta Landsnet.

KT Landsins umsitur ikki viðkvæmar upplýsingar.

4.21 Akstovan (LG 2020/203-0384)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Akstovuni, fyri m.a. at kanna, um stovnurin hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Endamálið hjá Akstovuni er at umsita akfarseftirlit, skráseta og umskráseta akfør, stíla fyri ástøðiligum og verkligum koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, krevja inn vegskatt, skrásetingargjøld og onnur avgjøld á motorakførum. Akstovan er eisini við í fyrireikandi lógararbeiði í sambandi við broyting í ferðslulóg og kunngerðum. 23 fólk starvast á stovninum.

Akstovan skrásetir ikki, hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til tað, sum stovnurin avrikar, men virksemið er býtt í arbeiðsøkir, so sum fyrisiting, avgreiðsla, sýn og koyrikort-royndir.

Akstovan hevur lýst málini hjá stovninum í innanhýsis skjali og fylgir við, at málini verða nádd. Fíggjarmálaráðið hevur fingið avrit av skjalinum. Akstovan hevur við millumbilum fund við Fíggjarmálaráðið um m.a. virksemið hjá stovninum.

Roknskaparviðurskifti o.t.

Játtanin til Akstovuna er nettojáttan. Virksemið verður fíggjað við játtan í fíggjarlóg og inntøkum av tænastuveitingum o.ø.

Roknskapartøl 2016 til 2020, høvuðskonta 3.38.4.01:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir	7.797	8.136	8.682	9.040	9.394
Keyp av vørum og tænastum	4.490	4.692	5.086	4.817	5.477
Keyp av útbúnaði	785	839	823	1.090	1.204
Leiga, viðlíkah., skattur o.a.	953	1.084	1.361	1.580	1.339
Søla av vørum og tænastum	-215	-220	-217	-202	-226
Kravd gjøld, bøtur, avgjøld o.a.	-15.214	-15.640	-16.514	-16.959	-17.097
Tilsamans	**-1.403**	**-1.109**	**-778**	**-635**	**90**
Nettojáttan	*-1.000*	*-1.000*	*-776*	*-568*	*369*

Roknskaparreglugerðin er seinast dagførd í 2016, og góðkend av ráðnum. Sambært Akstovuni er ætlanin at dagføra roknskaparreglugerðina.

Stovnurin biður um tilboð, tá ið vørur og tænastur, dýrari enn 50 t.kr., verða keyptar.

Starvsfólkini nýta arbeiðsbúnar frá Akstovuni og sambært leiðsluni verða teir bert brúktir til arbeiðis. Tá starvsfólk fara úr starvi, skulu búnarnir latast aftur. Landsgrann-skoðanin mælti til at áseta reglur um fríar arbeiðsbúnar, t.d. í roknskaparreglugerðina, næstu ferð hon verður dagførd.

Landsgrannskoðanin kannaði nakrar ferðauppgerðir. Í tveimum førum var endurgjaldið fyri ferðaútreiðslur ov stórt. Sambært Akstovuni var talan um feil, og munurin verður endurrindaður.

Akstovan hevur sjey peningastovnskontur, og allar eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Tær verða javnan tømdar í landskassan. Akstovan hevur netbanka til peningastovnskonturnar, men sambært stjóranum hava starvsfólk bert lesiatgongd. Konturnar verða stemmaðar av.

Akstovan hevur eitt gjaldkort. Landsgrannskoðanin mælti til, at kortið í minst møguligan mun verður nýtt til annað enn til keyp á netinum, og at allar rokningar sum kunnu, verða rindaðar um rokningaverkgongd.

Akstovan hevur fýra leigumál um leigu av hølum: Á Sandi, í Saltangará, í Sørvági og á Smyrilsvegi í Havn. Hølini á Smyrilsvegi verða brúkt til goymslu, meðan hini verða brúkt til at sýna akfør. Harumframt leigar Akstovan seg inn í stórbilaverkstøð at sýna stór akfør, tá ið tørvur er á tí. Akstovan hevur ikki gjørt formligan sáttmála um hesi leigumál, men rindar 3 t.kr. fyri hvørja ferð. Landsgrannskoðanin hevur kannað, at goldna leigan er sambært sáttmálunum.

Bygningar og bilar eru skrásettir í Búskaparskipan landsins. Akstovan eigur fimm bilar. Akstovan hevur dagført yvirlit yvir ognir við virði omanfyri 4 t.kr.

Lønir

Landsgrannskoðanin kannaði trý starvsfólkamál. Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar, enn tær nevndar niðanfyri.

Avloysarastarv ikki lýst leyst.

Eitt avloysarastarv var ikki lýst leyst. Sambært stjóranum var orsøkin, at tað var átrokandi at fáa ein avloysara. Stjórin helt, at tað fór at taka ov langa tíð at søkja eftir avloysara, tí ávísar arbeiðsuppgávur skuldu loysast. Akstovan hevði umsókn liggjandi frá einum, sum hevði søkt av sínum eintingum, og umsøkjarin var settur í avloysarastarvið. Sambært stjóranum hevur Akstovan ikki sett onnur størv, uttan at lýsa tey leys.

Í juni 2021 hevur landsstýrismaðurin mint Akstovuna á at fylgja setanarpolitikki landsins um at øll størv, eisini tíðaravmarkaði størv, skulu lýsast leys alment.

Starvsfólk á Akstovuni nýta Totalview at skráseta tíðina, nær tey koma og fara. Sambært stjóranum er vanligt, at starvsfólkini arbeiða yvir av og á, og tí hava flestu starvsfólk tímar tilgóðar. Tey kunnu eiga upp til 100 tímar, ella skylda upp til 40 tímar. Meginreglan er, at meirsaldur verða avspákaðar, men um saldurnar eru stórar, kemur fyri, at tær verða goldnar út. Landsgrannskoðanin hevur hugt eftir tímasaldunum pr. 26. januar 2021. Eitt starvsfólk skyldaði meira enn 40 tímar.

Landsstýrismaðurin hevur í juni 2021 mælt Akstovuni til at nýta ásettu mørkini fyri +/- tímar í rundskrivinum um at tíðaravmarka lønir í landsroknskapinum.

Inntøkur

Meginparturin av virkseminum hjá Akstovuni verður fíggjað við tænastugjøldum, sum Akstovan krevur inn, og sum eru ásett í Ferðslulógini.

Tænastugjøld ikki broytt í nógv ár.

Tænastugjøldini hava verið óbroytt í fleiri ár; sambært stjóranum eru nøkur ikki broytt síðani 1992. Útrokning lá sum grundarlag undir upphæddunum upprunaliga. Av tí at tænastugjøldini eru ásett í lógini, er torført at broyta tey. Sambært stjóranum eru gjøldini ov lág í mun til veruliga kostnaðin av at veita tænastuna.

Tænastugjøldini verða goldin um kassan, antin við reiðum peningi, við gjaldkorti, ella Akstovan leggur út fyri tinglýsing og veðhavaralýsingar fyri viðskiftafólk, fyri síðani at krevja tey inn aftur. Tað er gjald sambært §§ 6 og 7 í K. nr. 1/2017 “um skráseting av hýru- og skúlavognum uttan skrásetingargjald”. Serstøk konta er stovnað til tinglýsing og veðhavaralýsingar, sum verður stemmað av.

Kassaeftirlit

Landsgrannskoðanin var á ófráboðaðum kassaeftirliti á Akstovuni í november 2020. Einki var at finnast at.

KT-viðurskifti

Teldurnar hjá Akstovuni eru knýttar í Landsnet. Akstovan luttekur í "trygdarpakkanum" hjá KT-Landsins. Felagsskipanirnar í KT-landsins fylgja trygdartiltøkunum hjá teimum.

Akstovan hevur aðrar skipanir, sum hava stóran týdning fyri stovnin og landið sum heild, m.a akfarsskrá, koyrikortskrá og vegskattaskrá. Akstovan hevur eisini aðrar skipanir, so sum sýnsskrá og kassaskipan. Skipanirnar eru mentar til Akstovuna, og Akstovan eigur tær.

Stovnar sum Akstovan skulu skoðast árliga av KT-grannskoðara við viðkomandi royndum og útbúgving, og sum Fíggjarmálaráðið hevur góðkent. KT-grannskoðari skoðaði skipanirnar og KT-kervið í 2020. KT-grannskoðarin vísti á fleiri veikleikar, harav nakrir eru álvarsligir og hava høga raðfesting. Sambært KT-grannskoðaranum eiga teir høgt raðfestu veikleikarnir at fáast í rættlag beinanvegin, ella so skjótt tilber. Stjórin kunnaði um, at tey arbeiða við at bøta um veikleikarnar. Landsgrannskoðanin mælti til, at veikleikarnir, sum KT-grannskoðarin vísir á, verða fingnir í rættlag, so skjótt tilber.

KT-grannskoðarin vísti á fleiri veikleikar.

Landsstýrismaðurin hevur í juni 2021 kunnað um, at fleiri av ávístu veikleikunum eru loystir, men framvegis verður arbeitt við at fáa í rættlag aðrar veikleikar. Árliga skoðanin fyri 2021 er í gongd.

4.22 Lønarhæddaravgjald (LG 2020/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lønarhæddaravgjald, høvuðskonta 20.52.2.10, m.a. fyri at kanna, um TAKS hevur sett í verk nøktandi og virkið innan-eftirlit.

Lønarhæddaravgjald er álagt virksemi, ið er frítikið at gjalda meirvirðisgjald. Ll. nr. 193/1993 "um lønarhæddaravgjald" er galdandi fyri virkir, sum móti samsýning lata heilsu-, tryggingar- og peningastovnstænastur.

Lønarhæddaravgjald verður roknað fyri hvønn ársfjórðing, og fellur til gjaldingar í seinasta lagi ein mánað og 10 dagar eftir, at avgjaldstíðarskeið er endað. Er avgjald ikki goldið til tíðina, skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjaldsdegnum at rokna.

Sambært lógini kann Landsstýrið áseta nærri reglur fyri uppgerð av avgjalds-grundarlagnum. Landsstýrið hevur ikki ásett nærri reglur.

Rundskriv nr. 2/1995 "um lønarhæddaravgjald", sum liggur á heimasíðuni hjá TAKS, er ikki dagført, tó at m.a. avgjaldsprosentið er broytt. TAKS ætlar at strika rundskrivið.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskapartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Toll- og nýtslugjøld	-36.499	-37.377	-37.858	-38.808	-42.011
Avskriving/avseting	0	0	41	860	5
Bøtur og haldáleggjan	-4	-2	-3	-2	-3
Morarentur	-79	-78	-75	-29	-19
Tilsamans	**-36.582**	**-37.457**	**-37.895**	**-37.979**	**-42.027**
Játtan	*-35.000*	*-37.000*	*-37.000*	*-39.000*	*-38.000*

Í 2020 er inntøkan væl hægri enn játtanin. Í góðkenningini av mánaðarroknskapunum mars 2020 og seinni, hevur stjórin viðmerkt, at meirinntøkurnar eru orsakað av rætting fyri eldri ár.

Í 2020 eru meir-inntøkur orsakað av rættingum

Virkini skeivar uppgerðir fyri árini 2016 til 2019

Feilur í skipanini at útrokna lønarhæddaravgjaldið hevur havt við sær, at ikki øll inntøka hjá virkjum í heilsuvinnuni er roknað við í avgjaldsgrundarlagið. Virkini fingu tí skeivar uppgerðir fyri 2016, 2017, 2018 og 2019. TAKS roknar lønarhæddaravgjaldið fyri 2020 endaliga, tá ið skattaálíkningin er framd, í seinasta lagi 1. oktober 2021.

TAKS heintar eftirstøður av lønarhæddaravgjaldi inn um IK-skipanina. 31. desember 2018 var eftirstøðan um 1 mió.kr., og 31. desember 2019 var eftirstøðan 92 t.kr. Í 2019 avskrivaði TAKS 860 t.kr. av eftirstøðu, ið ikki kundi heintast inn hjá einum virki.

Skráseting av virkjum

Øll virkir eru skrásett við V-tali í Vinnuskránni, har kotur stýra skyldunum hjá virkjunum. Avgerandi fyri at lønarhæddaravgjald verður kravt er, at virkir eru skrásett rætt í Vinnuskránni. Tríggjar ymiskar kotur fyri lønarhæddaravgjaldi stýra, hvør skal gjalda, og hvussu nógv.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað yvirlitið yvir fyritøkur, ið eru skrásettar í Vinnuskránni at rinda lønarhæddaravgjald. Niðurstøðan er, at tað helst eru fleiri av skrásettu fyritøkunum, sum ikki áttu at verið skrásettar til lønarhæddaravgjald.

TAKS hevur kunnað um, at tey javnan ruddað upp í skrásetingunum. Virkir, ið hava boðað frá, at tey hava skyldu at rinda lønarhæddaravgjald, siga ikki altíð frá, tá ið tey gevast við virkseminum. Tá ið ein tíð er liðin, og TAKS sær, at einki virksemi er, strikar TAKS skylduna at rinda lønarhæddaravgjald.

Útrokning av lønarhæddaravgjaldi

Eftir hvønn ársfjórðing roknar útrokningarskipanin sjálvvirkandi lønarhæddaravgjaldið hjá teimum virkjum, sum eru skrásett við áðurnevndu kotum. Útrokningin verður gjørd við, at skipanin lesur ávísan teig í fyribilsskattaskránni, har fyribilsskrásett inntøka av egnum virki er skrásett.

Útrokningarskipanin lesur eisini samlaðu lønarupphæddina, ið er goldin um V-talið sama ársfjórðing, og roknar síðani 2,5% av ¼ av B-inntøkuni pluss 2,5% av útgoldnu lønunum sama tíðarskeið. Rokningar verða sendar virkjunum umvegis Gjaldstovuna.

Fyritøkur, sum reka tryggingarvirksemi og bankavirksemi, rinda ávikavist 10% og 12% av útgoldnum lønum.

Tá ið skattskylduga inntøkan er gjørd upp fyri undanfarið ár, eftirroknar útrokningarskipanin tølini og ger neyðugar rættingar av lønarhæddaravgjaldinum.

TAKS rættar ikki fyri gomul ár.

Í teimum førum Virkisdeildin hjá TAKS broytir áður gjørdar álíkningar, rættar TAKS ikki møguligt lønarhæddaravgjald, tí nýggj útrokning má gerast handligt.

Vinnudeildin, sum umsitur lønarhæddaravgjaldið, fær ikki boð frá Virkisdeildini, um ella hvussu nógv skattskylduga inntøkan hjá virkjum verður broytt eftirfylgjandi. Sambært TAKS hevur hækking av lønarhæddaravgjaldinum avmarkaðan týdning, av tí at gjaldið verður drigið frá sum útreiðsla í roknskapunum.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið mælir til, at TAKS broytir mannagongdirnar soleiðis, at Virkisdeildin frameftir boðar Vinnudeildini frá, tá broytingar verða gjørdar í skattskyldugu inntøkuni hjá virkjum, sum rinda lønarhæddaravgjald.

Feilur í útrokningarskipanini

Feilur í uppgerðum av heilsuvirksemi.

Í januar 2020 varð TAKS varugt við feil í útrokningarskipanini. Feilurin hendi av tí at B-inntøkurnar vóru skrásettar í øðrum teigi í skattaskipanini. Tá ið útrokningarskipanin

ikki var broytt tilsvarandi, var ov lítið kravt inn í lønarhæddaravgjaldi frá virkjum, sum reka heilsuvirksemi.

Feilir vóru í rokningunum hjá fleiri virkjum. TAKS hevur ikki talt upphæddirnar saman, og veit heldur ikki, hvussu stórar upphæddirnar eru fyri hvørt árið.

5,4 mió.kr. stava frá rættingum.

Sambært TAKS stava tær 5,4 mió.kr. í meirinntøkum í 2020 í høvuðsheitum frá rættingum av uppgerðum fyri 2016, 2017 og 2018. TAKS sendi virkjunum krøv í februar og mars 2020. TAKS hevur eisini gjørt rættingar í fyribilsupphæddunum 2020, sum verða javnaðar, tá ið álíkningin er gjørd fyri árið.

Stakroyndir

Landsgrannskoðanin hevur kannað nakrar útrokningar av lønarhæddaravgjaldi hjá peningastovnum og tryggingarfyritøkum. Einki var at finnast at.

Landsgrannskoðanin kannaði eisini nakrar avrokningar hjá fyritøkum í heilsuvinnuni, eftir at TAKS hevur gjørt rættingar í januar 2020.

Nakrar fyritøkur hava MVG-skyldugt virksemi, umframt lønarhæddaravgjaldsskyldugt virksemi og virksemi, sum hvørki er lønarhæddaravgjaldsskyldugt ella MVG-skyldugt afturat. Tá ber ikki til út frá skrásetingunum hjá TAKS at kanna, um uppgerðirnar eru rættar. Útrokningin skal verða grundað á býtið millum virksemi, yvirskot ella hall.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS ikki javnan tryggjar, at feløgini, sum hava blandað virksemi, hava rætt býtið ímillum avgjaldsskylduga partin og restina av virkseminum, umframt avlop ella hall. Tað er ikki óvanligt, at lutfallið millum virksemini broytist ár frá ári.

Í februar 2021 kunnaði TAKS um, at tað ikki eru nógv virkir, ið hava blandað virksemi, og er býtið skeivt hjá onkrum, er tapið fyri landskassan avmarkað, tí fyritøkurnar í nógvum førum eisini rinda MVG. Sambært TAKS hevur stovnurin fyri nøkrum árum síðani kannað ávísa vinnu í sambandi við blandað virksemi, og stovnurin er nú í holt við eina umfatandi kanning av býtinum hjá øðrum virkjum.

TAKS vísti á, at stovnurin hevur ikki orku til at kanna øll virkir, men ger kanningar so hvørt sum orka og raðfesting loyvir tí.

Innaneftirlit

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum umrøtt, at TAKS brúkar eina talgilda kekklistaskipan at stýra afturvendandi vanligu uppgávunum innan ásettar freistir. Saman við eftirlitinum við játtanini er kekklistaskipanin ein týðandi partur av innaneftirlitinum.

Ein eins týðandi partur av innaneftirlitinum er tey tiltøk, sum leiðslan og starvsfólk seta í verk og fremja fyri at røkka málinum um, at raksturin er málsøkin og effektivur, at roknskapurin er rættur og álítandi, og at lógir og reglur eru hildnar.

Mælt til at seta í verk innaneftirlit.

TAKS hevur ikki havt serskilt eftirlit við lønarhæddaravgjaldinum. Landsgrannskoðanin mælti til at seta í verk virkið innaneftirlit, sum kann finna feilir, rætta teir, og forða fyri sviki.

TAKS hevur greitt frá, at tá ið sjálvvirkandi koyringarnar av lønarhæddaravgjaldinum eru í november, fær Vinnudeildin fráboðan um tað eina viku frammanundan. Ætlanin við fráboðanini er, at TAKS kann kanna, um uppgerðirnar eru rættar, men tá ið feilur hevur verið í skipanini við sjálvvirkandi uppgerðum í trý ár, hevur eftirlitið ikki verið nøktandi. Sambært TAKS hava tey kannað nógvar uppgerðir í 2020, og ætla at hava neyvari eftirlit við sjálvvirkandi uppgerðunum í framtíðini.

Eftirlitið hevur ikki verið nøktandi.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin víst á tað, sum TAKS áður hevur svarað Landsgrannskoðanini, at orka er ikki til eftirlit við øllum, men stakroyndir verða gjørdar. Sjálvsagt kann eftirlitsarbeiðið betrast, men tað verður ongantíð møguligt fult og heilt at forða fyri sviki, og at fanga ella steðga øllum mistøkum.

Tað týdningarmesta er, at eftirlitið sannlíktger, at avroknaðu lønarhæddaravgjøldini eru røtt. Í samskifti við TAKS fer Fíggjarmálaráðið at tryggja, at eitt minstakrav er fyri eftirliti við øllum skattum og avgjøldum, herundir við lønarhæddaravgjaldinum.

Fíggjarmálaráðið fer at tryggja minstakravi fyri eftirlit.

Sambært landsstýrismanninum ætlar Fíggjarmálaráðið, at frameftir verður kunning um eftirlit fastur partur av skránni á regluligu stovnsfundunum við TAKS.

4.23 Loyvisgjald á alivinnu (LG 2020/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 20.52.2.14 “Loyvisgjald á alivinnu”. Alivinnan rindar loyvisgjald eftir Ll. nr. 64/2014. Sambært átekning í fíggjarlógini verður staðfesti mánaðarligi miðalspotprísurin í evrum fyri kruvdan laks sambært Fish Pool Index brúktur til útrokning av avgjaldsgrundarlagnum. Umrokningarkursurin er 746,038 danskar krónur fyri hvørjar 100 evrur.

Frá 1. januar 2019 er avgjaldið ávikavist 5%, 2,5% og 0,5% av miðal altjóða marknaðarvirði á ávikavist minst 36 kr./kg, 32 kr./kg og undir 32 kr./kg.

Avgjaldsgrundarlagið er nøgdin av tiknum alifiski falda við miðalprísinum í Fish Pool Index tann mánaðin, tøkan er framd.

Alifyritøkurnar skulu upplýsa fyri TAKS: tíðarskeið uppgerðin er fyri, vekt á kruvdum alifiski, miðal altjóða marknaðarprís fyri mánaðin, úrslit at gjalda tøkugjald av, og prosentsats og krónur fyri tøkugjaldið.

Upplýsingar um mánaðarligu tøkuna av alifiski skulu sambært lógini latast TAKS innan 15. í mánaðinum aftaná tøkuna. Eru upplýsingarnar ikki latnar rættstundis, verður sekt á 1.000 kr. løgd afturat tøkugjaldinum fyri avvarðandi mánað, og eftir gjaldsfreistina skulu 0,7% roknast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjaldsdegnum at rokna.

Umsiting og eftirlit

TAKS hevur ikki skrivligar mannagongdir fyri eftirliti av, um loyvisgjald, sum fyritøkur geva upp, er rætt. Kundatænastan skrásetir uppgerðirnar, bókhaldsdeildin bókar og ger møguligar renturokningar.

Kundatænastan kannar, at uppgerðin sær røtt út, t.e. rættur prísur og rættur avgjaldssatsur. Tá ið árið er av, samanlíknar TAKS tølini við almennu upplýsingarnar um tøku, fyri at tryggja at øll tøka er uppgjørd.

Einki eftirlit við uppgerðunum av loyvisgjaldi.

TAKS hevur ikki gjørt annað eftirlit viðvíkjandi loyvisgjaldi, enn at starvsfólk hyggur at skrásettu uppgerðunum. Eingi sjálvvirkandi eftirlit eru við, at t.d. prísurin er rættur, at avgjaldið er rætt roknað, ella at samlaða kilotalið av laksi falda við prísinum gevur rætt loyvisgjald. Samlaðu inngjøldini fyri loyvisgjøld verða flutt til Búskaparskipan landsins eina ferð um samdøgrið.

Roknskapartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Tøkugjald á alivinnu	-160.881	-158.108	-136.361	-139.996	-81.813
Játtan	*-108.000*	*-138.000*	*-160.000*	*-164.000*	*-175.000*

Loyvisgjaldsinntøkurnar eru lægri í 2020 enn undanfarin ár, orsakað av lágum prísum; inntøkurnar eru 93,2 mió.kr. lægri, enn játtanin í fíggjarlógini. Seinasta ársfjórðing 2020 lá miðalprísurin niðan fyri 32 kr./kg., sum ger, at loyvisgjaldið er 0,5%.

TAKS broytti í februar 2021 loyvisgjøldini 2020 hjá fyritøku við 3,7 mió.kr., eftir umbøn frá fyritøkuni. Fyritøkan helt seg ikki hava skyldu at gjalda loyvisgjøld, tí fiskurin var undantikin avgjaldi sambært § 2, stk. 5, í lógini, tá ið hann ikki kundi seljast fyri marknaðarvirði.

TAKS var ikki samt við fyritøkuna, um at fiskurin ikki var seldur fyri marknaðarvirði, og fyritøkan hevur kært avgerðina til Skatta- og avgjaldskærunevndina.

TAKS hevur afturført inntøkuna, tí er upphæddin ikki við í landsroknskapinum, ella skuldskrivað fyritøkuni.

Í juni 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið er av somu áskoðan sum TAKS, at ítøkiliga málið er rættiliga prinsipielt. Málið er ikki endaliga avgreitt enn av Skatta- og avgjaldskærunevndini.

Í nøkrum førum hava alifyritøkur sent TAKS nýggjar uppgerðir við rættingum. T.d. hevur eitt virki rættað somu uppgerð fleiri ferðir, og munurin er fleiri mió.kr.

Feilir kundu verið funnir, um eftirroknað var.

Í onkrum føri hevur virki sent rættaða uppgerð, tí feilur var í fyrru uppgerðini, sum TAKS kundi havt uppdagað, um stovnurin hevði eftirroknað uppgerðina.

TAKS hevur ikki rættað uppgivnan kilopris á laksi, tó at uppgivni prísurin ikki svarar til miðal altjóða marknaðarvirði.

TAKS hevur enn ikki gjørt nakað eftirlit innan lógina um loyvisgjøld, men tað verður tikið við í raðfestingini fyri, hvussu eftirlitsorkan hjá TAKS verður brúkt. TAKS vísir á, at stovnurin spyr vanliga ikki fyritøkurnar, hví tær gera broytingar í áður innsendum uppgerðum.

TAKS eftirroknar ikki uppgerðirnar, sum virkini senda inn.

TAKS eftirroknar ikki hvørja einstaka uppgerð, og tískil hevur TAKS ikki broytt nakað í innsendu uppgerðunum.

Landsgrannskoðanin hevur samanhildið miðalprísirnar 2018 til 2020, ið virkini hava givið upp til TAKS, við miðalprísirnar hjá Fish Pool Index. Í nógvum førum er munur á prísunum, bæði pluss og minus.

TAKS vísir á, at talan um feilir, ið ganga báðar vegir, og tá ið samanlíknað verður við samlaðu inntøkurnar fyri 2018, 2019 og 2020, heldur TAKS, at talan er ikki um stórar feilir, tá ið talan er um 0,025%.

TAKS hevur ábyrgd av, at inntøkurnar sum stovnurin umsitur, eru rættar, og Landsgrannskoðanin er ikki samd við TAKS, at feilirnir verða minni, tá ið teir ganga báðar vegir.

Fíggjarmálaráðið heldur, at eftirlitið er ikki nøktandi.

Í juni 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fíggjarmálaráðið tekur undir við, at umsiting av og eftirlit við loyvisgjøldum ikki er nøktandi, og í so máta ger tað ongan mun, at feilir ganga báðar vegir. Fíggjarmálaráðið heitir á TAKS um at fáa umsiting og eftirlit í rættlag.

4.24 Onnur gjøld/avgjøld

4.24.1 Avgjald av kapitaleftirlønum (LG 2017/220-0521)

Eingin vissa fyri, at øll gjalda.

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingini hjá TAKS av avgjaldi av kapitaleftirlønum. Samanumtikið virkaði umsitingin, at tryggja at rættar upphæddir vóru goldnar, væl. Tá ið stjórin góðkendi mánaðarroknskapir, váttaði hann mótvegis Fíggjarmálaráðnum, at allar inntøkur vóru við, og at roknskapurin var rættur og álítandi. Landsgrannskoðanin vísti á, at TAKS onga vissu hevði fyri, at øll, sum skuldu rinda avgjald, rindaðu landskassanum avgjøldini.

Ynskiligt at fáa váttan frá grannskoðara.

Landsgrannskoðanin hevur áður umrøtt spurningin, um at grannskoðarin hjá eftirlønarveitarum árliga kundi váttað, at mannagongdir og bókhald vóru hóskandi skipað við atliti at útrokning og avrokning av avgjøldunum. Sambært TAKS høvdu tey í longri tíð ynskt at fingið tað í lóggávuna, men komið var ikki á mál.

Landsstýrismaðurin kunnaði um, at hann ætlaði at fáa tað inn í lógina, næstu ferð rentutryggingarlógin varð broytt.

Enn er eingin broyting gjørd í rentutryggingarlógini.

4.24.2 Brennioljugjald (LG 2019/220-0522)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av inntøkum av brennioljugjaldi og endurrindan av brennioljugjaldi til ávísar bátar og virkir. Inntøkurnar eru skrásettar á høvuðskontu 20.52.2.13 "Brennioljugjald" í landsroknskapinum og greinaðar á standardkontu 53 "Stuðul til vinnu" og standardkontu 61 "Skattur og avgjøld".

Høvuðstøl sambært landsroknskapinum 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Stuðul til vinnu	10.776	11.705	11.802	13.013	15.173
Skattur og avgjøld	-79.082	-79.503	-87.370	-88.875	-89.007
Tilsamans	**-68.306**	**-67.798**	**-75.568**	**-75.862**	**-73.834**
Játtan	*-68.000*	*-68.000*	*-65.000*	*-76.000*	*-75.000*

Heimild at krevja inn brennioljugjald er í Ll. nr. 179/1992 "um serligt avgjald á brenniolju", og nærri ásetingar um endurgjøld eru í K. nr. 23/2003 "um endurgjald av serligum oljuavgjaldi".

Tvey oljufeløg vóru skrásett hjá TAKS at avrokna oljuavgjøld. TAKS helt seg við vissu kunna siga, at tað vóru ikki fleiri, sum seldu olju.

Fyri at tryggja, at oljufeløgini góvu rætt upp, hevði TAKS til eina og hvørja tíð heimild at kanna vørur á goymslu, handilsbøkur og annað roknskapartilfar v.m. hjá feløgunum. Sambært TAKS høvdu tey nýtt heimildina fyri nógvum árum síðani.

Eftirlitið og eftirlitsorkan hjá TAKS var avmarkað sambært stovninum. TAKS raðfesti samlaðu eftirlitini út frá váðameting um vandan fyri feilum, avleiðingum av møguligum feilum v.m. TAKS helt ikki, at brennioljugjøld vóru av slíkum slagi, at vandin fyri feilum var stórur, og tískil var eftirlitsorka ikki nýtt til økið.

Ikki nøktandi, at TAKS ikki tryggjar at gjøldini eru røtt.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS ikki tryggjaði sær, at oljufeløgini góvu rætt upp, t.d. við at nýta heimildina í § 3a í lógini.

Ynskiligt at fáa váttan frá grannskoðara, at gjøldini eru rætt avroknað.

Landsgrannskoðanin hevur áður reist spurningin um at áleggja feløgum, sum krevja inn avgjøld vegna landskassan, at útvega grannskoðanarváttan frá sínum grannskoðarum um, at avroknaðu avgjøldini eru røtt. TAKS kunnaði um, at tey høvdu latið Fíggjarmálaráðnum málið um grannskoðanarváttan at seta á løglista.

Samanumtikið kundi Landsgrannskoðanin ikki sanna, at avroknaðu brennioljugjøldini vóru røtt. Nøktandi skjalprógv vóru ikki í skjalatilfarinum, og TAKS kundi ikki sanna rættleikan, tá ið stovnurin ikki hevði framt eftirlit hjá oljufeløgunum.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at gjøldini eru røtt.

Í august 2020 svaraði landsstýrismaðurin viðmerkingunum frá Landsgrannskoðanini: *"Álit er gott, men eftirlit er betri, verður tikið til. Men tað er ein sannroynd, at ov nógv eftirlit er ov kostnaðarmikið, bæði viðvíkjandi tilfeingi og upphæddum, og er neyvan gagnligt hvørki fyri land ella fyritøkur.*

Sum TAKS hevur svarað Landsgrannskoðanini, er orka ikki til eftirlit við øllum, men stakroyndir verða gjørdar. Sjálvsagt kann eftirlitsarbeiðið betrast, men tað verður ongantíð møguligt fult og heilt at forða fyri sviki, og at fanga ella steðga øllum mistøkum.

Spurningurin er so, um meiri orka skal nýtast til eftirlit við brennioljugjaldi. Tað týdningarmesta er, at eftirlitið sannlíktger, at avroknaðu brennioljugjøldini sannlíkt eru røtt. Í samskifti við TAKS fer Fíggjarmálaráðið at tryggja, at eitt minstakrav er fyri eftirliti við av øllum skattum og avgjøldum, herundir við brennioljugjaldinum.

Í hesum sambandi kann verða upplýst, at tað eru 2 feløg sum standa fyri brennioljugjaldinum. Eftirlitsfólkini koma at "kenna" feløgini.

Fíggjarmálaráðið er samt við TAKS um, at størri eftirlitsorka er ein spurningur um raðfesting innan játtanina, tí hevur TAKS fullan stuðul til átakið "null inntøpping". Átakið byrjaði á sumri 2016 og hevur ikki sligið fult ígjøgnum enn. Vónandi kann meira arbeiðsorka, vegna nýtslu av Vinnuglugganum, verða flutt frá inntøpping til økta eftirlitsorku."

Endurrindan

Um 325 virkir og bátar vóru í januar 2020 skrásett hjá TAKS at fáa oljuavgjald endurrindað. Í 2019 eru 13 mió.kr. endurrindaðar teimum, sum sambært § 2, stk. 3 og 4, í lógini, høvdu rætt til at fáa endurrindað brennioljugjaldið, ið tey høvdu goldið oljufeløgunum.

Virkini sendu umsóknir til TAKS um at fáa alt ella partvíst brennioljugjald endurrindað. Tá ið umsókn var gingin á møti, skrásetti TAKS viðkomandi virki við ávísari kotu í Vinnuskránni, og so leingi TAKS ikki fekk fráboðan um broyting, stóð skrásetingin óbroytt.

Landsgrannskoðanin bað TAKS um at fáa skjøl viðvíkjandi trimum feløgum, sum vóru skrásett at hava rætt til endurrindan av brennioljugjaldi. Landsgrannskoðanin fekk útskriftir av MVG-uppgerðum fyri juni og oktober 2019. Av tí at MVG-uppgerðirnar eru sendar TAKS umvegis Vinnugluggan, eru eingi undirskjøl við. Av hesari orsøk, og av tí at TAKS einki eftirlit hevði havt, kundi Landsgrannskoðanin ikki sanna, at endurrindanin av brennioljugjaldi var røtt.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at endurrindanin er røtt.

4.24.3 Framleiðslugjald (LG 2019/220-0522)

Í undanfarnu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. grannskoðan av framleiðslugjøldum. Framleiðslugjald verður kravt inn við heimild í Ll. nr. 19/2002 "um avgjald á framleiðslu og innflutningi". Sambært § 2 í lógini skal avgjald rindast til landskassan fyri vørur, ið við vinnuligum endamáli verða framleiddar, sum ásett í frumskjali 1 til Toll- og vøruskránna. Avgjaldið er eitt %-gjald av fakturaviði og ein upphædd pr. kg ella litur.

Framleiðsluvirkir gera avgjaldið upp hvønn mánað, og senda uppgerðina til TAKS í seinasta lagi 28. í mánaðinum eftir. Verður avgjald ikki goldið rættstundis, rinda virkini

0,7% í mánaðarligari rentu. TAKS hevur heimild at panta gjaldkomin krøv sambært § 3, stk. 4, í lógini.

TAKS kann játta afturrindan av avgjøldum, tá ið vørur verða útfluttar frá tolløkinum ella latnar til tær í § 8 í tolllógini nevndu sølubúðir. Eisini kann TAKS eftir umsókn endurrinda ella fráskriva framleiðslugjøld av vørum, sum verða oyðilagdar undir framleiðslu ella á framleiðsluøkinum treytað av, at vørurnar verða burturbeindar undir tolleftirliti.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at avroknaðu gjøldini eru røtt.

Landsgrannskoðanin kundi ikki sanna, at avroknaðu framleiðslugjøldini vóru røtt. TAKS raðfesti ikki økið, lítil orka var sett av til arbeiðið, og handligu mannagongdirnar tryggjaðu ikki, at øll, sum skuldu rinda framleiðslugjald, rindaðu. TAKS roknaði framvegis rentu av ov seint goldnum avgjaldi handligt.

TAKS kunnaði um, at tey fleiri ferðir høvdu víst Fíggjarmálaráðnum á, at neyðugt var við størri játtan fyri at nøkta eftirlitstørvin, serliga á tolløkinum.

TAKS var samt við Landsgrannskoðanina, at renturokningin átti at fáa hægri raðfesting og vónaði, at fíggjarligt rúm fór at vera fyri tí innan alt ov langa tíð.

Eftirlitini ikki nøktandi.

Landsgrannskoðanin helt, at eftirlitini við bryggjaríunum vóru ikki nøktandi. Tó at TAKS kundi endurrinda avgjald, treytað av at vørurnar eru burturbeindar undir tolleftirliti, var sambært TAKS ov lítil arbeiðsorka til, at eftirlit kundi vera við báðum bryggjaríunum.

Mannagongdir tryggjaðu ikki, at virkir í longri tíðarskeið ikki sluppu undan at senda inn uppgerðir, ella at virkir góvust við at rinda avgjald, tó at tey høvdu skyldu til tess. TAKS ætlaði at endurskoða mannagongdirnar.

Landsgrannskoðanin hevur áður reist spurningin um at áleggja feløgum, sum krevja inn avgjald vegna landskassan, at útvega grannskoðanarváttan frá sínum grannskoðara um, at avroknaðu avgjøldini eru røtt.

Í januar 2020 kunnaði TAKS um, at tað framvegis var arbeitt við málinum. Sambært TAKS hevði stovnurin fyri einum ári síðani biðið Fíggjarmálaráðið um at seta uppskotið um grannskoðanarváttan á løglista.

Í august 2020 vísti landsstýrismaðurin á, at ov nógv eftirlit var ov kostnaðarmikið, bæði viðvíkjandi tilfeingi og upphæddum, og var neyvan gagnligt, hvørki fyri land ella fyritøkur. Orka var ikki til eftirlit við øllum, men stakroyndir vóru gjørdar. Sjálvsagt kundi eftirlitsarbeiðið betrast, men tað fór ongantíð at vera møguligt fult og heilt at forða fyri sviki, og at fanga ella at steðga øllum mistøkum.

Tað týdningarmesta var, at eftirlitið gjørdi sannlíkt, at avroknaðu framleiðslugjøldini vóru røtt. Landsstýrismaðurin vísti eisini á, at tað vóru tvey feløg við sama eigara, sum stóðu fyri størsta partinum av framleiðslugjaldinum. Eftirlitsfólkini komu at "kenna" virkini. Stakroyndir vóru tó eisini gjørdar av hinum uppgerðunum.

Sambært TAKS hevði stovnurin gjørt av at gera eftirlit hjá framleiðsluvirkjunum í 2020, har bæði Tolldeildin og Virkiseftirlitið vóru við, og ætlanin var at uppraðfesta, at spillvøra verður skrásett og burturbeind undir tolleftirliti. Eisini vóru kekklistar og mannagongdir gjørdar og endurskoðaðar aftaná vitjanina av Landsgrannskoðanini.

Átakið "null inntøpping" ikki sligið ígjøgnum enn.

Fíggjarmálaráðið var samt við TAKS um, at størri eftirlitsorka var ein spurningur um raðfesting innan játtanina, tí hevði TAKS fullan stuðul til átakið "null inntøpping". Átakið byrjaði á sumri 2016 og var ikki sligið fult ígjøgnum. Vónandi kundi meira arbeiðsorka, vegna nýtslu av Vinnuglugganum, verða flutt frá inntøpping til økta eftirlitsorku.

4.24.4 Ferðaavgjald (LG 2019/220-0522)

Landsgrannskoðanin umrøddi í undanfarnu frágreiðing grannskoðan av inntøkum av ferðaavgjøldum. Sambært § 1 í Ll. nr. 37/1988 "um ferðagjald", skal fyri hvørt ferðafólk, sum verður flutt av landinum, rindast 65 kr. Ferðafólkaflutningsfeløg krevja avgjaldið inn og rinda tað til TAKS.

TAKS hevði ikki nýtt heimildina at kanna um upplýsingarnar, sum flutningsfeløgini lótu inn, vóru rættar. TAKS hevði seinast verið á eftirlitsvitjan hjá flutningsfeløgum í 2011.

Landsgrannskoðanin helt tað ikki vera nøktandi, at TAKS ikki tryggjaði sær, at flutningsfeløgini góvu rætt upp, t.d. við at nýta eftirlitsheimildina.

Landsgrannskoðanin hevur áður reist spurningin um at áleggja ferðaflutnings-feløgunum at útvega grannskoðanarváttan frá sínum grannskoðarum um, at avroknaðu ferðaavgjøldini eru røtt. TAKS kunnaði um, at stovnurin hevði latið Fíggjar-málaráðnum málið um grannskoðanarváttan at seta á løglista.

Ynskiligt at fáa váttan frá grannskoðara.

Samanumtikið kundi Landsgrannskoðanin ikki sanna, at avroknaðu ferðaavgjøldini vóru røtt, tá ið TAKS ikki hevði gjørt eftirlit hjá ferðaflutningsfeløgunum.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at avroknaðu gjøldini eru røtt.

4.24.5 Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at TAKS hevur boðað Fíggjar-málaráðum frá, at eftirlitsøkið í 2021 er styrkt við einum starvsfólki afturat.

Fíggjarmálaráðið ætlar, at frameftir verður kunning um eftirlit fastur partur av skránni á regluligu stovnsfundunum við TAKS.

Enn eru ongar broytingar gjørdar í ávikavist rentutryggingarlógini, lógini um serligt avgjald um brenniolju, lógini um avgjald á framleiðslu og innflutningi, og ferða-gjaldslógini. Fíggjarmálaráðið hevur ikki nakað nýtt at leggja afturat í málinum um grannskoðaraváttan

Einki nýtt í málinum.

5. Fiskivinnumál

5.1 Fiskimálaráðið (LG 2016/205-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Fiskimálaráðnum.

Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2011. Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fiskimálaráðið seint í 2020 hevur sent uppskot til nýggja roknskaparreglugerð til Fíggjarmálaráðið at góðkenna.

Landsgrannskoðanin vísti á, at onkur starvsfólk áttu nógvar tímar á. Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at samanumtikið er samlaði ágóðin í tímum lækkaður munandi í 2020. Í roknskapinum er peningur avsettur til økið.

Ágóði í tímum hjá tænastumanni, verður ikki goldin út.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at ein leiðari, ið er tænastumaður, eigur tímar á, svarandi til nakrar mánaðir. Fiskimálaráðið hevur spurt Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum, hvussu støðan er hjá arbeiðsgevaranum viðvíkjandi ágóðum í tímum hjá leiðarum og tænastumonnum. Lønardeildin hevur víst á semju við Tænastumannafelagið frá november 1995 har ásett er, at "*Tænastumaður uttan ásetta arbeiðstíð tilskrivar ikki yvirtíð og/ella frígongu. Tó kann tænastumaður, sum hevur ella hevur havt nógv meirarbeiði, í ein ávísan mun ráða yvir arbeiðstíðini til privata nýtslu".* Tí kann tað ikki koma upp á tal at útgjalda nakað í hesum sambandi.

5.2 Fiskiveiðieftirlitið (LG 2017/205-0342)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Fiskiveiðieftirlitinum

Fiskiveiðieftirlitið hevur nógvar dátur, sum hava týdning fyri stovnin sjálvan og fyri samfelagið sum heild. Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Vørn hevði arbeitt miðvíst fram móti at betra um KT-trygdina og at broyta mannagongdir á økinum. Stovnurin hevði sett eitt KT-trygdarráð, ið hevði fund eina ferð um vikuna. Vørn ætlaði at fáa arbeiðið liðugt áðrenn næstu grannskoðan, men arbeiðið var drúgvari enn væntað, og tí var ikki komið á mál, tó at ein stórur partur var gjørdur, m.a. váðameting og dátuflokking.

Tilmæli um dátutrygd verða fylgd upp. Einki farið um evstamark.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeiðið við dátutrygd hjá Vørn heldur støðugt fram og gongur væl. KT-grannskoðanin kom við raðfestum tilmælum fyri stovnin, og stovnurin hevur sett viðmerkingar, evstamark og ábyrgdarpersónar á tey høgt og miðal raðfestu tilmælini. Einki tilmæli er farið um evstamark.

5.3 Nýtt havrannsóknarskip, løgujáttan (LG 2019/205-0343)

Havrannsóknarskipið formliga handað í desember 2020.

Í 2020 grannskoðaði Landsgrannskoðanin høvuðskontu 5.34.3.06 "Nýtt havrannsóknarskip, løgujáttan". Samanumtikið helt samlaði byggikostnaðurin seg innan fyri játtanina. Rannsóknarskipið Jákup Sverri bleiv formliga handað Fiskimálaráðnum fyrst í desember 2020.

5.4 Fiskivinnuroyndir (LG 2018/205-0343)

Í seinastu frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av umsitingini av Fiskivinnuroyndum.

Samanumtikið fylgdi umsitingin skrivligu mannagongdunum í viðgerðini av umsóknunum og stuðulin var lýstur alment.

Niðurstøðan av stakroyndunum, ið Landsgrannskoðanin gjørdi, var m.a.:

Til verkætlan 0144 vóru 160 t.kr. goldnar. Í 2017 vóru 150 t.kr. játtaðar til framhald av verkætlanini, men eingin umbøn var komin. Frágreiðing og samandráttur fyri verkætlanina vóru send ráðnum, men í apríl 2019 vóru umsøkjararnir bidnir um at senda eina betri endaliga frágreiðing, sum eisini tekur afturíaftur fyrr gjørdar royndir (Impulsblóðging).

Tá ið verkætlanin endar og biðið verður um seinasta útgjald, skuldi endalig frágreiðing og grannskoðaður roknskapur fyri alt tíðarskeiðið sendast Fiskivinnuroyndum.

Í nøkrum førum er játtaður stuðul útgoldin, í øðrum førum afturførdur.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, tær 150 t.kr., ið vóru settar av í 2017, eru afturførdar í 2019.

Verkætlan 0176 fekk 50%, ella 150 t.kr. í august 2018. Síðani datt verkætlanin niðurfyri ella steðgaði upp. Orsøkin var serliga, at verkætlanarleiðarin fór í annað starv, og eingin tók yvir verkætlanina.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at peningurin skal afturførast.

Verkætlan 0181 hevði gingið sum ætlað í 2018 og 2019, og ávikavist 1.250 t.kr. og 650 t.kr. vóru goldnar umsøkjaranum. Verkætlanarleiðslan sendi inn roknskap fyri 2019, samandrátt og umbøn um seinasta gjaldið á 200 t.kr., men fekk í juli 2020 boð um, at verkætlanarroknskapur fyri 2018 og 2020, og endalig verkætlanarfrágreiðing eisini skuldu sendast inn.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at endalig frágreiðing er latin inn. Somuleiðis er verkætlanarroknskapur fyri 2018 og 2019. Í januar 2021 eru 200 t.kr. útgoldnar.

Verkætlan 0161 hevði gingið sum ætlað, og verkætlanarleiðarin hevði kunnað Fiskimálaráðið ávegis.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at endalig frágreiðing er latin inn. Umbønir um fult útgjald fyri bæði 2017 og 2018 eru móttiknar og upphæddirnar útgoldnar.

Verkætlan 0180 hevði stórt sæð gingið sum ætlað og var nærum liðug. Úrslitini og smakkiroyndir vóru løgd fram á 11. framløgudegnum í mars 2019. Í februar 2019 vóru treytirnar til útgjaldið sendar umsøkjaranum, har mint varð á at senda inn endaliga frágreiðing, samandrátt, roknskap og umbøn um seinasta gjald.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at endalig frágreiðing, samandráttur og áteknaður roknskapur eru ikki latin inn. Útgoldnar eru 127,5 t.kr. Umbøn um síðsta útgjald er ikki komin hóast áminning. Í 2018 eru 22,5 t.kr. avsettar á fíggjarstøðuni til verkætlanina.

5.5 Effektivar veðhaldsútreiðslur (LG 2017/205-0345)

Í seinastu frágreiðingunum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av effektivum veðhaldsútreiðslum.

Í frágreiðingini 2019 vísti Landsgrannskoðanin á, at einki fullfíggjað yvirlit var yvir støðuna viðvíkjandi veðhaldslánunum. Ikki fyrr enn ein dagførdur og samlaður saldulisti verður gjørdur, ber til at gera eina niðurstøðu um veðhaldslánini.

Í august 2020 greiddi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum frá, at í november 2019 lat leiðslan í TAKS Fiskimálaráðnum eina fráboðan um skuld, sum var til innheintingar. TAKS kunnaði um, at í desember 2017 fór ein arbeiðsbólkur frá Innheintingardeildini og Lógardeildini undir at gjøgnumganga alla skuld og allar skuldarar, sum sambært einum saldulista hjá Gjaldstovuni vóru í eftirstøðu av ymiskum vinnulánum. Í juli 2019 var arbeiðið liðugt.

Í fráboðan til Fiskimálaráðið í november 2019, tók TAKS samanum og mælti til, at skuldin, sum var fyrnað til innheintingar, varð avskrivað. Gjøgnumgongd hjá TAKS vísti, at 104 skuldarar skyldaðu 185,5 mió.kr., og av teimum vóru 160,8 mió.kr. fyrnaðar til innheintingar. Skuldin, sum ikki var fyrnað, var 24,7 mió.kr.

Í 2019 vóru 160,8 mió.kr. av 185,5 mió.kr. fyrnaðar.

TAKS mælti til, at skuld, sum ikki var fyrnað varð skrásett í bókhaldinum hjá TAKS, og at málini verða upprættað ella skrásett í journalini hjá TAKS saman við tilhoyrandi skjølum. TAKS mælti eisini til, at tær 24,7 mió.kr. íroknað rentur frá juli 2019 hjá 45 skuldarum, hereftir verða heintaðar inn eftir vanligu innheintingarreglunum við mótrokning og úttøku, sum Fútarætturin hevur heimild at fremja.

Í 2020 kunnaði Fiskimálaráðið um, at ráðið tók tilmælið frá TAKS um avskriving av skuld til eftirtektar, samsvarandi tí áseting, sum TAKS hevur mælt til. Niðurstøðan er gjørd við grundarlagi í tí fráboðan, ið leiðslan á TAKS hevur latið Fiskimálaráðnum, eins og tí frágreiðing og gjøgnumgongd, ið arbeiðsbólkur á TAKS framdi frá desember 2017 til juli 2019.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin boðað frá, at málið er avgreitt samsvarandi tilmælinum frá TAKS. Øll fyrnað og virðisleys lán eru avskrivað, og tær avsetingar, sum hava verið til hesi lán, eru afturførdar. Afturføringin sæst einans í fíggjarstøðuni.

Samsvarandi tilmæli frá TAKS eru øll fyrnað og virðisleys lán avskrivað.

5.6 Avgjald á fiskatilfeingi (LG 2020/220-0522)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað avgjald á fiskatilfeingi. Avgjald á fiskatilfeingi er ásett við lóg og játtað á høvuðskontu 20.52.2.15, undirkontu 01. Seinastu árini hevur avgjaldið verið:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Skattur og avgjøld	-153.445	-161.205	-159.903	-147.573	-222.489
Avskriving/avseting	0	0	0	-50	1.293
Tilsamans	**-153.445**	**-161.205**	**-159.903**	**147.622**	**-221.196**

Vørn krevur avgjøldini inn sambært

- Ll. nr. 150/2016 “um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017”,
- Ll. nr. 172/2017 “um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018, 2019, 2020 og 2021 og botnfiski í Barentshavinum í 2020 og 2021”,
- Ll. nr. 171/2019 “um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018, 2019 og 2020”.

Sambært K. nr. 67/2012 “um landingar og avreiðingar av fiski og fiskavørum” skal allur fiskur og øll fiskavøra, sum verður landað, umskipað ella uppskipað í Føroyum, ella á føroysku landleiðunum, um eina góðkenda innvigingarskipan. Vektarseðlar skulu sendast Vørn talgilt í tí sniði, sum Vørn ásetir, í seinasta lagi yrkadagin eftir landingarnar.

Í lógunum frá 2016 og 2017 er ásett, at:

- veiðigjaldið fellur til gjaldingar so hvørt, veiðan er avreidd,
- Vørn ger upp veiðigjaldið og sendir eigara av fiskifarinum rokning mánaðarliga,
- gjaldfreistin er 10 dagar eftir dagfesting á rokning,
- renta skal rindast fyri hvønn byrjaðan mánað, og
- TAKS kann innheinta veiðigjaldið, umframt rentu og møguligan innkrevjingarkostnað við panting.

KT- skipan

Vørn nýtir KT-skipan, nevnd Høgguslokkurin, til at halda skil á vektarseðlum og avrokningum. Vørn hevur skrivliga tænastuavtalu við P/f Formula, ið hevur ment skipanina saman við stovninum.

Í januar 2021 hevur grannskoðanarvirkið skoðað allar KT-skipanirnar hjá Vørn, herundir Høgguslokkin. Niðurstøðan var, at trygdarviðurskiftini hjá Vørn samsvaraðu ikki til fulnar við krøvini í rundskrivinum um KT-trygd. Skoðanin staðfesti nakrar veikleikar, sum eru neyvari lýstir í frágreiðingini. Vørn fylgir í ávísan mun krøvunum í rundskrivinum, tó at skoðanin vísti á fleiri trygdarveikleikar.

Skoðanin staðfesti nakrar veikleikar.

Skoðanin staðfesti eisini, at Vørn hevur fleiri fakskipanir, herundir Høgguslokkin, har stovnurin ikki hevur serskilt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum. Grannskoðarin mælir Vørn til at fáa viðurskiftini við veitararnar í rættlag, gera ella dagføra avtalur, og harvið fáa góðkenning frá Fíggjarmálaráðnum til skipanirnar, ið eru uttan fyri KT landsins.

Mælt er til at fáa viðurskiftini við veitararnar í rættlag.

Roknskaparviðurskifti

Mannagongdir hjá stovninum eru lýstar í góðsku- og trygdarhandbók.

Móttøkuvirkini skráseta vektarseðlarnar talgilt innan eitt samdøgur frá innvigingini. Eftirlitsfólk stemma vektarseðlarnar av mótvegis upplýsingum, ið skipararnir hava givið upp frammanundan og boðað Vørn frá. Eisini kannar Vørn, um vektarseðlarnir eru í samsvari við fiskiloyvini í skipanini.

Vørn sendir reiðaríunum rokningar út frá upplýsingunum í Høgguslokkinum minst eina ferð um mánaðin, tó vera tær sum oftast sendar 2-3 dagar eftir, at vektarseðilin er innlatin. Gjaldfreistin, sum er 10 dagar, er sum oftast hildin, men í heilt fáum førum er onkur afturút at gjalda; tá rykkir Vørn beinanvegin eftir peninginum.

Í Ll. nr. 150/2016 er ásett í § 6, stk. 4, at um eigarar av fiskiførum ikki rinda rættstundis, skal 0,7% rindast í rentu fyri hvønn byrjaðan mánað, og sambært stk. 5 kann veiðigjald, umframt rentu og møguligar innkrevjingarkostnaðir, krevjast inn við panting. TAKS fremur panting eftir reglunum um innkreving av skattum.

Vørn roknar ikki rentu, men um krav verður sent til innheintingar hjá TAKS, roknar TAKS rentu. Í 2020 er eitt krav um veiðigjald sent til pantingar, og tá rindaði reiðaríið 13.339 kr. í rentu.

Avskrivingar

Í 2020 avskrivaði Vørn 1,3 mió.kr. vegna eitt felag. Felagið fekk upprunaliga rokning fyri landing uttanlands. Danska eftirlitið gjørdi vart við, at uppgivna veiðan var ikki røtt, og málið kom fyri í rættinum, har tað endaði við semju. Vørn avskrivaði rokningina og felagið rindaði 247.486 kr. samsvarandi semjuni.

Samsvarandi semjuni avskrivaði Vørn 1,3 mió.kr., og felagið rindaði um 247 t.kr.

Stakroyndir

Landsgrannskoðanin valdi við stakroyndum 11 veiðugjøld til nærri eftirlit. Talan er um rokningar fyri veiðigjøld av makreli, svartkjafti, norðhavssild og botnfiski, og har rættindi eru keypt á uppboðssølu í 2018.

Rættindahavararnir hava fingið tillutað ávíst tonsatal innan ávísu fiskasløgini og hava sett trygd fyri keypinum. Vørn stillar útlutaða tonsatalið hvørt ár samsvarandi broytingum í heildarkvotunum. Kvotur, ið eru keyptar í 2018 við t.d. 8 ára loyvi, kunnu tí hækka ella lækka árini eftir.

Vørn fær hvørt ár upplýsingar frá Fiskimálaráðnum um broytingar í heildarkvotunum, og avroknar við rættindahavarar samsvarandi broytingunum.

Tá ið veiða er avreidd, senda góðkendu móttøkuvirkini Vørn talgildar vektarseðlar, og Vørn kannar, um avreidda veiðan er samsvarandi útskrivaða fiskiloyvinum, og um hon er í samsvari við keyptu og stillaðu nøgdina.

Keypararnir hava keypt rættindini til útlutaðu nøgdirnar fyri avtalaðan prís, men Vørn hækkar ella lækkar kiloprísin í lutfalli ímillum prísin, tá ið keypt var og miðalprísin fyri øll skipini tað árið, avreitt er.

Við støði í teimum 11 rokningunum kannaði Landsgrannskoðanin útlutaðu loyvini, vektarseðlarnar, broytingarnar í heildarkvotunum, og um prísásetingarnar eru rættar. Í sambandi við gjøgnumgongdina, samskiftu vit við Vørn og Fiskimálaráðið og bóðu um nærri frágreiðingar um ávísar rokningar og grundarlagið fyri teimum. Einki var at finnast at.

Landsgrannskoðanin hevði einki at finnast at rokningunum og grundarlagnum undir teimum.

6. Umhvørvis- og Vinnumál

6.1 Umhvørvis- og vinnumálaráðið (LG 2016/206-0111)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a., at Umhvørvis- og vinnumálaráðið arbeiddi við at endurskoða roknskaparreglugerðina, eftir at málsøkjabýtið var broytt, og tað arbeiðið skuldi eftir ætlan vera liðugt á heysti 2020.

Í august 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ráðið enn arbeiðir við at endurskoða roknskaparreglugerðina. Arbeiðið er komið somikið væl áleiðis at uppskotið verður klárt í fyrru helvt av september.

Roknskaparreglugerðin ikki dagførd.

6.2 Maritimur tænastudepil (LG 2020/206-0111)

Í sambandi við grannskoðan av landsroknskapinum 2020 hevur Landsgrannskoðanin gjøgnumgingið undirkontu 6.11.1.06.26 “Maritimur tænastudepil”.

Í 2020 eru játtaðar 500 t.kr. Einki er brúkt. Í fíggjarlógartekstinum stendur, at játtanin m.a. er ætlað til samskipan og saman við vinnuni at skipa fyri miðvísari marknaðarføring av maritimum tænastum, sum føroyskar fyritøkur og stovnar hava at bjóða.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur greitt frá, at 2020 á mangan hátt hevur verið eitt serligt ár, og av tí at ikki var møguligt at ferðast, hevur ikki verið gjørligt at skipa fyri nøkrum av ætlaðu tiltøkunum.

Eingin peningur brúktur til maritiman tænastudepil.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið ætlar at endurskoða í sambandi við fíggjarlógaruppskotið 2022, av tí at møguleikin at ferðast og at fara undir marknaðarførings- og søluátøk má væntast at vera sera avmarkaður í 2021 og sannlíkt eisini í 2022.

6.3 Stuðul til umhvørvisverndartiltøk (LG 2020/206-0301)

Í sambandi við grannskoðan av landsroknskapinum 2020 hevur Landsgrannskoðanin gjøgnumgingið høvuðskontu 6.30.1.01 “Stuðul til umhvørvisverndartiltøk”.

Í 2020 eru játtaðar 400 t.kr. Í viðmerkingunum í fíggjarlógini stendur, at stuðulin verður játtaður sambært reglugerð frá 2016 “fyri stuðul til umhvørvisverndartiltøk”. Stuðulin verður játtaður eftir umsókn, ið skal innihalda upplýsingar um endamál og lýsing av verkætlanini, kostnaðarmeting og fíggjarætlan. Eingin áseting er um, hvør kann søkja um stuðul.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið bað Umhvørvisstovuna gera tilmæli um, hvørjir umsøkjarar skuldu fáa stuðul í 2020. Í sínum tilmæli vísir Umhvørvisstovan m.a. á, at lýst verður ikki alment eftir umsóknum í 2020.

Ikki lýst alment eftir umsóknum.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið skrivar eisini í sínum tilmæli til landsstýrismannin, at lýst verður ikki alment eftir umsóknum.

Spurt, hví ikki hevur verið lýst alment eftir umsóknum í 2020, svaraði Umhvørvis- og vinnumálaráðið, at talan er um eitt mistak, tá ið víst verður til reglugerð frá 2016 í fíggjarlógini fyri 2020. Vanliga hava reglugerðir verið gjørdar hvørt ár. Í reglugerðini fyri 2020 er ásett, hvat stuðulin skal nýtast til, umframt at tað ikki verður lýst alment eftir umsóknum. Ráðið er í holt við at endurskoða reglugerðina.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur greitt frá, at viðmerkingin hjá Landsgrannskoðanini um lýstu reglugerðina frá 2016, kom óvart á ráðið, tí Landsgrannskoðanin í frágreiðingini vísti á, at sambært www.logir.fo er reglugerðin frá 2016 enn galdandi.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur kannað málið viðvíkjandi reglugerðum og vendi sær til Løgmansskrivstovuna hesum viðvíkjandi, tí tað hevur ikki verið vanlig siðvenja hjá ráðnum at lýsa reglugerðir. Løgmansskrivstovan hevur svarað, at reglugerðir skulu ikki lýsast, og Løgmansskrivstovan skuldi taka stig til at taka reglugerðina av www.logir.fo.

Gjøgnumgongd av umsóknum

Umhvørvisstovan metti um umsóknirnar og mælti til at lata stuðul til:

1. Tjóðsavnið og Havstovuna til fuglateljing o.a. í Ramsaroyggjum, 315 t.kr.,
2. Tjóðsavnið til at skráseta náttúrudátur, 55 t.kr.,
3. Umhvørvisstovuna til verkætlan um at kortleggja náttúrudátur við dronu, 30 t.kr., og
4. Sumbiar kommunu til rudding í Víkarbyrgi, 0 kr.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið mælti landsstýrismanninum til at fylgja tilmælinum frá Umhvørvisstovuni við hesum broytingum:

1. Tjóðsavnið og Havstovan til fuglateljing o.a. í Ramsaroyggjum, 265.000 kr.,
2. Tjóðsavnið til at skráseta náttúrudátur, 40.000 kr.,
3. Umhvørvisstovan til verkætlan um at kortleggja náttúrudátur við dronu, 20.000 kr., og
4. Sumbiar kommunu til rudding í Víkarbyrgi, 75.000 kr.

Landsstýrismaðurin tók undir við tilmælinum frá ráðnum.

Í 2020 eru 372.646 kr. goldnar í stuðli fyri verkætlanirnar 1, 2 og 4. Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið verkætlanirnar, sum fingu stuðul í 2020. Einki var at finnast at, tá ið samanborið verður við krøvini í reglugerðini frá 2016.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini er ásett, at roknskapur fyri verkætlan eigur at verða latin Umhvørvis- og vinnumálaráðnum saman við frágreiðing um úrslit av verkætlanini, tá ið verkætlanin er liðug ella í seinasta lagi 20. februar árið eftir. Ráðið hevur fingið roknskap fyri tær tríggjar verkætlanirnar.

Umhvørvisstovan viðger egnar umsóknir

Umhvørvisstovan hevur mælt ráðnum til at játta umsóknir frá stovninum sjálvum.

Landsgrannskoðanin vísti á óhepnu støðuna, at Umhvørvisstovan viðger og mælir ráðnum til at játta umsóknir frá stovninum sjálvum. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at skilnaður er ímillum umsøkjarar og myndugleikan, sum viðger og tilmælir umsóknirnar.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini, at tað er óheppið, at Umhvørvisstovan tilmælir egnar verkætlanir. Í endurskoðaðu reglugerðini fyri 2021 verður ein áseting um, at umsóknir frá Umhvørvisstovuni skulu sendast ráðnum at viðgera og góðkenna.

6.4 Náttúrufriðingarnevndir (LG 2020/206-0301)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til náttúrufriðingarnevndir á høvuðskontu 6.30.1.07. Friðingarnevndirnar eru skipaðar sambært Ll. nr. 48/1970 "um náttúrufriðing".

Leikfólk eru nevndarlimir í lokalu friðingarnevndunum, og sýslumaðurin er formaður. Limirnir fáa fundarpening sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Friðingarnevndirnar virka uttan fyri almennu fyrisitingina. Umhvørvis- og vinnumálaráðið er umsitingarmyndugleiki og umsitur útreiðslurnar fyri nevndirnar.

Roknskapartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Høvuðskonta	2016	2017	2018	2019	2020
Ógreinað	113	113	19	1	213
Yvirfriðingarnevndin	47	46	166	212	90
Norðoyar sýsla	6	11	15	18	9
Eysturoyar sýsla	60	40	32	46	8
Streymoyar sýsla	112	56	137	97	21
Sandoyar sýsla	18	3	3	6	80
Suðuroyar sýsla	4	12	17	26	0
Vága sýsla	29	28	20	15	11
Tilsamans	**389**	**309**	**409**	**421**	**432**

Í 2020 eru útreiðslurnar til friðingarnevnd í Sandoyar sýslu, 76 t.kr. í fundarpeningi, tó at talan er um 8 fundir. Útgjaldið til Streymoyar sýslu er 20 t.kr. fyri 30 fundir. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur greitt frá, at upphæddirnar eru ikki nóg neyvt skrásettar hjá hvørjari nevnd sær.

Lønir og aðrar útreiðslur

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um útgjøldini samsvara við galdandi reglur og mannagongdir, og um samsvar er millum hildnu fundirnar og útgjøldini. Vit gjøgnumgingu fundarfrágreiðingarnar fyri 2020, og samanhildu tær við tal av útgjøldum.

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum eru niðanfyri.

Formaðurin boðar Umhvørvis- og vinnumálaráðnum frá, hvør skal hava fundarpening, við at senda ráðnum fundarfrágreiðingarnar, sum ráðið skrásetir í journalskipanina. Bókhaldið hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum skrásetir fundarsamsýningarnar eftir upplýsingum í fundarfrágreiðingunum, og ein fulltrúi leysgevur.

Formenninir fáa hægstu samsýning fyri allar fundirnar, teir eru á; tá er umsitingin av fundararbeiðinum íroknað. Heimildirnar til tað eru ikki ásettar í lóg, men sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum eru tær eftir øllum at døma sambært gamlari siðvenju.

Heimild í gamlari siðvenju.

Sambært Búskaparskipan landsins hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið rindað nevndarformanni endurgjøld fyri meira enn ein fund sama dag. Spurt, um heimild er at rinda fyri fund, longri enn fimm tímar, fleiri ferðir sama dag, vísir Umhvørvis- og vinnumálaráðið á, at sambært siðvenju fær formaður altíð fulla samsýning fyri hvønn fund, tó fáa formenninir ikki meira enn eina samsýning, um fleiri fundir eru sama dag. Tað er komið fyri, at fleiri samsýningar eru útgoldnar sama dag, men tá hevur talan verið um samsýning fyri ymiskar dagar.

Sorinskrivarin er formaður í yvirfriðingarnevndini og fær fasta samsýning. Skrivarin hjá sorinskrivaranum fær tímaløn fyri arbeiði fyri yvirfriðingarnevndina.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið endurrindar sorinskrivaranum aðrar útreiðslur, sum Dómaraskrivstovan leggur út í sambandi við fundirnar hjá yvirfriðingarnevndini.

Í 2019 hevur Fíggjarmálaráðið gjørt av, eftir umbøn frá sorinskrivaranum, at hækka samsýningina til formannin í yvirfriðingarnevndini úr 5.000 kr. upp í 6.000 kr. um mánaðin. Sambært somu avtalu fær skrivarin hjá sorinskrivaranum 414 kr. um tíman fyri at vera skrivari hjá yvirfriðingarnevndini. Tað er sami takstur, sum donsku dómstólarnir nýta sum samsýning fyri eykaarbeiði.

6.5 Stuðul til spillolju (LG 2020/206-0301)

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið høvuðskontu 6.30.1.10 "Stuðul til spilloljureinsing".

Sambært fíggjarlógini 2020 verður stuðulin latin IRF[13] eftir sáttmála frá 1992 millum Føroya Landsstýri og IRF um, at IRF savnar inn og viðger spillolju. Stuðulsjáttanin er ætlað til at gjalda IRF fyri hall av hesum virksemi.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur greitt frá, at lógarteksturin fer at verða broyttur, soleiðis at hall av virkseminum ikki longur er ein fortreyt fyri, at IRF fær stuðulin. Stuðulsupphæddin skal tó framhaldandi nýtast til virksemi knýtt at spilloljureinsing.

Landsgrannskoðanin vísti til kunngerð frá 2011 "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan", ið ásetir, at stuðulsveitarin regluliga skal hava eftirlit við, at stuðulsmóttakarin lýkur tær treytir, ið eru grundarlag undir stuðlinum.

Nýggjur sáttmáli um spilloljureinsing er gjørdur í 2020.

Í sáttmálanum frá 1992 er ásett, at stuðulin verður goldin so hvørt grannskoðaður roknskapur, ið nágreinar hallið av virkseminum, verður latin Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Grannskoðaður roknskapur, ið nágreinar hallið fyri 1. ársfjórðing 2020, er latin ráðnum, og í apríl 2020 eru 532 t.kr. goldnar IRF, svarandi til hallið.

Sáttmálin frá 2020 ásetir, at øll stuðulsupphæddin verður latin, tá ið grannskoðaður roknskapur fyri árið frammanundan fyriliggur. IRF hevur 5. oktober 2020 latið Umhvørvis- og vinnumálaráðnum roknskapin fyri 2019, og síðani er restin av stuðulsupphæddini á 3.468 t.kr. útgoldin.

Samanumtikið hevur Landsgrannskoðanin einki at finnast at viðvíkjandi umsitingini av stuðlinum til spilloljureinsing.

6.6 Landbúnaðarstuðul (LG 2020/206-0332)

Landsgrannskoðanin hevur í 2020 grannskoðað landbúnaðarstuðul. Heimildin fyri játtanini er í Ll. nr. 32/2003 "um landbúnaðarstuðul" og í Ll. nr. 18/1961 "um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m." Landsstýrismaðurin hevur ásett nærri reglur og treytir fyri stuðlinum í K. nr. 76/2018, har eisini umsitingin av studninginum verður latin Búnaðarstovuni.

Í 2019 vóru játtaðar 17,65 mió.kr. á høvuðskontu 6.33.2.10 "Landbúnaðarstuðul"[14].

[13] Interkommunalur renovatiónsfelagsskapur.
[14] Við málsøkjabýtinum er játtanin 2020 á grein 6.

Roknskapartøl, liðað í undirkontur:

t.kr.

Undirkonta	2016	2017	2018	2019	2020
01. Mjólk	7.220	7.221	7.225	7.221	7.193
02. Neytakjøt	499	525	815	825	1.105
03. Seyðakjøt	1.700	1.692	2.143	2.500	2.645
04. Stráfóður	5.080	5.080	5.107	5.109	5.080
07. Húsdýralógin	18	49	56	70	70
08. Avloysaraskipanin	480	480	480	480	480
10. Føroysk húsdjór	150	250	284	351	300
11. Grønmetisframleiðsla	0	400	700	721	800
12. Seyðakanningar	0	541	390	378	376
13. Føroysk ross	0	0	0	0	100
Tilsamans	**15.147**	**16.238**	**17.200**	**17.655**	**18.149**

Grønmetisframleiðsla

Í fíggjarlógini er eingin áseting um, hvat endamálið við grønmetisstuðlinum er, hvør kann søkja, ella hvørjar treytir verða álagdar stuðulsmóttakaranum. Í 2019 vóru 800 t.kr. játtaðar, 700 t.kr. í 2018 og 400 t.kr. í 2017, tá ið játtað var á fyrsta sinni.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini 2017 stendur, at játtanin er til at stuðla verkætlanum og royndum við føroyskari grønmetisframleiðslu. Í ætlanunum hjá landsstýrinum um ein nýggjan landbúnaðarpolitikk, er eitt av málunum at økja um framleiðsluna av dygdargóðum føroyskum landbúnaðarvørum, harundir at framleiða grønmeti.

Búnaðarstovan hevur víst á, at talan er um verkætlanarstuðul og ikki mongdarstuðul. Spurd, svarar Búnaðarstovan, at eingin materiell heimild er at vísa á; bert samskifti og heimildarskrivið úr Fiskimálaráðnum.

Í januar 2021 vísir Umhvørvis- og vinnumálaráðið til kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan, sum í § 9, stk. 1, ásetir, at *"heimild til lógarbundnan stuðul og stuðulsjáttan skal greitt síggjast í serstakari heimildarlóg".* Í § 9, stk. 2, er ásett, at *"fyri stuðulsjáttanir kann í ávísum førum vera nóg mikið við heimild í sjálvari játtanini".* Í tílíkum førum skal verða sagt frá hesum í viðmerkingunum til játtanina.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið heldur, at tað er óheppið, at eingin serstøk heimildarlóg er, og at einki stendur í fíggjarlógartekstinum um, hvussu grønmetisstuðulin kann veitast. Játtanin er upprunaliga veitt í broytingaruppskoti til fíggjarlógaruppskotið fyri 2017. Tað framgongur av álitinum frá Fíggjarnevndini í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum, at *"Játtan á 400 t.kr. er til at stuðla verkætlanum og royndum við føroyskari grønmetisframleiðslu. Í ætlanunum hjá landsstýrinum um ein nýggjan landbúnaðarpolitikk, er eitt av málunum at økja um framleiðsluna av dygdargóðum føroyskum landbúnaðarvørum, harundir at framleiða grønmeti".*

Eingin serstøk lógarheimild, og einki er í fíggjarlógini um, hvussu grønmetisstuðul kann veitast.

Viðgerð av umsóknum

Í 2017 gjørdi Búnaðarstovan, í samráði við Fiskimálaráðið, eina reglugerð til umsitingina av stuðli til grønmetisframleiðslu.

Í januar 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at ráðið saman við Búnaðarstovuni hevur endurskoðað reglugerðina, og at nýggj reglugerð verður galdandi frá fíggjarárinum 2021.

Búnaðarstovan hevur lýst í bløðunum og á heimasíðuni, at stuðul verður veittur til grønmetisframleiðslu, og víst til umsóknarblað á heimasíðuni. Umframt persónligar upplýsingar skulu umsøkjarar greiða frá, á hvørjum matrikkuli verkætlanin verður framd, hvør umsitur lendið, hvat slag av grønmeti ætlanin er at velta, og hvussu tað svarar til reglugerðina fyri játtanina. Umsøkjari skal eisini upplýsa tíðarætlan og fíggjarætlan, sum útgreinar útreiðslur til lønir, plantutilfar o.a., umframt eginfígging, aðra fígging og stuðulsfígging frá Búnaðarstovuni.

Í 2018 fekk Búnaðarstovan 18 umsóknir. Landbúnaðarráðgevin viðgjørdi umsóknirnar, og legði landbúnaðarfakligar metingar til grund fyri sínum tilmæli. Tvær av umsóknunum vóru mettar at hava "munandi týdning fyri menning av føroyskari grønmetisvelting og grønmetisframleiðslu". Onnur av skikkaðu umsóknunum var tó tikin aftur, og allur stuðulin var eftir tilsøgn latin einum umsøkjara.

Landsgrannskoðanin hevur gingið ígjøgnum umsóknina, sum fekk stuðul í 2018 og hevur einki at finnast at í mun til krøvini í reglugerðini. Stuðulin er goldin út í trimum eftir uppgerð og grundskjølum frá umsøkjaranum.

Í 2019 komu fimm umsóknir um stuðul til grønmetisframleiðslu, og fýra fingu játtað stuðul, t.e.:

Veltan:	653.400 kr.
Eva úr Dímun:	68.000 kr.
Sp/f Miðstovugarður:	38.000 kr.
Gimburlombini:	40.550 kr.

Búnaðarstovan hevur ikki fingið grannskoðaðan roknskap, men hevur hugt ígjøgnum skjølini, sum stuðulsmóttakararnir sendu inn og gjørt sína meting, áðrenn hon rindaði stuðulin út.

Ikki heimild at síggja burtur frá ásetingunum um grannskoðaðan roknskap.

Landsgrannskoðanin heldur, at hóast helst einki er goldið út, sum ikki viðvíkur grønmetisframleiðslu, kann Búnaðarstovan ikki síggja burtur frá ásetingini í § 22 í kunngerðini "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan".

Krøv um grannskoðan v.m.

Landsgrannskoðanin vísti á, at í § 22, stk. 2, í kunngerðini "um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan" er ásett, at roknskapur, sum ikki er fevndur av stk. 1, verður grannskoðaður av góðkendum grannskoðara sambært ásettum reglum, uttan so, at stuðul bert verður latin eina ferð og er minni enn 100 t.kr.

Búnaðarstovan hevur víst á, at sambært ásetingunum í kapitli VIII í ársroknskaparlógini eru ikki allir roknskapir grannskoðanarskyldugir, og fleiri (teir flestu) av teimum bøndum og vinnurekandi, ið fáa landbúnaðarstuðul, eru somikið smáir í fíggjarligum vavi, at teir eru ikki fevndir av ásetingini um grannskoðaðan roknskap. Sostatt lata flestu bøndur roknskap, ið ikki er grannskoðaður, til TAKS.

Sambært Búnaðarstovuni, fer tað í fyrsta lagi at gerast ein eyka kostnaðarbyrða fyri teir bøndur og tey vinnurekandi, ið annars ikki eru fevnd av kravinum í ársroknskaparlógini um grannskoðanarskyldu, um ásetingin í § 22, stk. 2, skal verða fylgd neyvt. Stuðulsmóttakararnir mugu tí viga hesar eykaútreiðslur upp ímóti, hvørt landbúnaðarstuðulsmøguleikin skal verða troyttur ella ikki, og sostatt er ítøkiligur vandi tí fyri, at slík herd krøv kunnu undirgrava politiska viljan handan játtanina av landbúnaðarstuðlinum, nevniliga at virka sum frami av føroyskum landbúnaði. Í aðrar mátar tekur Búnaðarstovan fult undir við ásetingunum í nevndu lóggávugrein.

Búnaðarstovan hevur kunnað um, at stovnurin hevur verið í samband við TAKS, og vóru stovnarnir samdir um, at Búnaðarstovan kann senda TAKS árligt yvirlit yvir teir bøndur og vinnurekandi, sum hava fingið landbúnaðarstuðul í undanfarnum ári, og at TAKS síðani kann nýta yvirlitið í sínum eftirlitsarbeiði mótvegis innkomnum roknskapum frá bøndrum og vinnurekandi í landbúnaðinum.

Sambært Búnaðarstovuni tykist ein tílík skipan vera ein smidlig loysn, sum átti at nøkta eftirlitstørvin á fullgóðan hátt saman við teimum stakroyndarsýnum og eftirliti, ið Búnaðarstovan sjálv ger, t.d. at vitja garðar fyri at máta mongdina av hoyggi, ið søkt verður um stráfóðurstuðul til o.s.fr.

Samanumtikið

Stovnar og ráð hava ikki heimild at slaka ásett eftirlitskrøv.

Landsgrannskoðanin heldur framvegis, at Búnaðarstovan kann ikki síggja burtur frá ásetingini um at brúka grannskoðaðan roknskap sum eftirlitsamboð í sambandi við útgoldnan stuðul, sum ásett er í § 20, stk. 2.

Tað er galdandi uttan mun til um tey eru fevnd av grannskoðanarkrøvunum í ársroknskaparlógini.

Landsgrannskoðanin heldur, at undantakið um grannskoðan eftir kunngerðini um stuðulsjáttan er rættiliga greitt, er stuðulsupphæddin undir 100 t.kr. og ikki afturvendandi, kann undantak koma upp á tal. Stuðul er skattafíggjaður peningur latin til ávís endamál, og krøvini eru júst fyri at tryggja játtandi myndugleikanum vissu fyri, at peningurin verður nýttur rætt.

Tilmælið frá Landsgrannskoðanini um, at stuðulsmóttakarin skal lata Búnaðarstovuni grannskoðaðan roknskap stendur tí við.

Í januar 2021 vísir Umhvørvis- og vinnumálaráðið á, at ásetingarnar í Ársroknskaparlógini eru ikki viðkomandi fyri veiting av stuðulsjáttan. Tá ið landið veitir stuðulsjáttan, galda ítøkiligu reglurnar fyri veiting av stuðli. Tað merkir, at verkætlanarroknskapur skal gerast fyri verkætlanina, sum stuðul verður søktur til, tað verði seg stráfóðurstuðul, seyðakjøtstuðul, grønmetisstuðul v.m. Tann ítøkiligi verkætlanarroknskapurin skal grannskoðast og latast Búnaðarstovuni sum partur av eftirlitinum. Eftirlitið er álagt myndugleikanum, sum umsitur stuðulsjáttanina.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, hevur ráðið umrøtt málið við Búnaðarstovuna, og er Búnaðarstovan framvegis av teirri áskoðan, at tað at seta krav um grannskoðan, er at leggja eyka umsitingarbyrðar á bøndurnar, eisini vísandi til at summar av stuðulsupphæddunum eru so smáar, at tað ikki fer at loysa seg at søkja um stuðul. Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Búnaðarstovan samdust um at endurskoða reglugerðina fyri stuðulsveiting og umhugsa, hvørt eitt minstamark fyri stuðulsveiting eigur at verða ásett. Eisini var umrøtt at taka upp við Fíggjarmálaráðið, um kravið til grannskoðaðan roknskap í ávísum førum kann takast av.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísir at enda á, at ongar undantaksreglur eru, og tí skal Búnaðarstovan halda seg til ásetingarnar hjá landinum í umsitingini av stuðulsjáttanum.

6.7 Føroysk húsdjór og Føroysk ross (LG 2020/206-0332)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað stuðul til “Føroysk húsdjór” á undirkontu 6.33.2.10.10 og stuðul til “Føroysk ross” á undirkontu 6.33.2.10.13, sum eru á høvuðskontu 6.33.2.10 “Landbúnaðarstuðul”.

Heimildin fyri stuðlinum er í Ll. nr. 32/2003 “um landbúnaðarstuðul” og í Ll. nr. 18/1961 “um studning til frama fyri húsdýraalingina og húsdýrahaldið v.m.” Í K. nr. 76/2018 eru ásettar nærri reglur. Búnaðarstovan umsitur stuðulin.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini stendur, at í 2020 er játtanin til landbúnaðarstuðul hækkað 500 t.kr., harav 50 t.kr. eru til Felagið Føroysk Ross at ala og skráseta serføroyska rossið. Frammanundan hava 50 t.kr. verið markaðar til sama endamál á undirkontuni “Føroysk húsdjór”.

Felagið Føroysk Ross sendi Fíggjarnevndini umsókn um stuðul til sítt virksemi. Í 2020 eru tí 100 t.kr. játtaðar til felagið, og nýggj undirkonta er gjørd til endamálið.

Roknskapartøl, liðað í undirkontur:

t.kr.

Undirkonta	2017	2018	2019	2020
10. Føroysk húsdjór	250	284	350	300
13. Føroysk ross	-	-	-	100
Tilsamans	**250**	**284**	**350**	**400**

Landsgrannskoðanin heldur, at tá undirkontan er markað til Felagið Føroysk Ross og ikki til føroyska rossastovnin, átti undirkontan at verið nevnd "Felagið Føroysk Ross".

Búnaðarstovan er samd við Landsgrannskoðanina og leggur afturat, at orsakað av fyrisitingarligu byrðuni av at umsita slíka stuðulsjáttan, vildi stovnurin fegin sloppið undan uppgávuni, tá ið upphæddin í síni heild er markað til ávísan móttakara.

Føroysk húsdjór

Í fíggjarlógini er ikki ásett, hvat endamálið við stuðlinum til Føroysk húsdjór er, hvør kann søkja, ella hvørjar treytir verða lagdar við stuðlinum. Stuðul verður latin eftir umsókn, og latin verkætlanum, ið hava til endamáls at menna, styrkja ella bøta um einstøku stovnarnar av føroyskum húsdjórum, umframt at verja og varðveita tey og teirra serligu eyðkenni, soleiðis at tey ikki forkomast ella fara fyri skeyti.

Búnaðarstovan hevur lýst eftir umsóknum. Treytir fyri innihaldinum í umsóknunum er lýst á heimasíðuni.

Í 2019 var eindarstuðulin 8.000 kr. til greðingar og 4.000 kr. til ryssur. Landbúnaðarráðgevin viðgjørdi umsóknirnar, og 27 av 28 umsøkjarum fingu stuðul. Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið umsóknirnar og hevur einki at finnast at í mun til krøvini, sum eru ásett í umsóknarblaðnum.

Viðgerð av umsóknum

Í 2019 fekk Búnaðarstovan tvær umsóknir um stuðul til verkætlanir. Landbúnaðarráðgevi viðgjørdi umsóknirnar, og legði landbúnaðarfakligar metingar til grund fyri tilmæli sínum. Hann mælti til at játta aðra umsóknina, og stuðulin var goldin sohvørt sambært rokning.

Í 2019 var stuðulin til føroysk húsdjór nýttur soleiðis:

Aliross, 22 greðingar og 5 ryssur	196.000 kr.
Verkætlan, Felagið Føroysk Ross	70.000 kr.
Verkætlanir, Búnaðarstovan	84.000 kr.
Tilsamans	350.000 kr.

Í 2020 fekk Búnaðarstovan 29 umsóknir um stuðul, sum allar vóru játtaðar. Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið umsóknirnar. Einki var at finnast at í mun til krøvini, sum eru ásett í umsóknarblaðnum.

Í 2020 varð stuðulin til føroysk húsdjór nýttur soleiðis:

Aliross, 19 greðingar og 10 ryssur	153.600 kr.
Verkætlanir, Búnaðarstovan	117.326 kr.
Landsseyðasýning, Búnaðarstovan	29.100 kr.
Tilsamans	300.026 kr.

Búnaðarstovan fekk tríggjar umsóknir um verkætlanarstuðul, umframt afturberingina til stovnin sjálvan. Búnaðarstovan bað ein landbúnaðarfrøðing gera tilmæli.

Stuðul er fluttur til egna rakstrarjáttan og uttan umsókn.

Felagið Føroysk Ross fekk 100 t.kr., og hinar umsóknirnar vóru avgreiddar sambært tilmælinum. Búnaðarstovan flutti 117.326 kr. til sín sjálvs á høvuðskontu 6.33.2.01 "Landbúnaðarroyndir og -ráðgeving". Sambært stovninum er talan um afturbering fyri

útreiðslur, eisini útreiðslur í sambandi við landsseyðasýningina 2020. Eingin umsókn liggur til grund fyri flytingini av stuðulsjáttanini til Búnaðarstovuna.

Búnaðarstovan vísir á, at umrøtt hevði verið, um t.d. Bóndafelagið og Óðalsfelagið áttu at staði sum formligir fyriskiparar av seyðasýningini, og harvið kundu søkt um stuðul av játtanini. Hinvegin er Búnaðarstovan landbúnaðarfakmyndugleikin til at skipa fyri sýningini. Búnaðarstovan góðskutryggjar fakliga støðið hjá dómarunum, váttar fakligu dygdina, veitir hølir, flutning, kunning o.t.

Sambært Búnaðarstovuni vóru útreiðslurnar í 2020 munandi hægri enn onnur ár orsakað av koronustøðuni, tí neyðugt var at skipa seyðasýningarnar sum talgilda stevnu, og á einum góðskustøði, sum nøktaði krøvini hjá Kringvarpi Føroya.

Búnaðarstovan heldur, at verandi framferðarháttur er meira einføld, óbyrokratisk og gjøgnumskygd loysn at náa endamálinum. Um Bóndafelagið og Óðalsfelagið skipaðu fyri seyðasýningunum, hevði Búnaðarstovan skipað tiltakið teirra vegna, sum inntøku-fíggjað virksemi, við endurgjaldi frá feløgunum sum stuðulsmóttakarum.

Landsgrannskoðanin ivast í, um Búnaðarstovan kann síggja burtur frá ásetingini í kunngerðini frá 2018 um, at stuðul verður veittur eftir umsókn.

Heldur ikki er sjónarmiðið hjá Búnaðarstovuni, um at annars høvdu fyriskipararnir kunna søkt um stuðul, nøktandi grundgeving fyri at síggja burtur frá lógarásettu reglunum, og tí fíggja seyðasýningarnar av stuðulsjáttanini, heldur enn av rakstrinum hjá stovninum. Ikki minst, tá ið Búnaðarstovan metir seyðasýningarnar hava so stóran týdning. Heldur ikki ber til at síggja burtur frá lógarásettum krøvum við grundgeving um, at verandi framferðarháttur er einfaldari, óbyrokratiskari og gjøgnumskygdari.

Heimild er ikki at síggja burtur frá lógarreglum.

Eftirlit við stuðlinum

Spurd, hvussu stovnurin hevur eftirlit við, at alidjórini, ið fáa stuðul, hava rætt til stuðul, svaraði Búnaðarstovan, at stovnurin hevur gjørt myndugleikarnar varugar við ta óhepnu og ófullfíggjaðu orðing, sum er í sjálvum heitinum fyri hesa játtanina.

Búnaðarstovan vísir á, at talan er um “gomul føroysk húsdjórasløg”, t.v.s. varð-veitingararbeiði av húsdjórasløgum, ella tí, ið eftir er av teimum, t.e. seyður, neyt, ross og flogfenaður. Í sambandi við stuðul til alidjórini av føroyska rossaslagnum skal kríatúrið vera skrásett í stambókini fyri Føroyska Rossið. Felagið Føroysk Ross rekur skipanina “Føroya Fengur”, har ættarsambond, váttanir fyri ílegukanningar v.m. eru skrásett.

Sambært Búnaðarstovuni er eingin ivi um, at í hesum føri er grundarlag fyri rættinum til stuðul. Landbúnaðarráðgevin hevur mett um útrokningargrundarlagið undir stuðuls-veitingini til alirossini. Stovnurin vísir til “Reglugerð fyri umsiting av stuðulsjáttan til føroysk húsdjórasløg” frá 2018.

Í 2019 fekk Búnaðarstovan serfrøðingar úr Finnlandi at niðurfrysta embryo av seinastu neytunum av føroyskum uppruna. Búnaðarstovan keypti flogfenað sum lið í arbeiðinum at menna stovnin av føroyskum gásum. Eisini hevur Búnaðarstovan keypt køvievni til goymslu av sáði, og havt útreiðslur í sambandi við greðingahald.

Stuðul til Búnaðarstovuna

Eingin umsókn liggur til grund fyri nýtsluni hjá Búnaðarstovuni av stuðulsjáttanini. Landsgrannskoðanin ivast í, um stovnurin kann brúka av stuðulsjáttanini til innanhýsis verkætlanir uttan at lúka kravið um umsókn.

Búnaðarstovan hevur greitt frá, at tað, sum stovnurin hevur fingið stuðul til, í øllum førunum eru uppgávur og virksemi, sum eru uttan fyri vanliga raksturin hjá stovninum. Stjórnarráðið hevur álagt stovninum uppgávurnar.

Landsgrannskoðanin undrast á, hvussu ein uppgáva, ið stjórnarráðið hevur lagt til stovnin at røkja, kann liggja uttan fyri vanliga raksturin hjá stovninum. Tað tykist sum at Búnaðarstovan hevur misskilt sína uppgávu sum stuðulsumsitari.

Búnaðarstovan vísir á, at hevði onkur annar søkt um stuðul til hetta slagið av virksemi, hevði umsóknin verið játtað, og tí heldur Búnaðarstovan, at materiella heimildin hjá stovninum at fáa stuðulin er í lagi.

Landsgrannskoðanin heldur, at materiella heimildin er í lógini um landbúnaðarstuðul, har ásett er, at treytin fyri at fáa stuðul, er, at Búnaðarstovan hevur játtað umsókn um stuðul.

Búnaðarstovan heldur tað vera einfaldari og gjøgnumskygdari loysn, at stovnurin sjálvur brúkar stuðulsjáttanina til endamálið, heldur enn at fáa onkran uttanhýsis at søkja um fígging av stuðulsjáttanini til samsvarandi verkætlanir, ið eru staðsettar á Búnaðarstovuni. Sum dømi nevnir Búnaðarstovan, at í 2002 og 2004 fekk Felagið Føroysk Ross formliga fígging av stuðulsjáttanini til sáðtøkur at frysta í sáðgoymslu. Tað arbeiðið fór fram á táverandi Royndarstøðini, og sáðgoymslan hevur verið á Búnaðarstovuni líka síðani, og harvið hevur stovnurin árligar útreiðslur til køvievni, eftirlit o.l.

Búnaðarstovan leggur afturat, at stovnurin hevur harumframt lagt sítt ískoyti í verkevnini burtur av egnari rakstrarjáttan, t.d. arbeiðsmegi til røkt, samskifti við granskingarstovnar, stráfóður, hølir, amboð o.t. Sambært Búnaðarstovuni fremur stovnurin uppgávur, sum liggja uttan fyri virksemisøkið hjá stovninum, við rakstrarjáttanini.

Tað kann grugga roknskapin, at aðrar játtanir, enn rakstrarjáttanin, verða brúktar at reka ein stovn.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at Búnaðarstovan brúkar stuðulsjáttan til at fíggja sítt virksemi, uttan at taka atlit at gegninum í stuðulsviðgerðini, og uttan at ásetingarnar í heimildarlógini eru fylgdar. Roknskapurin gevur ikki rætta mynd av virkseminum hjá stovninum, tá ið reglurnar um játtanarslag ikki eru hildnar, eisini kann tað grugga roknskapin, at stovnurin brúkar aðrar játtanir, enn rakstrarjáttanina, at reka stovnin við.

Búnaðarstovan førir fram, at stovnurin hevur ikki økt um sítt egna virksemi orsakað av stuðulsfíggjaða virkseminum, heldur tvørturímóti.

Føroysk ross

100 t.kr. av samlaðu játtanini til landbúnaðarstuðul eru markaðar til Felagið Føroysk Ross á undirkontu 13 til at ala og menna serføroyska rossið.

Í 2020 hevur Felagið Føroysk Ross sent Búnaðarstovuni umsókn um 100 t.kr. Stuðulin er goldin í tveimum, 47 t.kr. fyri skjalfestar útreiðslur, og 53 t.kr. eru goldnar sambært umsókn, sum Búnaðarstovan hevur viðgjørt og góðkent í 2021.

Búnaðarstovan hevur greitt frá, at í samráði við Umhvørvis- og vinnumálaráðið eru øll umsóknarbløðini fyri fíggjarárið 2021 rættað, fyri greitt og týðiliga at upplýsa um herdu krøvini til grannskoðaðan roknskap o.t. Eftirsum at ikki var upplýst um krøvini, tá ið umsóknir um stuðul vóru latnar inn í 2020, hevur Búnaðarstovan ikki gjørt grannskoðanarkravið einvíst galdandi fyrr enn fyri stuðulsárið 2021.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í august 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ráðið harmast um at viðurskiftini hava verið ógreið fyri Búnaðarstovuni, og er Umhvørvis- og vinnumálaráðið í stóran mun samt við sjónarmiðunum hjá Landsgrannskoðanini.

Landsstýrismaðurin hevur í januar 2021 latið Búnaðarstovuni eitt formligt skriv um stovnsbygnað og skipanarreglur fyri stovnin. Umhvørvis- og vinnumálaráðið og

Búnaðarstovan eru samd um, at skipanarreglurnar eru greiðar, og at seyðasýningar v.m. eru vanligur rakstur hjá Búnaðarstovuni.

Luttekur Búnaðarstovan í verkætlanum, sum kunnu stuðlast av stuðulsjáttanum, sum Búnaðarstovan umsitur, skulu hesar umsóknir latast Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til góðkenningar, áðrenn stuðul kann gjaldast Búnaðarstovuni.

Frameftir skal ráðið viðgera umsóknir um stuðul, har Búnaðarstovan luttekur í verkætlanini.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið leggur afturat, at farið er undir at endurskoða og dagføra ymisku reglugerðirnar, sum Búnaðarstovan umsitur stuðulsjáttanir eftir.

6.8 Jarðfeingi (LG 2017/206-0321)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Jarðfeingi.

Roknskaparreglugerðin var ikki góðkend. Fyri tænastur, ið stovnurin ger fyri feløg og stovnar í Føroyum, var samsýningin tímaløn hjá starvsfólki +110%. Taksturin fyri granskingararbeiðið var 890 kr./tíman. Landsgrannskoðanin mælti til at áseta í roknskaparreglugerðini, hvussu prísásetingin verður gjørd.

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at ráðið hevði umrøtt málið við Jarðfeingi, og Jarðfeingi tók undir við at seta takstirnar í roknskaparreglugerðina.

Í uppskotinum um roknskaparreglugerð, sum ráðið fekk, stóð: "*Samsýningar fyri veittar tænastur verða í høvuðsheitum ásettar við støði í tímalønum hjá starvsfólkum, ið veita tænasturnar, og einum gjaldi til felags útreiðslur hjá stovninum. Samsýningarnar kunnu tó vera hægri, t.d. í summum granskingarverkætlanum, har ein felags tímasatsur verður avtalaður fyri allar partarnar í verkætlanini".*

Í 2020 boðaði Umhvørvis- og vinnumálaráðið frá, at ráðið fór at taka málið uppaftur við Jarðfeingi.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ætlanin er framvegis, at prísásetingin fyri tænastur hjá Jarðfeingi í sambandi við granskingarverkætlanir skal standa í roknskaparreglugerðini, tá ið farið verður undir at endurskoða roknskaparreglugerðina.

Roknskaparreglugerðin er ikki dagførd.

KT-viðurskifti

Jarðfeingi hevði gjørt eina váðameting, ið ikki var heilt liðug, og var í holt við at verkseta hana. Sambært stjóranum var dátusavnið tað mest kritiska. Dáturnar viðvíkjandi boringum liggja hjá KT Landsins. Savnið av lutum var í kjallaranum hjá Jarðfeingi.

Upplýsingarnar hjá Jarðfeingi eru viðkvæmar, men tey hava ongar viðkvæmar persónupplýsingar.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Jarðfeingi í 2020 hevði innlimað seg í Trygdarpakkan hjá Landsneti, sum m.a. fatar um KT-grannskoðan. Landsnet hevði í juli 2020 framt KT-skoðan hjá Jarðfeingi. Jarðfeingi fekk nøkur tilmæli og avtalað var, at tey skuldu verða avgreidd innan november 2020, tá ið uppfylgjandi KT-skoðan skuldi vera.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at KT-skoðan fyri 2020 er gjørd, og í skoðanini sæst, at KT-trygdin á stovninum er í lagi.

KT-skoðan er gjørd fyri 2020, og KT-trygdin hjá stovninum er í lagi.

6.9 Sjóvinnustýrið (LG 2020/206-0351)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Sjóvinnustýrið. Játtanin er á høvuðskontu 6.35.1.08.

Sjóvinnustýrið virkar sambært Ll. nr. 165/2001 "um trygd á sjónum", har tilskilað er, at landsstýrismaðurin kann leggja tær heimildir, hann sjálvur hevur sambært lógini, til Sjóvinnustýrið at fyrisita. Stovnurin umsitur og hevur ábyrgd av føroyska regluverkinum, sum ásetir altjóða krøv og serlig føroysk krøv til skip og bátar, skrásett í føroysku skipa- og farskránni. IMO skoðar Sjóvinnustýrið 7. hvørt ár, og Force Certification hvørt ár.

Sambært lógini tilnevnir landsstýrismaðurin tríggjar limir í eitt siglingarráð, hvørs starv er at taka avgerðir í málum, sum sambært lógini kunnu verða kærd til ráðið. Avgerðir hjá ráðnum kunnu ikki skjótast inn fyri hægri fyrisitingarligan myndugleika.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Endamál, virksemi og uppgávur hjá Sjóvinnustýrinum eru orðað í dygdarhandbók. Roknskaparreglugerðin er frá 2015, og er ikki dagført, tó at m.a. havnaeftirlit við fremmandum skipum (Paris MoU) varð partur av stovninum í 2018.

Landsgrannskoðanin mælti til at seta reglur um uppgerð av gjaldterminalinum í roknskaparreglugerðina.

Roknskapartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	9.335	9.581	10.495	10.573	10.825
Keyp, leiga, avskr. o.a.	4.844	5.005	4.445	4.590	5.805
Søla av vørum og tænastum	-304	-412	-313	-298	-338
Eftirlits- og umsjónaravgjøld	-5.104	-5.062	-4.960	-4.549	-5.189
Rentuútr. og rentuinnt.	-18	-40	-42	-38	-25
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	1.122	274	585	777	1.102
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	-1.122	-274	-585	-777	-1.102
Tilsamans	**8.753**	**9.073**	**9.625**	**10.277**	**11.079**

Virksemið hjá Sjóvinnustýrinum er partvíst inntøkufíggjað. Eftirlitsgjøld minkaðu frá 2016 til 2019, tí at minni kom inn fyri sjóvinnubrøv.

Inntøkur

Sjóvinnustýrið avgreiðir rokningar fyri FAS handliga. Bátagjaldið er ásett fyri at halda skil á, hvør eigur bátarnar og at viðlíkahalda skránna. Rokningarnar eru grundaðar á upplýsingar úr Teyggjuni[15].

Inntøkur seinastu 5 árini:

t.kr.

Skipaskrásetingin	2016	2017	2018	2019	2020
Søla av vørum og tænastum	-191	-256	-142	-181	-131
Eftirlits- og umsjónaravgjøld	-1.428	-2.143	-2.013	-1.742	-2.273
Inntøkur tilsamans	**-1.619**	**-2.399**	**-2.155**	**-1.923**	**-2.404**

Gjaldast skal forút fyri avrit av skipsblaði og skráseting av skipsskeyti; tí skrásetir Sjóvinnustýrið einki skjal, uttan at tað er goldið. Samband er ikki ímillum Teyggjuna og Búskaparskipan landsins, tí ber ikki til at samanhalda útflýggjaðu skjølini við upphæddirnar í bókhaldinum. Stovnurin hevur í hyggju at fáa eina loysn til at skriva rokningar og kvittanir út.

[15] KT-skipan við upplýsingum um skrásett skip og bátar, yvirliti yvir eigaraviðurskifti, fiskiloyvi o.a.

Í K. nr. 96/2015 hevur Sjóvinnustýrið heimild at krevja eftirlits- og umsjónaravgjøld fyri skrásetingar av bátum og skipum.

Í K. nr. 71/2010 er heimild at krevja gjøld fyri FAS og tjóðskaparbrøv. Landsgrannskoðanin kannaði inntøkur við stakroyndum við at samanhalda rokningar við ásettu takstirnar. Einki var at finnast at.

Inntøkur seinastu 5 árini:

t.kr.

Skipaeftirlitið	2016	2017	2018	2019	2020
Søla av vørum og tænastum	-113	-156	-171	-116	-207
Eftirlits- og umsjónaravgjøld	-3.675	-2.919	-2.946	-2.806	-2.916
Inntøkur tilsamans	**-3.788**	**-3.075**	**-3.117**	**-2.922**	**-3.123**

Sølan av dagbókum hevur verið støðug seinastu 5 árini. Inntøkurnar av skipsbløðum eru tongdar at talinum av skrásettum skipum.

Eftirlitsgjøld eru rindað við gjaldkorti. Manningardeildin hjá stovninum skrivar vinnubrøv og viðurkenningarprógv út, og Sýnsdeildin letur málibrøv til nýggj skip og í sambandi við broytingar.

Fyri sýn av skipum rinda reiðarí 850 kr./t. pluss útreiðslurnar hjá Sjóvinnustýrinum av ferðing v.m. Tímataksturin hevur verið óbroyttur síðani 2016, og er sami takstur, sum danska Søfartsstyrelsen brúkar. 20% eru løgd omaná fyri avskrivingar, trygging o.a. Stovnurin krevur ikki samsýning fyri ferðatíðina hjá sýnsfólkum.

Inntøkurnar av FAS-skipanini eru sambært K. nr. 71/2010. Skip rinda 15 t.kr. um árið umframt gjald, ásett eftir stødd á skipinum og prosentgjald út frá aldri á skipinum.

Landsgrannskoðanin samanbar rokningar við upplýsingarnar í Teyggjuni. Einki var at finnast at.

Inntøkurnar fyri loyvisbrøv eru skiftandi, alt eftir hvussu nógv skip verða skrásett í FAS.

Manningardeildin ger upp inntøkurnar fyri skipsbløð, skeyti, veðbrøv og tjóðskaparbrøv, og stemmar peningastovnskontuna av. Umsitingin bókar inntøkurnar og stemmar av við uppgerðarskjalið.

Keyp

Sjóvinnustýrið bjóðar keyp út skrivliga ímillum fleiri. Í desember 2017 hevur Sjóvinnustýrið ment eina skipagrundskrá. Stovnurin tók av kostnaðarmeting frá KT-fyritøku, upp á 726 t.kr. Eisini keyptu tey ískoyti til skipanina fyri 162 t.kr.

Landsgrannskoðanin vísti á, at sambært rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum skal Gjaldstovan hoyrast í sambandi við ætlað keyp, ný- ella víðarimenning av KT-skipanum.

Gjaldstovan skal hoyrast í sambandi við ætlað keyp, ný- ella víðarimenning av KT-skipanum.

Sambært Sjóvinnustýrinum hevur stovnurin fleiri ferðir vent sær til KT landsins um ráðgeving og vegleiðing. KT landsins kundi ikki ráðgeva, men bað tey venda sær til uttanhýsis veitarar. Sjóvinnustýrið hevur vent sær til ávísan KT-veitara og fingið ráðgeving haðani í fleiri førum.

Sjóvinnustýrið rindar KT-fyritøku slakar 10 t.kr. um mánaðin fyri rakstur og viðlíkahald av Teyggjuni, sum stovnurin og Fiskimálaráðið eiga helvt um helvt.

Sjóvinnustýrið hevur skrivliga avtalu frá 2015 við Den Maritime Havarikommision, um kanningar av vanlukkum á sjónum og av arbeiðsvanlukkum. Í 2020 rindaði stovnurin

231 t.kr. fyri tænastuna. Sjóvinnustýrið greiddi frá, at tað skal vera armslongdar-frástøða frá Sjóvinnustýrinum, tá ið slíkar hendingar eru.

Sjóvinnustýrið hevur í 2014 gjørt avtalu við eina fyritøku um royndartíð at røkja callsenturtænastu fyri stovnin fyri 8.000 kr. um mánaðin. Mánaðarliga gjaldið er nú 9.440 kr. Sáttmálin er galdandi í eitt ár, og kann sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða varningi. Spurt, um tænastan er boðin út ímillum fleiri, ella lýst á Keypsportalinum, svaraði Sjóvinnustýrið, at stovnurin var og er ikki vitandi um, at aðrar føroyskar fyritøkur veita callsenturtænastu.

Í sambandi við bygnaðarbroytingar, til hjálp við setan av deildarleiðara, og til sparring um HR-viðurskifti hevur Sjóvinnustýrið í 2019 og 2020 rindað einari fyritøku 400 t.kr., uttan at bjóða tænasturnar út ímillum fleiri. Sambært Sjóvinnustýrinum er talan um týðandi álitisviðurskifti millum veitaran og stovnin, samstundis sum tað hevur týdning at halda áfram frá samskiftinum frammanundan.

Allir stovnar skulu fylgja ásetingunum í rundskrivinum "um keyp av vørum og tænastum".

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið er av teirri áskoðan, at allir stovnar hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum skulu fylgja ásetingunum í rundskrivinum "um keyp av vørum og tænastum". Eru føri har tað av onkrum serligum orsøkum ikki letur seg gera, eigur stovnurin at taka tað upp við Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Fíggjarmálaráðið (Keypsportalin).

Húsaleiga

Í 2019 rindaði Sjóvinnustýrið 689 t.kr. í húsaleigu, t.e. góðar 100 t.kr. meira enn í 2018 og 2017.

Í tveir mánaðir mátti stovnurin eisini rinda húsaleigu fyri hølini, tey fóru úr. Í juni 2020 gjørdi Sjóvinnustýrið sáttmála við P/f Hey um leigu av 477 m^2 í Bókbindaragøtu 8, fyri 1200 kr./m^2. Landsverk hevur góðkent leigusáttmálan, sum er galdandi til 31. desember 2021, og í fyrsta lagi kann sigast upp við 6 mánaða freist til 31. desember 2021.

Lønir

Lønirnar eru størsti parturin av útreiðslunum hjá Sjóvinnustýrinum.

ISPS[16] krevur vaktarskipan 24 tímar um samdøgrið, tí hava ávís starvsfólk vakt eina viku í senn. Skipanin er útgreinað í setanarsáttmálum hjá hvørjum einstøkum. Samsýningin er sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag, og uppgávurnar eru greinaðar í Dygdarskipanini.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lønirnar hjá starvsfólkum vóru rættar við at samanhalda lýsingar, umsóknir, setanarsáttmálar v.m. við útgoldnu lønirnar. Vit høvdu ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum eru nevndar niðanfyri.

Ein er settur í starv í 2020 og løntur sambært 36. lønarflokki í tænastumannaavtaluni, uttan at starvið er tænastumannastarv. Lønardeildin hevur góðkent lønar- og setanar-treytirnar. Viðkomandi fær vaktargjøld, tó at tað ikki er útgreinað í setanarskrivinum, sum annars er ásett í starvsfólkahandbókini.

Sambært Sjóvinnustýrinum er vaktargjald ikki í setanarskrivinum hjá sýnsstarvsfólkum. Tað er gjørt, fyri at stovnurin kann seta starvsfólk, sum av ávísari orsøk ikki ynskja at vera við í vaktarskipanini, ella av aðrari orsøk ikki skulu vera í vaktarskipanini.

Sambært Sjóvinnustýrinum byrjaði eitt kærumál í 2020 ímillum Sjóvinnustýrið/ Lønardeildina og Starvsmannafelagið um vaktarskipanina, har hesin spurningurin

[16] The International Ship and Port Facility Security Code.

eisini er við. Sjóvinnustýrið bíðar eftir avgerð í kærumálinum og fer at rætta starvsfólkahandbókina samsvarandi.

Starvsfólk skráseta arbeiðstíðina, nær tey koma, nær tey fara, fráveru og feriu. Leiðreglur eru í starvsfólkahandbókini, sum m.a. áseta, at starvsfólk kunnu skylda 30 tímar ella eiga 40 tímar á. Sjóvinnustýrið ger avtalur við starvsfólkini um, at tey kunnu eiga upp til 2 serstakar frívikur á.

Í november 2020 áttu fleiri starvsfólk nógvar feriutímar á. Sambært Sjóvinnustýrinum hevur støðan viðvíkjandi koronufarsóttini gjørt sítt til, at onkur átti meira feriu á, enn vanligt hevur verið í november.

Fíggjarstøða

Sjóvinnustýrið hevur ongar ognir skrásettar í Búskaparskipan landsins. Stovnurin hevur dagført yvirlit yvir útbúnað og innbúgv. Skrásett er ikki, nær ognirnar eru útvegaðar, ella hvussu nógv tær kostaðu. Sjóvinnustýrið eigur ein bil.

Enn ongar ognir skrásettar í BSL.

Sambært Búskaparskipan landsins standa 12.300 kr. á kontuni "Ikki inntøkuført - granskingarstyrkur, gávur o.t.", ið hava staðið har síðani 2008, sum flyting frá felagnum Skipating. Sjóvinnustýrið ætlaði avgreiða upphæddina saman við Gjaldstovuni. Í juni 2021 er upphæddin ikki avgreidd.

KT-viðurskifti

Sjóvinnustýrið brúkar Landsnet og hevur onkra fakskipan liggjandi uttan fyri Landsnet. Sambært kunngerðini um KT-trygd skal stovnurin skoðast av Gjaldstovuni eina ferð um árið. Stovnurin er skoðaður í 2020.

6.10 Sjóvinnustýrið, bygningur (LG 2015/206-0351)

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at Sjóvinnustýrið húsaðist í skrivstovuhølum í Tórshavn. Ætlanin var at byggja nýggj skrivstovuhøli til stovnin í Vágum. Verklagslóg var samtykt fyri tilsamans 9,9 mió.kr. Landsverk stóð fyri byggiverkætlanini, og eftir ætlan skuldi bygningurin verða klárur at flyta inn í á heysti 2019.

Landsverk hevði í samstarvi við Vága kommunu og Sjóvinnustýrið funnið eina hóskandi staðseting av skrivstovubygninginum. Yvirtøkan av økinum dróg út, m.a. tí at kommunan átti ein part, og ein privatur ánari átti ein part av økinum, sum ætlanin var at nýta til staðsetingina av bygninginum til Sjóvinnustýrið. Kommunan fór tí undir at ognartaka henda partin av økinum, og tók tað drúgvari tíð enn fyrst mett.

Í august 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at seinasta vár umrøddu Landsverk og Vága kommuna at gera eitt gerðabýti, soleiðis at landið yvirtekur grundøkið, har bygningurin til Sjóvinnustýrið skal staðsetast, og kommunan yvirtekur grótbrotið í Sandavági frá Landsverki. Umbýtið fór væntandi at verða avgreitt á heysti 2020.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnaði eisini um, at ætlanin var at bjóða verkætlanina út á heysti 2020.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at umbýtið er framt, og Føroya landsstýrið eigur nú grundøkið, har bygningurin verður staðsettur.

Verkætlanin at byggja nýggjan umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið er boðin út sum heildararbeiðstøka, og avtala er gjørd við byggifyritøku. Arbeitt verður við at fáa neyðug loyvir frá Vága kommunu. Ætlanin er at fara undir at grava út í november 2021, treytað av at neyðugu loyvini eru fingin til vega.

6.11 Loyvisnevndin (LG 2019/206-0371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Loyvisnevndini. Nevndin umsitur skeinkiloyvi til rúsdrekka o.a., og játtanin er á høvuðskontu 13.37.1.08. Loyvisnevndin virkar eftir § 8 í Ll. nr. 183/2018 "um matstovuvirksemi og gistingarhúsvirksemi" (Matstovulógin) og K. nr. 3/2020.

Loyvisnevndin hevði ikki orðaðan KT-politikk, og hevði ikki gjørt ætlan fyri, hvussu nevndin skal lúka krøvini í nýggju persóndátulógini.

Landsgrannskoðanin vísti á, at allir stovnar landsins skulu lúka treytirnar í rundskrivinum um KT-trygd, umframt ásetingar í trygdarkunngerðini og mælti til, at Loyvisnevndin setir í verk KT-trygd eftir galdandi reglum.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at grannskoðari hevur skoðað KT-trygdina hjá Loyvisnevndini. Rúsdrekkasøla landsins hevur umsitingina hjá Loyvisnevndini um hendi og tryggjar, at reglurnar í rundskrivinum verða hildnar.

6.12 Vinnustovnurin (LG 2017/206-0371)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Vinnustovninum.

Vinnustovnurin hevði ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at nýta egna búskaparskipan, men hevði í februar 2018 søkt um loyvi. Sambært Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hevði Vinnustovnurin ikki frætt frá Gjaldstovuni. Ráðið legði afturat, at skipanin hjá landinum megnar ikki at umsita allar skrásetingarnar hjá Vinnustovninum, og var tað upprunaliga í samstarvi við Gjaldstovuna, at Vinnustovnurin hevði egna búskaparskipan til skuldarar. Tó var eingin formlig avtala gjørd.

Enn einki formligt loyvi til egna búskaparskipan.

Í 2020 greiddi Umhvørvis- og vinnumálaráðið frá, at samskifti hevði verið við Gjaldstovuna, men Gjaldstovan hevði ikki vent aftur um eina niðurstøðu.

Í august 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at einki nýtt er í málinum.

6.13 Brúkaraumboð (LG 2020/206-0371)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Brúkaraumboðið. Brúkaraumboðið virkar eftir Ll. nr. 19/2008 "um marknaðarføring". Játtanin er á høvuðskontu 6.37.1.15 og stovnurin er fevndur av roknskaparreglugerðini hjá Vinnustovninum.

Roknskapar- og játtanartøl:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	838	854	956	952	779
Keyp av vørum og tænastum	197	121	115	72	201
Keyp av útbúnaði, netto	0	29	65	3	46
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	77	126	177	75	71
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	-186	-208	-305	-122	0
Tilsamans	**926**	**922**	**1.008**	**980**	**1.097**
Játtan	*1.100*	*1.100*	*1.126*	*1.100*	*1.129*

Brúkaraumboðið er einasta starvsfólk í føstum starvi. Sambært § 21, stk. 3, í Ll. nr. 19/2008 er setanartíðin eitt 5 ára skeið, ið var úti í september 2017. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur longt setanina, seinast 20. februar 2020.

Sambært § 4 í K. nr. 103/2012 “um virksemi Brúkaraumboðsins” letur Brúkaraumboðið á hvørjum ári landsstýrismanninum frágreiðing um virksemi sítt í farna árið. Seinasta frágreiðingin var fyri árini 2017/2018. Í umbúna er ein frágreiðing fyri 2019/2020.

6.14 Filmshús (LG 2020/206-0371)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað játtanina til filmshús á høvuðskontu 6.37.2.12. Filmshúsið er sett á stovn við heimild í Ll. nr. 72/2017 “um filmshús”. Sambært K. nr. 108/2017 “um filmshús” liggur leiðslan hjá einum stýri við trimum limum, sum landsstýrismaðurin setir, harav ein eftir tilmæli frá Mentamálaráðnum og ein eftir tilmæli frá Felagnum Føroysk Filmsfólk. Landsstýrismaðurin ásetir samsýning til nevndina.

Í mars 2018 setti stýrið leiðara fyri Filmshúsið. Uppgávan hjá leiðaranum er at byggja upp Filmshúsið til ein depil innan samskipan og menning av filmsvinnuni í Føroyum, so fyrispurningar frá altjóða framleiðarum innan filmsvinnu kunnu samskipast ígjøgnum Filmshúsið.

Í 2020 var játtanin 1,6 mió.kr. Roknskapartøl 2017 til 2020:

t.kr.

Heiti	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	104	392	655	683
Keyp av vørum og tænastum	506	354	538	746
Keyp av útbúnaði, netto	248	46	8	59
Leiga, viðlíkahald og skattur	24	104	96	96
Søla av vørum og tænastum	0	-18	-32	-49
Flytingarinntøkur úr útlandinum	0	0	-165	-35
Innanh. Flyt. millum alm. stovn. (útr)	100	100	100	100
Tilsamans	**982**	**978**	**1.200**	**1.600**

Størsti parturin av útreiðslunum í 2020 vóru keyp av vørum og tænastum. Sambært Filmshúsinum er eitt arbeiði í gongd, sum skal lýsa føroysku filmsvinnuna og koma við ítøkiligum uppskotum um, hvussu altjóða áhugin at arbeiða við filmsframleiðslu í Føroyum skal stýrast. Orsakað av avmarkaðu ferðamøguleikunum í 2020 hevur tað tikið longri tíð enn ætlað.

Landsgrannskoðanin mælti til at gera roknskaparreglugerð. Í august 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at reglugerðin er gjørd.

Lønir, fundarsamsýningar og umsitingargjald

Landsgrannskoðanin hevur kannað lønarmálið og setanina av leiðaranum, um lýsing, umsókn, prógv, setanarskriv og lønargjaldsumbøn eru í málinum. Eisini kannaðu vit útgoldna fundarpeningin. Einki var at finnast at.

Vinnuframi umsitur skrivstovuhaldið fyri Filmshúsið sambært avtalu við stýrið. Leiðarin hevur lesiatgongd til Búskaparskipan landsins og sær rokningarnar, sum koma til stovnin. Filmshúsið rindar Vinnuframa 100 t.kr. um árið fyri umsitingina.

Keyp
Roknskapartøl fyri keyp av vørum og tænastum:

t.kr.

Heiti	2017	2018	2019	2020
Ferðing og flutningur, alment sett	1	23	32	8
Ferðing og flutningur, onnur	166	131	127	91
Umboðan o.tíl.	9	46	98	98
Telefon, el og keyp av vørum annars	23	22	17	19
Keyp av tænastum í sambandi við KT	40	44	58	76
Keyp av tænastuveitingum annars	268	87	206	453
Tilsamans	**506**	**353**	**538**	**746**

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur keyp, umboðan og ferðaútreiðslur í 2020.

Í 2020 hevur Filmshúsið goldið 218 t.kr. til sakkøna hjálp, harav 100 t.kr. fyri menning av grundarlagi fyri filmsvinnu í Føroyum. Hinir útreiðslupostarnir eru fyri hjálp til tekstir og heimasíðu.

Filmshúsið brúkar ferðauppgerðarskipanina hjá Gjaldstovuni. Landsgrannskoðanin hevur kannað ferðauppgerðirnar fyri 2020. Einki var at finnast at.

Inntøkur
Filmshúsið hevur heimild at hava inntøkur, men í 2020 var lítið gjørt við menning innan filmsvinnuna í Føroyum vegna ferðaavmarkingar. Inntøkurnar fyri skeið eru 49 t.kr.

KT
Øll KT-umsitingin hjá Filmshúsinum er hjá KT landsins. Tað er bert ein brúkari í Filmshúsinum og stovnurin goymir ongar persóndátur ella aðrar dátur av týdningi.

6.15 Endurgjald til filmsverkætlanir (LG 2020/206-0372)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 6.37.2.14 “Endurgjald til filmsverkætlanir”. Heimildin fyri afturbering er í Ll. nr. 170/2017 “um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum”. Landsstýrismaðurin hevur ásett nærri reglur og treytir fyri afturberingini í K. nr. 61/2020.

Í 2018 og 2019 vóru 200 t.kr. játtaðar um árið til “Endurgjald til filmsverkætlanir”.

Í sambandi við upptøkurnar av sendirøðini TROM bað landsstýrismaðurin um 4 mió.kr. í eykajáttan. Í viðmerkingunum verður víst á, at afturberingarskipanin hevur virkað væl, og at hon hevur verið avgerandi fyri, at partar av altjóða verkætlanum eru tiknar upp í Føroyum. Afturberingarskipanin kann lata upp til 25% av góðkendu útreiðslunum, sum framleiðslufelag hevur í Føroyum. Í eykajáttanarlóg fyri oktober 2020 eru 4 mió.kr. játtaðar.

Samlaða fíggjarætlanin til TROM er umleið 27 mió.kr. Mett var, at 16 mió.kr. skuldu brúkast í Føroyum í 2020 og 2021. Tilsøgnin um afturbering úr afturberingarskipanini var ein fortreyt fyri, at TROM kundi verða framleidd í Føroyum.

Í 2018 fekk verkætlanin “To love” 200 t.kr., og í 2019 fekk felagið Truenorth 200 t.kr. í sambandi við upptøkur til James Bond. Í 2020 fekk verkætlanin “Alt fyri hana” 200 t.kr. og “Trom” 4 mió.kr.

Sambært K. nr. 61/2020 tekur stýrið fyri Filmshúsið avgerðir um afturbering av útreiðslum til filmsframleiðslu í Føroyum. Í sambandi við viðgerðina kann stýrið fáa sær fakkøna hjálp. Avgerðir hjá stýrinum eru endaligar og kunnu ikki kærast til annan myndugleika.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið umsóknirnar og játtanirnar. Einki var at finnast at.

6.16 Tónleikaútflutningsstova (LG 2020/206-0372)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Tónleikaútflutningsstovuna. Játtanin er á høvuðskontu 6.37.2.15.

Sambært Ll. nr. 185/2018 "um tónleikaútflutningsstovu" er endamálið hjá Tónleikaútflutningsstovuni at marknaðarføra føroyskan tónleik uttanlands og veita ráðgeving um tónleikaútflutning, veita ráðgeving til útlendskar fyritøkur og tónleikarar, ið leita sær føroyskar samstarvspartar og at virka fyri at hækka førleikastøðið innan tónleikaútflutning og tónleikavinnu í Føroyum.

Leiðslan á Tónleikaútflutningsstovuni er eitt stýri við fýra limum, sum landsstýrismaðurin tilnevnir, harav ein eftir tilmæli frá Mentamálaráðnum og tveir eftir tilmæli frá tónleikavinnuni. Landsstýrismaðurin velur formannin. Stýrið setir dagligan leiðara og onnur starvsfólk.

Roknskaparviðurskifti

Landsgrannskoðanin mælti til at gera roknskaparreglugerð. Í september 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at reglugerðin er gjørd.

Roknskapar- og játtanartøl 2020:

t.kr.

Heiti	Roknskapur	Játtan
Lønir v.m.	694	700
Keyp av vørum og tænastum	176	180
Keyp av útbúnaði, netto	5	45
Leiga, viðlíkahald og skattur	22	100
Søla av vørum og tænastum	0	-25
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	100	0
Tilsamans	**997**	**1.000**

Lønir o.a.

Leiðarin var settur 1. november 2019. Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið setanina og lønarmálið. Einki var at finnast at.

Stýrið fær samsýning eftir galdandi reglum um fundarsamsýningar.

Keyp

Stovnurin hevur brúkt 177 t.kr. til keyp av vørum og tænastum. Av teimum eru 105 t.kr. goldnar til norska fyritøku fyri konsulentarbeiði. Stýrið greiddi frá, at eitt umboð fyri fyritøkuna flutti til Føroyar tíðliga í 2020, og tá ið viðkomandi búði í landinum, bleiv viðkomandi konsulentur hjá Tónleikaútflutningsstovuni. Norska fyritøkan arbeiddi við at marknaðarføra 8 føroyskar bólkar úti í heimi. Tónleikaútflutningsstovan rindaði 50% og bólkarnir 50%.

Orsakað av COVID-19 brúkti Tónleikaútflutningsstovan minni til ferðaútreiðslur enn væntað, og brúkti ístaðin meira upp á konsulenttænastur.

Vísandi til rundskriv "um keyp av vørum og tænastum", heldur Landsgrannskoðanin, at stovnurin átti at biðið um undantak frá regluni um útbjóðing, um ikki var gjørligt at bjóða nevnda konsulentarbeiði út.

Innanhýsis flytingar ml. stovnar
Vinnuframi hevur skrivstovuhaldið og tekur sær av øllum bókhalds- og roknskapar-viðurskiftum. Í juni 2019 hevur stýrið gjørt avtalu við Vinnuframa, har m. a. er ásett, at umsitingargjaldið er 100 t.kr. um árið.

Leiga
Tónleikaútflutningsstovan hevur avtalu við Eysturkommunu um leigu av hølum í Syðrugøtu, sum stovnurin rindar 885 kr. um mánaðin fyri. Umframt tað rindar stovnurin 1.000 kr. um mánaðin í leigu í Hugskotinum á Eystaru Bryggju í Tórshavn. Í 2020 rindaði stovnurin tilsamans 21,6 t.kr. fyri bæði hølini.

Inntøkur
Sambært stýrinum skuldi Tónleikaútflutningsstovan eisini skipa fyri skeiðum og taka gjøld fyri tað, men tað er fyribils útsett orsakað av COVID-19.

6.17 Stuðul til útoyggjamenning (LG 2019/206-0372)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av "Stuðul til útoyggjamenning". Játtanin er ætlað til at stuðla tiltøkum í útoyggjum, sum eru mennandi fyri útoyggjarnar.

Í 2019 vóru 1,1 mió.kr. játtaðar. Umhvørvis- og vinnumálaráðið umsitur játtanina og hevði rindað stuðulin sambært reglugerð "fyri veiting av stuðulsjáttan til útoyggja-menning" frá 23. februar 2016.

Í sambandi við grannskoðanina kannaði Landsgrannskoðanin útgjøld til 5 persónar og feløg, ið høvdu fingið stuðul í 2019.

Útoyggjafelagið, sum hevði fingið 260 t.kr. í stuðli, hevði ikki latið inn roknskap fyri 2019, tó at umsøkjari skuldi lata ráðnum grannskoðaðan roknskap, tá ið stuðuls-upphæddin er oman fyri 100 t.kr.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum var roknskapurin hjá Útoyggjafelagnum ikki liðugur, orsakað av skerdari arbeiðsorku hjá grannskoðanarfyritøkuni, vegna koronufarsóttina. Umhvørvis- og vinnumálaráðið skuldi senda Landsgrannskoðanini roknskapin, tá ið ráðið hevði móttikið hann.

Í august 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ráðið hevur fingið roknskapirnar frá Útoyggjafelagnum fyri 2019 og 2020.

6.18 Rúsdrekkasøla landsins (LG 2018/206-0373)

Í 2018 kunnaði Uttanríkis- og vinnumálaráðið um, at Rúsdrekkasølan arbeiddi við at dagføra roknskaparreglugerðina, sum var frá 2007.

Nýggja roknskapar-reglugerðin er góðkend.

Í august 2021 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ráðið hevur góðkent nýggju roknskaparreglugerðina hjá Rúsdrekkasølu landsins.

Kassa- og goymslueftirlit
Landsgrannskoðanin hevur verið á ófráboðaðum kassa- og goymslueftirlitum á nøkrum deildum hjá Rúsdrekkasølu landsins seinasta árið, og um ársskiftið gjørdi Landsgrannskoðanin eftirlitsteljingar av høvuðsgoymsluni á Hjalla.

Kassarnir stemmaðu stórtsæð eftirlitsdagin, meðan nakrir munir vóru á goymslunum úti á deildunum.

6.19 Umhvørvisstovan (LG 2017/211-0374)

Í fleiri frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av stuðulsfíggjaða virkseminum hjá Umhvørvisstovuni.

Stuðulsfíggjað virksemi skal sambært játtanarreglunum vera sprottið úr vanliga virkseminum, og stovnurin skal greiða neyvari frá stuðulsfíggjaða virkseminum í viðmerkingum til fíggjarlóg.

Roknskaparligur skilnaður skal vera ímillum stuðulsfíggjað virksemi og vanligt virksemi hjá stovninum, eisini viðvíkjandi lønum.

Roknskaparligur skilnaður skal vera ímillum vanligt virksemi og stuðulsfíggjað virksemi.

Landsgrannskoðanin kannaði eina verkætlan, nevnd Secure. Samlaða kostnaðarætlanin var 13,8 mió.kr. Føroyski parturin var 1,8 mió.kr. og var fíggjaður við 1,2 mió.kr. frá Northern Periphery and Arctic Programme, stytt NPA, og 634 t.kr. í eginfígging frá Umhvørvisstovuni.

Pengarnir til verkætlanina vóru m.a. brúktir til sólselluútbúnað á bygningunum hjá Umhvørvisstovuni og Dugna, útskifting av sirkulatiónspumpum í 32 húsum í Nólsoy og til ráðstevnur.

Verkætlanin var frá 1. mai 2016 til 30. apríl 2019. First level controller hevði váttað hálvárligu roknskapirnar til NPA. NPA rindar bert stuðul fyri goldnar rokningar.

Stuðulin frá NPA var goldin soleiðis:

2018:	263.000 kr.
2019:	197.000 kr.
2020:	697.000 kr.
Tilsamans	1.157.000 kr.

Í 2016 og 2017 var eingin stuðul móttikin, og 79 t.kr. vóru støðlaðar í fíggjarstøðuni.

Í 2018 rindaði verkætlanin 277 t.kr. fyri lønir til játtanina “El-veiting” og 57 t.kr. til Umhvørvisstovuna, sum “flytingar millum almennar stovnar”. Í 2018 vóru 334 t.kr. støðlaðar, og ágóðin í fíggjarstøðuni var 414 t.kr.

Í 2019 rindaði verkætlanin 152 t.kr. fyri lønir, har skjalprógvið er “yvirlit yvir rættingar í bókhaldinum”. Verkætlanin rindaði Landsverki 46 t.kr. fyri el-installatiónir og samskipan v.m. fyri sólselluútbúnað til Dugna.

Í 2019 vóru 419 t.kr. lagdar afturat støðlaðu upphæddini og 136 t.kr. drignar frá. Skjalprógvini vóru listi við umbókingum og yvirlit yvir rættingar í bókhaldinum. Ágóðin 31. desember 2019 var 697 t.kr.

Í juli 2020 kunnaði Umhvørvis- og vinnumálaráðið um, at restin av stuðlinum var goldin Umhvørvisstovuni í februar og apríl 2020.

Landsgrannskoðanin vísti á, at vantandi skráseting av arbeiðstíð gjørdi, at tað bar ikki til at sanna, at upphæddirnar, ið verkætlanin rindaði fyri arbeiðstímar, vóru rættar. Umhvørvisstovan var samd í, at støðan higartil viðvíkjandi tímaskráseting ikki hevði verið nøktandi, og boðaði frá, at hon fór at fáa viðurskiftini í eina fasta legu.

Vantandi skráseting av arbeiðstíð ger, at til ber ikki at sanna, at upphæddir eru rættar.

Í juli 2020 kunnaði Umhvørvis- og vinnumálaráðið um, at Umhvørvisstovan hevði broytt mannagongdina soleiðis, at tímanýtslan til ymiskar verkætlanir verður gjørd upp á vikufundum á deildini og verður førd í eitt rokniark. Ráðið helt tað vera eina skilagóða loysn, sum eisini var ódýr.

Samanumtikið
Landsgrannskoðanin vísti á, at tað gruggar roknskapin, tá ið goldið verður fyri sólselluanleggið av tveimum játtanum, umframt av stuðulsfíggjaðum virksemi.

Í juli 2020 greiddi Umhvørvis- og vinnumálaráðið frá, at ráðið tók undir við, at stovnar og ráð samstarva, og í so máta var tað eitt fyrimyndarligt samstarv, sum var til fyrimuns fyri báðar partar og í tráð við endamál hjá stovnunum báðum.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum var tað óheppið, at samstarvið ikki hevði verið nóg greitt, tá ið rokningarnar skuldu bókast, og hevði gjørt tað trupult hjá grannskoðanini at síggja samlaðu útreiðslurnar. Umhvørvis- og vinnumálaráðið ætlaði at mæla Umhvørvisstovuni til at hugsa bókhald inn í verkætlanir til tess at tryggja gjøgnumskygni.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið helt, at rættast hevði verið, at ein stovnur bókaði allar útreiðslurnar á verkætlanina og síðani avgreiddi tann partin, sum aðrir stovnar skuldu gjalda, við "innanhýsis flyting millum stovnar".

Landsgrannskoðanin helt, at tað var ikki nøktandi, at Umhvørvisstovan ikki kundi skjalprógva bókingarnar í Búskaparskipan landsins, og at roknskapurin fyri stuðulsfíggjaða virksemið ikki kundi samanhaldast við roknskapin/uppgerðirnar til NPA. Tað sást heldur ikki av roknskapinum fyri stuðulsfíggjaða virksemið, hvussu stóra upphædd Umhvørvisstovan hevði goldið til verkætlanina.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, at roknskapurin er rættur, uttan nøktandi tíðarskráseting og bókingarskjalprógv.

Niðurstøðan hjá Landsgrannskoðanini var, at vit kundu ikki siga, at roknskapurin fyri verkætlanina Secure var rættur, tí eingin verulig tíðarskráseting hevði verið, og tí at nógvar bókingar vóru gjørdar uttan skjalprógv.

Í juli 2020 greiddi Umhvørvis- og vinnumálaráðið frá, at ráðið helt, at hóast NPA hevur egna skipan (eMS) at skráseta roknskapir og skjøl í, var tað ein sjálvfylgja, at roknskapurin í Búskaparskipan landsins samsvaraði við tað, sum var skrásett í eMS.

Í august 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at málið er tikið upp við Umhvørvisstovuna og Umhvørvisstovan hevur váttað, at uppgerðin, sum er latin NPA, er røtt, og at mannagongdir eru broyttar, soleiðis at tað ber til at síggja rættvísandi roknskap fyri eina og hvørja verkætlan í Búskaparskipan landsins.

6.20 Umhvørvisstovan, kassaeftirlit (LG 2020/206-0374)

Umhvørvisstovan
Í desember 2020 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti á Umhvørvisstovuni. 470 kr. vóru ov nógv í kassanum í mun til kassaskipanina. Landsgrannskoðanin kannaði eisini tvær peningastovnskontur. Á aðrari kontuni vóru nakrir gamlir, opnir postar.

Skógrøktin
Í mai 2021 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirliti hjá Skógrøktini. Ein minni munur var, sum vit fingu frágreiðing um.

6.21 Heilsufrøðiliga starvsstovan (LG 2017/206-0375)

Í seinastu frágreiðingunum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Heilsufrøðiliga starvsstovan nevnir í roknskaparreglugerðini, hvørji inntøkusløg stovnurin hevur, men ikki nærri reglur um prísáseting v.m.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið var samt við Landsgrannskoðanini, at tað var ikki samsvar ímillum ásetingina í rundskrivinum og uppskotið til roknskaparreglugerð. Ráðið fór saman við Heilsufrøðiligu starvsstovuni at broyta ásetingina um inntøkur í samsvari við rundskrivið.

Í 2020 kunnaði Umhvørvis- og vinnumálaráðið um, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tekur gjøld fyri ymiskar tænastur og veitingar. Prísir eru ásettir í kunngerð. Tó áttu prísir fyri tey ymisku inntøkusløgini at framgingið av roknskaparreglugerðini. Tað eigur at vera tikið við, tá ið roknskaparreglugerðin verður endurskoðað.

Í august 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnað um, at ætlanin er framvegis, at tey ymisku inntøkusløgini skulu framganga av roknskaparreglugerðini, tá ið hon verður endurskoðað.

6.22 Barsilsskipanin (LG 2020/206-0394)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Barsilsskipanina í 2020. Vit eftirkannaðu m.a. avstemman av inngjøldum, útgjøldum, skuldarum og ognarum.

Endamálið við Barsilsskipanini er at veita barsilspening til foreldur, sum eru í barsilsfarloyvi. Í 2019 eru 135 mió.kr. játtaðar á høvuðskontu 17.39.4.01 “Barsilsskipan” til útgjøld, og á høvuðskontu 17.39.4.04 “Umsiting av barsilsskipan” eru 2,4 mió.kr. játtaðar til umsiting.

Inntøkurnar eru játtaðar á høvuðskontu 20.52.1.28 “Gjald til barsilsskipan”.

Í Ll. nr. 48/2001 “um barsilsskipan” (Barsilslógin) eru reglur um m.a. rætt til barsilsfarloyvi, útgjald av barsilspeningi og inngjald til skipanina. Fleiri kunngerðir eru gjørdar við heimild í Barsilslógini.

Roknskaparviðurskifti

Inngjøld til Barsilsskipanina

Í § 18 í barsilslógini er ásett, at barsilsgjald verður kravt av øllum A-inntøkum, sum tey gjaldsskyldugu fáa, við nøkrum undantøkum sum eru nevnd í stk. 1, pkt. 1 - 4.

Landsstýrismaðurin kann við kunngerð broyta gjaldið, tó ikki hægri enn 0,71%. Síðani 2016 hevur inngjaldsprosentið verið 0,71%[17] av gjaldsgrundarlagnum.

Inngjøld og játtanir 2015 til 2020:

t.kr.

Inntøkur, høvuðskt. 20.52.1.28	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Einstaklingar, lønmóttakarar	-48.934	-58.901	-61.794	-64.814	-68.604	-71.260
Einstakl., sjálvboðið inngjald	-48	-64	-58	-50	-51	-57
Innt. frá feløgum, arbeiðsgev.	-51.579	-62.052	-65.446	-68.811	-73.219	-75.988
Avskrivingar/avsetingar	82	7	5	6	10	17
Tilsamans	**-100.478**	**-121.010**	**-127.293**	**-133.668**	**-141.865**	**-147.289**
Játtan, inntøkur	*98.000*	*116.000*	*122.000*	*132.500*	*137.000*	*147.000*
Meirinntøkur	**-2.478**	**-5.010**	**-5.293**	**-1.168**	**-4.865**	**-289**

Inntøkurnar eru øktar úr 100 mió.kr. upp í 147 mió.kr. árini 2015 til 2020. Sambært roknskapartølunum hava inngjøldini frá arbeiðsgevarum verið hægri, enn inngjøldini frá persónum, sjálvt um prosentgjaldið er tað sama.

[17] 1. januar 2021 er inngjaldið broytt til 0,86%.

TAKS hevur greitt frá, at munurin stendst av, at arbeiðsgevarar rinda barsilsgjald av lønum, sum løntakarar ikki gjalda av, t.d. eru persónar, ið ikki hava fulla skattskyldu í Føroyum, sum ikki eru gjaldsskyldugir.

Sjálvboðin inngjøld

Persónar, sum hava aðra inntøku av vinnu enn A-inntøku, hava sambært § 20 í lógini rætt til barsilspening, um teir tekna eina trygging.

Í K. nr. 59/2002 er gjaldið til sjálvbodnu barsilspeningatryggingina ásett til 500 kr. um árið fyri hvønn tryggjaðan. Gjaldið verður rindað TAKS fyrstu ferð, samstundis sum tryggingin verður teknað hjá Barsilsskipanini, og verður síðan rindað TAKS eina ferð um árið eftir uppkravi.

Í 2013 vísti Landsgrannskoðanin á, at í mun til tað, ið A-skattgjaldarar rinda, er árliga tryggingargjaldið á 500 kr. í lægra lagi. Við galdandi prosentgjaldi svarar upphæddin til 0,71% av einari inntøku á 70.422 kr. um árið.

Landsgrannskoðanin hevur samskift við Vinnumálaráðið og Samferðslumálaráðið um málið, og seinni við Umhvørvis- og vinnumálaráðið, men gjaldið er enn óbroytt.

Gjaldið fyri sjálvbodna trygging verður broytt til 3.000 kr. um árið.

Kunngerð um gjald á 3.000 kr. um árið er lýst, og fær nýggja gjaldið virknað frá 1. januar 2022.

Áogn hjá Barsilsskipanini

Løntakarar og arbeiðsgevarar hava skyldu at gjalda barsilsgjald, tá ið A-inntøka verður móttikin ella rindað. Í § 19, stk. 2, í barsilslógini er ásett, at barsilsgjaldið fellur til gjaldingar samstundis, sum teir gjaldsskyldugu rinda ella fáa A-inntøku. Áðrenn A-inntøkan verður útgoldin, skal inngjaldið avroknast.

Sambært K. nr. 123/2001 kunnu arbeiðsgevarar rinda við at geva TAKS fulltrú til at taka barsilsgjaldið av peningastovnskontu hjá viðkomandi, ella við at rinda barsilsgjaldið eftir rokning frá TAKS. Barsilsgjaldið skal rindast innan 20 dagar eftir, at TAKS hevur sent rokningina.

TAKS hevur bert stovnað fáar gjaldsavtalur um barsilsgjald. TAKS skrásetir rokningarnar í bókhaldsskipan sínari, og um krøvini ikki eru goldin innan gjaldfreistina, verður skuldin sjálvvirkandi flutt til innkrevjingarskipanina.

Áogn, skrásett høvuðskontu 20.52.1.28 “Gjald til barsilsskipan”, seinastu 6 árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Barsilsgjald, arbeiðsgevarar	6.240	7.347	7.580	7.717	8.207	8.342
Barsilsgjald, sjálvboðin skrásett	1	-4	-1	0	-4	-2
Tilsamans	**6.241**	**7.343**	**7.579**	**7.717**	**8.203**	**8.340**

Áognin fyri barsilsgjald hækkar.

Frá 2015 til 2020 er samlaða áognin hækkað úr 6,2 mió.kr. í 8,3 mió.kr. Við árslok 2018 var áognin, sum er fallin til gjaldingar og send til innheintingar 542 t.kr., og við árslok 2019 var hon 675 t.kr.

Í kunngerðini um barsilsgjald er ásett, at tá ið arbeiðsgevarar rinda A-inntøku, skulu teir avrokna sín part av barsilsgjaldinum til TAKS.

Ikki møguligt hjá TAKS at trekkja gjaldið sjálvvirkandi.

Áðrenn føroysku peningastovnarnir fluttu KT-virksemi sítt av landinum, bleiv gjaldið frá arbeiðsgevarunum trekt sjálvvirkandi, tá ið lønir vórðu avgreiddar. TAKS hevur kannað um tað aftur ber til at trekkja gjaldið sjálvvirkandi, men tað letur seg ikki gera.

Tað er ásett í kunngerðini, at bæði løntakarar og arbeiðsgevarar skulu avrokna barsilsgjaldið samstundis, sum lønin verður móttikin ella rindað. Við núverandi innheintingarmannagongd verður gjaldið frá arbeiðsgevarum ikki rindað samstundis sum A-inntøkan verður goldin.

Sambært Umhvørvis- og vinnumálaráðnum heldur TAKS at verandi mannagongd riggar væl. Umhvørvis- og vinnumálaráðið ásannar, at tørvur er á at endurskoða lógina og tilhoyrandi kunngerð. Ætlanin er, at gjaldshátturin skal verða smidligur fyri arbeiðsgevarar, men samstundis tryggja inntøkurnar hjá Barsilsskipanini.

Áogn við árslok 2019, greinað í tal av skuldarum og upphæddir:

kr.

Áogn pr. skuldara	Tal	Saldo 31.12.19	Til innkrevjingar
< 0	134	-83.622	18.332
1-10.000	2.166	2.652.104	2.238.555
10.001-100.000	119	3.299.493	3.233.363
100.001-1.000.000	5	842.985	790.005
> 1.000.000	1	1.495.882	1.496.490
Tilsamans	**2.425**	**8.206.842**	**7.776.745**

Sambært TAKS var skuldin, sum var eldri enn eitt ár í august 2020, 112 t.kr., býtt á 122 V-tøl (arbeiðsgevarar).

Ímillum áognina hjá Barsilsskipanini eru 134 persónar/virkir, sum eiga 83.622 kr. á hjá Barsilsskipanini. TAKS hevur greitt frá, at tey eftirkanna ágóðar og rinda teir út, men at summi virkir ynskja, at ágóðin verður mótroknaður í komandi krøvum.

TAKS metir ikki um gjaldførleikan hjá hvørjum skuldara sær, men metir um skuldina í innheintingarskipanini sum heild.

Avsetingar og avskrivingar

Í fíggjarstøðuni setir Barsilsskipanin hvørt ár pening av m.a. til útgjøld, sum verða goldin út í januar, men sum hoyra til árið fyri. Seinastu árini hava avsetingarnar verið:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Skuld, greidd til útgjald. ym. skipanir	-12.585	-10.911	-10.805	-9.621	-11.106	-13.044

Avsetingar vegna kærunevndaravgerð.

Í 2013 gav kærunevndin hjá Barsilsskipanini einum borgara viðhald í, at TAKS ikki hevði tulkað § 13 í barsilslógini rætt. Avgerðin hevði m.a. við sær, at lógin um barsilsgjald var broytt í mai 2014, og at onnur, sum høvdu fingið barsilsgjøld, høvdu fingið ov lítið útgoldið.

Í 2014 og 2015 hevði TAKS sett av í sambandi við kærunevndaravgerðina, ávikavist 1,4 mió.kr. og 1,8 mió.kr. TAKS inntøkuførdi upphæddirnar aftur í 2015 og 2016. Sambært TAKS rindaðu tey tilsamans 2,5 mió.kr. út í samsvari við kærunevndaravgerðina.

Útgjøld úr Barsilsskipanini

Foreldur og arbeiðsgevarar hava rætt til útgjøld úr Barsilsskipanini. Barsilsskipanin rindar eisini sjálv barsilsgjøld, ALS-gjøld, gjøld til AM-grunnin og eftirløn.

Útgjøld og játtanir á høvuðskontu 6.39.4.01:

t.kr.

Útreiðslur til veitingar	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Veiting til persónar	55.602	69.034	75.700	75.801	83.938	102.092
Veiting til persónar umvegis arb.gev.	32.093	32.930	33.688	34.852	41.939	46.590
Frítíðarløn, eftirløn v.m. [18]	8.063	9.734	12.555	16.114	19.939	22.425
Veitingar tilsamans	**95.758**	**111.699**	**121.943**	**126.767**	**145.816**	**171.107**
Játtan	*96.000*	*114.000*	*114.000*	*133.000*	*135.000*	*143.000*
Meir-/minninýtsla	**-242**	**-2.301**	**7.943**	**-6.233**	**10.816**	**28.107**

Roknskapartølini fyri 2018 og 2019 eru ikki røtt.

Av tí at ein feilur var í bókhaldsskipanini og harvið av bókingunum av eftirlønum, eru tølini í 2018 og 2019 ikki røtt. Sí eisini brot niðanfyri um bíðikontu. Í 2018 eru útreiðslurnar til veitingar 131 mió.kr., tó at roknskapurin vísir 127 mió.kr. Í 2019 eru útreiðslurnar til veitingar 153 mió.kr., men roknskapurin vísir 146 mió.kr. Móttakararnir av barsilspeningi hava tó fingið tað, ið teir skulu.

Bíðikonta

Í fíggjarstøðuni hevur Barsilsskipanin eina sonevnda "bíðikontu", sum verður nýtt til at seta pening av, sum ikki er klárur at rinda út, men sum arbeiðsgevarar og persónar hava rætt til. Bíðikontan verður eisini nýtt til onnur útgjøld, har øll viðurskifti ikki eru í lagi.

Á høvuðskontu 6.39.4.01 eru upphæddirnar bókaðar í fíggjarstøðuni á St.Rk. 0849 "ymsar ikki avgreiddar skyldur":

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Ymsar ikki avgreiddar skyldur	35	436	1.786	3.641	10.858	-436

Spurt, hví upphæddin var økt so nógv, svaraði TAKS, at talan var um gjøld, sum ikki vóru klár at rinda út.

Um miðjan juli 2020 spurdi Landsgrannskoðanin aftur TAKS um málið, hví saldan ultimo juni 2020 var komin upp á 15,7 mió.kr. Seinast í august 2020 svaraði TAKS m.a., at saldan á bíðikontuni fór at verða bókað, tá ið arbeiðsorka var til tað.

Eftir at Landsgrannskoðanin fleiri ferðir, seinast í september 2020, bað um frágreiðing um upphæddina, og hví hon vaks so nógv, eftirkannaði TAKS allar bókingar í Barsilsskipanini.

Um miðjan oktober 2020 boðaði TAKS frá, at feilur var komin í KT-skipanina í 2018, sum hevði havt við sær, at tilsamans 25 mió.kr. ov lítið vóru útreiðsluførdar í 2018, 2019 og 2020, og harvið hevði Barsilsgrunnurin goldið landskassanum samsvarandi ov lítla upphædd.

Í november 2020 kunnaði TAKS um, at feilurin var rættaður.

Innaneftirlitið als ikki nøktandi.

Landsgrannskoðanin heldur, at innaneftirlitið als ikki hevur verið nøktandi. Um innaneftirlitið hevði virkað nóg væl, hevði TAKS sannlíkt varnast feilin væl fyrr.

Feilur í KT-skipanini

Frá 1. januar 2018 skulu persónar, sum fáa barsilsgjald, rinda eftirlønargjald.

[18] Í upphæddini eru frítíðarløn, eftirløn, ógreinað tilskot, og gjøld til ALS, BAS og AMEG.

TAKS gjørdi nýggjar kontur til at bóka eftirlønir á frá 1. januar 2018. Í tí sambandi var neyðugt at forrita KT-skipanina til endamálið. Sambært TAKS hendi feilurin tá. Skipanin var forritað til at kreditera og debitera á tvær rakstrarkontur. Tað gjørdi, at útgjøld til eftirlønir vóru ikki útreiðsluførd yvir raksturin, og Barsilsgrunnurin harvið ikki kravdur eftir eftirlønargjøldunum.

Barsilsgjøld til foreldur og eftirlønargjøld verða rinda út um peningastovnskontu hjá Gjaldstovuni.

Útgjøldini av eftirlønargjøldum eru krediterað peningastovnskontuna og debitera "bíðikontuna" hjá TAKS í fíggjarstøðuni. Um rætt var bókað, skuldi debiteringin tá verið á rakstrarkontu.

Hesin skeivleikin hevði við sær, at rakstrarútreiðslurnar hjá Barsilsskipanini vóru 4,1 mió.kr. ov lágar í 2018 og 7,1 mió.kr. í 2019 og um 14 mió.kr. í 2020, tá ið feilurin var funnin.

Umsitingin av Barsilsskipanini

Í 2011 gjørdu TAKS og Vinnumálaráðið avtalu um umsiting av pørtum av Barsilsskipanini. Í avtaluni er m.a. ásett, at TAKS skal:

- viðgera og avgreiða umsóknir,
- umsita útgjald,
- umsita tekning av tryggingum hjá sjálvstøðugum vinnurekandi,
- journalisera og skráseta,
- nýta og viðlíkahalda neyðugar KT-skipanir, og føra bókhald, og
- gera uppskot til løgtingslógir og kunngerðir, saman við Vinnumálaráðnum.

Sambært umsitingaravtaluni skal TAKS á hvørjum ári lata landsstýrismanninum frágreiðing um virksemið hjá Barsilsskipanini. Seinasta frágreiðingin er fyri 2018.

Útreiðslurnar og játtanirnar til umsiting av Barsilsskipanini seinastu árini:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Umsiting av skipan	2.505	2.147	2.050	2.447	2.112	2.050
Játtan	2.250	2.000	2.000	2.400	2.400	2.400
Meir-/minninýtsla	**-255**	**-147**	**-50**	**-47**	**288**	**350**

Síðani TAKS yvirtók umsitingina, hevur stovnurin avroknað umsitingarútreiðslur og KT-rakstur ímillum Barsilsskipanina og TAKS.

Innaneftirlit

TAKS skrásetir umsóknir um barsilsgjald við p-talinum hjá mammunum sum lykli, eisini tá ið pápi ella arbeiðsgevari søkir. Barsilspeningurin verður útgoldin sjálvvirkandi.

Sambært TAKS ansa tey eftir, at tey ikki móttaka og goyma viðkvæmar persónupplýsingar. Um umsøkjarar senda slíkar upplýsingar saman við umsóknini, strikar TAKS upplýsingarnar.

Stórur partur av umsitingini fer fram handligt. Málsviðgerarar kanna við stakroyndum útgjøldini, áðrenn deildarleiðarin leysgevur. Deildarleiðarin samanber upplýsingarnar á listanum við upplýsingarnar, ið eru skrásettar í skipanini. Simulering verður gjørd av útgjøldunum, soleiðis at til ber at steðga útgjøldum, um okkurt er, sum tað ikki eigur at vera.

Stórur partur av umsitingini fer fram handligt.

Fyri at byrgja fyri feilum kanna málsviðgerarnir skrásettu málini hjá hvørjum øðrum.

Eingin funktións-skilnaður.

Funktiónsskilnaður

Øll starvsfólkini, sum arbeiða við Barsilsskipanini burturav, hava eins arbeiðsuppgávur og hava somu rættindi í KT-skipanini at stovna og broyta mál. Tað merkir, at funktións-skilnaður er ikki ímillum uppgávurnar.

Í 2017 kannaði Landsgrannskoðanin brúkararættindini til Barsilsskipanina. Vit kannaðu, hvør hevði rættindi til ávikavist at spyrja um upplýsingar og at broyta upplýsingar í KT-skipanini. Umframt málsviðgerarnar, sum burturav arbeiða við Barsilsskipanini, hevði deildarleiðarin fyri stuðlar og grunnar atgongd. Flestu starvsfólkini í kundatænastuni og onnur starvsfólk hjá TAKS høvdu rættindi at spyrja í Barsilsskipanini. TAKS hevur eftirsíðan kunnað um, at atgongdin hjá deildar-leiðaranum at stovna og broyta er strikað.

TAKS heldur tað vera neyðugt, at starvsfólkini í kundatænastuni hava rættindi til at spyrja um upplýsingar í Barsilsskipanini. TAKS kannar hálvárliga, at óviðkomandi ikki hava atgongd, og heldur eisini eyguni við atgongdunum til journalskipanina.

TAKS hevur skrivliga vegleiðing við innanhýsis mannagongdum til at viðgera umsóknir, og hvussu innaneftirlitið skal vera í sambandi við útgjøld úr Barsilsskipanini.

Avstemman av inngjøldum

TAKS fær hvønn mánað upplýsingar frá Elektron um útgoldna A-inntøku. Stovnurin stemmar upphæddirnar hjá Elektron av við upphæddirnar, sum persónar og arbeiðs-gevarar hava goldið til Barsilsskipanina. Út frá samlaðu tølunum roknar TAKS út, hvussu stórt samlaða inngjaldið fyri mánaðin eigur at vera og samanheldur við tað, sum er goldið inn.

Avstemmanirnar av barsilsgjaldinum 31. desember 2019 vístu, at í arbeiðsgevara-gjøldunum var munurin 383.117 kr., ella 0,52% og 49.322 kr. ella 0,07% í løntakara-gjøldunum. TAKS hevur áður greitt frá, at orsøkin til munirnar er, at allar upphæddir, ið skulu gjaldast Barsilsskipanini, verða niðurroknaðar til heilar krónur.

Sambært TAKS vóru samlaðu útgoldnu A-inntøkurnar 11.686 mió.kr. í 2019, og av teimum rindaðu arbeiðsgevarar barsilsgjald av 10.367 mió.kr. Orsøkin til munin er, at nakrar A-inntøkur eru undantiknar gjaldskyldu.

Avstemman av útgjøldum

Hvønn mánað stemmar TAKS av millum Barsilsskipanina og tað, sum verður flutt til Gjaldstovuna. Eisini stemmar TAKS av millum Barsilsskipanina og Búskaparskipan landsins. Tey stemma ikki av millum Barsilsskipanina og skattaskipanina hjá TAKS.

TAKS hevur eftirlit við, um móttakari av barsilspeningi fær løn samstundis, sum viðkomandi fær barsilspening. TAKS kannar útgjøld frá arbeiðsgevarum, tó ikki lønir, sum tað almenna rindar.

Tað, at allar almennar lønir verða goldnar um V-talið hjá Gjaldstovuni, ger, at TAKS fær ikki havt eftirlit við teimum lønunum. TAKS hevur fyri árum síðani biðið um at fáa skilt upplýsingarnar sundur í V-tøl hjá einstøku stovnunum fyri betur at kunna samanbera lønir og barsilsgjald. Ikki er greitt um, ella nær tað verður gjørt.

TAKS hevur talgildar kekklistar at skjalprógva avstemmanirnar.

Samanumtikið um innaneftirlit

TAKS hevur skrivliga vegleiðing við mannagongdum fyri málsviðgerð og innaneftirlit. Innaneftirlitið er m.a. skipað við avstemman og kannan av listum, og at málsviðgerar-arnir kanna málini hjá hvørjum øðrum. Málsviðgerðin, innaneftirlitið og avstemmingar annars eru í stóran mun handlig, og Landsgrannskoðanin heldur, at tað er ein veikleiki, sum kann virka til at feilir koma í.

Landsgrannskoðanin er kunnað um, at TAKS, Gjaldstovan og Elektron eru í holt við at endurskoða allar mannagongdir, so tær verða meira sjálvvirkandi, og vandin fyri feilum verður minni.

TAKS, Gjaldstovan og Elektron endurskoða mannagongdirnar at gera tær meira sjálvvirkandi.

Stakroyndir av útgjøldum

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nøkur mál um barsilsgjøld, har umsøkjarar høvdu fingið útgjøld í oktober 2019. Vit kannaðu, um allar upplýsingar, ið eru kravdar í sambandi við útgjald, vóru til skjals og um útgjøldini vóru rætt. Einki var at finnast at.

Stakroyndir vístu ikki feil í útgjøldunum.

6.23 Barsilsgrunnurin

Barsilsgrunnurin hevur til endamáls at fíggja og rinda út barsilspening. Sambært § 19a, stk. 2, 2. pkt. í Barsilslógini vera inntøkur grunsins játtaðar í fíggjarlógini og fluttar Barsilsgrunninum. Møguligt avlop verður spart saman í grunninum og kann nýtast til útgjøld, um skipanin hevur hall, ella avgerð verður tikin um at hækka útgjaldið.

Inntøkurnar til Barsilsgrunnin er á høvuðskontu 20.52.1.28 "Gjald til barsilsskipan" í fíggjarlógini og landsroknskapinum. Grunnurin hevur sjálvstøðugan roknskap og fíggjarstøðu í landsroknskapinum. Inntøkurnar eru havdar á undirkontu 01. "Gjald til barsilsskipan" og vera fluttar um undirkontu 09. "Flutt til Barsilsgrunn" til stovnsnummar 004050.

Roknskapartøl sambært landsroknskapum:

t.kr.

Rakstrarroknskapur	2016	2017	2018	2019	2020
Inntøkur	121.010	127.293	133.668	141.865	147.289
Útreiðslur	113.846	123.993	129.214	147.927	158.360
Úrslit	**7.164**	**3.300**	**4.454**	**-6.063**	**-11.071**

Fíggjarstøða Barsilsgrunnurin	2016	2017	2018	2019	2020
Primo, tøkur peningur	2.216	9.380	12.680	17.134	11.071
Rakstrarúrslit	7.164	3.300	4.454	-6.063	-11.071
Tøkur peningur við ársenda	**9.380**	**12.680**	**17.134**	**11.071**	**0**

Barsilsgrunnurin tómur

Primo 2020 er eginognin í Barsilsgrunninum í landsroknskapinum skrásett til 11.071 t.kr., men feilurin, sum er nevndur undir brotinum omanfyri um bíðikontu[19], ávirkar eisini Barsilsgrunnin.

Fyri Barsilsgrunnin hevði feilurin ta ávirkan, at samanlagt 11.269 t.kr. afturat áttu at verið fluttar úr Barsilsgrunninum fyri útgjaldingar í 2018 og 2019 áðrenn ársbyrjan 2020. Eginognin í Barsilsgrunninum primo 2020 var í landsroknskapinum 2019 skrásett til 11.071 t.kr., men Barsilsgrunnurin átti at verið skrásettur við 198 t.kr. í negativari "eginogn" við ársbyrjan.

Barsilsgrunnurin hevði í veruleikanum negativa eginogn við ársbyrjan 2020.

Sambært landsroknskapinum 2020 (viðmerkingunum á síðu 97) vóru eisini 14 mió.kr. ov lítið útreiðsluførdar í 2020, tá ið feilurin var funnin.

[19] Sí síðu 116.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Í august 2021 hevur Umhvørvis- og vinnumálaráðið greitt frá, at hallið hjá Barsilsskipanini *"gjørdist somikið stórt, at Barsilsgrunnurin ikki hevði pening nokk til at endurrinda landskassanum útreiðslurnar til Barsilsskipanina.*

Samlaða hallið í 2020 í mun til játtan var:

Barsilsskipan útreiðslur (tilskot til einstaklingar)	*171.106.831 kr.*
Inntøkur (á §6)[20]	*-156.309.781 kr.*
Umsiting av Barsilsskipan (endurgjald til TAKS)	*2.050.280 kr.*
Útreiðslur til umsiting er endurgoldið frá inngjøldum	*-2.050.280 kr.*
Netto hall	*14.797.050 kr.*

Lagt kann verða afturat, at Barsilsgrunnurin endurrindaði Landskassanum 11.071.455 kr., sum var tað, sum var uppspart í Barsilsgrunninum primo 2020.

Játtanin til útgjøld í 2020 var	*143.000.000 kr.*
Játtanin til umsiting av barsilsskipan í 2020 var	*2.400.000 kr.*

Av teimum samlaðu útgjøldunum á 171.106.831 kr. stava 11.268.891 kr. frá feili í 2018 og 2019. Útgjøldini til barsilspening í 2020 vóru 159.837.940 kr.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið skal fyrst siga, at talan er um lógarbundnar útreiðslur, sum skulu haldast, hvørt játtan er tøk ella ikki.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið heldur tó, at rættast hevði verið, at ráðið fekk játtað eykajáttan til Barsilsskipanina, tá tað gjørdist greitt, at hvørki inngjøld ella innistandandi í Barsilsgrunninum primo vóru nóg mikið til at dekka útgjøld og útreiðslur annars. Málið varð tikið upp við Fíggjarmálaráðið, sum ikki tók undir við at biðja Tingið um eykajáttan til Barsilsskipanina, men heldur vildi, at hallið skuldi staðfestast í landsroknskapinum."

Viðmerkingar frá Landsgrannskoðanini

Barsilsgrunnurin er ein internur grunnur, og er skipaður fyri at tryggja at innkravd barsilsgjøld verða nýtt til endamálið. Grunnurin er at rokna sum ein marking ella eyðmerking av tí peningi, sum verður kravdur inn til at fíggja Barsilsskipanina.

Í landsroknskapinum 2020 er meirnýtslan "avgreidd" á tann hátt, at fyrst er eginognin hjá Barsilsgrunninum brúkt, og síðani er restin tikin við í landsroknskapin undir játtanini til barsilsskipan á høvuðskontu 6.39.4.01.

Ikki heimild at hava útreiðslur á játtanini til Barsilsskipan.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at § 19a í lógini um barsilsskipan ásetir, at "Barsilsgrunnurin endurrindar landskassanum útreiðslurnar". Játtanin á 6.39.4.01 er bara til at avgreiða "Tilskot til einstaklingar", í hesum føri at rinda barsilspening til tey, sum hava rætt til at útgjøld. Til at rinda útreiðslurnar, verða "innanhýsis flytingar" gjørdar frá Barsilsgrunninum til hesa játtanina.

Roknskapartølini hjá Barsilsgrunninum áttu at verið:

t.kr.

Rakstrarroknskapur	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**
Inntøkur	121.010	127.293	133.668	141.865	147.289
Útreiðslur	113.846	123.993	133.362	155.049	161.888
Úrslit	**7.164**	**3.300**	**306**	**-13.184**	**-14.599**

Fíggjarstøða Barsilsgrunnurin	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**	**2020**
Primo, tøkur peningur	2.216	9.380	12.680	12.986	-198
Rakstrarúrslit	7.164	3.300	306	-13.184	-14.599
Tøkur peningur við ársenda	**9.380**	**12.680**	**12.986**	**-198**	**-14.797**

[20] Fluttar, sum innanhýsis flytingar ml. alm.stovnar (innt.) frá Barsilsgrunninum.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at Barsilsgrunnurin átti at víst eina negativa eginogn upp á slakar 15 mió.kr. við ársenda 2020.

Ivasamt, um heimild er at "eftirgeva" Barsilsgrunninum.

Landsgrannskoðanin ivast í, um heimild er at "eftirgeva" grunninum tað, sum grunnurin sambært lógini átti at endurrindað Barsilsskipanini.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið vísir í september 2021 til viðmerkingarnar til broytingina í lógini um Barsilsgrunn[21], har tað verður sagt *"Er líkt til, at tiltakspeningurin verður burtur, má landsstýrismaðurin leggja uppskot fyri Løgtingið um annaðhvørt at hækka inngjaldið til Barsilsgrunnin ella at játta grunninum pening"*. Út frá hesum er ikki heimild, ella hevur ikki verið ætlanin, at grunnurin skal vísa hall. Umframt tað heldur Umhvørvis- og vinnumálaráðið, at landsroknskapurin hevði verið misvísandi um veruligu útreiðslurnar ikki sóust í landsroknskapinum, men heldur blivu fluttar til ein internan grunn.

Landsgrannskoðanin hevur eisini umrøtt meirnýtsluna í broti 4.47 í frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu 2020.[22]

Umsiting av Barsilsgrunninum

Barsilsgrunnurin endurrindar landskassanum útreiðslurnar av umsitingini av Barsilsskipanini, og landsstýrismaðurin hevur við heimild í § 19a, stk. 7, í Barsilslógini lagt umsitingina til TAKS.

Barsilsskipanin er málsøki hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um umsiting og virksemi grunsins í kunngerð. Landsstýrismaðurin hevur ikki gjørt slíka kunngerð. Umhvørvis- og vinnumálaráðið heldur ikki, at tørvur er á einari reglugerð fyri umsitingina av Barsilsgrunninum, tí at sum so er eingin umsiting í Barsilsgrunninum. Talan er um eina kontu, har inn- og útgjaldingar verða bókaðar. Er undirskot í mun til inngjøld/útgjøld, endurrindar Barsilsgrunnurin. Harafturat endurrindar Barsilsgrunnurin TAKS kostnað fyri umsiting av Barsilsskipanini.

Sambært § 19a, stk. 8, í lógini ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur fyri íløgurøkt Barsilsgrunsins, soleiðis at hon er í samsvari við íløgupolitikk landsins. Sambært TAKS eru enn ongar reglur gjørdar fyri íløgurøkt. Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur higartil ikki hildið, at tørvur er á at gera reglur um íløgurøkt, av tí at Barsilsgrunnurin hevur tørv á at hava peningin tøkan. Innistandandi í Barsilsgrunninum verður umsitið á sama hátt sum gjaldførið hjá landinum.

[21] Í Lm. nr. 083/2014.
[22] Síða 44 til 46 í frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu 2020, sum er latin løgtingsgrannskoðarunum í august 2020.

7. Uttanríkis- og mentamál

7.1 Undirvísingarstýrið (LG 2020/207-0231)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Undirvísingarstýrinum, fyri m.a. at kanna, um stovnurin hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Undirvísingarstýrið er formliga skipað á heysti 2018 sum fyrisitingarlig eind undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Stýrið skal taka sær av rakstrarligum og fyrisitingarligum uppgávum á undirvísingarøkinum, serliga av fólkaskúlanum og í ávísan mun miðnámsskúlunum. Harafturat eru Studni og Musikkskúlaskipanin partur av Undirvísingarstýrinum. 21 fólk starvast í stýrinum.

Undirvísingarstýrið hevur frá januar 2020 sjálvstøðuga høvuðskontu í fíggjarlógini. Játtanin, sum er á høvuðskontu 7.23.1.02, er 13,9 mió.kr. í 2020.

Roknskaparviðurskifti

Undirvísingarstýrið er í holt við at gera egna roknskaparreglugerð; ímeðan brúka tey roknskaparreglugerðina hjá Mentamálaráðnum.

Eru í holt við at gera egna roknskapar-reglugerð.

Stjórin leysgevur rokningar og góðkennir roknskapirnar.

Undirvísingarstýrið brúkar Keypsportalin til størri keyp, t.d. tá ið tey keypa innbúgv.

Stjórin hevur eitt Eurocard. Gjaldstovan hevur givið loyvi til kortið, sum hevur verið nýtt til keyp á netinum og til smærri keyp annars.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað ymisk skjøl, herundir nakrar ferðauppgerðir. Einki var at finnast at.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lønirnar vóru rættar, og um Undirvísingarstýrið fylgir almenna setanarpolitikkinum. Landsgrannskoðanin hevur samanhildið setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Einki var at finnast at.

Undirvísingarstýrið hevur einki ognaryvirlit. Leiðslan hevur kunnað um, at tey eru í holt við at gera ognaryvirlit.

Einki ognaryvirlit.

KT-viðurskifti

Undirvísingarstýrið hevur gjørt váðameting. Skipanirnar eru í Landsneti, og eru undir teimum nýtslu- og trygdarreglum, sum eru fyriskrivaðar. Undirvísingarstýrið er skoðað av KT-grannskoðara, og leiðslan hevur fingið frágreiðing, sum vísir, at tvey tilmæli hava høga raðfesting og eiga at verða viðgjørd beinanvegin. Annað tilmælið er avgreitt. Nøkur tilmæli eru, sum hava miðal raðfesting og eiga at verða loyst innan 6 mánaðir. Undirvísingarstýrið hevur greitt frá, at tey eru farin í holt við at fáa tey í rættlag.

7.2 Føroyskt sum annaðmál, vaksin (LG 2020/207-231)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin á høvuðskontu 7.23.1.06 "Føroyskt sum annaðmál, vaksin", fyri m.a. at kanna um roknskapurin er rættur, um samsýningarnar eru sambært heimildum, og um roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini stendur, at talið av tilflytarum úr ymiskum londum er økt munandi seinastu árini. Í høvuðsheitum eru tveir bólkar; familjusamanføring og fólk, sum koma til Føroyar at arbeiða í styttri ella longri tíð. Uttanríkis- og mentamálaráðið ætlaði at skipa "Føroyskt sum annaðmál" sum eina verkætlan, har arbeitt verður út frá nøkrum høvuðsátøkum til at menna samlaðu skipanina til at undirvísa tilflytarum í føroyskum máli, mentan og samfelagsviðurskiftum.

Í 2019 setti Mentamálaráðið verkætlanarleiðara at fyrireika verkætlanina og at skipa samstarv við arbeiðsbólkar, Fróðskaparsetrið, Nám og kvøldskúlararnar. Verkætlanin skuldi fevna um øll skúlastig, frá fólkaskúlanum til Fróðskaparsetrið, og eisini um frítíðarundirvísingina, sum kommunurnar taka sær av.

Í september 2020 gav Mentamálaráðið út eina námsætlan fyri Føroyskt sum annaðmál, og K. nr. 144/2020 "um undirvísing í føroyskum sum annaðmál og móðurmálsundirvísing" greinar endamál, málbólkar o.a.

Roknskaparviðurskifti

Játtanar- og roknskapartøl 2020 og 2021:

t.kr.

Heiti	2020	2021[23]
Lønir v.m.	931	130
Keyp av vørum og tænastum	91	43
Innanhýsis flytingar ml. almennar stovnar (útr)	0	348
Tilsamans	**1.022**	**521**
Játtan	*2.000*	*3.000*

Størsti parturin av útreiðslunum er lønir[24]. Sambært Uttanríkis- og mentamálaráðnum var ætlanin at byrja diplomútbúgving á Fróðskaparsetrinum í 2020, men ætlanin bleiv fyribils útsett til 2021 vegna COVID-19. Ráðið metti, at kostnaðurin av diplomútbúgvini fór at vera umleið 1 mió.kr. í 2020.

Mentamálaráðið setti verkætlanarleiðara 1. september 2019. Starvið varð ikki lýst leyst, tí ráðið hevði fólk, sum kundi setast til uppgávuna.

Stovnurin hevur heldur ikki lýst eftir starvsfólki, tí hildið var, at tað kravdi serligar førleikar at fyrireika undirvísingina í føroyskum sum annaðmál, og so fá fólk hava neyðugu útbúgvingarnar. Heldur ikki er talan um føst størv, men um smærri uppgávur av og á. Landsgrannskoðanin hevur víst á, at øll almenn størv skulu lýsast leys, og mælti stovninum til at fylgja reglunum.

Øll almenn størv skulu lýsast leys.

Í juli 2020 tók landsstýrismaðurin undir við Landsgrannskoðanini, um at øll almenn størv skulu lýsast leys. Í teimum førum, tá ið starvsfólk eru knýtt at verkætlanini sum tímalønt, eru tey at samanbera við uppgávunevndir og námsætlanarnevndir, og tí ikki starvsfólk sum so.

Diplomútbúgvingin byrjar í 2021.

Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at diplomútbúgvingin byrjar á Fróðskaparsetrinum í september 2021.

[23] Roknskapartøl pr. august 2021.
[24] Í 2021 eru lønir eisini skrásettar sum Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar.

7.3 Nám (LG 2017/207-0231)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Námi.

Ll. nr. 53/2014 "um at útvega undirvísingarmiðlar o.a." var sett í gildi í mai 2014. Í august 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Mentamálaráðið arbeiddi við at umskipa Nám við atliti at bygnaðarbroytingum í ráðnum, har Nám skuldi átaka sær øktar uppgávur sum fakligur og námsfrøðiligur menningardepil. Tí var kunngerðin um virksemi á Námi ikki gjørd enn.

Kunngerð um virksemi á Námi ikki gjørd.

Arbeiðið at skipa eftirútbúgvingina í síni heild, sum byrjaði í 2013, var ikki liðugt. Sambært landsstýrismanninum var tað arbeiðið eisini tongt at bygnaðarbroytingunum og broyttu uppgávunum hjá Námi.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at stovnurin er skipaður við einum toymisbygnaði, sum hevur verið í støðugari menning og mentur við atliti at nýggjum uppgávum, har Próvstovan er partur av Námi. Harumframt er ein ráðgevingareind skipað umframt øktu uppgávurnar innan KT- menning. Stovnurin fatar í dag um hesar partar:

- Leiðslutoymi
- Fyrisitingartoymi
- Savnstoymi
- Ráðgevingartoymi
- KT-toymi
- Bókatoymi
- Snartoymi
- Tíðindatoymi

Ráðgevingartoymið, sum eftir ætlan skuldi skipast sum ein námsfrøðiligur menningar-depil, er komið væl áleiðis, og arbeiðið at gera reglur um virksemið er byrjað.

7.4 Fólkaskúlin (LG 2020/207-0232)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað nakrar læraraløgnir í fólkaskúlanum á høvuðskontu 7.23.2.01 "Fólkaskúlin". Í 2020 er játtanin til fólkaskúlan 390 mió.kr., harav meginparturin er til løgnir. Sambært fíggjarlógini eru 777 fulltíðarstørv.

Fólkaskúlin virkar eftir Ll. nr. 125/1997 "um fólkaskúlan". Sambært § 32, stk. 2, skipar landsstýrismaðurin í mentamálum talið av lærarum á skúlunum.

Skipanin er grundað á upplýsingar frá skúlunum um væntað tal av næmingum, flokkum o.ø. Einstaki skúlin sendir Undirvísingarstýrinum tølini, og stýrið tillutar skúlunum tímar og umsitur forskipanina til løgnarkoyringar. Løgnardepilin á Gjaldstovuni rindar løgnirnar út.

Roknskapartøl frá 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Løgnir v.m.	301.627	327.312	348.163	370.435	379.819
Keyp av vørum og tænastum	1.078	1.809	728	1.104	834
Tilskot til einstaklingar	2	9	0	0	0
Stuðul til annað virksemi	886	1.099	1.086	1.029	1.236
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	695	1.116	1.788	1.840	1.660
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	0	-19.228	-27.845	-5	0
Flyting frá kommununum til landið	0	0	0	0	-340
Tilsamans	**304.288**	**312.116**	**323.919**	**374.402**	**383.208**

Til at grannskoða læraraløn í fólkaskúlanum 2020 valdi Landsgrannskoðanin Vestmanna skúla.

Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um útgoldnu lønirnar eru rættar, og um almenni setanarpolitikkurin verður hildin. Við stakroyndum kannaðu vit, hvussu starvsfólkamál verða viðgjørd og skrásett.

Samanumtikið vístu stakroyndirnar, at lønirnar verða goldnar út eftir røttum sáttmála og røttum lønarflokki. Lærararnir hava virksemisætlan og frávera verður skrásett.

7.5 Rásin (LG 2020/207-0232)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Rásini, á høvuðskontu 7.23.2.06. Rásin er stovnssett við Ll. nr. 67/2003 "um skúlatilboð til ung við breki". Sambært lógini skal innihaldið í skúlaskeiðnum vera eitt heildartilboð, sett saman av bústaði, skúla og arbeiði. Høvuðsdentur verður lagdur á praktiska læring. Endamálið er at menna tey ungu til eitt sjálvstøðugt lív eftir lokið skúlaskeið.

Roknskaparviðurskifti

Núverandi leiðsla tók við í 2016 og hevur, við hjálp frá Gjaldstovuni, skipað bókhaldið av nýggjum. Rásin rindar Gjaldstovuni fyri bókhaldshjálp, men varaleiðarin góðkennir og leiðarin leysgevur. Seinast góðkenda roknskaparreglugerð er frá november 2016.

Roknskapartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	3.200	3.396	3.652	3.640	3.635
Keyp av vørum og tænastum	532	597	513	586	639
Keyp av útbúnaði, netto	133	47	10	15	74
Leiga, viðlíkahald og skattur	25	69	55	15	8
Søla av vørum og tænastum	-210	-213	-211	-240	-262
Tilsamans	**3.680**	**3.897**	**4.020**	**4.016**	**4.094**

Lønir eru størsti útreiðsluposturin. Sum kostskúli hevur Rásin eisini nakað av útreiðslum til gerandisvørur. Skúlin hevur eisini dagført nakað av KT-útgerðini í 2020.

Lønir o.a.

Starvsfólkini eru sett eftir sáttmálanum hjá Pedagogfelagnum, men feriur eru eins og í sáttmálanum hjá lærarum, tí starvsfólkini halda frí, tá ið skúlin er stongdur.

Tað eru altíð onkur starvsfólk á stovninum, og skúlin hevur sovandi náttarvakt. Fastløntu starvsfólkini arbeiða sunnudagar og avspáka tímarnar. Leygardagar eru avloysarar til arbeiðis.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum nakrar lønir. Vit kannaðu, um lønirnar eru rættar, um tíðarskrásetingarnar eru nøktandi, og um lýsingar, umsóknir, prógv, viðmælir o.a. viðkomandi fyri størvini er tøkt. Einki var at finnast at.

Leiðarin arbeiðir dagtíð og hevur eisini onkra náttarvakt og kvøldvakt. Onnur starvsfólk avspáka tímar, tá ið skúlin er stongdur. Leiðarin hevur ikki feriu á sama hátt sum hini starvsfólkini, og hevur fingið tímar útgoldnar. Landsgrannskoðanin vísti á, at tá ið stovnurin rindar fyri yvirtíð, meirtímar ella fyri serstøku frívikuna, hevur tað týdning, at leiðarin skrásetir arbeiðstíðina og feriu.

Mæltu til at tíðar-avmarka lønir.

Rásin hevur ikki tíðaravmarkað lønir í roknskapinum 2020. Sambært rundskrivi nr. 9007/2017 skulu tímasaldur tíðaravmarkast í roknskapinum, um starvsfólk eiga meira

enn 40 tímar ella skylda meira enn 30 tímar. Sambært landsstýrismanninum hevur Undirvísingarstýrið mint stovnin á at fylgja rundskrivinum.

Keyp og kreditorar
Flestu rokningarnar koma talgilt, og eru skrásettar í Búskaparskipan landsins sohvørt. Rásin keypir mest frá heilsølu, men hevur annars kontu í lokalu handlunum. Skúlin hevur tvey gjaldkort frá bensinstøð: eitt til brennievni og eitt til kioskvørur.

Ognir og støðisogn
Í 2020 hevur Rásin ikki stórvegis útreiðslur til útbúnað. Stovnurin hevur keypt nakrar teldur til starvsfólkini og stórar skermar til felagshølini. Útgerð og innbúgv slítast skjótari á Rásini enn í einum vanligum húsarhaldi. Næmingarnir skulu læra til lívið og skulu tí læra at brúka útgerðina. Rásin hevur ognaryvirlit, sum verður dagført regluliga.

Í støðisogn í Búskaparskipan landsins er ein bygningur og eitt grundstykki skrásett. Einki akfar var í yvirlitinum, tó at Rásin hevur ein buss og ein viðfestivogn. Bussurin er síðani skrásettur í støðisognini.

Inntøkur og skuldarar
Fyri skúlagongdina rinda næmingarnir 3.500 kr. um mánaðin í 10 mánaðir um árið. Inntøkurnar verða bókaðar, tá ið tær falla til gjaldingar. Gjaldstovan ger rokningar, og Rásin sendir áminningar, um onkur ikki rindar rættstundis. Inngjøldini í 2020 eru í samsvari við næmingalistan.

Ein næmingur skyldar 12 t.kr. fyri kostgjald frá 2019. Lítið sannlíkt er, at skuldin verður goldin, og rættarliga er kravið ivasamt, tí viðkomandi var undir 18 ár og tók ikki sjálvur avgerð um skúlagongdina.

Ógreiða um, hvør heftir fyri møguligari skuld.

Tað kemur fyri, at onnur enn næmingurin ella avvarðandi taka avgerð um, at næmingur skal í skúla á Rásini. Flestu næmingarnir eru undir 18 ár, tí kann vera ivasamt um teir hefta fyri møguligari skuld.

Landsgrannskoðanin mælti til at fáa greiði á, hvønn kravið skal sendast til.

Undirvísingarstýrið hevur víst Rásini á, at um næmingurin sjálvur ella avvarandi ikki hava tikið avgerð um, at næmingur skal í skúla á Rásini, eigur tann stovnur ella skipan, sum avger tað, at vátta, at tey hefta fyri kostgjaldinum.

Onnur gjøld
Afturat skúlagjaldinum rinda næmingarnir hvønn mánað 1.500 kr. til lummapening, 1.000 kr. til annað egið brúk, 300 kr. til felagskassa og 1.000 kr. til uppsparing til námsferð. Næmingarnir skulu hava tvey gjaldkort, eitt til lummapeningin og eitt til egið brúk.

Við lummapengunum læra starvsfólkini næmingarnar at umsita pengar. Næmingarnir kunnu brúka lummapeningin, sum teimum lystir, og kvittanir vera ikki goymdar.

Peningurin til egið brúk er ætlaður til klæðir, frisør o.a. Kvittanir skulu goymast saman við kortinum í serskildari mappu í læstum skápi.

Felagskassin er ein kontantkassi, og peningurin verður brúktur til felagshugna. Kvittanir og frágreiðingar um keyp skulu leggjast í kassan, sum verður gjørdur upp eftir lokið skúlaskeið, og møguligt avlop verður endurgoldið næmingunum.

Næmingarnir spara saman til námsferð. Stovnurin rindar starvsfólkaløninrnar í ferðatíðini. Aðrar ferðaútreiðslur hjá starvsfólkunum verða goldnar helvt um helvt av næmingunum og starvsfólkunum.

Sambært roknskaparkunngerðini mugu landsstovnar ikki fyrisita ogn og skuld hjá øðrum, uttan so at heimild er fyri tí, ella at avtala er gjørd við aðalráðið um tað. Tøkur peningur skal setast inn í peningastovn. Tílík ogn ella skuld verður ikki tald við sum ogn ella skuld hjá landinum, men verður skrásett sambært kontuskipan landsins.

Sambært leiðaranum verður námsferðargjaldið flutt á peningastovnskontu, sum leiðslan á Rásini umsitur. Kontan verður gjørd upp eftir námsferð. Skúlin hevur avtalu við Mentamálaráðið um kontuna og felagskassan.

Løgujáttan

Í 2019 og 2020 eru játtaðar ávikavist 400 t.kr. og 1.500 t.kr. á høvuðskontu 7.23.2.05 til fyrireikingar at víðka Rásina, og betra um karmarnar. Ætlanin er, at pláss skal vera fyri 14 næmingum. Landsverk hevur ræðisrættin á kontuni og stendur fyri arbeiðinum.

7.6 Glasir (LG 2020/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Glasir. Játtanin á høvuðskontu 7.23.3.05 er til miðnámsskúlarnar, og játtanin til Glasir er á undirkontu 31. Í 2020 eru 132,8 mió.kr. játtaðar til útreiðslur og 10,7 mió.kr. til inntøkur.

Kommunurnar rinda 20% av lærlingaundirvísingini, býtt ímillum kommunurnar eftir heimstaðnum, lærlingarnir høvdu, tá ið teir byrjaðu skúlan.

Høvuðsroknskapartøl 2017 til 2020:

t.kr.

Heiti	2017	2018	2019	2020
Rakstrarútreiðslur	127.074	131.791	131.580	136.174
Rakstrarinntøkur	-8.275	-7.588	-6.075	-6.935
Flytingarútreiðslur	0	1	38	1.410
Skattir og flytingarinntøkur	0	-9	9	-250
Flytingar millum almennar myndugleikar	-3.807	-4.822	-5.489	-7.477
Tilsamans	**114.991**	**119.372**	**120.063**	**122.922**

Depilsráð

Landsstýrismaðurin setir depilsráð, sum sambært Ll. nr. 79/2015 “um skúladepil í Marknagili” m.a. skal tryggja yrkisfakliga virksemið í Marknagilsdeplinum, og at skúlin í størst møguligan mun bjóðar út yrkisfakligar grund-, eftir- og víðariútbúgvingar, sum eru viðkomandi fyri tørvin hjá vinnuni. Sambært lógini verður depilsráðnum heimilað at ráða yvir inntøkufíggjaða virkseminum í Marknagilsdeplinum.

Starvsskipan ikki góðkend.

Depilsráðið skal gera starvsskipan fyri virksemi sítt, sum landsstýrismaðurin skal góðkenna. Spurt, um skipanin er gjørd og góðkend, svaraði Glasir, at formaðurin fyri Depilsráðið samskiftir við Uttanríkis- og mentamálaráðið um arbeiðið at fáa starvsskipanina góðkenda.

Eru framvegis sjálvsognarstovnar.

Tekniski skúlin í Tórshavn og Føroya Handilsskúli eru framvegis sjálvsognarstovnar skipaðir sambært Ll. nr. 106/1998 “um yrkisskúlar”, og sum eftir ætlan skuldu taka seg av í 2020.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið helt tað ikki vera haldbart at bíða longur eftir heimildini at flyta avlop yvir um ár, og ætlaði ráðið tí at varðveita annan av sjálvsognarstovnunum, ið skuldi taka sær av inntøkufíggjaða virkseminum. Leisturin fyri umsitingina av inntøkufíggjaða virkseminum verður at líkna við eginraksturin, sum sjálvsognarstovnarnir høvdu, áðrenn Skúladepilin í Marknagili var settur á stovn.

KT-viðurskifti

Av tí at Fíggjarmálaráðið hevur ásett, at stovnar, sum umsita næmingaprógv, eitt nú fólkaskúlar, miðnámsskúlar, Vinnuháskúlin og Yrkisdepilin, eru stovnar við serliga týdningarmiklum dátum, kemur Glasir í hendan bólkin. Í januar 2021 kunnaði Glasir um, at tey hava gjørt m.a. dátuflokking og váðameting innan KT-økið, og at tey arbeiddu við at betra tað, m.a. í sambandi við KT-skoðanina.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerðin var send Mentamálaráðnum í mai 2017, men ráðið hevur ikki góðkent hana.

Roknskaparreglugerðin ikki góðkend.

Stovnar, sum hava inntøkur av at selja vørur og tænastur skulu greiða frá í reglugerðini, hvussu skrásetingin er løgd til rættis, og hvussu prísásetingin verður gjørd, so til ber at kanna, um samsvar er ímillum vørukeyp, vørunýtslu og sølu. Landsgrannskoðanin mælti til, at Glasir fær ásetingarnar við í roknskaparreglugerðina.

Prísáseting eigur at vera í roknskaparreglugerðini.

Inntøku- og stuðulsfíggjað virksemi

Landsgrannskoðanin hevur áður víst á, at um stovnurin hevur fingið loyvi frá Fíggjarmálaráðnum at hava inntøku- og stuðulsfíggjað virksemi, skal virksemið vísast fyri seg í fíggjarlógini og í landsroknskapinum á serstøkum undirkontum.

Landsgrannskoðanin mælir enn eina ferð til, at inntøkufíggjað virksemi og/ella stuðulsfíggjað virksemi verður skrásett, sum ásett í játtanarreglunum.

Inntøkufíggjað og stuðulsfíggjað virksemi eigur at vera skrásett sambært játtanarreglunum.

Kantina

Innanhýsis roknskapurin fyri kantinuna:

t.kr.

Heiti	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	3.291	3.191	2.688	2.774
Keyp av vørum og tænastum	3.399	3.131	2.083	1.945
Keyp av útbúnaði, netto	52	129	33	94
Leiga, viðlíkah., skattur o.a. útreiðslur	20	10	5	1
Søla av vørum og tænastum	-6.393	-5.606	-4.392	-3.960
Tilsamans	**369**	**855**	**418**	**854**

Inntøkur og útreiðslur eru minkað munandi seinastu árini, tí kantinuvirksemið er nógv broytt í sambandi við samanleggingina av skúlunum.

Skúlaheimið

Innanhýsis roknskapartøl fyri Skúlaheimið:

t.kr.

Heiti	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	486	494	204	432
Keyp av vørum og tænastum	284	480	266	341
Keyp av útbúnaði, netto	1	5	13	173
Leiga, viðlíkahald og skattur	8	0	0	0
Søla av vørum og tænastum	-1.042	-1.081	-662	-1.017
Tilsamans	**-264**	**-101**	**-178**	**-70**

Lønirnar eru til samskipara og til náttarvaktir. Í 2020 eru 305 t.kr. av teimum 341 t.kr. av keypi av vørum og tænastum fyri hita. Inntøkurnar eru frá útleigu av kømrum.

Næmingagjøld

Síðani 2017 hevur Glasir goldið Fjølriti 250 kr. fyri hvønn næming fyri upphavsrættindi. Næmingarnir rinda harumframt 200 kr. fyri avrit o.a., tilsamans skulu teir rindað 450 kr. um árið.

Frá 2018 til 2020 eru næmingagjøldini 1.770 t.kr., men næmingarnir høvdu einans goldið 552 t.kr. Áognin, 1.218 t.kr., er ikki skrásett í roknskapinum.

Ikki nøktandi, at einki yvirlit er yvir skuldina.

Tá ið skúlaárið byrjar, boðar Glasir næmingunum frá, at teir skulu rinda næmingagjøld. Umsitingardeildin krossar av á einum lista, hvør hevur goldið. Fíggjardeildin hevur ikki yvirlit yvir, hvussu stór skuldin er, ella hvørjir næmingar skylda næmingagjøld.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er ikki nøktandi at krevja gjøld frá næmingum, uttan at halda skil á roknskaparliga, um gjaldið verður goldið, og hvussu nógv hvør næmingur skyldar.

Orsøkin til, at Glasir ikki hevur gjørt meira fyri at fáa áognina goldna, er, at skúlin hevur samskift við Mentamálaráðið um heimildir, og hvussu gjaldið skal krevjast inn, men enn hevur Glasir ikki fingið nakra niðurstøðu.

Vegna vantandi niðurstøðu hevur Glasir gjørt av at handfara áognirnar á sama hátt sum aðrar áognir, t.v.s. at senda tær til innheintingar, tá ið freistirnar eru farnar. Fyri at betra um trygdina og skrásetingarnar ætlar Glasir brúka kassaskipanina til arbeiðið. Glasir fer at taka upp við Undirvísingarstýrið, hvat skal gerast við áognina fyri farin skúlaár.

Sangleikur

Innanhýsis roknskapur fyri sangleik:

t.kr.

Heiti	**2020**
Lønir v.m.	652
Keyp av vørum og tænastum	786
Søla av vørum og tænastum	-877
Aðrar flytingarinntøkur	-250
Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt)	-150
Tilsamans	**161**

Aðrar flytingarinntøkur eru 50 t.kr. frá Mentanargrunni landsins, 30 t.kr. frá Tórshavnar kommunu og 170 t.kr. frá ymiskum privatum fyritøkum. Innanhýsis flytingar eru frá játtanini “Tiltøk fyri børn og ung”, høvuðskontu 7.23.3.05.

Glasir bað grannskoðanarfyritøku seta upp og grannskoða roknskapin fyri sangleikin, tí Uttanríkis- og mentamálaráðið kravdi, at roknskapurin skuldi grannskoðast av góðkendum grannskoðara, tá ið ráðið játtaði 150 t.kr. í stuðli.

Tølini í roknskapinum, ið Glasir hevur latið Uttanríkis- og mentamálaráðnum, eru ikki tey somu, sum eru í Búskaparskipan landsins.

kr.

Sangleikur	**Búskaparskipan landsins**	**Roknskapur frá grannskoðanarvirkinum**
Lønir	652.011	719.162
Útreiðslur	785.870	897.432
Inntøkur	-1.276.840	-1.346.840
Hall	**161.989**	**269.174**

Orsøkin til munin er, at bókingar eru framdar, eftir at roknskapurin er gjørdur í september 2020 og latin pørtunum. Glasir vísir á, at munirnir stava serliga frá, at 124 t.kr. í MVG eru ikki við í roknskapinum í Búskaparskipan landsins, eins og rokning fyri uppseting av roknskapinum, og lønir og atgongumerkir fyri 70 t.kr. eru heldur ikki við í innanhýsis roknskapinum.

MVG, sum landið hevur goldið, er ikki útreiðsla hjá Glasi.

MVG er við í uppgerðini frá september 2020, tí ikki var greitt fyrr enn í november 2020, hvussu MVG’ið skuldi skrásetast. Glasir er samt við Landsgrannskoðanina, at MVG, sum landið hevur borið kostnaðin av, kann ikki dragast frá sum útreiðsla í roknskapinum.

Keyp

Glasir brúkar Keypsportalin til størri keyp. KT-deildin hevði t.d. havt útboð á portalinum. Frá 2018 til 2020 er KT-útgerð keypt fyri 6,4 mió.kr.

Í 2020 eru nettoútreiðslurnar til keyp av vørum góðar 2 mió.kr., tá er 1 mió.kr. mótbókað.

Tað er ikki góður roknskaparsiður at mótbóka inntøkur á útreiðslukontum. Tað ger, at roknskapurin vísir ikki rætta virksemið hjá stovninum, og at gjøgnumskygni í roknskapinum als ikki er nóg gott. Landsgrannskoðanin mælti til, at skjalprógv verða løgd við øllum inngjøldum, og at kontant inngjøld verða bókað í kassauppgerð so hvørt.

Roknskapurin vísir ikki rætta virksemið og er ikki gjøgnumskygdur.

70 starvsfólk hava fartelefonir frá Glasi. Skúlin hevur ikki skrivligan politikk á økinum, men allir leiðarar hava fartelefon.

Skúlin hevur gamlar siðvenjur fyri, hvussu tey skipað fyri starvsfólkatiltøkum, sum skúlin rindar fyri. Glasir hevur seinastu árini keypt 265 jólapakkar um árið fyri 500 kr. stk.

Einki var at finnast at ferðauppgerðunum, men Landsgrannskoðanin mælti til, at leggja skjøl við, ið sýna endamál við ferðum.

Eftirlitsslóð v.m.

Landsgrannskoðanin vísti eins og áður á, at roknskapurin er ikki rættur, tá ið Glasir bókar keyp og sølu í fíggjarstøðuni í staðin fyri í rakstrinum, og tað er ikki í samsvari við roknskaparreglurnar. Tað er ikki altíð gjørligt at fylgja eftirlitsslóðini, tí upphæddir eru fluttar ímillum nógvar ymiskar kontur.

Inntøkur og útreiðslur eiga ikki at vera bókaðar í fíggjarstøðuni.

Glasir hevur greitt frá, at tað er í samsvari við “Depilslógina”, at skúlin hevur bókað inntøkur og útreiðslur í fíggjarstøðuni.

Landsgrannskoðanin hevur enn eina ferð mælt til at fáa hesi viðurskiftini viðvíkjandi roknskapinum í rættlag.

Lønir v.m.

Í virksemisætlan leggur skúlin tímarnar, sum lærari er settur at undirvísa og aðrar tímar, so sum tíð til verkætlanir, próvtøkur, skeið, umsiting o.a. Undirvísingartímatalið er 1750 tímar um árið. Lærarar kunnu tó arbeiða meira enn fulla tíð, og hjá summum er brøkurin 1,3.

Leiðslan kann leggja tímar í tímabankan, sum seinni kunnu brúkast til at regulera løn við, avspákast ella gjaldast út sum yvirtíð. Lærarar kunnu eisini hava minustímar í virksemisætlanini, sum verða lagdir í tímabankan.

Glasir brúkar tímabanka.

Sambært sáttmálanum ímillum Yrkisfelagið Miðnám og Fíggjarmálaráðið, kann yvirtíð í ársverkinum hjá einstøkum lærara, upp til 300 tímar, setast í tímabankan. Undirtímar í ársverkinum hjá einstøkum lærara vera, alt tað ber til, tiknir úr tímabankanum og rindaðir aftur árið eftir. Yvirtímar, sum ikki fara í tímabankan, vera útgoldnir so hvørt.

Upphæddirnar í tímabankanum eru skrásettar sum “skyldugur kostnaður” og drignar frá í rakstrinum, uttan at vera goldnar út. Talið av skyldugum tímum ultimo 2020 er slakir 26.000 tímar.

Skyldugi kostnaðurin í 2017 var 6,2 mió.kr., og í 2020 er hann 12,2 mió.kr. 26 lærarar áttu 13.415 tímar á fyri tíðina fram til skúlaárið 2019/20. Teir áttu yvir 300 tímar hvør og upp í nærum 1.300 tímar.

Skyldugi lønarkostnaðurin hækkar.

Glasir hevur biðið deildarleiðarar og starvsfólk um at minka tímabankan, har tímabankin ikki tykist fylgja endamálinum. Sambært Glasi er saldan hjá summum lærarum lækkað í 2020/21 í samsvari við áheitanina.

Summir lærarar við stórum tímabanka kunnu ikki fáa tímarnar ella yvirtíð goldna, tí teir hava tímaniðurskurð sambært § 26 í sáttmálanum hjá YF. 120 lærarar kunnu sambært YF-sáttmálanum eiga +/- 300 tímar. Teir flestu hava positiva tímasaldu.

Tíðarskráseting

Lærarar skráseta ikki tímar, sum teir brúka til t.d. umsiting, men leiðararnir skulu tryggja, at tímarnir eru arbeiddir. Tá ið lærarar fáa játtaðar tímar til verkætlanir, skráseta teir ikki tímarnar, og vita tí heldur ikki um neyvt sama tal verður brúkt. Sambært leiðsluni er tað ein spurningur ímillum læraran og næsta leiðara. Deildarleiðararnir vátta tímaseðlarnar hjá lærarum og starvsfólkum.

Starvsfólk í fyrisitingini hava flekstíð, +50/-25 tímar.

Stakroyndir av lønarmálum

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lønirnar eru rættar við at samanbera lønirnar við setanarskriv, prógv o.a. Umframt tær viðmerkingar, ið eru nevndar niðanfyri, hevði Landsgrannskoðanin einki at finnast at.

Eitt starvsfólk á serbreytini, sum hevur kandidatútbúgving, er lønt eftir sáttmálanum hjá Føroya Tekniska Lærarafelag. Spurt, um innplaseringin átti at verið sum cand.mag. og civilverkfrøðingur, svaraði Glasir, at tá ið serbreytin var sett á stovn, var avgerð tikin um, at størvini skuldu setast sambært sáttmálanum hjá Føroya Tekniska Lærarafelag. Sambært Glasi hevur Lønardeildin í nøkur ár havt flokkingarnar til viðgerðar, og Glasir hevur ikki heimild at broyta flokkingina, fyrr enn ein niðurstøða kemur frá Lønardeildini.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í juni 2021 var semja gjørd um nýggjan sáttmála við Yrkisfelagið Miðnám, har viðurskiftini hjá Serbreytini vóru partur av semjuni.

Fíggjarstøða

Í 2018 vísti Landsgrannskoðanin á, at tað var átaluvert, at skúlin enn ikki hevði nakað yvirlit yvir ognirnar, tó at hann í 2010 upplýsti, at hann fór at gera ognaryvirlit. Glasir er samt við Landsgrannskoðanina, men vísti samstundis á, at tey høvdu ikki arbeiðsorku til at gera yvirlitið, tí síðani 2013 var øll orkan farin til umsitingina av nýggja lønarsáttmálanum. Glasir hevði gjørt avtalu við Gjaldstovuna og Mentamálaráðið um at gera yvirlit yvir innbúgv og maskinur við virði oman fyri 50 t.kr., ið fóru at vera keyptar til nýggja skúlabygningin, og at gamalt innbúgv og maskinur, ið tey tóku við sær, eisini skuldu skrásetast.

Einki ognaryvirlit.

Glasir hevur ikki yvirlit yvir maskinur, innbúgv o.a. Leiðslan greiddi frá, at bygningurin er enn ikki yvirtikin frá Landsverki, og vísti á, at ein umbøn um eykajáttan var til viðgerar um at játta 6 mió.kr.[25] til manglar í bygninginum, sum skulu gerast, áðrenn hann kann góðkennast og fáa nýtsluloyvi.

Í november 2020 kannaði Landsgrannskoðanin saman við starvsfólki á Glasi, um maskinur o.a., sum er keypt í 2018 og goldið av løgujáttanini, eru í skúlanum. Lutirnir, ið vit spurdu eftir, vóru til á Glasi.

Í støðisognini hjá Glasi eru fimm bygningar í Hoydølum, serligt innbúgv og tríggir bilar skrásettir. Leiðarin á KT-deildini hevur yvirlit yvir allar teldur hjá skúlanum.

[25] Í 2020 eru játtaðar 12,2 mió.kr. við eykajáttanarlóg, og í 2021 eru játtaðar 1,2 mió.kr. í fíggjarlógini. Tilsamans hevur Landsverk disponerað og/ella avsett 36 mió.kr. av teimum játtaðu 37,3 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur enn eina ferð mælt til, at Glasir útvegar yvirlit yvir ognirnar hjá skúlanum, og at allar ognir, sum skulu skrásetast í landsroknskapinum, verða skrásettar.

Goymslur
Í desember 2020 hevur Glasir talt goymsluna hjá kantinuni til 80 t.kr. Skúlin hevur ikki talt aðrar goymslur t.d. hjá timbur-, maskin- og hárdeildini. Sambært leiðsluni eru tær goymslurnar ótýðandi.

Peningastovnskontur og gjaldkort
Landsgrannskoðanin hevur avstemmað saldurnar á peningastovnskontunum. Saldurnar stemmaðu. Glasir hevur 7 gjaldkort.

Á kontu í BankNordik, "Føroya Studentaskúli (inngjøld)" bókar Glasir rørsluna eina ferð um mánaðin. Ultimo 2020 stóðu 153 t.kr. á kontuni. Skúlin hevur arvað kontuna í samanleggingartilgongdini. Kontan er stovnað í samráði við Mentamálaráðið til at rinda fyri stakgreinalestur hjá næmingum á øllum miðnámsskúlunum. Glasir hevur fleiri ferðir biðið Undirvísingarstýrið um at fáa ábyrgdina av kontuni staðsetta, uttan at tað er gjørt.

Kassar
Skúlin hevði 3 kassar. Landsgrannskoðanin gjørdi kassaeftirlit, men kundi ikki samanhalda við kontanta sølu. Kontantur peningur var ikki bókaður í longri tíð í kantinuni. Kassarnir vóru ikki gjørdir upp regluliga, og smávegis munir vóru í øllum kassunum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at greiður skilnaður verður ímillum tey, sum umsita kassarnar og bókhaldið, og at áseta í roknskaparreglugerðini, hvør hevur ábyrgd av hvørjum.

Í januar 2021 kunnaði Glasir um, at skúlin hevur tikið nýggja kassaskipan í brúk. Allar sølur verða nú skrásettar í kassaskipanina og kassauppgerðir verða gjørdar fyri hvønn dag. Reiðupeningurin verður borin til bókhaldið, sum stemmar peningin av, áðrenn hann verður settur inn.

Glasir hevur tikið kassan í móttøkuni av, og skúlin arbeiddi við at seta í verk talgilda kassaskipan, og at avmarka nýtslu av kassum til einans at vera í kantinuni og hárdeildini.

Kontantkassi er nú einans í kantinuni og hárdeildini.

Stuttfreistað skuld
Saldan á St.Rk. 0881 "Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t:

t.kr.

Heiti	2017	2018	2019	2020
Ikki inntøkuført - granskingarstyrkir, gávur o.t.	-319	-621	-1.276	-1.376

Talan er í høvuðsheitum um inntøkur og útreiðslur, sum bert eru bókaðar í fíggjarstøðuni.

Bókingarnar eru ikki í samsvari við reglurnar um, at inntøkur og útreiðslur skulu bókast í rakstrinum. Roknskapurin vísir ikki samlaða virksemið hjá stovninum, og tað forðar fyri gjøgnumskygni.

Landsgrannskoðanin mælti staðiliga til, at allur raksturin verður bókaður í rakstrarroknskapinum.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum
Í februar 2021 bað Landsgrannskoðanin landsstýrismannin um viðmerkingar til frágreiðingina um Glasir.

Í september 2021 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at saman við Undirvísingarstýrinum er ráðið í holt við at gjøgnumganga frágreiðingina, og at hon verður tikin upp við Glasir, við tí endamálið at fáa gjørt tær broytingar og tillagingar, sum eiga at verða gjørdar sambært frágreiðingini.

7.7 Lønir á serbreytunum (LG 2018/207-0233)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av lønunum hjá lærarunum á serbreytunum á Miðnámi á Kambsdali, Tekniska skúla í Klaksvík og á Glasi í Tórshavn.

Landsgrannskoðanin kundi ikki við vissu siga, at lønirnar vóru rættar, við at samanbera tær. M.a. var ymiskt, hvussu ársverk, skráseting av arbeiðstíð, lønarsáttmálar, flokkingar, starvsaldur o.a. vóru umsitin.

Hóast talan er um eina námsskipan, vóru tveir ymiskir lønarsáttmálar brúktir. Setanar- og lønarviðurskiftini hjá lærarunum á serbreytini vóru eftir sáttmálum, sum vóru ætlaðir til miðnám og yrkisnám annars. Eyðkennið við serbreytini er, at hon hevur ikki vanlig upptøkukrøv og miðar ikki eftir vanligum miðnámsprógvi.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað eyðvitað var ein fyrimunur at hava ymiskar undirvísingarførleikar, útbúgvingar og royndir á serbreytini, men helt tó, at tað var ikki nøktandi, at starvsfólk vóru viðgjørd ymiskt, alt eftir nær tey vóru sett í starv, ella á hvørjum skúla tey vóru sett.

Landsgrannskoðanini kunnugt, byrjaði samskifti millum Mentamálaráðið og Fíggjarmálaráðið um lønarviðurskiftini longu í 2016, og enn var ikki komið á mál.

Mentamálaráðið greiddi frá, at í apríl 2019 var semja undirskrivað millum Føroya Tekniska Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið. Partarnir samdust um, at størvini á serbreytunum skuldu flokkast og avtala gerast um arbeiðstíð.

Í samráðingunum við Yrkisfelagið Miðnám hevði Mentamálaráðið eisini kravt, at partarnir samdust um at endurskoða lønirnar á serbreytunum. Í sáttmálanum í mai 2019 er ásett, at størvini á serbreytini skulu flokkast, og avtala gerast um arbeiðstíð.

Undirvísingarstýrið og Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum vóru í holt við at gera upplegg til samráðingar við partarnar. Arbeitt var við at flokka størvini, og væntaði ráðið, at tað fór at verða avgreitt í 2019.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at á sumri 2019 greinaði Undirvísingarstýrið økið. Í juni í 2019 fór umbøn til Lønardeildina um at flokka serbreytirnar. Tað var eitt upplegg at arbeiða víðari við, men arbeiðið dróg út. Í oktober 2020 gingu sáttmálarnir á økinum út, og tá ætlaði Lønardeildin at taka málið um lønirnar á Serbreytunum við í lønarsamráðingarnar.

Semja gjørd við Yrkisfelagið Miðnám um Serbreytina.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin víst á, at í juni 2021 var semja gjørd um nýggjan sáttmála við Yrkisfelagið Miðnám, har viðurskiftini hjá Serbreytini vóru partur av semjuni. Semjan var í tveimum:

1) Generellu ásetingarnar í sáttmálanum um arbeiðstíð hjá miðnámsskúla-lærarum eru ikki galdandi fyri serbreytirnar. Arbeiðstíðin fyri fult starv er 1.750 tímar um árið. Arbeiðið verður skipað av leiðslu skúlans.

   Leiðsla skúlans ger av, hvussu nógv tíð skal til fyrireiking, uppfylging og annað, sum part av arbeiðstíðini.

2) Til lønartalvuna fyri bachelorar verður 1. oktober 2021 sett inn viðmerking um, at lærarar við meðallangari útbúgving á serbreyt, sum lúka útbúgvingarkrøvini ganga stigini 1 til 14. Henda skalagongdin er galdandi fyri lærarar, ið verða settir eftir 1. mars 2021.

Landsstýrismaðurin hevur eisini greitt frá, at *"Undirvísingarstýrið hevur kunnað Miðnám á Kambsdali og Miðnámsskúlan í Suðuroy um semjuna.*

Fyri Miðnám á Kambsdali eru boðini, at tey beinanvegin skulu gjøgnumganga allar setanir og fáa setanarskriv o.l. avgreidd. Harumframt at tey 1. januar 2022 hava sett í verk hóskandi skráseting av arbeiðstíð. Undirvísingarstýrið hevur biðið um at fáa fyrilagt, hvussu skúlin ætlar at skráseta arbeiðstíð frameftir.

Fyri Miðnám í Suðuroy eru boðini, at tey skulu seta starvsfólk eftir semjuni og beinanvegin fara undir at fáa hóskandi skráseting av arbeiðstíð. Undirvísingarstýrið fylgir hesum upp, og fer at biðja um at fáa fyrilagt, hvussu skúlin skrásetir arbeiðstíðirnar.

Tað er enn ikki gjørd semja við Føroya Tekniska Lærarafelag, men samráðingarnar eru byrjaðar. Undirvísingarstýrið vónar, at semja verður gjørd í 2021, soleiðis at Tekniski skúli í Klaksvík og Glasir kunnu fáa øll viðurskifti upp á pláss til skúlaárið 2022/23".

Samráðingar eru byrjaðar við Føroya Tekniska Lærarafelag um Serbreytina.

7.8 Tekniski skúli í Klaksvík, løgujáttan (LG 2018/207-0233)

Sambært landsroknskapinum kostaði skúlin 36,6 mió.kr. Tó hevði landið goldið 38,2 mió.kr. fyri byggingina. Munurin stóðst av, at Landsverk í 2016 hevði sent høvuðsráðgevanum ein faktura, 1,6 mió.kr., har Landsverk vísti til, at feilir hjá ráðgevanum høvdu gjørt, at aðrar arbeiðstøkur vórðu vorðnar dýrari. Upphæddin er mótroknað í prosjekteringsútreiðslunum.

Landsgrannskoðanin vísti á, at tað var lítið sannlíkt, at landið fór at fáa peningin frá høvuðsráðgevanum, og at roknskapurin fyri byggingina tí ikki var rættur.

Í 2018 hevði høvuðsráðgevin einki goldið. Mentamálaráðið tók undir við Landsgrannskoðanini, at bókingarhátturin gjørdi, at roknskapurin var ikki rættur.

Í 2019 segði landsstýrismaðurin, at Landsverk royndi at fáa semju við høvuðsráðgevan, tí at eitt sakarmál var kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Landsverk hevði latið gerðarrættinum málið.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at síðan 2020 er roynt at fáa semju millum partarnar, men tó uttan nakra niðurstøðu.

Seinastu tíðina hevur tað víst seg, at bygningurin lekur sera illa. Nærri kanningar vóru gjørdar, og niðurstøðan er, at bygningurin má umvælast. Landsverk hevur boðið umvælingina út og hevur fingið tilboð á slakar 2 mió.kr. við MVG. Samlaða kravið í hesum máli er tískil hækkað til 3,4 mió.kr. við MVG. Tað er fráboðað gerðarrættinum 24. august 2021.

Samlaða kravið móti høvuðsráðgevanum er nú 3,4 mió.kr.

Partarnir samráðast nú um eina sýn og meting á staðnum, fyri at fáa staðfest manglar áðrenn hesir verða umvældir.

Sambært landsstýrismanninum fær Landsverk ikki sagt, nær málið verður avgreitt.

7.9 Skúladepil við Marknagil, løgujáttan (LG 2020/207-0233)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað løgujáttanina á høvuðskontu 7.23.3.09. Í 2019 vóru 23,9 mió.kr. játtaðar til liðugtgerð og ymiskar tillagingar av Glasi. Nýggj verklagslóg var gjørd, ið ásetir, at byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi verða 23,9 mió.kr.

Í viðmerkingunum til eykajáttanarlóg oktober 2020 sigur Fíggjarmálaráðið m.a., at munandi manglar vóru í gjørda arbeiðinum, sum máttu bøtast, fyri at bygningurin kundi góðkennast. Bygningurin hevur ikki fingið endaligt nýtsluloyvi. Útfylt R&V-ætlan[26] skal latast kommununi, sum krevur, at ætlan skal fyriliggja fyri øll aktivu brunaanleggini. Ætlanin er gjørd, men Glasir skal fylla hana út.

Bygningurin er ikki endaliga góðkendur.

Bygningurin er ikki endaliga góðkendur, og góðkenningin kemur ikki, fyrr enn samanstoypingarnar eru gjørdar. Landsverk hevur ikki sett arbeiðið við samanstoypingunum í gongd fyrr, tí stovnurin hevur bíðað eftir endaligu játtanini.

Sambært Landsverki eru nøkur arbeiðir á Glasi um at vera liðug, tó at arbeiðstakarin framvegis ikki hevur sent rokning. Samanstoypingarnar eru einasta veruliga stóra arbeiði, sum er eftir. Landsverk hevur gjørt sáttmála við múrarafyritøku fyri 5 mió.kr. Arbeiðið var boðið út sum undirhondsútboð, har tríggir arbeiðsgevarar vóru bidnir um at geva tilboð.

Í 2020 eru játtaðar 12,2 mió.kr. við eykajáttanarlóg, og í fíggjarlógini 2021 eru játtaðar 1,2 mió.kr. Landsverk hevur disponerað og/ella avsett 36 mió.kr. av teimum játtaðu 37,3 mió.kr.

Sambært Búskaparskipan landsins er avsett til ógoldnar rokningar 31. desember 2020 fyri slakar 6,4 mió.kr.

Í mai 2021 er avsetingin vegna ógoldnar rokningar slakar 5,3 mió.kr. frá 7 ognarum. Elsta skuldin er frá 2017.

7.10 Frítíðarundirvísing (LG 2019/207-0235)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av umsitingina av játtanini til frítíðarundirvísing, sum er á høvuðskontu 7.23.5.07.

Neyðugt at dagføra lógarverkið um frítíðarundirvísing.

Undirvísingarstýrið vísti í 2019 Mentamálaráðnum á, at neyðugt var dagføra lógarverkið. Stýrið hevði spurt um tulkingar av lógini og av fyrisitingarligu mannagongdunum, sum høvdu verið siðvenjur, áðrenn Undirvísingarstýrið fekk ábyrgdina av at fyrisita lógina.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at hann ætlaði at dagføra lógina um frítíðarundirvísing v.m. og hevði sett hana á løglistan.

Rundskriv um læraraløn o.a.
Landsgrannskoðanin vísti á ymisk viðurskifti í rundskrivinum um læraraløn frá 5. juli 2001. Talan var um ásetingar í sambandi við løn til almenna frítíðarundirvísing, serstaka frítíðarundirvísing og frítíðarvirksemi.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Uttanríkis- og mentamálaráðið ætlaði at endurskoða rundskrivið.

[26] Rakstur og viðlíkahald

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum
Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at arbeitt verður framvegis við lógarbroytingunum, serliga at gera ítøkiligari ásetingar fyri føroyskt sum annaðmál, ið verður skipað sum serstøk frítíðarundirvísing. Rundskrivið um læraraløgnir er partur av hesum arbeiði og verður endurskoðað samstundis.

7.11 Vinnuháskúlin (LG 2018/207-0236)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Vinnuháskúlanum.

Lønir o.a.
Vinnuháskúlin hevði goldið lærara samsýning fyri verkætlanarleiðslu hjá skipsføraralesandi. Sambært Vinnuháskúlanum var avtalan um samsýningina gjørd, áðrenn Maskinmeistaraskúlin var lagdur saman við Føroya Sjómansskúla, men avtalan var ikki at finna.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Undirvísingarstýrið arbeiddi við at gera eina nýggja avtalu, og at fáa hana góðkenda av Fíggjarmálaráðnum.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Vinnuháskúlanum er eingin skrivlig avtala gjørd um samsýningina, sum lærarar fáa fyri verkætlanarleiðslu hjá skipsføraralesandi. Føroya Sjómansskúli hevur ásett samsýningina í 2001, ella har á leið. Sambært skúlanum er samsýningin ongantíð prísjavnað ella broytt.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at í sambandi við sáttmálasamráðingarnar verður arbeitt við ársverki fyri maritimu skúlarnar, sum ætlandi verður sett í verk í 2022. Í tí sambandi fer Fíggjarmálaráðið at endurskoða og góðkenna allar samsýningar.

KT-viðurskifti
Vinnuháskúlin hevði ikki gjørt váðameting sambært rundskrivinum um KT trygd. Skúlin samskifti við Dátueftirlitið um, hvussu persónupplýsingar skuldu viðgerast. Landsgrannskoðanin mælti til, at viðurskiftini vórðu fingin í rættlag.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at sambært Vinnuháskúlanum var trygdarpolitikkurin hjá skúlanum ikki endurskoðaður. Arbeiðið hevði drigið út orsakað av, at KT-starvið ikki var sett, og at Undirvísingarstýrið arbeiddi við at gera nýggja felags KT-skipan fyri alt undirvísingarverkið, har Vinnuháskúlin skal vera ein partur.

Vinnuháskúlin verður partur av Skúlaneti.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at uttanhýsis veitarar hava í tíðarskeiðnum hildið viðlíka og bøtt um skipanir og trygd. Vinnuháskúlin verður eftir ætlan fyrsti stovnurin, sum verður partur av Skúlaneti.

7.12 Sjónám (LG 2020/207-0236)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Sjónám og Trygdarmiðstøðina. Játtanin er á høvuðskontu 7.23.6.05 “Maritimir skúlar”.

Sjómansskúlin er skipaður sambært Ll. nr. 55/2001 “um útbúgving av manning á skipum o.ø.” Trygdarmiðstøðin veitir sjófólki og næmingum skeið og undirvísing í trygd á sjónum sambært Ll. nr. 63/1998 “um manning av skipum”.

Í skúlaárinum 2020/2021 vóru 11 skiparanæmingar og 7 skipsatstøðingar. Í 2019/2020 fingu fleiri enn 600 skeiðsluttakarar prógv.

Heimildir til skeiðsgjøld

Sambært K. nr. 100/2012 “um gjald fyri skeið innan trygd á sjónum” kunnu gjøldini fyri lógarkravd trygdarskeið í mesta lagi vera 2.500 kr. fyri næmingar í fólkaskúla og sjóvinnubreyt og 4.000 kr. fyri sjófólk.

Sambært § 11 í K. nr. 73/2016 “um trygdarskeið fyri manning á fiskiskipum” kann skúlin krevja gjald frá hvørjum einstøkum luttakara fyri útreiðslur í sambandi við trygdarskeiðið, undir hesum luttøkugjald og gjald fyri prógv.

Í 2020 var kostnaðurin fyri trygdarskeið á Sjónámi 3.250 kr. fyri næmingar í fólkaskúla og 6.500 kr. fyri sjófólk. Sami takstur hevur verið galdandi í nøkur ár.

Skeiðsgjaldið er ikki í samsvari við kunngerðina.

Spurt, hvar heimildin er at áseta onnur gjøld fyri trygdarskeið, enn tey, sum eru ásett í K. nr. 100/2012, svaraði Sjónám, at skúlin í 2015 munnliga gjørdi Vinnuháskúlan og Mentamálaráðið varug við, at K. nr. 100/2012 ikki longur var rímilig fyri stovnin, tí tað var ómøguligt at bjóða eitt slíkt skeið út í samsvari við kunngerðina. Í samráði við Vinnuháskúlan helt Sjónám, at 6.500 kr. fyri eitt 5 daga trygdarskeið, var rímiligur prísur fyri bæði skeiðsveitara og skeiðstakara. Stovnarnir ynsktu ikki at koma í ta støðu at bjóða skeið út við undirskoti.

Í apríl 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, skúlarnir fara at fáa boð um at tillaga gjøldini soleiðis, at tey svara til ásetingina í K. nr. 100/2012, og at ráðið eisini umrøður spurningin um at endurskoða kunngerðina.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin hjá Sjónámi er frá 2018, og er send Mentamálaráðnum til góðkenningar. Í apríl 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at ráðið miðar ímóti at góðkenna reglugerðina áðrenn summarferiuna.

Roknskapartøl undirkonta 22. “Sjónám (Klaksvíkar sjómansskúli)”:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	2.519	2.480	2.579	2.449	2.414
Keyp av vørum og tænastum	747	877	746	463	808
Keyp av útbúnaði, netto	159	63	55	7	55
Leiga, viðlíkahald og skattur	70	665	29	3	2
Søla av vørum og tænastum	-232	-221	-133	-61	-73
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	0	0	0	252	0
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	0	-38	-79	-107	0
Tilsamans	**3.263**	**3.826**	**3.198**	**3.005**	**3.205**

Inntøkurnar hjá Sjómansskúlanum stava frá sølu av bókum, radioskeiðum v.m. Innanhýsis flytingar, útreiðslur, í 2019 eru endurgjøld til Tekniska skúla fyri lønir.

Roknskapartøl undirkonta 23. “Sjónám (Trygdarmiðstøðin og skeiðsvirksemi)”:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	2.682	2.634	2.598	2.682	2.594
Keyp av vørum og tænastum	885	969	917	834	894
Keyp av útbúnaði, netto	36	260	218	20	145
Leiga, viðl. avskr. o.a.	226	168	303	125	210
Søla av vørum og tænastum	-2.361	-2.373	-2.477	-2.380	-2.300
Flytingarinntøkur	0	0	-173	0	-6
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	0	0	0	146	0
Tilsamans	**1.466**	**1.658**	**1.385**	**1.427**	**1.537**

Sambært Sjónámi hevur skúlin ásett kostnaðir fyri skeið í mun til útreiðslurnar hjá skúlanum. Sjónám letur ikki luttakarunum prógv, fyrr enn goldið er fyri skeiðið.

Í apríl 2021 hevur landsstýrismaðurin vísst á, at maritimu skúlarnir eru ikki inntøkufíggjaðir, men fáa játtan í fíggjarlógini hvørt ár. Skúlarnir hava tó í ávísan mun ásett skeiðsgjøldini í mun til útreiðslurnar, skúlarnir hava av skeiðunum.

Sambært landsstýrismanninum var kunngerðin um skeið innan trygd á sjónum ein politisk avgerð, fyri ikki at gera tað ov kostnaðarmikið hjá næmingum í fólkaskúlanum og hjá øðrum ungum, sum høvdu hug at royna sjógvin.

Sjónám bjóðar eisini út onnur skeið, enn vanligu trygdarskeiðini, og Landsgrannskoðanin mælti til at greina prísásetingina av skeiðum v.m. í roknskaparreglugerðini.

Heimildir, prísásetingar v.m. eiga at vera í roknskaparreglugerðini.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur, at ráðið skal ikki góðkenna einstøku skeiðsgjøldini, og ásetingar eru ikki fyri onnur skeið, enn vanliga trygdarskeiðið. Í roknskaparreglugerðini eigur tó at vera greitt frá um heimildir, prísásetingar, avsláttir og kredittir, og fer ráðið tí at taka tann spurningin upp í sambandi við góðkenning av reglugerðini.

KT-trygd, herundir váðameting og trygdarpolitikkur

Í desember 2020 hevur eitt grannskoðanarvirki skoðað Sjónám sambært rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum um KT-trygd.

Í niðurstøðuni sigur grannskoðarin, at trygdarviðurskiftini hjá Sjónámi ikki til fulnar samsvara við krøvini í trygdarrundskrivinum, og vísir hann á staðfestar veikleikar.

7.13 Fróðskaparsetur Føroya (LG 2018/207-0236)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Fróðskaparsetri Føroya. Landsgrannskoðanin mælti til at fáa greiða heimild til at áseta gjøld fyri skeið v.m.

Sambært Setrinum var prísásetingin fyri skeiðsgjøld gjørd eftir marknaðartreytum, soleiðis at skeiðsvirksemi ikki var kappingaravlagandi. Setrið var í holt við at endurskoða roknskaparreglugerðina, og verður tað útgreinað neyvari, hvørjar inntøkur Setrið hevur, og hvussu Setrið prísásetir skeiðsgjøld v.m.

Sambært landsstýrismanninum er Fróðskaparsetrið enn í holt við at endurskoða roknskaparreglugerðina

Samsýningar til útlendskar undirvísarar

Landsgrannskoðanin vísti á, at samsýningar fyri undirvísing og nevndarsamsýningar til fólk, ið ikki búgva í Føroyum vóru at roknað sum A-inntøka, um arbeiðið var útint í Føroyum, og at tær samsýningarnar tí áttu at verðið goldnar sum løn heldur enn “keyp av tænastum”.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at TAKS var av teirri fatan, at um Fróðskaparsetrið rindaði samsýning til útlendskar undirvísarar, var tað at meta sum A-inntøka, um arbeiðið var útint í Føroyum. Um arbeiðið hjá undirvísaranum var gjørt í útlandinum, var talan ikki um A-inntøku, og tískil verður viðkomandi ikki skattskyldugur í Føroyum. Viðvíkjandi nevndarsamsýningum, so var talan um A-inntøku sambært Skattalógini § 60, stk. 1, nr. 7, og tískil verður viðkomandi eisini avmarkað skattskyldugur av hesari inntøku. Uttanríkis- og mentamálaráðið fór at taka málið upp við Setrið.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at orsakað av koronu hevur Fróðskaparsetrið ikki havt so nógvar útlendskar undirvísarar og prógvdómarar í Føroyum, ístaðin er arbeiðið hjá teimum fyri tað mesta gjørt uttanlands. Henda

samsýningin er ikki at rokna sum A-inntøka, og hevur Setrið tí heldur ikki goldið hana út sum A-inntøku.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur heitt á Setrið um at tillaga mannagongdina, soleiðis at skattareglurnar verða hildnar. Setrið hevur svarað, at tey sjálvi fara at seta seg í samband við TAKS fyri at umrøða, hvussu Setrið kann leggja tað til rættis, tí tað krevur nakað av fyrisiting, sum Setrið annars sleppur undan.

Undirvísing, prógvdøming o.a.

Fróðskaparsetrið hevði rindað samsýningar fyri undirvísing, prógvdøming v.m. sum "keyp av tænastum". Á nøkrum rokningum var MVG lagt á. Uppgávurnar vóru ikki bodnar út. Landsgrannskoðanin vísti á, at tað er týdningarmikið, at almennir stovnar rinda samsýningar, sum eru løn, um Lønarskipanina hjá Gjaldstovuni. Tá ið arbeiðsgevarar rinda løntakarum frítíðarløn, skal frítíðarlønin rindast á frítíðarlønarkontu avvarðandi løntakarafelags e.a. Viðvíkjandi meirvirðisgjaldi vístu vit á, at sambært meirvirðisgjaldslógini er m.a. undirvísing í skúla ella á fróðskaparsetri undantikið MVG-skyldu.

Samsýning fyri undirvísing og prógvdøming er at roknað sum A-inntøka sambært § 60 í skattalógini. Sambært Mentamálaráðnum, sá TAKS málið sum, at talan var um móttakarar, ið fingu samsýningar fyri persónligt arbeiði í tænastu fyri Setrið. Arbeiðið var ikki gjørt fyri egna rokning, men fyri rokning hjá Setrinum. Tískil metti TAKS, at lønarinntøkurnar áttu at verða ávístar um A-skattaskipanina.

Í august 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Uttanríkis- og mentamálaráðið fór at taka málið upp við Setrið.

Undirvísing og prógvdøming verður ikki longur gjørt fyri rokning.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Fróðskaparsetrinum fer øll samsýning fyri undirvísing og prógvdøming nú umvegis skattaskipanina. Tað merkir, at einki arbeiði verður gjørt fyri rokning.

Stuðulsfíggjað virksemi

Verkætlanarleiðarar (t.d. Ph.d. lesandi) hava ábyrgd av, at játtanir til stuðulsfíggjað virksemi halda. Dekanur og stjórin góðkenna verkætlanir.

Seinastu árini er óbrúktur granskingarstuðul støðlaður í fíggjarstøðuni:

t.kr.

Heiti	2014	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Ikki inntøkuført - granskingarstyrkur, gávur o.t.	11.523	13.113	12.966	11.782	11.305	17.529	24.237

Peningur hevur staðið ónýttur í nógv ár.

Landsgrannskoðanin hugdi nærri at trimum verkætlanum, har peningur hevði staðið ónýttur í nógv ár.

Førleikamenning í varandi orku

3,7 mió.kr. vóru støðlaðar til "Førleikamenning í varandi orku". Setrið fekk 4,3 mió.kr. í 2014 frá Statoil Færøyene AS til gransking og undirvísing. Í 2017 vóru 190 t.kr. brúktar. Í 2018 eru 434 t.kr. brúktar.

Fyrsta Ph.d. verkætlanin við fígging av hesum stuðlinum var nú í gongd. Ein granskari var settur í tíðaravmarkað starv 1. februar 2018 til 1. februar 2021, til Ph.d. verkætlanina "Greining og myndlan av vindorkutilfeinginum í Føroyum".

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Ph.d. verkætlanin "Greining og myndlan av vindorkutilfeinginum í Føroyum" verður framvegis fíggjað av stuðlinum. Eingin nýggj Ph.d verkætlan er farin í gongd. Í dag eru 2,5 mió.kr. eftir.

Stuðul frá TF Holding

Fróðskaparsetrið og TF Holding høvdu gjørt avtalu, galdandi frá 1. juli 2015 til 31. juli 2020, um at TF Holding stuðlar Setrinum við 5 mió.kr. til at virka við til at uppbyggja búskaparfrøði sum granskingar- og undirvísingarøki á Setrinum. Treyt fyri stuðlinum var m.a., at Setrið bjóðaði bachelorútbúgving í búskaparfrøði út, lestrarárið 2016/2017.

Landsgrannskoðanin helt, at roknskaparliga viðgerðin av stuðlinum var fløkt og ikki nóg gjøgnumskygd. Roknskapurin 2017 kundi heldur ikki sigast at vera rættur.

Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at sambært Setrinum hevði roknskaparliga viðgerðin av stuðulsjáttanini verið akkurát tann sama, sum hon hevði verið fyri alt annað stuðulsfíggjað virksemi hjá Setrinum. Mentamálaráðið fór at venda sær til Gjaldstovuna um yvirskipaðu roknskaparligu viðgerðina av stuðulsfíggjaða virkseminum hjá Setrinum, og eftir tað fór málið at verða tikið uppaftur við Setrið.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið var ikki komið til nakra niðurstøðu um, hvørt roknskaparliga viðgerðin av stuðulsjáttanum átti at broytast. Stuðulsfíggjaða virksemið hjá Setrinum verður tí viðgjørt á sama hátt, sum tað hevur verið gjørt.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at einki er broytt. Fróðskaparsetrið handfer enn verkætlanirnar soleiðis, sum tær altíð hava verið handfarnar.

Yvirlit yvir ognir

Ikki fullfíggjað ognaryvirlit.

Innbúgvið til Sjóvinnuhúsið, ið er goldið av løgujáttanini, var ikki skrásett. Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Fróðskaparsetrið hevur ognað sær eina skipan, fyri á ein betri hátt at kunna skráseta ognirnar. Setrið væntaði at hava eitt fullfíggjað yvirlit yvir ognirnar í 2021.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Setrið er byrjað at skráseta ognir í skipanini, og at ognir, sum hava eitt virði oman fyri 50 t.kr., verða skrásettar í Búskaparskipan landsins.

KT-viðurskifti

Setrið hevði skipanir, sum eru týdningarmiklar fyri stovnin, lesandi og granskarar.

Arbeitt verður við tilbúgvingarætlan.

Sambært landsstýrismanninum var arbeiðið við at orða eina tilbúgvingarætlan og leist fyri dagføringar og uppstiganir av Prógvbókini ikki byrjað, men Setrið ætlaði at seta sjøtil á arbeiðið í næstum. Setrið var við í einari verkætlan um eina felags KT-skipan fyri alt undirvísingarverkið. Eitt umfatandi fyrireikingararbeiðið var gjørt, sum miðaði eftir at loysa KT-trygdarspurningarnar og útbúgvingarfyrisitingina í einari felags skipan fyri alt undirvísingarverkið.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at arbeitt verður framhaldandi við at fáa til vega eina felags KT-skipan fyri alt undirvísingarverkið. Fyrisitingarstjórin á Fróðskaparsetrinum situr í stýrisbólkinum fyri verkætlanina, umframt at onnur fólk í fyrisitingini sita í arbeiðsbólkum. Arbeiðið heldur áfram til komið er á mál.

7.14 Granskingarráðið (LG 2020/207-0236)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Granskingarráðnum, fyri m.a. at kanna, um stovnurin hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Sambært Ll. nr. 85/2001 “um gransking” er Granskingarráðið umsiting hjá Granskingargrunninum. Granskingarráðið og -grunnurin hava hvør sín roknskap, og

roknskapurin hjá Granskingargrunninum verður grannskoðaður av privatum grannskoðara.

Játtanin til Granskingarráðið er á høvuðskontu 7.23.6.20, í 2020 eru játtaðar 2.519 t.kr.

Roknskapartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	1.791	1.798	1.880	1.993	2.034
Keyp av vørum og tænastum	626	554	599	647	576
Keyp av útbúnaði, netto	20	86	60	11	94
Søla av vørum og tænastum	-7	-7	-14	-15	-15
Vanligar flytingarinntøkur	-50	-56	-83	-57	-113
Flytingarinntøkur úr útlandinum	-60	-11	-24	-101	-70
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (útr)	90	77	85	92	89
Innanh. flyt. millum alm. stovn. (innt)	-63	-66	-70	-116	-90
Tilsamans	**2.345**	**2.376**	**2.432**	**2.455**	**2.506**

1. januar 2021 er Ll. nr. 89/2020 "um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan" sett í gildi. Játtanin í 2021 er til fyrisitingina, sum sambært lógini verður skipað sum almennur stovnur, ið umsitur eksternan grunn.

Ráðið fyri gransking, menning og nýskapan er sett á stovn at ráðgeva landsstýrinum og vinnu um yvirskipaðan politikk. Granskingarráðið kunnar um stuðulsmøguleikar til gransking o.a. úr skipanum, sum liggja hjá nýggja stovninum ella verða lagdar til hann, vegleiðir umsøkjarum og umsitur játtaðar verkætlanir.

Stovnurin fevnir eisini um føroysku NCP-tænastuna[27], sum er kravd í sambandi við ES granskingar- og menningarsamstarvið Horizon Europe, og um tilhoyrandi EURAXESS tænastuna, ið er kunningartænasta til granskarar, sum ynskja at koma til Føroya ella at fara út í heim at granska.

Granskingarráðið kunnar breitt um úrslit og avrik frá gransking, menning og nýskapan. Stovnurin skipar fyri ymiskum tiltøkum, verkstovum og árligu Vísindavøkuni, sum í stóran mun er fíggjað av øðrum.

Roknskaparviðurskifti o.a.

Roknskaparreglugerð ikki góðkend.

Granskingarráðið hevur eina fyribilsroknskaparreglugerð frá 2016, sum fatar um Granskingarráðið og grunnin. Reglugerðin var send Mentamálaráðnum, men er ikki góðkend, tí ógreiða var um, um avlop av óbrúktari játtan hjá grunninum skuldi falla aftur til landskassan.

Nýggj lóg greiðir spurningin um óbrúktar játtanir.

Nýggja lógin, sum kom í gildi 1. januar 2021, greiðir spurningin um óbrúktar játtanir. Granskingarráðið er farið í holt við at gera nýggja roknskaparreglugerð.

Ognaryvirlitið er dagført ultimo desember 2020.

Granskingarráðið hevur peningastovnskontu, sum er skrásett í Búskaparskipan landsins. Gjaldkort, sum verður nýtt til keyp á netinum o.a., er knýtt at kontuni. Landsgrannskoðanin mælti til, at stovnurin í størst møguligan mun nýtir Búskaparskipan landsins í sambandi við talgildar rokningar og at gjalda við. Gjørd er heimildarváttan til gjaldkortið við neyvari ásetingum um, hvat tað kann verða brúkt til.

Stovnurin umsitur harafturat tvær kontur, sum eru skrásettar í Búskaparskipan landsins. Onnur er EIK-vísindagrunnurin og hin er Sjúkrakassagrunnurin.

[27] National Contact Points.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum m.a ferðaútreiðslur uttanlands og keyp av vørum og tænastum. Landsgrannskoðanin mælti til, at ferðaútreiðslur uttanlands verða neyvt skjalfestar t.d. við at leggja fundarskrá, innbjóðing e.l. saman við útgjøldunum. Eisini var mælt til, at skjalfesta umboðanarútreiðslurnar við at upplýsa endamál við at halda útreiðsluna, og at skráseta innkeyp av útbúnaði rætt.

Inntøkur
Granskingarráðið skipar árliga fyri Vísindavøku, har endamálið er at økja um áhugan fyri gransking og fyri granskingarúrslitum í samfelagnum. 12 stovnar stuðla tiltakinum við 7.500 kr. hvør, og Tórshavnar kommuna við 12.000 kr.

Lønir
Fýra fólk eru í starvi hjá Granskingarráðnum. Tey skráseta arbeiðstíðina, og út frá skrásetingunum gera tey avtalu við stjóran um frítíð og avspáking.

Landsgrannskoðanin kannaði við stakroynd, um lønirnar eru rættar, og um Granskingarráðið fylgir almenna setanarpolitikkinum. Vit samanhildu setanarskriv, prógv o.a. við galdandi lønarsáttmálar. Einki var at finnast at.

Granskingarráðið rindar 2.000 kr. í samsýning til metingarfólk í sambandi við umsóknir um granskingarstuðul. Tvey metingarfólk eru til at meta um hvørja umsókn. Samsýningin er upprunaliga ásett til tað sama, sum próvdómarar á Fróðskaparsetrinum fáa. Flestu metingarfólkini eru búsett uttanlands og gera arbeiði uttanlands.

KT-viðurskifti
Granskingarráðið er knýtt í Landsnet. Granskingarráðið nýtir Búskaparskipan landsins til roknskaparviðurskiftini, og 360 skipanina til journalisering. Skipanirnar eru hýstar hjá KT landsins, og trygdarreglurnar hjá KT landsins eru galdandi fyri stovnin.

7.15 Tjóðpallur Føroya (LG 2020/207-0242)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Tjóðpalli Føroya, fyri m.a. at kanna, um stovnurin hevur sett í verk eitt nøktandi og virkið innaneftirlit.

Tjóðpallur Føroyar er sjálvstøðugur almennur stovnur og virkar sambært Ll. nr. 68/2003 “um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.” Virksemið hjá Tjóðpallinum er lýst í §§ 5-8 í lógini. Játtanin er á høvuðskontu 7.24.2.06 “Leiklist”, undirkontu 20. “Tjóðpallur Føroya”.

Landsstýrismaðurin hevur sett eitt leiklistaráð við sjey limum, sum skal seta og loysa úr starvi stjóra, umrøða og góðkenna fíggjarstøðu og mál av týdningi fyri Tjóðpallin og leiklist. Ráðið skal staðfesta virksemi stovnsins eftir tilmæli stjórans.

Leiklistaráðið hevur gjørt setanarsáttmála við stjóran, galdandi frá 1. februar 2020 til 31. januar 2025. Stjórin var fyrstu ferð settur í starv 1. februar 2005. Eitt skrivstovufólk er í føstum starvi. Leikarar verða settir í tíðaravmarkað størv fyri hvønn leik.

Roknskaparviðurskifti o.a.
Roknskaparreglugerðin er dagførd í 2018. Stovnurin hevur sent reglugerðina til Mentamálaráðið, men ráðið hevur ikki góðkent hana. Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum fleiri ferðir víst á, at Tjóðpallurin hevur ikki góðkenda roknskaparreglugerð. Í mars 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið var ikki komið á mál við roknskaparreglugerðini.

Ikki góðkenda roknskaparreglugerð.

Vísandi til Ll. nr. 56/2017 “um talgildar rokningar”, mælti Landsgrannskoðanin til at avgreiða allar rokningar um Rokningarportalin.

Roknskapar- og játtanartøl 2016 til 2020:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	3.678	3.278	3.671	4.047	4.071
Keyp av vørum og tænastum	1.759	1.605	1.868	1.266	1.236
Keyp av útbúnaði, netto	8	133	72	185	72
Leiga, viðlíkahald og skattur	243	333	306	291	314
Søla av vørum og tænastum o.a.	-980	-700	-1.037	-871	-439
Tilsamans	**4.708**	**4.649**	**4.880**	**4.918**	**5.254**
Játtan	*4.601*	*4.661*	*4.882*	*5.151*	*5.262*

Inntøkur

Inntøkurnar stava frá sølu av atgongumerkjum. Roknskapurin er býttur á endamálstættir, ein fyri hvønn leik. Inntøkurnar í 2020 hava verið lægri enn undanfarin ár orsakað av COVID-19.

Nærum øll atgongumerkjasøla er um heimasíðuna. Eitt sindur verður selt kontant um kassan, sum verður gjørdur upp á uppgerðarskjal fyri stovnskassa.

Landsgrannskoðanin hevur kannað inntøkurnar fyri ein leik fyri at staðfesta, at øll gjøldini, bæði tey, sum eru goldin um atgongumerkjaskipanina og tey, sum eru goldin kontant, eru inntøkuførd. Einki var at finnast at.

Tjóðpallurin er MVG-skrásettur og avroknar MVG hvønn ársfjórðing.

Leiga

Tjóðpallurin rindar 200.000 kr. um árið í húsaleigu til Tórshavnar kommunu. Afturat tí rindar stovnurin 1.000 kr. um mánaðin til P/f Faroe Ship fyri vøruhotell.

Umboðan o.l.

Tjóðpallurin rindar m.a. umboðanarútreiðslur við gjaldkorti. Landsgrannskoðanin mælti til at brúka vegleiðingina í fylgiskjalinum til roknskaparreglugerðina hjá stovninum, tá ið tað snýr seg um umboðanarútreiðslur.

Lønir

Tjóðpallurin setur leikarar í tíðaravmarkaði størv, alt eftir virkseminum hjá stovninum. Setanarviðurskifti og løn eru ásett í avtalu millum Tjóðpall Føroya og Leikarafelag Føroya. Avtalan frá mars 2009 og lønartalvur finnast á heimasíðuni hjá Fíggjarmálaráðnum, og verður lønartalvan dagførd, tá ið lønarbroytingar eru í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Tá ið Tjóðpallurin setur fólk í fast starv, lýsir hann størvini leys. Stovnurin hevur gjørt semju við Mentamálaráðið um, at teimum nýtist ikki at lýsa eftir fólki til leikir og pallsmíð v.m., men at tey biðja fólk í samráði við leikstjóran. Leikarar arbeiða eftir skema, 35 tímar um vikuna sambært sáttmálanum.

Við stakroyndum kannaðu vit nakrar lønir hjá starvsfólkum, ið eru lønt sambært sáttmálanum hjá Leikarafelagnum. Vit høvdu nøkur tilmæli.

Stjórin roknar starvsaldurin út, tá ið fólk vera sett í starv. Landsgrannskoðanin mælti til at skjalfesta fyri hvørja starvssetan, hvussu komið er fram til starvsaldurin.

Fíggjarstøða

Í fíggjarstøðuni standa 250 t.kr., sum ogn hjá Tjóðpallinum. Upphæddin hevur staðið síðani 2016. Sambært Tjóðpallinum stavar ágóðin frá einum felags projekti millum fleiri partar. Ógreitt er, um upphæddin er rætt. Landsgrannskoðanin mælti til fáa greiði á upphæddini, og krevja tað inn, sum skal.

Tjóðpallurin hevur eina peningastovnskontu. Kontan verður brúkt til skráseting av inntøkum av leikum. Peningur verður javnan fluttur av kontuni til Gjaldstovuna. Sambært roknskaparreglugerðini er loftið á peningastovnskontuni 20 t.kr.

Eitt gjaldkort er knýtt at peningastovnskontuni. Heimildarváttan er gjørd 14. desember 2020. Heimildarváttanin er ikki í samsvari við rundskriv um nýtslu av gjaldkorti, talan skal verða um serstaka kontu, og upphæddin eigur ikki at fara upp um 10 t.kr.

Tjóðpallurin hevur yvirlit yvir flestu ognirnar í rokniarki og í myndum. Sambært stjóranum hava tey nú skrásett stóran part av teknisku útgerðini, og eru tey í holt við at fullføra yvirlitið.

KT-viðurskifti

Teldurnar hjá Tjóðpallinum eru knýttar í Landsnet. Á heimasíðuni er ein skipan til at selja talgild atgongumerkir til sjónleikir. Atgongumerkjaskipanin fer umvegis atgongumerki.fo., sum er tekniskur veitari.

Rundskrivið um KT-trygd frá 2019 áleggur stovnunum at viðgera persónupplýsingar sambært galdandi lóggávuni á økinum. Stovnar, sum ikki hava serliga týdningarmiklar dátur og skipanir, skulu syrgja fyri, at skikkaður persónur ger skoðanina, og skal hon vera skjalfest.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Tjóðpallurin flokkar dáturnar, sum stovnurin varðar av og ger eina váðameting av tí, sum hóttir tær dáturnar.

Arbeitt verður við KT-trygdini.

Í mars 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur gjørt avtalu við veitara, ið skal hjálpa ráðnum og stovnum undir ráðnum at lúka krøvini í dátuverndarlógini. Arbeiðið umfatar m.a. váðameting, dátuflokking, viðgerðaryvirlit o.s.fr. Landsstýrismaðurin vísir á, at arbeiðið eisini ávirkar KT-trygdina sum heild, tí at tað er ógjørligt at hava nøktandi dátuvernd uttan at KT-trygdin eisini er í lagi.

7.16 Tjóðsavnið (LG 2019/207-0243)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av roknskapinum hjá Tjóðsavninum og umsiting stovnsins av stuðulsjáttanum. Eisini kunnaði Landsgrannskoðanin seg nærri um Koltursætlanina og inntøkufíggjaða virksemið hjá Tjóðsavninum.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin ikki góðkend.

Roknskaparreglugerðin var dagførd í 2019, men Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði ikki góðkent hana.

Umsiting av stuðulsjáttanum

Landsgrannskoðanin grannskoðaði útgjøldini av stuðli, sum Tjóðsavnið lat bygdasøvnum, mentanarsøguligum skipum, Sjósavninum og listasøvnum. Vit kannaðu um útgjøldini fylgdu galdandi reglum og mannagongdum, og hvussu Tjóðsavnið tryggjaði sær, at móttakararnir luku treytirnar fyri at fáa stuðul.

Tá ið reglur um eftirlit, roknskap, grannskoðan v.m. ikki eru í serligu heimildarlógunum, eru reglurnar í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan galdandi.

Stuðul til bygdasøvn og mentanarsøgulig skip hevur heimild í serligari lóg, men tað hevur stuðulin til Sjósavnið og stuðulin til listasøvn ikki.

Landsgrannskoðanin hevði ikki varhuga av, at stuðulin ikki var brúktur til ætlaðu endamálini, tó vóru fleiri ivamál um, hvussu roknskapir, grannskoðan og eftirlit annars

skuldu vera. Umsiting av stuðulsjáttanum kann verða trupul, tá ið fleiri reglur tilskila, nær roknskapur skal latast inn, um hann skal vera grannskoðaður, og eftir hvørjum reglum hann skal grannskoðast. Landsgrannskoðanin mælti til, at Tjóðsavnið saman við Uttanríkis- og mentamálaráðnum fekk greiði á, hvørjar reglur vóru galdandi.

Í 2020 vísti landsstýrismaðurin á, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði áleið somu avbjóðingar við ymiskum ásetingum fyri umsiting av stuðulsjáttanum, so sum ymiskar freistir, nær roknskapir skuldu latast inn og ymiskar ásetingar um, nær roknskapirnir skuldu grannskoðast. Ráðið hevði tí tillagað sínar mannagongdir fyri umsitingina av stuðulsjáttanunum, so at umsitingin livdi upp til ásetingarnar í kunngerðini um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Uttanríkis- og mentamálaráðið ætlaði at umrøða umsitingina av stuðulsjáttanum við Tjóðsavnið, fyri at fáa greiði á, hvørjar reglur vóru galdandi, og hvussu tær skuldu umsitast.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur ikki umrøtt umsitingina av stuðulsjáttanunum við Tjóðsavnið, so enn er einki hent í málinum.

7.17 Tjóðskjalasavnið (LG 2020/207-0243)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Tjóðskjalasavninum og umsitingina av stuðulsjáttanini til skjalasøvn. Játtanin er á høvuðskontu 7.24.3.03, undirkonta 23. “Tjóðskjalasavnið”.

Tjóðskjalasavnið virkar sambært Ll. nr. 49/1992 “um skjalasøvn”. Skjalasavnið skal savna, skipa, varðveita, lýsa og taka sær av tilfari, sum almennir stovnar skulu avhenda til savnið, og stovnurin skal hava eftirlit við journalum og arkivum hjá almennum stovnum og ráðgeva teimum. Tjóðskjalasavnið savnar harumframt privat skjøl, sum hava granskingarligan ella mentanarligan týdning.

Uppgáva skjalasavnsins er eisini at hava savnindi tøk til almenna fyrisiting og gransking og at hava egna gransking.

Roknskaparviðurskifti v.m.

Tjóðskjalasavnið var partur av Søvnum landsins, men hevur síðani 2018 virkað sum sjálvstøðugur stovnur. Stovnurin hevur brúkt roknskaparreglugerðina hjá Søvnum landsins og virkað hana til sín tørv. Í februar 2021 var nýggj roknskaparreglugerð send Uttanríkis- og mentamálaráðnum til góðkenningar.

Roknskapartøl 2018 til 2020:

t.kr.

Heiti	2018	2019	2020
Lønir v.m.	3.726	3.675	4.437
Keyp av vørum og tænastum	971	1.355	1.216
Keyp av útbúnaði, netto	-19	247	214
Leiga, viðlíkahald og skattur	313	186	157
Søla av vørum og tænastum	-256	-3	-52
Stuðul til annað virksemi	0	25	25
Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr)	10	8	8
Innanh. flyt. millum almennar stovn. (innt)	-316	-356	-352
Tilsamans	**4.429**	**5.136**	**5.653**

Inntøkurnar stava frá lesistovuni, sum fær gjøld fyri avrit, avhending av skjalatilfari frá almennum stovnum og frá Ílegusavninum fyri arbeiðið við ættarbandsskránni. Í 2020 fekk savnið 281 t.kr. fyri arbeiðið við ættarbandsskránni.

Lønir

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur lønarmál, um umsóknir, lýsingar, setanarbrøv, prógv, arbeiðsroyndir o.a. viðkomandi var til skjals. Landsgrannskoðanin kannaði eisini tíðarskrásetingar.

Eitt starvsfólk var í fyribilsstarvi, og sambært stjóranum var setanin longd, tó at tað ikki var skjalfest. Landsgrannskoðanin mælti til at lýsa starvið leyst, um starvsfólk skal setast í fast starv.

Mánaðarløntu starvsfólkini skulu skráseta arbeiðstíðina í Totalview, og tímalønt skráseta arbeiðstíðina á skjal við dagfesting og arbeiðstímum.

Eitt starvsfólk skrásetti arbeiðstíð sína at byrja sjálvvirkandi hvønn morgun, tá ið viðkomandi fór heimaníframá. Starvsfólkið fekk tí løn í ein tíma um dagin fyri at ferðast til arbeiðsstaðið.

Vísandi til reglurnar um at hava hóskandi skráseting av arbeiðstíð heldur Landsgrannskoðanin, at um starvsfólk leggja sjálvvirkandi skrásetingar í tíðarskrásetingarskipanina, er endamálið við skrásetingini burtur. Tíðarskrásetingarskipanin er m.a. ætlað at halda skil á, nær starvsfólk eru til arbeiðis.

Sjálvvirkandi skrásetingar gera, at endamálið við tíðarskrásetingum er burtur.

Onnur dømi vóru um, at starvsfólk høvdu skrásett arbeiðstíð, uttan at hava verið til arbeiðis, t.d. í sambandi við jólaborðhald. Stjórin hevur víst á, at hann hevur ikki álagt starvsfólkum at møta til jólaborðhald, og hevur heldur ikki góðkent arbeiðstíð fyri jólaborðhald. Stjórin helt, at feilurin helst er íkomin av, at skipanirnar Totalview og Outlook hava verið knýttar saman, soleiðis at avtalur í kalendaranum eru skrásettar í tíðarskrásetingarskipanini. Stjórin hevur heitt á Løgmansskrivstovuna um at slíta sambandi millum skipanirnar, so at slíkir feilir ikki henda aftur.

Landsgrannskoðanin mælti til, at stjórin hevur eftirlit við tíðarskrásetingunum og váttar tímarnar. Landsgrannskoðanin mælti eisini til, at leiðslan orðar skrivligar reglur um arbeiðstíð og tímasaldu.

Landsgrannskoðanin mælti til eftirlit og at orða reglur um tíðarskráseting.

Sambært stjóranum hevur stovnurin í mars 2021 orðað skrivligar reglur um tíðarskrásetingar. Áður hevur skrivarin sent útskriftir av skrásettu arbeiðstíðini til starvsfólkini at eftirkanna. Í serligum førum hevur skrivarin lagt skrásetingarnar fyri leiðsluna.

Sambært almennu reglunum skulu tímasaldur tíðaravmarkast í roknskapinum, tá ið starvfólk eiga fleiri enn 40 tímar á ella skylda fleiri enn 30 tímar. Sambært stjóranum hevur stovnurin gjørt reglur um, at tímasaldan hjá starvsfólki skal vera innan +40/-30 tímar.

Tímasaldur skulu tíðaravmarkast í roknskapinum.

Ferðauppgerðir

Landsgrannskoðanin gjøgnumgekk ferðauppgerðirnar hjá stovninum seinastu tvey árini. Í alt ov nógvum førum vantaði nøktandi skjalprógv fyri, hvat endamálið var við ferðunum. Landsgrannskoðanin vísti á, at sum skjalprógv ber til at brúka t.d. skrá fyri ráðstevnu ella fundarinnkalling.

Ikki nøktandi skjalprógv fyri ferðauppgerðir.

Skjalprógv fyri útreiðslur eiga týðiliga at vísa upphæddir, dagfestingar, nøvn á keyparum, hvønn útreiðslan er fyri o.a. Starvsfólk eiga tí at syrgja fyri, at kvittanir kunnu lesast.

Nógvir feilir vóru í ferðauppgerðunum, serliga í uppgerðunum hjá stjóranum. Landsgrannskoðanin mælti leiðsluni til at gjøgnumganga ferðauppgerðirnar av nýggjum og at rætta feilirnar.

Nógvir feilir, tá ið eftirlitið er veikt.

Landsgrannskoðanin heldur, at feilir av hesum slagi eiga ikki at koma fyri. So nógvir skeivleikar eru tekin um, at roknskapareftirlitið hevur verið veikt. Stjórin hevur góðkent uppgerðirnar, og átti at havt sæð feilirnar. Landsgrannskoðanin vísti á, at onkur annar eigur at góðkenna ferðauppgerðir hjá stjóranum.

Innanhýsis mannagongdir eru nú herdar.

Stjórin og starvsfólkini hava gjøgnumgingið ferðauppgerðirnar av nýggjum. Niðurstøðan er, at øll skuldu rinda pening aftur. Sambært stjóranum hevur hann hert innanhýsis mannagongdirnar, og fer í framtíðini at kanna uppgerðirnar nærri, áðrenn tær verða góðkendar. Framyvir er tað leiðsluskrivarin, sum góðkennur ferðauppgerðir hjá stjóranum.

Inntøkur, kassi og peningastovnskonta

Tjóðskjalasavnið hevur nakað av inntøku av at avrita og at hjálpa fólki at leita í skjølum. Til ber at gjalda við reiðum peningi ella fáa rokning. Upphæddirnar eru ikki stórar og sambært stjóranum er virksemið hjá lesistovuni minkandi.

Í oktober 2020 var Landsgrannskoðanin á ófráboðaðum kassaeftirlitið. Bert smávegis var at finnast at.

Landsgrannskoðanin mælti til at talmerkja rokningarnar, soleiðis at tær kunnu eyðmerkjast í bókhaldinum. Eisini mæltu vit til, at stovnurin orðar ein kredittpolitikk viðvíkjandi rokningum frá lesistovuni.

Inntøkurnar eru settar á peningastovnskontu hjá stovninum. Sambært kontuavritunum er lítil munur á inntøkuni og kostnaðinum fyri at hava bankakontu.

Ognir

Sambært Tjóðskjalasavninum hevur stovnurin nærum ongar ognir við keypsvirði omanfyri 50 t.kr., men hevur verkstøð v.m., har samlaði kostnaðurin fyri útbúnaðin er meira enn 50 t.kr. Stovnurin er farin í holt við at gera yvirlit yvir virðismikla útbúnaðin.

Viðmerkingar frá landsstýrismanninum

Sambært landsstýrismanninum hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið fingið eina statusfrágreiðing frá Tjóðskjalasavninum, har greitt er nærri frá, hvat er gjørt fyri at rætta upp á viðurskiftini, sum Landsgrannskoðanin hevur viðmerkingar til. Ráðið hevur lisið frágreiðingina og eftirfylgjandi samskift við Tjóðskjalasavnið um tiltøkini, sum eru sett í verk.

Stuðulsjáttan

Tjóðskjalasavnið letur stuðul til Tvøroyra Skjalasavn sambært uppgerð frá kommununi av útreiðslum, sum kommunan hevur havt av Tvøroyra Skjalasavni. Tjóðskjalasavnið fyllir út "bókingarskjal til kommunuavrokningarskipanina", viðheftir uppgerðina frá kommununi og sendir tað til Gjaldstovuna at bóka. Í 2020 var stuðulin 1.085 t.kr.

7.18 Landsbókasavnið (LG 2020/207-0243)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapin hjá Landsbókasavninum á høvuðskontu 7.24.3.03, undirkontu 24. Landsbókasavnið virkar sambært Ll. nr. 79/2001 "um bókasøvn". Landsbókasavnið skal savna allar føroyskar bókmentir, og í tann mun tað er gjørligt, allar bókmentir, sum viðvíkja Føroyum.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin ikki góðkend.

Roknskaparreglugerðin er seinast dagførd í 2019. Sambært Uttanríkis- og mentamálaráðnum hava tey móttikið eina dagførda roknskaparreglugerð, ið ráðið er í holt við at gjøgnumganga, áðrenn hon verður góðkend.

Lønir
Í 2020 vóru 21 starvsfólk á stovninum og 76% av játtanini eru lønarútreiðslur. Landsgrannskoðanin kannaði við stakroyndum, um lønirnar vóru rættar, um skjalprógv vóru fyri útbúgving, starvsaldri o.ø., og um stovnurin hevur hóskandi tíðarskráseting. Eisini kannaðu vit, um almenni setanarpolitikkurin er hildin, við at størv eru lýst leys, at setanarbólkur viðger umsóknir, og at setanarbræv er latið starvsfólkunum. Einki var at finnast at.

Starvsfólk skráseta arbeiðstíðina og kunnu hava +32/-16 tímar flextíð. Landsbókasavnið ger avtalu við starvsfólkini um, hvussu sertaka frívikan verður hildin fyri komandi frítíðarár. Landsgrannskoðanin mælti til, at tímasaldur og feriur verða tíðaravmarkað við árslok samsvarandi rundskrivi nr. 9007/2017.

Tímasaldur skulu tíðaravmarkast í roknskapinum.

Keyp av vørum, tænastum o.a.
Landsgrannskoðanin mælti stovninum til at brúka ferðaavrokningarskipanina hjá Gjaldstovuni, og at tænastuferðir verða skjalprógvaðar við uttanhýsis skjølum.

Landsbókasavnið hevur latið starvsfólkunum gávukort á 500 kr. í jólagávu. Stovnurin hevur ráðført seg við TAKS, sum hevur svarað, at arbeiðsgevari kann lata skattafríar gávur, herundir gávukort, til starvsfólk í sambandi við serstøk høvi, um keypsprísurin íroknað meirvirðisgjald er 1.500 kr. ella minni.

Inntøkur
Landsbókasavnið áleggur sektir fyri ov seina innlating, selur kaffi, ljósrit o.a. Landsgrannskoðanin var í oktober 2020 á ófráboðaðum kassaeftirlitið. Einki var at finnast at.

Landsbókasavnið fær umsitingargjøld og gjøld fyri at binda inn bílagdar bøkur til fólka- og skúlabókasøvn. Eisini er nakað av inntøku frá sølu av ljóðbókum, sum Bókamiðsølan stendur fyri. Bókamiðsølan ger mánaðarliga søluuppgerð og sendir avrokning til Landsbókasavnið.

Ognir
Í støðisognini í Búskaparskipan landsins eru tríggjar ognir skrásettar; t.e. ein skrivstovubygningur, ein bilur og ein móttøkuskiva. Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra støðisognina, og at stovnurin annars hevur yvirlit yvir ognir og virðismiklan útbúnað.

Áogn og skuld
Í fíggjarstøðuni eru 18 t.kr. avsettar ímóti tapi av skuldarum. Talan er um áogn frá tíðarskeiðnum 2008 til 2011, har okkurt er goldið aftur, og annað kann vera fyrnað. Landsbókasavnið hevur sett fólk at gjøgnumganga avsetingina.

Stuðulsjáttan til fólka- og skúlabókasøvn og bókasavnsgjald
Landsbókasavnið umsitur stuðulsjáttanina til fólkabókasøvn, sum í 2020 var 4.387 t.kr. Stuðulin verður latin sambært Ll. nr. 79/2001 “um bókasøvn”. Bókasavnsgjald til høvundar verður eisini útgoldið av játtanini sambært bókasavnslógini.

Fólka- og skúlabókasøvn
Fólkabókasøvn kunnu fáa upp til 40% í studningi til rakstur, og skúlabókasøvnini kunnu fáa upp til 60% av útreiðslunum til undirvísingartilfar og -amboð. Landsbókasavnið, Bókastovan, skal skipa fyri árliga býtinum av bókasavnsgjaldinum, sum eisini er játtað á stuðulsjáttanini. Landsstýrismaðurin hevur 15. juli 2003 gjørt reglugerð um býtið av bókasavnsgjaldinum.

Viðvíkjandi fólka- og skúlabókasøvnum rindar Landsbókasavnið 80% forút og restina, tá ið endaligur roknskapur er móttikin. Skúlabókasøvnini eru kommunal, og tí er oftast talan um samlaða umsókn og játtan til fólka- og skúlabókasøvn.

Stuðulsjáttanin ikki hækkað við økta virkseminum.

Stuðulsjáttanin er ikki hækkað við økta virkseminum hjá søvnunum. Tað merkir, at upphæddirnar, sum søvnini fáa til rakstur, eru væl lægri, enn hægstu ásetingarnar í lógini. Eingi nýggj søvn eru komin í stuðulsskipanina í nógv ár.

Bókasavnsgjald til høvundar

Landsbókasavnið stendur fyri uppteljing og metingum av, hvørjar bøkur lúka treytirnar og skipar fyri útgjaldi til rithøvundar. Talt verður upp í bókasavnsskipanini Reindex, har føroysku bókasøvnini skráseta sínar bøkur. Býarbókasavnið í Tórshavn og Nám hava egnar skipanir og senda Landsbókasavninum sínar uppteljingar. Landsbókasavnið hevur eftirlit við fólkabókasøvnunum og veitir ráð og leiðbeiningar. Stovnurin miðar eftir at koma runt til øll søvnini, men eingin vitjan var í 2020 vegna koronu.

7.19 Umsitingin av Miðlastuðli (LG 2020/207-0244)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað latna Miðlastuðulin í 2019. Heimildin at rinda stuðul er í Ll. nr. 35/2017 “um miðlastuðul”. Miðlastuðulsnevndin, sum rindar stuðulin út, virkar sambært K. nr. 139/2017. Miðlastuðul var fyrstu ferð latin í 2017. Játtanin er á høvuðskontu 7.24.4.13.

Endamálið við grannskoðanini var at kanna, um stuðulin er latin sambært ásetingunum í lógini, og um virksemið hjá Miðlastuðulsnevndini er í samsvari við reglurnar í kunngerðini.

Endamálið við lógini er at virka við til at økja útboðið av miðlum og margfeldi teirra, soleiðis at borgarar og samfelag fáa tryggjað eitt dygdargott og álítandi miðlainnihald.

40% av árligu játtanini er latin sum ein føst grundupphædd býtt javnt ímillum stuðulsmóttakararnar. 60% av játtanini er latin grundað á skjalprógvaðar lønar-útreiðslur árið fyri. Samlaði stuðulin til umsøkjara kann í mesta lagi vera 40% av skjalprógvaðum lønarútreiðslum, gjørdar upp við støði í góðkenda roknskapinum undanfarna roknskaparár.

Saman við umsókn skal umsøkjari lata góðkendan roknskap fyri skjalprógvaðar útreiðslur, sum stuðulin er grundaður á. Sambært viðmerkingunum til lógina skulu stuðulsheimilaðu útreiðslurnar í roknskapinum váttast við átekning frá grannskoðara.

Miðlastuðulsnevndin

Landsstýrismaðurin setir miðlastuðulsnevnd við trimum limum fyri trý ár í senn. Limirnir kunnu í mesta lagi sita tvey skeið á rað. Nevndin tekur endaliga avgerð innan fyrisitingina. Við árslok skal nevndin lata landsstýrismanninum skrivliga frágreiðing um sítt virksemi.

Landsstýrismaðurin hevur í K. nr. 139/2017 ásett reglur um uppgávur, viðgerð og starvsskipan fyri virksemið hjá nevndini.

Í apríl 2021 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið greitt frá, at nevndin eigur at greiða frá virkseminum, og eigur eftir besta førimuni at greiða frá, hvørja møguliga ávirkan miðlastuðulin hevur. Ráðið hevur biðið sitandi miðlastuðulsnevnd um eina meira fullfíggjaða ársfrágreiðing.

Í mars 2021 hevur nevndin latið ráðnum frágreiðing í sambandi við umsóknirnar frá 2020. Hereftir fer ráðið at leggja ársfrágreiðingina á heimasíðuna.

Grannskoðanin

Grannskoðanin vísti, at stuðulsgrundarlagið er ikki eins hjá øllum umsøkjarunum, og hava teir tí ikki fingið stuðul á sama grundarlagi í 2019. Líkt er til, at umsøkjarar hava ikki somu fatan av, hvat liggur í heitinum lønarútreiðslur, og hvat freelance er. Hjá teimum flestu, men ikki øllum, eru útreiðslur til freelance v.m. roknaðar sum rakstrar-útreiðslur og eru partur av bruttoúrslitinum.

Hava ikki fingið stuðul á sama grundarlagi.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at tá ið roknskapurin bert vísir bruttoúrslit, kunnu útreiðslur ikki knýtast til roknskapartølini, hóast avrit av rokningum fyriliggja.

Landsgrannskoðanin ivast í, um heimild er at lata stuðul út frá øðrum fortreytum enn lønarútreiðslum, serliga út frá tí hugsan, at mentanarnevndin broytti orðingina í lógaruppskotinum frá at vera rakstrarútreiðslur til at vera lønarútreiðslur.

Útreiðslurnar eru skjalprógvaðar á ymiskan hátt, onkur roknskapur er grannskoðaður og aðrir ikki. Summar lønarútreiðslur eru fyri undanfarna roknskaparár og aðrar eru fyri kalendaraárið. Landsgrannskoðanin kann tí ikki sanna, at stuðulin er latin á røttum grundarlagi.

Sambært Uttanríkis- og mentamálaráðnum hevur Miðlastuðulsnevndin greitt frá, at av tí at talan var um nýggja lóggávu, tá ið nevndin fór til verka í 2017, mátti nevndin finna ein leist at virka eftir og at viðgera stuðulsumsóknirnar út frá. Nevndin staðfesti tíðliga, at tilfarið, hon hevði at meta umsóknirnar eftir, var ikki einsháttað. Roknskapirnir vóru ymiskir, nakrir vóru grannskoðaðir og aðrir ikki. Eisini vóru roknskapirnir gjørdir á ymiskan hátt, eitt nú viðvíkjandi lønarútreiðslum, freelanceútreiðslum o.ø.

Sambært nevndini gjørdu tey nógv burturúr at fáa miðlarnar at skjalprógva útreiðslurnar, ið teir hava søkt um stuðul til. Í fleiri umførum bóðu tey um meira tilfar bæði frá umsøkjarum, grannskoðarum og frá TAKS.

Landsgrannskoðanin mælti til, at Uttanríkis- og mentamálaráðið skipar soleiðis fyri, at miðlastuðulin verður latin sambært lógini, at umsøkjararnir eru kunnaðir neyvt um stuðulsgrundarlag, krøv til grannskoðan o.a., og at virksemið hjá Miðlastuðulsnevndini fylgir kunngerðini m.a. við at avgerðir vera skjalfestar í gerðarbók.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur í 2021 lagt uppskot fyri Løgtingið um broyting í lógini um miðlastuðul, har lagt er upp til at broyta leistin fyri, hvussu miðlastuðul verður veittur. Sambært uppskotinum skulu miðlar ikki longur søkja um stuðul grundað á lønarútreiðslur, men ístaðin grundað á ítøkiligar verkætlanir.

Lógaruppskot lagt fyri Løgtingið.

Uttan mun til um lógin verður broytt ella ikki, tekur Uttanríkis- og mentamálaráðið undir við Landsgrannskoðanini, at tørvur er á at eftirmeta umsóknarskjalið og møguliga at orða eina vegleiðing, soleiðis at tað er greiðari fyri øllum, hvat er stuðulsheimilað.

Ráðið er samt við Landsgrannskoðanina, at tað skal verða greiðari, hvat er stuðulsheimilað.

7.20 Kringvarp Føroya, løgujáttan (LG 2019/207-0244)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin høvuðskontu 7.24.4.03 “Kringvarp Føroya, løgujáttan”. Kringvarp Føroya hevði eina løgujáttan frá 2013 til 2016 til um- og útbyggjan av bygningum Kringvarpsins. Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2018 var um- og útbyggingin liðug um ársskiftið 2016/2017.

Verklagslóg var gjørd í mai 2013. Útbyggingin skuldi fíggjast við sølu av gomlu bygningunum hjá Kringvarpinum, men tað vísti seg, at upphæddin frá søluni rakk ikki til alla umbyggingina, men bert til 1. byggistig. Verklagslógin fataði tó um fyrsta og annað byggistig.

Tá ið tilboðini komu inn, var kostnaðurin langt oman fyri fíggjarkarmin í verklagslógini. Mentamálaráðið bað tí Løgtingið um eykajáttan.

Eftir at sparingar vóru funnar fyri 2,1 mió.kr., játtaði Løgtingið 3,87 mió.kr. afturat í 2015. Upphæddin í verklagslógini varð tí hækkað frá 16,68 mió.kr. til 20,55 mió.kr. Gildistíðin varð longd frá at vera til 1. januar 2016 til 31. desember 2016.

Í álitinum til broyting av verklagslógini segði Fíggjarnevndin m.a., at "*Hetta verklag er enn eitt dømi um verkætlanir, ið ikki halda seg innanfyri givnu karmar. Grundin tykist í flestu førum at vera, at verkætlanir verða lagdar fyri Løgtingið uttan neyðuga fyrireiking. Fíggjarnevndin hevur tíðum víst á henda trupulleika og hevur mælt til, at reglurnar viðvíkjandi verklagslógum verða munandi herdar.*"

Í hoyringssvari til umbønina um at hækka verklagslógina sigur Kringvarpið m.a., at *"av tí at verkætlanin rendi seg í trupulleikar, bleiv ikki ein króna sett av til innbúgv, útgerð og tøkniligar innstallatiónir. Tað hevði tí verið ynskiligt, at hetta uppskotið tók hædd fyri hesari upphædd, so at Kringvarp Føroya kann fáa gleði av bygninginum beinanvegin. Tí skal KvF fíggja íløguna, fer tað helst at taka drúgva tíð, áðrenn bygningurin verður tikin í brúk.*"

Í § 3, stk. 2, í K. nr. 83/2011 "um løgujáttan" er ásett, at samlaða løguupphæddin skal fata um allar útreiðslur fyri, at løgan eftir ætlan kann takast í nýtslu, herundir innbúgv, størri útgerð og uttanumøkið.

Í juni 2020 greiddi Fíggjarmálaráðið frá, at ráðið visti ikki, hví útreiðslur til innbúgv, útgerð o.a. ikki vórðu tiknar við í verklagslógina, men kundi ráðið bert staðfesta, at tað ikki var í samsvari við játtanarreglurnar um, hvat skal takast við í verklagslógina. Fíggjarmálaráðið legði afturat, at í pkt. 1.1.9 í rundskrivinum um lógarsmíð stendur, at *"uppskot til løgtingslóg um verklag eiga altíð at verða send til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum"*.

Útreiðslur til innbúgv vóru ikki við í verklagslógini.

Í februar 2021 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið greitt frá, at Kringvarp Føroya hevur loyvi at varðveita eitt møguligt avlop av spæliinntøkunum við ársenda. Avlopið kann m.a. brúkast til at halda teknisku útgerðina hjá stovninum dagførda. Tað merkir, at tá ið Kringvarpið hevur tørv á t.d. at keypa nýggja útgerð, verður tað fíggjað av Kringvarpinum sjálvum, uttan at stovnurin fær eyka fígging á løgtingsfíggjarlógini.

Avlop av spæliinntøkum kann brúkast til tekniska útgerð.

Ráðið leggur afturat, at viðvíkjandi verkætlanini at um- og útbyggja kringvarpshúsið vóru útreiðslurnar til innbúgv og útgerð, sum skuldu til fyri at gera bygningarnar klárar til ætlaða virksemið, tá um- og útbyggingin var liðug, harav meginparturin var til tøkni og KT-undirstøðukervið, goldnar av Kringvarpinum sjálvum sambært umrødda leisti.

Útreiðslur í 2017

Samlaði kostnaðurin fyri umbygging sæst ikki í roknskapinum.

Í 2017 vóru 1.602 t.kr. goldnar fyri umbygging, uttan at tað er sjónligt í roknskapinum, harav 1.021 t.kr. vóru goldnar av kontuni "Umvæling av almennum bygningum". Tær 1.021 t.kr., vóru fyri meirveitingar í sambandi við umbyggingina.

Sambært landsroknskapinum vóru 581 t.kr. settar av í fíggjarstøðuni 2016 fyri arbeiðir, sum enn ikki vóru gjørd.

Á ákontuumbønini stóð, at tilboðsupphæddin var 8.866 t.kr., og at áður faktureað var 7.658 t.kr. Í mars 2017 vóru 581 t.kr. goldnar arbeiðstakaranum, uttan at tað sást í rakstrarroknskapinum fyri 2017, tí rokningin var bókað í fíggjarstøðuni.

Landsgrannskoðanin dugdi ikki at síggja, at restin av tilboðsupphæddini 627 t.kr. var í roknskapinum hjá løgujáttanini.

Sambært roknskapinum fyri “Umvæling av almennum bygningum” var ein rokning fyri 627 t.kr. frá sama arbeiðstakara. Í Búskaparskipan landsins var viðmerkt, at rokningin skuldi leysgevast saman við kreditnotu frá 20. apríl 2017, kreditnotan var 89 t.kr.

Landsgrannskoðanin bað Fíggjarmálaráðið um viðmerkingar til bókingarnar.

Í februar 2021 hevur Uttanríkis- og mentamálaráðið kunnað um, at ráðið metir tað vera í lagi, at Landsverk setir eina rokning av í fíggjarstøðuni í staðin fyri at rinda hana, um eitt arbeiðið, sum rokningin fevnir um, ikki er endaliga liðugt í fíggjarárinum, eitt nú tí at onkrir manglar eru. Tá ið arbeiðið er liðugt, og rokningin goldin, verður hon skuldskrivað fíggjarstøðuna, og ikki útreiðsluførd eina ferð afturat í rakstrinum.

7.21 Kirkjugrunnurin og Tiltaksgrunnurin (LG 2018/207-0245)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Kirkjugrunninum.

Í fleiri ár hevur Landsgrannskoðanin víst á, at sambært Ll. nr. 60/2007 “um fólkakirkjuna í Føroyum” ásetir landsstýrismaðurin neyvari reglur um virksemið hjá stiftsstjórnini, og sambært Ll. nr. 61/2007 “um fíggjarviðurskifti fólkakirkjunnar” ásetir landsstýrismaðurin reglur fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir.

Í 2014 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ætlanin var at gera kunngerðirnar í 2015, og í 2017 upplýsti landsstýrismaðurin, at enn var arbeitt við kunngerðunum.

Í uppskoti til samtyktar at góðkenna landsroknskapin 2016 vóru løgtingsgrannskoðararnir ónøgdir við, at kunngerðirnar enn ikki vóru gjørdar, hóast meira enn 10 ár vóru liðin, síðani lógirnar komu í gildi.

Í 2018 ásannaði Mentamálaráðið, at gott hevði verið, um kunngerðir vórðu gjørdar; men av tí at virksemið var í hampiliga tryggari legu, hevði Mentamálaráðið fyri ein part valt at raðfesta annað virksemi, og lutvíst høvdu viðurskifti, ið ráðið ikki var harri yvir, kravt stóran part av teirri avmarkaðu orku, ið var til meira yvirskipaða málsviðgerð viðvíkjandi kirkjuøkinum. Tí var arbeiðið ikki gjørt enn.

Í august 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at: *“Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur greiða fatan av, at virksemið hjá Stiftsstjórnini yvirhøvur er í tryggari legu, um enn einki er at taka seg aftur í, at ein hóskandi kunngerð hevði verið ein lætti fyri arbeiðið hjá Stiftsstjórnini. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tí ikki raðfest uppgávuna so høgt, men væntar - við fyrivarni fyri, hvørjar meira áleikandi uppgávur fara at koma nú í heyst og vetur - at kunngerð kann verða lýst komandi vár.*

Komið er ikki á mál við reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir. Uttanríkis- og mentamálaráðið kann tó upplýsa, at Stiftsstjórnin arbeiðir við einum kunngerðaruppskoti, sum er um ein part av hesum. Miðað verður eftir, at kunngerð kann verða lýst komandi vár. Tá arbeiðið er liðugt, fer Uttanríkis- og mentamálaráðið at gera eina aðra kunngerð um teir partarnar av reglunum fyri, hvussu kirkjuráðini gera fíggjarætlanir, sum hendan kunngerðin ikki fer at fevna um”.

Einki hent í málinum um vantandi kunngerðir.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at einki nýtt er hent í málinum. Málsøkini fólkakirkjan, onnur trúarsamfeløg og attongd øki eru bert mannað við einum ársverki tilsamans, og tá drúgt forfall hevur verið, hevur tíverri ikki borið til at fremja annað enn tær mest neyðugu málsviðgerðirnar hetta seinasta árið, meðan alt menningararbeiðið hevur ligið stilt.

7.22 Ítróttahøll á Sandoynni (LG 2018/207-0246)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av játtanini til ítróttahøll á Sandoynni.

Í 2017 vóru 485 t.kr. játtaðar til endaliga avhendan av ítróttahøllini á Sandoynni, harav 289 t.kr. vóru til at rinda kostnaðin at tinglýsa eitt veðskuldabrævv sum 1. veðrætt í ognini. Veðskuldarbrævið var ikki lýst í 2017; og Mentamálaráðið bað um at fáa upphæddina støðlaða, tí tinglýsingin fór at verða avgreidd eftir ársskiftið.

Í 2018 vóru tær 289 t.kr. inntøkuførdar í roknskapinum, uttan at nøkur útreiðsla er til tinglýsing.

Veðbrævv ikki tinglýst, og høllin ikki avhendað.

Í 2019 kunnaði Uttanríkis- og mentamálaráðið um, at veðbrævið, sum gav ráðnum veð í matr. nr. 292b Sandur við ástandandi ítróttahøll, var ikki tinglýst. Ítróttahøllin var heldur ikki avhendað kommununum í Sandoynni, tí hon var ikki góðkend av Sands kommunu, tí ymiskir manglar vóru. Fundur hevði verið við bygginevndina, um hvørji krøv bygginevndin setti til bygningin og ein kostnaðarmeting var gjørd. Uttanríkis- og mentamálaráðið skuldi gjøgnum samskifti við kommunurnar í oynni, tryggja sær, at tær yvirtaka høllina, tá ið staðfest krøv og ynskir vóru gjørd. Eftir tað verður ítróttahøllin avhenda kommununum í Sandoynni og veðbrævið tinglýst.

Í 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði fingið eykajáttan til at gera ítróttahøllina í Sandoynni lidna. Tá seinastu arbeiðini vóru gjørd, skuldi skúlasambandi í Sandoynni yvirtaka ítróttahøllina móti við fyri láninum, sum landskassin hevði útvegað.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at áðrenn arbeiðið fór í gongd, var avtalað millum Uttanríkis- og mentamálaráðið, Landsverk og kommunurnar í Sandoynni, hvat skuldi gerast, og ein mangullisti var í tí sambandi gjørdur. Mangullistin varð sendur kommununum í Sandoyar skúlasambandi, sum hvør í sínum lagi váttaðu í ætlanarskrivi arbeiðini á mangullistanum, og at kommunan vildi skriva undir veðbrævið, sum gevur Uttanríkis- og mentamálaráðnum við í ítróttahøllini, matr. 292b Sandur, tá arbeiðini vóru nøktandi útint, og nýtsluloyvi fyrilá til bygningin.

Høllin er ikki brunagóðkend.

Sambært Landsverki eru arbeiðini á mangullistanum gjørd, og Uttanríkis- og mentamálaráðið er tí av teirri fatan, at arbeiðini, sum gjørd eru sambært mangullistanum, eru í samsvari við treytirnar fyri at fá nýtsluloyvi til bygningin. Men eftir at arbeiðini eru gjørd, er komið fram, at veggurin á eystursíðuni skal gerast av nýggjum, fyri at ítróttahøllin kann verða brunagóðkend. Hetta eru nýggjar upplýsingar fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, og var hetta heldur ikki partur av mangullistanum og eykajáttanini til liðugtgerð av høllini.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur fingið at vita, at kommunurnar ikki vilja átaka sær uppgávuna at gera veggin av nýggjum, men at landið skal fíggja tað arbeiðið. Kommunurnar vilja tí heldur ikki skriva undir veðbrævið.

Uttanríkis- og mentamálaráðið heldur ikki, at ráðið hevur skyldu at gera meira við høllina, umframt at ráðið heldur ikki hevur tøka játtan til at gera meira. Ráðið hevur boðað kommununum í oynni frá tí, og samstundis heitt á kommunurnar um at avgreiða málið um veðsetingina.

8. Heilsumál

8.1 Fólkaheilsuráðið (LG 2020/211-0201)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Fólkaheilsuráðið. Játtanin er á høvuðskontu 11.20.1.04 “Upplýsing og ráðgeving”.

Fólkaheilsuráðið virkar eftir Ll. nr. 56/2000 “um Fólkaheilsuráð”. Í ráðnum eru 7 limir, tilnevndir av landsstýrismanninum fyri fýra ár ísenn. Ein limur umboðar undirvísingarverkið, ein Almannaverkið, tríggir limir eru heilsustarvsfólk og ein limur umboðar løgregluna. Landsstýrismaðurin velur sjeynda limin, sum eisini skal hava serligt innlit í almanna- og heilsuviðurskifti. Landsstýrismaðurin velur formann og næstformann millum limirnar í ráðnum.

Landskassin ber útreiðslurnar av virkseminum hjá Fólkaheilsuráðnum og hjá møguliga øðrum sakkønum nevndum, og rindar limunum í ráðnum samsýningar eftir almennum reglum.

Umframt at ráðgeva landsmyndugleikum og kommunalum myndugleikum, skal játtanin til Fólkaheilsuráðið eisini brúkast til at fíggja ítøkilig fólkaheilsuátøk, sum eru raðfest í fólkaheilsuætlanini hjá landsstýrinum. T.v.s. átøk, sum snúgva seg um kost, rørslu, royking, rúsdrekka- og rúsevnamisnýtslu og fyribyrgjandi heilsukanningar. Eisini er virkisøkið víðkað til at fevna um sálarliga heilsu.

Játtanin 2020 er hækkað 500 t.kr. og kanningin “Hvussu hevur tú tað?” frá 2015 er endurtikin, umframt at fleiri tiltøk, ið venda sær til fólkaheilsuætlanina, skulu fremjast.

Roknskaparviðurskifti

Umsitingin hjá Fólkaheilsuráðnum avgreiðir roknskapin í Búskaparskipan landsins.

Roknskapartøl seinastu árini:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	1.289	1.472	1.618	1.597	1.668
Keyp av vørum og tænastum	1.252	1.056	974	1.042	1.354
Keyp av útbúnaði, netto	53	85	61	42	234
Leiga, viðlíkahald og skattur	23	83	78	62	61
Annað	-9	-36	-23	20	0
Tilsamans	**2.608**	**2.660**	**2.708**	**2.763**	**3.317**
Játtan	*2.635*	*2.660*	*2.708*	*2.763*	*3.314*

Roknskaparreglugerðin er dagførd og góðkend av Heilsumálaráðnum í 2020.

Roknskaparreglugerðin er dagførd.

Í 2020 og fyrsta roknskapartíðarskeið 2021 hevur Fólkaheilsuráðið góðkent stovnsroknskapirnar rættstundis og uttan fyrivarni. Umsitingin kannar roknskapin fyri óvanligar upphæddir og frávik, og ger tilmæli til stovnsleiðaran at góðkenna. Sambært formanninum kunnar hann ráðslimirnar um roknskapin.

Keyp av útbúnaði
Landsgrannskoðanin hevur kannað nøkur keyp í 2020.

Roknskapartøl fyri keyp av útbúnaði:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Telduútbúnaður og edv-menning	2	40	9	10	17
Skrivstovuútbúnaður	1	15	10	27	29
Innbúgv, maskinur og útbúnaður	50	30	45	12	188
Tryggingarendurgjøld o.tíl.	0	0	0	-8	0
Søla av brúktum innbúgvi o.l.	0	0	-3	0	0
Tilsamans	**53**	**85**	**61**	**42**	**234**

Fólkaheilsuráðið hevur keypt eitt mátitól fyri 141 t.kr., at brúka úti um landið til almenn tiltøk o.l. Sambært Fólkaheilsuráðnum bað stovnurin um tilboð frá einasta veitara, sum var, og keypti bíligasta tólið. Tólið er skrásett sum støðisogn í Búskaparskipan landsins. Fólkaheilsuráðið hevur keypt eitt videotól fyri 45 t.kr. at framleiða filmar fyri ráðið.

Umboðan
Roknskapartøl fyri umboðan:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Umboðan, innanhýsis	8	19	31	28	32
Umboðan, uttanhýsis	8	28	62	66	74
Tilsamans	**16**	**47**	**93**	**94**	**106**

Fólkaheilsuráðið heldur jólaborðhald fyri starvsfólkum og ráðslimum umframt starvsfólkum, sum nýliga eru farin úr starvi. Fólkaheilsuráðið hevur eisini goldið jólagávur til starvsfólki.

Ónøktandi skjalprógv í ferðauppgerðum.

Ferðing
Av tí at næstan allar ferðauppgerðirnar eru ónøktandi skjalfestar, kann Landsgrannskoðanin ikki sanna, at tær eru rættar, og at tann ferðandi hevur fingið rætta endurgjaldið. Landsgrannskoðanin heldur samanumtikið, at umsitingin av ferðaútreiðslum hevur ikki verið í lagi.

Fólkaheilsuráðið fer frameftir at skjalfesta ferðaútreiðslurnar soleiðis, at tað er lættari at eftirkannað ferðir og kanna um vistir, sum skulu trekkjast frá, eru trektar frá.

Inntøkur
Eftir umbøn hevur Fólkaheilsuráðið hjálpt til at gera heilsukanningar av starvsfólkum hjá einum reiðarí. Stovnurin lænti sína útgerð út og útvegaði sjúkrarøktarfrøðingar at gera kanningarnar og ymiskt tilfar í tí sambandi. Gjaldstovan hevur sent rokning til reiðaríið fyri tænastuna.

Fólkaheilsuráðið hevur greitt frá, at tað er ikki partur av dagliga virkseminum at selja tænastur og tað er bert gjørt ta einu ferðina. Verður tað afturvendandi verður tað lýst í roknskaparreglugerðini.

Ognaryvirlit
Fólkaheilsuráðið hevur dagført ognaryvirlit.

Lønir
Stovnurin brúkar setanarpolitikk landsins. Landsgrannskoðanin kannaði lønarmálið hjá einum starvsfólki, sum er sett í tíðaravmarkað starv. Vit kannaðu um lýsing, umsókn, prógv, setanarskriv og lønargjaldsumbøn eru í málinum. Einki var at finnast at.

Starvsfólkini skráseta arbeiðstíðina í einum rokniarki, nær tey koma og fara, sjúkra- og feriudagar. Eisini verður skrásett um arbeitt er ov nógv ella ov lítið. Reglur eru ikki fyri, hvussu nógvar tímar starvsfólk kunnu eiga á ella skylda.

Ongar reglur um +/- tímasaldur.

Samsýningar

Til 1. august 2017 fekk formaðurin í Fólkaheilsuráðnum fundarpening eftir avtaluni millum Tænastumannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Í juni 2017 gjørdi landsstýrismaðurin av, at frá 1. august 2017 skuldi formaðurin fáa 5.000 kr. um mánaðin í fastari samsýning.

Fólkaheilsuráðið hevur gjørt leiðreglur fyri fundarsamsýningarnar, har ásett er, at limir, sum hava langan veg, fáa hægri takst, enn ásett er, og ráðslimir sum koma sjóvegis fáa altíð hægstu samsýning. Harumframt rindar ráðið koyripening og tunnilsgjøld.

Landsgrannskoðanin hevur við stakroyndum kannað útgoldna fundarpeningin hjá nevndarlimum. Einki var at finnast at.

KT

Fólkaheilsuráðið hevur ikki fingið boð frá Fíggjarmálaráðnum um, at stovnurin hevur serliga týdningarmiklar dátur og tí kemur undir herd KT-trygdarkrøv.

Fólkaheilsuráðið fær stórar nøgdir av dátum, tá ið kanningar verða gjørdar, men sambært formanninum eru dáturnar gjørdar navnleysar. Formaðurin greiddi frá, at Fólkaheilsuráðið ynskir í so lítlan mun sum gjørligt at taka persóndátur inn og hava tær liggjandi á stovninum.

Eftir lógini um dátuvernd skal ein stovnur, sum er dátuábyrgdari ella dátuviðgeri, tilnevna eitt dátuverndarfólk DPO (Data Protection Officer). Fólkaheilsuráðið hevur tilnevnt eitt dátuverndarfólk.

Í 2020 hevur eitt grannskoðanarvirkið gjørt KT-skoðan av Fólkaheilsuráðnum. Í frágreiðingini um skoðanina eru 15 tilmæli. 1 høgt, 9 miðal og 5 lágt raðfest tilmæli.

KT-skoðan er gjørd í 2020.

Fólkaheilsuráðið miðar eftir, at høg tilmæli verða avgreidd sum skjótast, miðal tilmæli áðrenn hálvt ár er farið, meðan eingin ítøkilig freist er fyri lágu tilmælini. Fólkaheilsuráðið arbeiðir við mannagongdum fyri, hvussu møgulig tilmæli skulu viðgerast á stovninum, men er ikki komið á mál.

Fólkaheilsuráðið keypir talgildar kanningar. “Hvussu hevur tú tað?” er gjørd av Lóður. Fólkaheilsuráðið hevur dátuviðgerðaavtalu við veitaran um kanningina. Veitarin er grannskoðaður við atlitið at KT, og Fólkaheilsuráðið hevur gjøgnumgingið grannskoðanarúrslitið.

Fólkaheilsuráðið hevur atgongd til skipanina “Kontrol GDPR” ígjøgnum eina grannskoðanarfyritøku. Formaðurin greiddi frá, at ráðið spyr Dátueftirlitið, tá ið tey ivast í, hvussu dátur skulu goymast.

8.2 Heilsutrygdarveitingar (LG 2020/211-0202)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað høvuðskontu 11.20.2.03, Heilsutrygdarveitingar.

Roknskaparviðurskifti v.m.

Niðanfyri er yvirlit yvir útgjøld seinastu 5 árini:

t.kr.

Endamál	Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
0	Ógreinað.	3.217	3.601	3.019	2.821	2.843
100	Læknahjálp	44.513	45.392	49.870	54.878	60.875
200	Endurgj. fyri brillur	1.222	1.254	1.231	1.336	1.492
210	Jarðarferðarhjálp	1.797	2.035	1.848	1.728	1.808
220	Flutningsútreiðslur	2	2	1	1	0
235	Tulking	7	6	11	9	9
310	Serlæknahjálp	2.053	1.708	1.694	719	958
320	Tannviðgerð	17.490	17.734	18.509	19.864	19.184
330	Fysiurgisk viðgerð	7.025	7.111	7.736	8.647	12.131
340	Kiropraktor	154	151	89	111	83
345	Ergoterapi	530	494	642	873	961
350	Sálarfrøðingar	944	1.229	1.327	1.568	1.418
360	Eftirbataheim	549	469	467	419	328
370	Fótarøkt	2.789	2.814	2.881	3.217	3.348
380	Hjálparráð	12.356	13.080	15.220	18.267	20.503
400	Heilivágur	66.376	67.320	70.762	76.000	81.700
500	Eftirútbúgv. og gransk.	1.025	1.053	1.078	1.182	1.258
	Tilsamans	**162.050**	**165.453**	**176.384**	**191.640**	**208.899**

Landsgrannskoðanin kannaði nøkur útgjøld og hevði nakrar viðmerkingar.

Læknahjálp

Seinastu 5 árini eru útreiðslurnar til læknahjálp hækkaðar frá 44,5 mió.kr. til 60,8 mió.kr. Útreiðslurnar eru gjøld til kommunulæknar, tó ikki fyri koppsetingar v.m., sum eru játtaðar á øðrum høvuðskontum.

Heilsutrygd hevur ávís talgild eftirlit, t.d. verða rokningar steðgaðar, tá ið lækni hevur skrásett meira enn eina viðtalu við sama persón sama dag.

Rúm tíð, síðani eftirlit var framt.

Viðskiftafólk skriva undir eitt skjal, tá ið tey hava verið til viðtalu, og læknar goyma tað sum skjalprógv. Heilsutrygd hevur verið á eftirliti hjá kommunulæknum fyri at kanna um útgjøldini eru røtt, men tað er rúm tíð síðani, tað seinast var gjørt.

Hjálparráð

Sambært § 10, stk. 4, 5 og 6, í heilsutrygdarlógini[28] veitir Heilsutrygd ískoyti til hjálparráð, sum eru tilskotsheimilað í kunngerð, sum eru liður í einari viðgerð, ella til persónar, sum ikki hava varandi tørv á hjálparráði, og hjálparráð í sambandi við heilivág.

Hjálparráðsnevndin tekur avgerð sambært reglunum í stk. 4 og 5, og er mannað við trimum føstum limum; einum umboði frá Heilsutrygd, einum frá Apoteksverkinum og einum frá Sjúkrahúsverkinum. Harumframt einum ella fleiri serkønum limum við læknafakligari útbúgving. Heilsutrygd veitir skrivara og rindar kostnaðin av hjálparráðsnevndini.

Hjálparráðsnevnd er ikki sett.

Sambært § 10, stk. 1, skal Landsstýrismaðurin seta eina hjálparráðsnevnd. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um virksemi nevndarinnar, tá ið hon skal viðgera umsóknir um tilskot til hjálparráð. Hjálparráðsnevndin er ikki mannað enn, og reglur ella mannagongdir eru tí ikki gjørdar.

[28] Ll. nr. 178/2009.

Í mai 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið arbeiðir við tveimum kunngerðum, einari um ískoyti til gjald fyri ávís hjálparráð og einari um hjálparráðsnevnd. Ætlanin er at seta hjálparráðsnevndina, tá ið kunngerðin er lýst.

Sambært § 10, stk. 7, í lógini ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um hjálparráð, m.a. møguligt egingjald ella depositum fyri hjálparráð, hvussu stórt tilskot verður veitt til einstaka hjálparráðið, og hvørji hjálparráð tilskot verður veitt til. Landsstýrismaðurin hevur ikki ásett reglur.

Sambært landsstýrismanninum arbeiðir Heilsumálaráðið við at áseta nærri reglur fyri umsitingina av hjálparráðum í kunngerð. Í september 2021 eru uppskot til kunngerðir send til hoyringar.

Enn ikki komið á mál við kunngerðum um hjálparráðsnevnd og um umsiting av hjálparráðum.

Heilivágur

Í 2020 var tilskotið til keyp av heilivági, fyriskipaðum á forskrift, 81,7 mió.kr., í 2016 var tað 66,4 mió.kr. Landsstýrismaðurin hevur ásett reglur um áseting av søluprísi í K. nr. 113/1992 “um áseting av søluprísi á heilivági”.

Spurt, um Heilsutrygd hevur eftirlit við, at upphæddirnar, sum stovnurin rindar apotekunum fyri heilivág, eru rættar, svaraði Heilsutrygd, at møguligt eftirlit má gerast úti á apotekunum, og at tað er ikki gjørt nýliga.

Einki eftirlit gjørt nýliga.

Samanumtikið

Heilsutrygd kannar eftir, um rokningar frá ergo- og fysioterapeutum, tannlæknum, fótarøktarum, umsóknir um jarðarferðarhjálp o.t. eru rættar.

Heilsutrygd kannar útgjøldini til kommunulæknar í ávísan mun, men hevur ikki gjørt eftirlit á staðnum í longri tíð. Heilsutrygd hevur heldur ikki gjørt kanningar á apotekunum nýliga. Stovnurin kunnaði um, at ætlanin er at gera eftirlit í næstum og útbyggja KT-skipanina til tað.

Landsgrannskoðanin mælti Heilsutrygd til at útvega skrivligar mannagongdir til umsiting og útgjald av veitingunum, og vísti á, at roknskaparreglugerðin er ikki dagførd síðani 2010.

Roknskaparreglu-gerðin ikki dagførd.

Í mai 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Heilsumálaráðið hevur fingið uppskot til roknskaparreglugerð frá Heilsutrygd, sum ráðið fer at viðgera í næstum.

Úr seinastu frágreiðing

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. útgjaldingar frá Heilsutrygdarveitingum til eftirútbúgving av læknum og til Dygdarskipanina[29].

Eftirútbúgving og gransking

Í 2019 vóru 328 t.kr. goldnar til Efteruddannelsesfonden. Upphæddin er roknað út frá ávísari upphædd fyri hvønn borgara yvir 18 ár, umframt gjald fyri borgarar undir 18 ár. 633 t.kr. eru goldnar til Administrationsudvalget, svarandi til 1,27% av læknahjálp 2018.

[29] Samanløgd skipan, sum hevur avloyst BE-skipanina (Bólka-Eftirútbúgvingarskipan) og Dygdargrunnin.

Dygdarskipan

Sambært Heilsutrygd eiga kommunulæknarnir grunnin, og stjórin á Heilsutrygd ger roknskapin og hevur umsitingina.

Útgoldið til eftirútbúgving og gransking:

t.kr.

	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Eftirútbúgving og gransking	1.004	1.025	1.053	1.078	1.182	1.258
Býtt til:						
Adm.udvalget og Efterudd. fonden	808	825	846	865	962	1.033
Dygdargrunnurin	63	64	66	68	71	72
BE-skipanin	133	136	141	144	150	153

Í 2019 vóru goldar 3,90 kr. til BE-skipanina og 1,84 kr. til Dygdargrunnin fyri hvønn borgara yvir 18 ár.

31. desember 2019 vóru 298 t.kr. á peningastovnskontu hjá Dygdargrunninum og 399 t.kr. hjá BE-skipanini. Allar inntøkurnar vóru frá Heilsutrygdarveitingum.

Roknskapirnir hava ikki verið grann-skoðaðir.

Sambært Heilsutrygd hevði nevndin givið stjóranum á Heilsutrygd og einum fulltrúa heimild at flyta pening av kontu hjá BE-skipanini. Eftir áheitan frá nevndini bókaði stjórin og bað um flytingar, og fulltrúin góðkendi. Roknskapirnir hava ikki verið grannskoðaðir.

Í juni 2020 kunnaði Heilsutrygd um, at einki stóð í reglugerðini fyri Dygdarskipanina um, at roknskapurin skuldi grannskoðast, og at Heilsutrygd fór at leggja uppskot fyri nevndina, um at roknskapirnir hereftir verða grannskoðaðir.

Heilsutrygd hevði ikki tikið støðu til, um grunnurin kom undir landsins almenna roknskaparhald, og visti heldur ikki, um leiðslan í Dygdarskipanini hevði tikið støðu til tann spurningin. Heilsutrygd legði afturat, at talan var ikki um pening, sum beinleiðis var játtaður í fíggjarlóg, men um gjald, sum var ásett í sáttmála ímillum Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Kommunulæknafelag Føroya, og at talan tí var um vunnin rættindi hjá kommunulæknum í einari sáttmálasamráðing.

Nevndin havt 2 fundir seinastu fimm árini.

Dygdarskipanin var sambært reglugerðini umsitin av nevnd, sett saman av tveimum umboðum fyri Heilsutrygd og tveimum umboðum fyri Kommunulæknafelagið. Sambært Heilsutrygd var seinasta samskiftið í nevndini á vári 2020. Heilsutrygd kunnaði um, at sambært nevndini í Dygdargrunninum høvdu tveir fundir verið seinastu fimm árini.

Sambært reglugerðini verður óbrúktur peningur fluttur til eftirfylgjandi ár, og um peningur hópar seg upp, verður málið lagt fyri Samstarvsnevndina.

Spurd, um Samstarvsnevndin hevur viðgjørt málið, nú 700 t.kr. vóru í grunninum, svaraði Heilsutrygd, at málið ikki var lagt fyri Samstarvsnevndina enn, men at tað væntandi fór at verða gjørt í næstum.

Í august 2020 kunnaði landsstýrismaðurin um, at Heilsumálaráðið fór at viðgera málið um Dygdarskipanina og BE-skipanina saman við Heilsutrygd, og fór síðani at svara Landsgrannskoðanini.

Nevndin hevur ræðið á Dygdargrunninum.

Í august 2021 hevur Heilsumálaráðið kunnað um, at Samstarvsnevndin hevur umrøtt ymiskt at brúka peningin í Dygdarskipanini til. Enn er eingin avgerð tó tikin. Heilsumálaráðið vísir á, at tað er ikki Heilsutrygd, sum hevur ræðið á grunninum, men at nevndin í grunninum er mannað við kommunulæknum og umboðum fyri Heilsutrygd.

8.3 Heilsutrygd (LG 2019/211-0202)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Heilsutrygd.

Roknskaparreglugerð
Roknskaparreglugerðin er frá 2010, og Heilsutrygd ætlaði at dagføra hana.

Roknskaparreglu-gerðin ikki dagførd.

Í sambandi við grannskoðanina av Heilsutrygdarveitingum hevur landsstýrismaðurin Í mai 2021 kunnað um, at Heilsumálaráðið hevur fingið uppskot til roknskaparreglugerð frá stovninum, sum ráðið fer at viðgera í næstum.

Í august 2021 hevur Heilsumálaráðið kunnað um, at tey eru í holt við at viðgera dagførda uppskotið til roknskaparreglugerð.

Ferðaendurgjøld
Við stakroyndum kannaðu vit ferðaendurgjøld fyri koyring í arbeiðsørindum og fyri koyring í sambandi við útbúgving. Heilsutrygd royndi at stuðla uppundir førleika-menning, og at starvsfólkini numu sær viðkomandi kunnleika á skeiðum og staklæru-greinum. Heilsutrygd valdi at endurrinda fyri koyring eftir takstinum í rundskrivinum frá Fíggjarmálaráðnum. Ofta eru eisini onnur arbeiðsørindi, sum t.d. fundir, avgreidd á sama túri.

Nógv starvsfólk hjá Gigni brúktu egnan bil at koyra frá arbeiðsstaðnum út til skúlar og smábarnaheim. Sambært sáttmálanum hjá sjúkrarøktarfrøðingum fingu tey endurgjald fyri ferðing sambært almennu reglunum.

Landsgrannskoðanin mælti til, at ferðauppgerðirnar vóru gjørdar eftir almennu reglunum, t.e. at tað sást á uppgerðunum, hvar koyrt var.

Í august 2021 hevur Heilsumálaráðið greitt frá, at seinastu árini eru nakrir bilar keyptir til Gigni, so koyringin við egnum bili er minkað. Nakrir heilsufrøðingar brúka framvegis egnan bil í arbeiðsørindum, og skriva niður, hvussu nógvar kilometrar verða koyrdir hvønn dag.

9. Almannamál

9.1 Almannamálaráðið (LG 2016/212-0111)

Roknskaparreglugerðin er dagførd.

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin, at Almannamálaráðið bíðaði við at dagføra roknskaparreglugerðina frá 2013, til Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið høvdu dagført reglurnar. Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin er dagførd og eintak er sent Gjaldstovuni og Landsgrannskoðanini til kunningar.

9.2 Familjufyrisitingin (LG 2019/212-0141)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av Familjufyrisitingini. Familjufyrisitingin var sett á stovn á ólavsøku 2018, í sambandi við at Føroyar sama dag yvirtóku familju-, persóns- og arvarættin.

Bókhaldið er á Gjaldstovuni, og stjórin leysgevur og góðkennir mánaðarroknskapirnar.

Sambært landsstýrismanninum hevur Almannamálaráðið 1. september 2021 móttikið roknskaparreglugerð frá Familjufyrisitingini til góðkenningar.

Lønarútreiðslur
10 fólk starvaðust á Familjufyrisitingini, harav fimm vóru sett í starv eftir føroyskum sáttmálum, eftir at Familjufyrisitingin var yvirtikin. Fimm starvsfólk, sum fluttu frá Ríkisumboðnum, høvdu danskar setanartreytir.

Sambært Ll. nr. 81/2005 “um rættindi løntakaranna í sambandi við, at landsstýrið yvirtekur mál og málsøki frá ríkismyndugleikunum”, varðveita starvsfólkini síni sáttmálarættindi til sáttmálaskeiðið er runnið, t.e. til 21. apríl 2021. Eftir tað eru setanartreytirnar ein samráðingarspurningur ímillum Fíggjarmálaráðið og Almannamálaráðið.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Fíggjarmálaráðið í januar 2021 gjørdi niðurstøðu um lønar- og setanartreytir hjá viðkomandi starvsfólkum, og miðskeiðis í mars fingu starvsfólkini tilboð frá Familjufyrisitingini um setan eftir føroyskum sáttmála. Flestu starvsfólkini tóku av.

Leiga av høli
Familjufyrisitingin hevði leigusáttmála við Sp/f Undir Bryggjubakka, galdandi frá 1. apríl 2018 til 1. apríl 2021. Stovnurin hevði ikki gjørt avtalu um at leingja leigumálið.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Familjufyrisitingin hevur leigað nýggj høli frá 1. januar 2022. Verandi leigumál er uppsagt við virknað frá 1. januar 2022.

9.3 Almannaverkið (LG 2017/212-0211)

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum umrøtt grannskoðan av Almannaverkinum.

Trivnaðartænastur rinda Almannaverkinum endurgjald fyri fyrisitingarútreiðslur o.a. Í fyrisitingarbygninginum húsast Almannaverkið, Trivnaðardepilin og Endurmenning, ið hava hvør sína játtan. Allar fyrisitingarútreiðslurnar verða bókaðar á játtanina hjá Almannaverkinum á høvuðskontu 12.21.1.02.

Roknskaparviðurskifti

Roknskaparreglugerðin enn ikki dagført.

Roknskaparreglugerðin var frá 2010. Almannaverkið hevði bíðað við at gera nýggja reglugerð, tí Gjaldstovan hevði arbeitt við at gera nýtt roknskaparrundskriv. Almannaverkið helt, at galdandi vegleiðing hóskaði ikki til ein so samansettan stovn sum Almannaverkið.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Almannaverkinum, er arbeiðið við reglugerðini enn ikki komið á mál, og møguliga verður neyðugt at endurskoða arbeiðið, tí tað var grundað á eitt uppskot til nýggjan leist, sum Gjaldstovan arbeiddi við.

Almannaverkið hevði tvær peningastovnskontur, sum fyri tað mesta vóru brúktar til lógarbundin útgjøld um Viðskiftafólkaskipanina (VFS). Sambært Almannaverkinum minkaðu útgjøldini av peningastovnskontunum, so hvørt sum útgjøld vórðu flutt yvir í Heildarskipanina.

Í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at VFS verður ikki brúkt longur, og útgjøldini fóru umvegis skipanina hjá Gjaldstovuni. Peningastovnskonturnar vórðu eisini brúktar til ymiskt annað, og Almannaverkið ætlaði at savna øll viðurskifti undir eina peningastovnskontu og niðurleggja hina.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært Almannaverkinum ber ikki til at niðurleggja umrøddu peningastovnskontu.

KT-viðurskifti

KT-skipan, við stórum týdningi fyri stovnin og landið sum heild, er dagført.

Heildarskipanin hjá Almannaverkinum hevur stóran týdning fyri stovnin og landið sum heild. Skipanin avgreiðir veitingarnar, sum Almannaverkið umsitur. VFS skuldi virka sum søguligur dátugrunnur í eina tíð. Allar dáturnar skuldu flytast í nýggju skipanina.

Almannaverkið hevði ikki roynt at endurskapa dátur frá trygdaravritum av Heildarskipanini í síni heild, men bert av einstøkum fílum. Almannaverkið hevði ikki formligar mannagongdir um tilbúgving. Stovnurin hevði havt eina einstaka trygdarhending, sum var avgreidd og skjalfest. Landsgrannskoðanin mælti til at gera mannagongdir um tilbúgving.

Í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannaverkið hevði gjørt avtalu við veitara um at endurskapa dáturnar.

Roynd at endurskapa dátur er framd í 2021 og eydnaðist.

Sambært Almannaverkinum var veitarin ikki komin á mál við at endurskapa dátur í august 2020. Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at royndin varð framd 6. mars 2021 eftir einari mannagongd, sum er gjørd til endamálið. Dáturnar vórðu tá endurskaptar.

9.4 Barnapeningur veittur í forskoti (LG 2015/212-0213)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av barnapeningi, m.a. innheinting av barnagjøldum, móttikin av órøttum. Í august 2016 var eftirstøðan 445 t.kr. Almannaverkið krevur eftirstøðuna inn, men roknaði við, at meginparturin fór ikki at verða goldin.

Í 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at hóast tað var óvist, hvussu nógv veruliga kundi krevjast inn, helt Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verða veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið ikki bar til at fáa gjaldsavtalu við gjaldskylduga. Fyrireikingar vóru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar í samráði við TAKS og Almannaverkið.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannamálaráðið hevur vent sær til Taks fyri at fáa heimild til vega at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað verður eftir at áseta reglur um tað, næstu ferð broytingar verða gjørdar í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl."

9.5 Einkjubarnastyrkur (LG 2014/212-0213)

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av umsitingini av játtanini til einkjubarnastyrk.

Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 skal barnagjald, sum umsøkjari hevur móttikið av órøttum, gjaldast aftur. Tað framgekk ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kundi ella skuldi brúka at krevja gjaldið aftur.

Almannaverkið átti at styrkt um eftirlitið, tá ið ongar lógarreglur eru um at krevja pening aftur.

Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri feilum.

Viðvíkjandi reglum um innkrevjing av útgjøldum, helt Almannamálaráðið tað vera neyðugt at umrøða málið nærri saman við TAKS og Almannaverkinum.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannamálaráðið hevur vent sær til Taks fyri at fáa heimild til vega at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað verður eftir at áseta reglur um innkrevjing næstu ferð broytingar verða gjørdar í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl."

9.6 Barnaískoyti (LG 2015/212-0213)

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at ivi er um innheintingarheimildirnar hjá Almannaverkinum. Sambært § 21, stk. 2, í Ll. nr. 71/1996 skal tann, sum hevur móttikið barnaískoyti móti betri vitan, gjalda upphæddina aftur. Tað framgongur ikki av lógini, hvørji amboð Almannaverkið kann ella skal brúka at krevja peningin aftur.

Almannaverkið átti at styrkt um eftirlitið, tá ið ongar lógarreglur eru um at krevja pening aftur.

Landsgrannskoðanin vísti á, at við hesum í huga átti Almannaverkið at styrkt um eftirlitið, sum skuldi forða fyri feilum.

Í 2017 metti Almannamálaráðið, at heimild helst átti at verði veitt TAKS at fremja innheintingina, tá ið tað ikki bar til at fáa í lag gjaldsavtalu við gjaldskylduga. Fyrireikingar vóru farnar í gongd til møguligar lógarbroytingar.

Í 2018 greiddi Almannamálaráðið frá, at fundur hevði verið um málið ímillum TAKS, Almannaverkið og Almannamálaráðið. Eingin niðurstøða var gjørd, tí talan var m.a. um fíggjarlig, teknisk og løgfrøðilig atlit, sum støða skuldi takast til.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Almannamálaráðið hevur vent sær til Taks fyri at fáa heimild til vega at krevja upphæddina inn umvegis TAKS. Miðað verður eftir at áseta reglur um innkrevjing næstu ferð broytingar verða gjørdar í Ll. nr. 71/1996 "um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.fl."

9.7 Bústovnar o.a., løgujáttan (LG 2019/212-0216)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin grannskoðan av løgujáttanini Bústovnar o.a. á høvuðskontu 12.21.6.02. Vit umrøddu verkætlanir, ið eru nevndar í viðmerkingum í fíggjarlógunum 2017, 2018 og 2019.

Almannamálaráðið hevði um 70 bygningar tilsamans. Stovnarnir høvdu onga játtan til viðlíkahald í sínum rakstri.

Ráðið gjørdi saman við Landsverki av, hvørjar útreiðslur skuldu haldast av játtanini. Landsverk gjørdi eina ætlan viðvíkjandi bygningunum, hvat kom undir viðlíkahald og var goldið av játtanini "Umvæling av almennum bygningum", og hvat kom undir umbygging og var goldið av játtanini "Bústovnar o.a."

Landsgrannskoðanin spurdi Almannamálaráðið, hvørjar raðfestingar vóru gjørdar 2017 til 2022, og hvussu býtið var ímillum viðlíkahald og umbyggingar í 2019. Í juni 2020 svaraði Almannamálaráðið, at játtanin á høvuðskontu 12.21.6.02 "Bústovnar" var til nýbygging, umvæling og dagføring av bygningum hjá Almannamálaráðnum og stovnum undir ráðnum. Almannamálaráðið hevði latið ræðisrættin víðari til Landsverk. Játtanin var raðfest í samstarvi við Landsverk og stovnar undir ráðnum, og í mun til viðmerkingarnar í fíggjarlógini.

Almannamálaráðið vísti á, at sambært Landsverki var tað týdningarmikið, at neyvt samstarv var um nýtslu av játtanum, soleiðis at sleppast kundi undan dupultarbeiði, og at játtanirnar vóru nýttar so skilagott sum møguligt.

Almannamálaráðið og Almannaverkið vóru umboðað í bygginevndum, har verkætlanir vóru settar í verk við verklagslóg. Bygginevndirnar vóru settar, áðrenn verklagslógin var gjørd. Í smærri verkætlanum høvdu tey stýrisbólkar. Bygginevndirnar høvdu regluligar fundir, alt eftir tørvi. Eina ferð um mánaðin ella annanhvønn mánað var fundur ímillum landsstýrismannin og Landsverk. Sambært Almannamálaráðnum høvdu eingir regluligir fundir verið ímillum Landsverk og landsstýrismannin seinasta hálva árið.

Sambært landsstýrismanninum vórðu regluligir mánaðarfundir millum landsstýrismannin og Landsverk tiknir uppaftur í apríl 2021. Á fundunum kunnar Landsverk um støðuna á øllum verkætlanunum, sum Landsverk hevur um hendi vegna Almannamálaráðið.

Roknskaparviðurskifti v.m.

Høvuðskonta 12.21.6.02 "Bústovnar", roknskapartøl 2015 til 2020:

t.kr.

Heiti	2015	2016	2017	2018	2019	2020
Lønir v.m.	648	0	13	1	0	0
Keyp av vørum og tænastum	775	5	5	13	0	1
Avskrivingar	0	0	0	0	0	124
Ymsar rakstrarútreiðslur	-1.423	-1.482	-1.920	-2.010	-2.038	-1.437
Bygging og løguframleiðsla	21.871	20.368	6.106	10.165	14.722	9.741
Útvegan av løgu o.ø.	0	-192	0	2.527	0	671
Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (útr)	0	1.477	1.902	1.997	2.038	1.312
Tilsamans	**21.871**	**20.176**	**6.106**	**12.692**	**14.722**	**10.412**

Upphæddirnar á "Innanh. flyt. ml. alm. stovn. (útr)" eru flytingar til Landsverk.

Eirargarður og Sambýli í Reynstúni

Sambært Almannamálaráðnum var gjørt av ikki at umbyggja Eirargarð, og ístaðin at byggja í Reynstúni á Argjum. Uppskot til verklagslóg var lagt fyri Løgtingið í 2019, men fall burtur, tá ið tingárið endaði. Ætlanin var at gera nýggja verklagslóg, men hon kom ikki í Tingið.

Ll. nr. 79/2017 "um at dagføra ognina Eirargarður 14/16" fyri í mesta lagi 30 mió.kr. kom í gildi 30. mai 2017 og fór úr gildi 31. desember 2019.

Roknskapartøl fyri umvælingar av Eirargarði 14-16 og bygging av Sambýli í Reynstúni:

t.kr.

Heiti	2016	2017	2018	2019	2020
Eirargarður 14 og 16	2.141	1.732	688	0	0
Samb.í Reynstúni/Høvuðsumv.					
Eirargarði 14-16	0	517	385	943	229
Umvæling av Eirargarði 14-16	0	0	0	2.264	2.315
Tilsamans	**2.141**	**2.249**	**1.073**	**3.207**	**2.544**

11,2 mió.kr. eru brúktar til umvælingar av Eirargarði og til bygging í Reynstúni 2016 til 2020.

Í oktober 2018 skrivaði Landsverk á heimasíðuni, at landsstýrismaðurin hevði slept ætlanini um at heildarumbyggja Eirargarð 14-16, og at Landsverk ístaðin gjørdi ábøtur fyri at bøta um inniumhvørvið. Í juli 2019 var, sambært Landsverki, fígging fingin til vega at umbyggja og dagføra tríggjar hæddir, t.e. dagføring av 16a og b, og umbygging og dagføring av 14a. 30. september 2019 kunngjørdi Landsverk, at fýra fyritøkur høvdu bjóðað upp á umbygging og dagføring av Eirargarði 14a.

Í 2019 eru 2,1 mió.kr. goldnar fyri renovering o.a. Í januar 2020 kunnaði Landsverk á heimasíðuni um, at játtanin til Eirargarð 14a var 3,8 mió.kr. í 2019, og at byggingin byrjaði í oktober 2019 og helt á til januar 2020.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at í 2019 og 2020 vóru 4,6 mió.kr. brúktar til umvæling av Eirargarði 14 og 16, m.a. til nýggj loft, lyftiútgerð, nýggj gólv, brandávaringarskipan, vesir og vátrúm, køk, inniluft og málaraarbeiði.

Í ár verða eftir ætlan gjørdar umvælingar og dagføringar á Eirargarði 16-1 og 16-2. Ætlandi verða 1,5 mió.kr. brúktar til at umvæla vesir og vátrúm, og til innbúgv og lyftiútgerð.

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at í 2023 er ætlanin at totaltrenovera Eirargarð 14-1. Í ætlanini eru 3,1 mió.kr. settar av til arbeiðið, sum m.a. fevnir um inniluft, nýtt loft, lyftiútgerð, nýtt gólv, umvæling av køki og vesum, málaraarbeiði og ABA brand-ávaringarskipan.

Heimið í Reynstúni á Argjum

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2019 vóru fyrireikingarnar at byggja ein nýggjan vardan bústað til húsfólkini á Eirargarði settar í gongd.

Í desember 2019 boðaði landsstýrismaðurin í almannamálum Fíggjarnevndini frá, at skipanaruppskotið viðvíkjandi heiminum í Reynstúni var liðugt. Landsstýrismaðurin kunnaði eisini um, at bygningurin møguliga verður dýrari enn mett. Grundstykkið fór møguliga at kosta 750 t.kr., og bygningurin verður 1.314 m^2 til støddar. Jørðarbeiðið kundi byrja í juni 2020 og byggingin í mars 2021. Heimið kundi verða liðugt í oktober 2022.

Í januar 2020 kunnaði Landsverk á heimasíðuni um, at arbeiðið at prosjektera Sambýlið í Reynstúni var boðið út í 2018, og MAP arkitektar vunnu uppgávuna.

Landsverk fekk skipanaruppskotið í mars 2019, síðani var ikki meira hent í málinum. Eingin játtan var, og tí kundi Landsverk ikki undirskriva ráðgevaraavtaluna.

Í 2020 greiddi Almannamálaráðið frá, at grundstykkið enn ikki var keypt. Tórshavnar kommuna hevði í november 2018 samtykt at selja øki til at byggja sambýli á, men málið var ikki endaliga avgreitt frá kommununi.

Prosjekteringin steðgaði á í februar 2019, tá ið uppskot til verklagslóg var lagt fyri Løgtingið. Uppskotið fall burtur, tá Løgtingið fór í summarfrí.

Í januar 2020 fekk Landsverk boð frá Almannamálaráðnum um at prosjektera Sambýlið í Reynstúni liðugt. Landsverk bað ráðgevan um at eftirkanna kostnaðarmetingina fyri at tryggja betri grundarlag fyri víðari arbeiði. Ráðgevin metti, at av tí at kostnaðarmetingin var eitt ára gomul, var neyðugt at hækka hana við 10%. Ætlanin var at fara í holt við víðari prosjektering, tá ið málið um grundøkið var avgreitt frá Tórshavnar kommunu. Tórshavnar býráð samtykti 25. juni 2020 at selja Almannamálaráðnum økið í Reynstúni til sambýli til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tá ið Tórshavnar býráð samtykti at selja grundøkið til Almannamálaráðið, var tað treytað av at innkoyringin, sum upprunaliga var frá Reynstúni, skuldi verða frá Glyvursvegi. Drúgva avgreiðslutíðin í Tórshavnar býráð og broyttu treytirnar, hava seinkað prosjekteringina við umleið 1½ ári og dýrkað verkætlanina umleið 25%.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at áðrenn farast kundi víðari við prosjekteringini, var neyðugt at meta um kostnaðin av broyttu fortreytunum við nýggju innkoyringini. Ráðgevin fór undir prosjektuppskot í november 2020, sum var handað í apríl 2021. Nakrir spurningar skuldu avgreiðast, m.a. í mun til innkoyringina. Teir eru avgreiddir í august 2021. Farið er undir myndugleikaprosjektið, og tá ið byggiloyvið er komið, verður farið undir høvuðsprosjektið.

Arbeiðið í Reynstúni væntandi boðið út í 2022.

Sambært tíðarætlanini verður arbeiðið boðið út í 2022. Landsstýrismaðurin ætlar í Løgtingið við verklagslógini, tá ið arbeiðið er boðið út, og tilboðini eru komin inn, til tess at tryggja, at byggiverkætlanin er so væl fyrireikað og upplýst, sum gjørligt, tá ið Løgtingið skal taka støðu til málið.

Barnaheim í Tórshavn

Sambært fíggjarlógini 2019 var ætlanin at byggja nýtt barnaheim í Tórshavn. Í 2019 vóru um 3,4 mió.kr. brúktar.

Sambært Almannamálaráðnum var nýggjasta kostnaðarætlanin sambært skipanaruppskoti 135 mió.kr. Eingin játtan var í fíggjarlógini 2020 til bygging av barnaheimi.

Einki nýtt um bygging av barnaheimi.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at einki nýtt er hent í málinum.

Bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu

Sambært Ll. nr. 60/2018 kunnu í mesta lagi 29 mió.kr.[30] brúkast til at byggja bú- og umlættingarheim í Tórshavn til børn og ung við autismu. Lógin er galdandi til 31. desember 2024. Heimið skal byggjast í Kvíggjartúni á Argjum.

Árini 2015 til 2019 vóru 3,1 mió.kr. brúktar til verkætlanina.

Í skrivi til Fíggjarnevndina í desember 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at bygningurin verður 1.192 fermetrar til støddar, at høvuðsprosjekt fyrilá, og at metti kostnaðurin møguliga varð hægri enn heimildin í lógini. Arbeiðið var boðið út og tilboðini skuldu koma inn í februar 2020. Sambært landsstýrismanninum fór, um

[30] Broytt til 39 mió.kr. í mars 2021, Ll. nr. 26/2021.

neyðugt, broytingaruppskot at vera lagt fyri Løgtingið í mars 2020, við umbøn um hægri játtan. Byggingin kundi eftir ætlan verða liðug í mars 2022.

Í 2020 kunnaði Almannamálaráðið um, at lisitatión var í februar 2020, men av tí at innkomnu tilboðini vóru munandi hægri enn kostnaðarmetingin, gjørdi landsstýrismaðurin av at ógilda lisitatiónina. Arbeitt var við at gjøgnumganga prosjektið við tí fyri eyga at gera uppskot til sparingar, og eftir ætlan bjóða prosjektið út av nýggjum.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at verkætlanin var umprosjekterað, og sparingar gjørdar, uttan at tað gekk út yvir funktiónirnar. Talan er um sama verklag, sum tá ið løgtingslógin var samtykt í 2018, (t.e. 6 búpláss, 6 umlættingarpláss og virkniseind til áleið 15 børn og ung).

Landsstýrismaðurin leggur afturat, at arbeiðið var boðið út í sjey arbeiðstøkum, og lisitatiónin var í januar 2021. Kostnaðurin er 39 mió.kr. (íroknað grundstykki, innbúgv v.m.). Broytingaruppskot var lagt fyri Løgtingið, har fíggjarliga heimildin var hækkað úr 29 mió.kr. upp í 39 mió.kr. Uppskotið var einmælt samtykt í mars 2021. Farið var undir at byggja í mai 2021, og sambært ætlanini verður klárt at flyta inn um ársskiftið 2022/23.

Væntandi klárt at flyta inn í heimið í Kvíggjartúni um ársskiftið 2022/23.

Vardir bústaðir í Tórshavn (Á Mýrini í Hoyvík)

Sambært Ll. nr. 59/2018 “um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn”, kunnu tveir bústaðir byggjast fyri í mesta lagi 58 mió.kr.[31] Lógin fer úr gildi 31. desember 2024.

Sambært Almannamálaráðnum eru tvær byggiskráir gjørdar í 2018 til sambýli til fólk við menningartarni. Annað sambýlið verður staðsett á Mýrini og hitt eftir ætlan í Klingruni í Hoyvík.

Í desember 2019 kunnaði landsstýrismaðurin í almannamálum Fíggjarnevndina um, at byggikostnaðurin møguliga verður hægri, enn upprunaliga mett. Fyrri bygningurin verður 1.222 fermetrar og skipanaruppskotið var liðugt. Bygningurin kundi verða liðugur á sumri 2022. Fyrireikingin til seinna bústaðin var ikki byrjað.

Almannamálaráðið vendi sær til Fíggjarmálaráðið við fyrispurningi, um prosjekteringin kundi halda áfram, hóast kostnaðurin møguliga varð hægri enn upprunaliga mett.

Í 2020 greiddi Almannamálaráðið frá, at sambært byggiskránni skuldu nýggju sambýlini ikki avloysa gomlu sambýlini, men staðsetingin av øðrum verður, har tvey minni sambýli vóru.

Sambært Almannamálaráðnum helt Fíggjarmálaráðið, at heimild var at arbeiða víðari við at fyrireika verkætlanina til eitt prosjektuppskot var gjørt. Samstundis mælti Fíggjarmálaráðið til, at uppskot um at broyta verklagslógina verður lagt fyri Løgtingið, soleiðis at lógin bert fevnir um prosjekteraða bústaðin og ikki um tveir bústaðir. Almannamálaráðið boðaði í januar 2020 Landsverki frá, at Landsverk kundi undirskriva sáttmálan við ráðgevan um at prosjektera Sambýlið á Mýrini sambært leistinum frá Fíggjarmálaráðnum.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin vístá, at ásannandi støðuna, sum hevur verið í sambandi við almennu byggiverkætlanirnar seinnu árini og viðmerkingarnar frá fíggjarnevndini um, at tað er umráðandi, at verkætlanirnar eru so væl fyrireikaðar sum gjørligt, áðrenn tær verða lagdar fyri Løgtingið, var verklagslógin broytt frá at byggja tveir vardar bústaðir fyri í mesta lagi 58 mió.kr. til at byggja ein vardan bústað fyri í mesta lagi 48 mió.kr.

Farið er frá tveimum vardum bústøðum til ein.

[31] Broytt til 46 mió.kr. í januar 2021, Ll. nr. 11/2021.

Bústaðurin skal vera liðugur á heysti 2022.

Fíggjarmálaráðið og Landsverk mæltu tá til, at verklagslógir skuldu leggjast fyri Løgtingið, tá ið verkætlanaruppskotið er klárt. Sambært verkætlanaruppskotinum var kostnaðarmetingin 41,2 mió.kr. Fíggjarmálaráðið mælti til at leggja 15% oman á metingina til møguligar óvissur (tí at kostnaðarmetingin í verkætlanaruppskotinum er 85% neyv). Einmælt Løgting samtykti broytingaruppskotið í januar 2021. Farið var undir jørðarbeiðið í mars. Tilboðini at byggja nýggja sambýlið vórðu latin upp í juli 2021, og vóru innanfyri kostnaðarmetingina. Samlaði kostnaðurin verður 41,7 mió.kr. Byggiarbeiðið byrjar í næstum, og bygningurin skal standa liðugur á heysti 2022.

Ætlanir um bústaðarbyggingar

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini 2017 stendur m.a., at tilgongdin, sum landsstýrismaðurin hevði sett í verk, um at útvega fleiri bústaðir í Suðurstreymoy og nútímansgera fleiri av verandi bústøðum, helt fram í tíðarskeiðnum 2018 til 2024.

Í viðmerkingunum í fíggjarlógini 2018 er m.a. ásett, at í tráð við bústaðarætlanina fyri Suðurstreymoy fyri árini 2017 til 2022, har avsettar eru 200 mió.kr. til bygging og útvegan av bústovnum, verður hildið áfram við dagføringum av verandi bygningum, samstundis sum farið verður undir at byggja nýggjar stovnar.

Í apríl 2018 spurdi Fíggjarnevndin, hvørjar ætlanirnar vóru við samlaða kostnaðinum av Barnaheiminum, vardum bústøðum og bú- og umlættingarheimi. Landsstýrismaðurin svaraði við at vísa til yvirlit yvir íløgur 2017 til 2022, har játtanin var 200 mió.kr., og at 14 mió.kr. vóru fluttar frá 2016, tilsamans var upphæddin 214 mió.kr.

Sambært yvirlitinum frá landsstýrismanninum skuldu játtanirnar brúkast til:

Eirargarður 14/16 (bráðfeingis viðlíkahald)	4.000 t.kr.
Eirargarður 14/16 (dagføring)	30.000 t.kr.
2 sambýli til fólk við menningartarni í Tórshavn	58.000 t.kr.
Nýtt barnaheim í Tórshavn	60.000 t.kr.
Bústovnar í Tórshavn til børn og ung við autismu	29.000 t.kr.
Sambýli í Torfinsgøtu 41, Tórshavn	7.500 t.kr.
Vardur bústaður til fólk við sálarsjúku	9.500 t.kr.
Sambýlið Eystan Heyg	3.000 t.kr.
Sambýlið í Garðsgøtu	3.000 t.kr.
Ábøtur v.m.	6.000 t.kr.
Dugniskúlin	4.000 t.kr.
Tilsamans	214.000 t.kr.

Sambært fíggjarlógini 2019 var lógaruppskot í Løgtinginum um at byggja Barnaheim í Tórshavn, Lm. nr. 32/2018. Fyrireikingar at byggja ein nýggjan vardan bústað til húsfólkini á Eirargarði vóru settar í gongd, og farast skuldi undir fyrireikingar til nýtt heim til fólk við seinheilaskaða.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at farið er ikki undir fyrireikingar at byggja barnaheim ella heim til fólk við seinheilaskaða. Fyrireikingar at byggja nýggjan vardan bústað til húsfólkini á Eirargarði eru byrjaðar og sambært tíðarætlanini verður arbeiðið væntandi bjóðað út eftir ársskiftið.

Játtanir og nýtsla

Játtað og brúkt frá 2017 til 2020:

t.kr.

	2017	2018	2019	2020
Flutt frá síðsta ári	13.869	19.763	36.071	21.349
Játtan	12.000	29.000	0	20.000
Játtað í árinum tilsamans	25.869	48.763	36.071	41.349
Nýtsla	6.106	12.692	14.722	10.412
At flyta til næsta ár	19.763	36.071[32]	21.349[33]	30.937[34]

Almannamálaráðið hevur í sambandi við fíggjarlógarviðgerðir seinastu árini fleiri ferðir víst á ætlanina at byggja bústaðir fyri 200 mió.kr. frá 2017 til 2022. Árini 2017 til 2020 eru 43,9 mió.kr. brúktar.

Árini 2017 til 2022 var ætlanin at byggja fyri 200 mió.kr. Slakar 44 mió.kr. eru brúktar.

Játtanirnar til Bústovnar o.a. hava givið lítla ábending um, hvør aktiviteturin fór at verða í fíggjarárinum.

Politiska stýringin av búskapinum liggur m.a. í íløgukarminum, har møguleiki er hjá politiska myndugleikanum at seta út í kortið, hvørjar íløgur skulu gerast og samstundis ávirka virksemið í landinum. Tá ið játtaðar upphæddir verða fluttar til seinni ár, er ikki samsvar ímillum ætlaða og veruliga virksemið.

Upphæddir, ið eru fluttar til seinni ár, verða støðlaðar í landsroknskapinum, og eru tí við í grundarlagnum undir fíggjarlógarviðgerðini. Men tá ið endaligi landsroknskapurin verður kunngjørdur árið eftir, ber illa til hjá Løgtinginum at fylgja við í virkseminum. Løgtingið sær ikki veruliga byggivirksemið, fyrr enn roknskapurin er gjørdur.

Sambært Almannamálaráðnum vóru 9,2 mió.kr. av játtanini 2017 á 12 mió.kr. settar av til at byggja eina búeind afturat Eystan Heyg. Málið var fyrireikað í 2017, og játtanin støðlað til 2018. Neyðuga lendið fekst ikki, tí var ætlanin slept og játtanin tí ikki brúkt.

Í 2018 vóru 29 mió.kr. játtaðar afturat, harav skuldu umleið 8 mió.kr. brúkast til at dagføra Eirargarð, sambært verklagslóg frá 2017. Ætlanin var slept, og ístaðin var farið undir fyrireikingar at byggja ein nýggjan vardan bústað. Umleið 6 mió.kr. skuldu brúkast til nýtt barnaheim, vísandi til uppskot um løgtingslóg, sum var lagt fyri Løgtingið í desember 2017. Tað málið datt burtur.

Til bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu skuldu sambært Almannamálaráðnum brúkast 5 mió.kr., og 5 mió.kr. skuldu brúkast til bygging av vardum bústaði. Tað tekur drúgva tíð at fyrireika eina byggiverkætlan og seinkingar hava verið.

Almannamálaráðið helt, at avsett var í fíggjarlógini í mun til tær verkætlanir, sum skuldu fremjast. Broytt støðutakan og seinkingar hava verið við til, at játtanirnar ikki hava verið brúktar sum ætlað.

Sambært almennu viðmerkingunum til Lm. nr. 94/2016 “Uppskot til løgtingslóg um at dagføra ognirnar Eirargarður 14/16” frá februar 2017, hevði Almannaverkið saman við Landsverki í mars 2015 útvegað eina frágreiðing um støðuna á 71 bygningum, har Almannaverkið hevur virksemi kring landið. 24 av bygningunum vóru bólkaðir í ringasta bólk, harav 22 í Suðurstreymoy.

Undranarvert at ikki meira verður bygt, tá ið støðan á verandi bygningum er so vánalig.

Havandi í huga serliga vánaligu støðuna á bústøðunum, helt Landsgrannskoðanin tað vera undranarvert, at játtanirnar at byggja fyri ikki vóru brúktar.

[32] Upphæddirnar “at flyta til næsta ár” standa aftarlaga í prentaða landsroknskapinum. Í 2018 eru tølini at finna á síðu 206.
[33] Síða 200 í landsroknskapinum 2019.
[34] Síða 214 í landsroknskapinum 2020.

Í 2020 greiddi Almannamálaráðið frá, at seinkingar, broytt støðutakan o.a. hava verið orsøkin til, at játtanirnar hava ikki verið brúktar til nýbygging.

Í fíggjarlógini 2020 vóru 20 mió.kr. játtaðar til nakrar smærri verkætlanir, sum vóru í gongd, og arbeitt var við teimum størru verkætlanunum sambært verklagslógunum Ll. nr. 59/2018 og Ll. nr. 60/2018.

Í skrivi til Fíggjarnevndina í desember 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannamálaráðið, í sambandi við byggingina av heiminum í Reynstúni, kannaði um tað var mest skynsamt, at verklagslógir ikki verða lagdar fyri Løgtingið, fyrr enn verkætlan er liðug prosjekterað, boðin út og tilboð komin inn.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at sambært avtalu við Fíggjarmálaráðið, verður verklagslóg um verkætlanina í Reynstúni løgd fyri Løgtingið, tá ið verkætlanin er liðugt prosjekterað, arbeiðið boðið út og lisitiatiónin hevur verið, til tess at tryggja, at byggiverkætlanin er so væl fyrireikað og upplýst sum gjørligt, tá Løgtingið skal taka støðu til málið.

9.8 Almannaverkið, Trivnaðartænastur (LG 2018/212-0216)

9.8.1 Trivnaðartænastur

Í undanfarnum frágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av felagsrakstrinum fyri Trivnaðardepilin og roknskapin hjá Eind 1 í Trivnaðartænastunum.

Roknskapurin á høvuðskontu 12.21.6.09 er greinaður á staðartátt eftir sama leisti, sum Trivnaðartænasturnar eru býttar í eindir.

Reglur um vardar bústaðir

Heimild at seta á stovn sambýli er í Forsorgarlógini, Lbk. nr. 100/1988, har heitið er “Vardir bústaðir”. Í Eind 1 eru sambýlini “Kelduskákið” og “á Mýruvegi”.

Landsstýrismaðurin góðkennir staðseting, fysiskar karmar í mun til málbólk, fígging, kostnað og ábyrgdarbýti hjá vardum bústøðum. Landsstýrismaðurin hevur ásett nærri reglur um upptøku, leigurættindi, virksemi og gjøld sambært K. nr. 3/2005 “um skipan av bústovnum” og við rundskrivi nr. 9003 frá 1. januar 2009 “um skipan av sambýlum”.

Kunngerðin ásetir, at búfólk skulu rinda fyri húsaleigu og til felags útreiðslur. Gjaldið kann tó ikki fara upp um ta upphædd, sum svarar til veruligu útreiðslurnar av at reka sambýlið. Rundskrivið frá 2009 ásetir nærri reglur um, hvat búfólkini vanliga skulu rinda fyri, og hvat felagskontan skal brúkast til.

Almannaverkið hevði ásett eins gjald fyri orkunýtsluna hjá øllum sambýlum fyri at javnseta borgararnar, hóast orkunýtslan var ymisk.

Landsgrannskoðanin hevur áður gjørt vart við, at samhaldsfasta gjaldið samsvaraði ikki við ásetingarnar í kunngerðini og rundskrivinum, um at gjaldið ikki kundi vera hægri enn veruligu útreiðslurnar.

Í 2020 vísti landsstýrismaðurin á, at 1. januar 2021 kom Ll. nr. 72/2020 “um almannatrygd og tænastur” í gildi. Sambært § 48 í lógini ásetir landsstýrismaðurin reglur um áseting av húsaleigu. Arbeiðið við kunngerðini var farið í gongd og fór væntandi at verða liðugt til ársskiftið.

Í august 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at nærri reglur eru ásettar í K. nr. 221/2020 "um húsaleigu og felagsútreiðslur, skilhald o.a. á fyribils bústøðum og vardum bústøðum".

Nýggj kunngerð er lýst um húsaleigu o.a. á fyribils og vardum bústøðum.

Roknskaparviðurskifti
Almannaverkið hevur fyrr boðað frá, at stovnurin arbeiddi við einari felags roknskaparreglugerð fyri alt virksemið.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannaverkið væntaði, at dagføringin av roknskaparreglugerðini hjá Trivnaðartænastum, sum var partur av reglugerðini hjá Almannaverkinum, fór at verða liðug við árslok 2020.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Almannaverkið er ikki komið á mál við reglugerðini enn, og møguliga verður neyðugt at endurskoða arbeiðið, tí tað var grundað á eitt uppskot til nýggjan leist, sum Gjaldstovan arbeiddi við.

Roknskaparreglugerðin er enn ikki dagførd.

9.8.2 Felagsrakstur í Trivnaðardeplinum
Í seinastu frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin eisini greitt frá grannskoðan av felagsrakstrinum í Trivnaðardeplinum.

Merking av akførum
Í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum er ásett, at øll akfør hjá landinum skulu vera týðiliga merkt við navninum á tí stovni, sum akfarið hoyrir undir ella við búmerki stovnsins. Akstovan hevur eftirlit við, at bilarnir verða merktir, og kann í heilt serligum førum loyva undantøkum.

Ikki allir bilarnir hjá Almannaverkinum vóru merktir, og tey høvdu søkt um nøkur undantaksloyvi. Við árslok 2018 hevði Almannaverkið 97 akfør. Til tey var eitt undantaksloyvi givið, meðan fýra lógu til endaliga avgerð. Akstovan hevði skotið upp, at Fíggjarmálaráðið útgreinar krøvini til undantaksloyvi, tí var avgerð ikki tikin.

Ikki allir bilar eru merktir, og ikki øll undantaksloyvi eru fingin til vega.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at einki nýtt er í málinum.

9.8.3 Eind 1
Skipan av arbeiðstíð - at leggja vaktætlanir
Eindarleiðarar løgdu vaktætlanir fyri sína eind, og torført var at taka atlit at hvílutíðum í summum førum, tí starvsfólk kundu arbeiða í fleiri eindum. Sambært Almannaverkinum eigur stovnurin at halda hvílutíðarreglurnar, men verandi skipan til vaktir megnar ikki at handfara setanir, sum eru í fleiri støðum. Arbeitt var við einari loysn.

Almannaverkið hevur greitt frá, at eitt fakfelag hevur stevnt eftir yvirtíðargjaldi.

Enn eingin avgerð um yvirtíðargjald.

Sambært landsstýrismanninum var málið lagt fyri Gerðarrættin, og var fyri 27. og 28. mai 2021. Tað fyriliggur ikki nøkur avgerð í málinum enn.

9.8.4 Uppfylging av grannskoðan, Eind 4
Í seinastu frágreiðingunum hevur Landsgrannskoðanin umrøtt grannskoðan av Trivnaðartænastum, serliga Eind 4.

Vardir bústaðir
Sambært § 16, stk. 2, í forsorgarlógini ásetir landsstýrismaðurin *"nærri reglur um trygdarfyriskipanir á nevndu stovnum og skyldu at veita hesi tilboð til persónar,*

1. *sum sambært rættarúrskurði skulu sinniskannast,*
2. *sum sambært rættarúrskurði ella dómi skulu setast í vardan bústað ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað, ella*

3. *sum treyt fyri ákæruafturtøku ella royndarleysgeving verða settir í vardan bústað, ella vera undir eftirliti, undir hesum við møguleika fyri fyrisitingarliga at verða settir í vardan bústað."*

Eingin kunngerð var lýst sambært § 16, stk. 2.

Almannaverkið helt tað vera átrokandi, at reglur vóru gjørdar viðvíkjandi trygdarfyriskipanum í vardum bústøðum og viðvíkjandi skyldu at veita tilboð til persónar, sum eru dømdir at vera undir eftirliti av Almannaverkinum ella at eru settir í vardan bústað.

Í 2017 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Almannamálaráðið var í holt við at gera nýggja lóggávu um almannahjálp, tænastur, rættartrygd og tvingsil. Landsstýrismaðurin ætlaði at leggja lógaruppskotið fyri Løgtingið í tingsetuni, og at lóggávan skuldi fáa virknað frá 1. januar 2019.

Í 2020 greiddi landsstýrismaðurin frá, at 1. januar 2021 fór Ll. nr. 72/2020 "um almannatrygd og tænastur" at koma í gildi. Sambært § 49, stk. 1, hevur Almannaverkið skyldu til at veita sosialnámsfrøðiliga viðgerð og fyribilsbústað sambært § 45 ella vardan bústað sambært § 46 til persónar, ið lúka somu treytir, ið vóru nevndar í oman fyri nevndu § 16, stk. 2, í áður galdandi forsorgarlógini (móttøkuskylda). Sambært § 49, stk. 3, ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um sosialnámsfrøðiliga viðgerð, ætlan, samstarv og samskipan við aðrar myndugleikar o.a. Arbeiðið var farið í gongd og skuldi eftir ætlan vera liðugt til ársskiftið.

Sambært § 50, stk. 1, í nýggju lógini kunnu fyribilsbústaðir sambært § 45 og vardir bústaðir sambært § 46 skipast sum tryggjað búfyriskipan. Sambært § 50, stk. 8, ásetir landsstýrismaðurin nærri reglur um skipan og góðkenning av tryggjaðum búfyriskipanum, umframt nærri reglur um treytir, gildistíð, uppihald og karmar kring tryggjaðar búfyriskipanir. Sambært landsstýrismanninum skuldi arbeiðið eftir ætlan vera liðugt til ársskiftið 2020.

Nýggj kunngerð um skipan o.a. av tryggjaðum búfyriskipanum er lýst.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at nærri reglur eru ásettar í K. nr. 222/2020 "um skipan, góðkenning o.a. av tryggjaðum búfyriskipanum sambært § 50 í lóg um almannatrygd og tænastur".

Skipan av bústovnum

Áðrenn 2013 vórðu bústovnar skipaðir eftir kunngerð, sum hevði heimild í § 16, stk. 2 og 3 í forsorgarlógini. Í 2013 var § 16 orðað av nýggjum, og § 27 sett í lógina. Landsstýrismaðurin skuldi sambært stk. 5 áseta nærri reglur um virksemi, upptøku og gjald, og um treytir fyri at veita tilboð uttanlands. Eingin kunngerð var lýst. Almannaverkið helt tað vera átrokandi, at reglur vórðu ásettar.

Í 2020 vísti landsstýrismaðurin á, at 1. januar 2021 kom Ll. nr. 72/2020 "um almannatrygd og tænastur" í gildi. Sambært § 48 í lógini skal landsstýrismaðurin áseta reglur um áseting av húsaleigu. Arbeiðið við kunngerðini var farið í gongd og skuldi væntandi verða liðugt til ársskifti.

Nýggj kunngerð er lýst.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at nærri reglur eru ásettar í K. nr. 221/2020 "um húsaleigu og felags útreiðslur, skilhald o.a. á fyribils bústøðum og vardum bústøðum".

Sambýli

Í 2017 ásannaði Almannamálaráðið, at tað vóru ikki nóg nágreiniligar ásetingar um eftirlitsskyldu í verandi regluverki, og at kunngerðirnar vóru ikki dagførdar samsvarandi samanleggingunum av stovnum o.ø. Sambært landsstýrismanninum fóru reglur um eftirlit at verða settar í nýggju lóggávuna, soleiðis at tað bleiv greitt, hvør hevði eftirlitsskylduna, og hvat eftirlitið skuldi fevna um. Kærumøguleikar fóru eisini at verða í nýggju lóggávuni.

Í 2020 vísti landsstýrismaðurin á, at 1. januar 2021 fór Ll. nr. 72/2020 “um almannatrygd og tænastur” at koma í gildi. Sambært § 69 í lógini hevur landsstýrismaðurin eftirlit. Sambært stk. 2, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um eftirlit. Arbeiðið við kunngerðini var farið í gongd.

Sambært landsstýrismanninum eru nærri reglur ásettar í K. nr. 226/2020 “um námsfrøðiligt eftirlit”.

Nýggj kunngerð um námsfrøðiligt eftirlit er lýst.

9.8.5 Lønargrannskoðan í Eind 6

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað lønir hjá Eind 6 hjá Trivnaðartænastuni. Í 2020 eru lønarútreiðslurnar 89% av samlaðu útreiðslunum.

Gjøgnumgongd av lønarmálum

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um setanarpolitikkurin er hildin, um lýsingar, umsóknir, prógv, tilmælir, setanarskriv v.m. vóru tøk, og um lønirnar í mai 2020 vóru rættar í mun til sáttmála og vaktætlan.

Einki var at finnast at nýggjaru setanunum. Størvini eru lýst leys, og umsóknir, prógv o.a. vóru í lønarmálunum. Í onkrum máli manglaði skjalprógv, tí starvsfólk eru sett av sjálvsognarstovnum, sum seinni eru vorðnir partur Trivnaðartænastuni.

Landsgrannskoðanin mælti til at dagføra lønarmálini, soleiðis at Almannaverkið í minsta lagi hevur skjalprógv fyri, at starvsfólkini fáa rætta løn og hava kravdu útbúgvingina. Sambært Almannaverkinum eru tey í holt við at dagføra lønarmálini.

Landsgrannskoðanin samanhelt lønarseðlarnar fyri mai 2020 við útskriftir úr Vaktplan. Vit høvdu nakrar viðmerkingar og spurningar, sum Almannaverkið hevur svarað.

Eitt starvsfólk var 1. september 2018 farið upp í fulla tíð, eftir at hava arbeitt ¾ tíð. Almannaverkið hevði ikki broytt føstu mánaðarlønina, tó at viðkomandi sambært vaktarætlanini hevur arbeitt heilan norm og til tíðir meirtímar. Starvsfólkið hevði tí fingið ov lítið í løn síðani september 2018.

Sambært Almannaverkinum er feilurin rættaður, og starvsfólkið hevur fingið tað, ið viðkomandi átti á. Landsgrannskoðanin vísti á, at starvsfólkið, sum parttíðarsett, hevur havt rætt til eftirløn av meirtímunum, og mælti til at kanna um eftirlønin var røtt.

Landsgrannskoðanin mælti eisini til, at Almannaverkið styrkir eftirlitið at byrgja fyri feilum.

Starvsfólk í fulltíðarstørvum hava fingið meirtímar útgoldnar; eitt starvsfólk átti yvir 100 tímar á í apríl og 170 tímar í mai 2020. Sambært Almannaverkinum var tað ein serstøk hending, sum gjørdi, at viðkomandi brádliga átti so nógvar tímar.

Fulltíðarsett starvsfólk fáa meirtíð.

Spurt, um avgerð er tikin um meirtíð og yvirtíð hjá fulltíðarsettum starvsfólkum, hevur landsstýrismaðurin svarað, at endalig avgerð er enn ikki tikin. Málið er enn til viðgerðar í Gerðarrættinum.

9.8.6 Eind 11 í Trivnaðartænastum

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað Eind 11, sum er í Suðuroy. Vit vitjaðu verkstaðið á Bakka, Eiðisgarð, Bárðarfløtt, og á frítíðartilboðnum.

Inntøkur

Verkstaðið á Bakka selur lutir, ið verða gjørdir á verkstaðnum. Inntøkurnar verða skrásettar í bókhaldinum, tá ið rokning er gjørd, og ikki tá ið vøra er latin.

Søla upp á borg og elektroniskar rokningar koyra í hvør sínari skipan.

Landsgrannskoðanin helt tað vera óheppið, at søla upp á borg og elektroniskar rokningar koyra í hvør sínari skipan. Í bókhaldsskipanini kunnu vit tí ikki fylgja við, um øll søla er inntøkuførd. Almannaverkið hevur greitt frá, at øll søla á verkstaðnum verður inntøkuførd, men at tey fara at skipa soleiðis fyri, at rokningarnar eru í nummarrøð. Tað ger at lættari verður at kanna, um øll søla er inntøkuførd.

Eiðisgarður selur eisini nakað av virkaðum lutum. Sambært starvsfólkunum eru bert smávegis inntøkur, og skulu tær brúkast til at keypa tilfar fyri. Eingin uppgerð var nakrantíð gjørd av sølu og keypi. Peningurin frá søluni var á skrivstovuni. Landsgrannskoðanin vísti á, at kontanta upphæddin var í størra lagi at hava sum vekslipening. Vit mæltu til, at stovnurin fekk ein tryggan peningakassa, skrásetir søluna og goymir kvittanir.

Almannaverkið tekur undir við tilmælinum. Stovnurin hevur útvegað sær peningakassa, førir roknskap í rokniarki og goymir kvittanir.

Bilar

Tveir av teimum trimum bilunum hjá Eind 11 eru merktir við búmerki. Bilarnir verða brúktir at keypa inn við og at koyra búfólkini við.

Hølisviðurskifti

Eind 11 liggur nærum øll í Vági. Starvsfólkini á Verkstaðnum á Bakka vístu á, at gjóstur var í parti av bygninginum, og kunnaðu um at Landsverk ætlar at dagføra ein part av húsinum.

Felagshølini hjá Eiðisgarði eru í sama bygningi sum røktarheimið Hamragarður. Bygningurin er rímiliga nýggjur, men ávísir manglar hava verið, sum enn ikki eru bøttir. Búfólkini hava egna íbúð við køki/alrúmi, kamari, gongd og baðirúmi. Í einari íbúð manglaði ein rútur. Sambært starvsfólkunum var rúturin tikin úr, fyri at kanna vindeygakarmin. Í felagshølunum vóru flestu manglarnir, at rútar og terrassuhurðar ikki virka.

Frítíðartilboðið í Vági er í einum sethúsum, ið Vágs kommuna eigur. Tveir borgarar brúka tilboðið eftir skúlatíð. Kjallarin og ovastaloftið eru ikki í brúki. Talan hevur verið um at taka kjallaran í brúk, og harvið víðka tilboðið. Sethúsini eru gomul, og treingja til dagføringar, men sýntust at nøkta tørvin, tá ið tað í løtuni ikki er brúk fyri atgongd við koyristóli.

Sambýlið á Bárðarfløtti er í sethúsum, sum eru lagað til at vera sambýli. Fleiri av búfólkunum brúka koyristól ella gangitól, og orsakað av at búrúmini og felagshølini eru í ovaru hæddini, var neyðugt at fáa lyftu í húsini. Starvsfólkahølini eru í niðaru hæddini.

Ein íbúð er í niðaru hæddini, ið hevur egna inngongd. Búfólkið kann tó ikki brúka ta inngongdina, tí har standa vognar, koyristólar o.a. Húsini eru ikki bygd til at vera sambýli og hava ikki bestu umstøður til at hýsa vognum, koyristólum o.t.

Eind 11 hevur eisini eitt dag- og umlættingartilboð, sum Landsgrannskoðanin ikki vitjaði.

UAP[35] og heilivágur

Leiðslan hevur skrivstovu á sambýlinum á Bárðarfløtti. Í tí hølinum var m.a. pengaskáp og skáp til heilivág. Landsgrannskoðanin minti á, at skrivstovan skal altíð vera læst, tá ið starvsfólkini fara frá hølunum.

UAP-toymið hjálpir nøkrum búfólkum at umsita pensjónina. Tey búfólkini fáa lummapeningin í kontantum. Búfólk, ið fáa hjálp frá avvarandi, hava gjaldkort til lummapening.

[35] UAP: Umsiting av pensjónum.

9.9 Kassaeftirlit á Verkstaðnum Vón (LG 2020/212-0216)

Landsgrannskoðanin hevur verið á ófráboðaðum kassaeftirliti á Verkstaðnum Vón. Forskotskassin er skrásettur í Búskaparskipan landsins og er býttur í stovnskassa, handil og kantinu. Kassahámarkið er 6.000 kr. Í kantinukassanum var ein minni kassamunur.

Framleiðsludeildirnar skráseta søluna á fylgiseðlar, sum tær senda til fíggjardeildina, ið fakturerar. Landsgrannskoðanin mælti til, at leggja søluseðlarnar í nummarrøð, og at rættaðir seðlar eisini eru tøkir. Almannaverkið tók undir við tilmælinum.

Sambært landsstýrismanninum hevur Almannaverkið gjørt mannagongdir fyri sølu upp á rokning, sum m.a. fevnir um, at allir fylgiseðlar skulu liggja í nummarrøð; eisini fylgiseðlar, sum ikki verða brúktir.

9.10 Felagskassar (LG 2020/212-0216)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað roknskapirnar 2020 fyri felagskassarnar hjá sambýlunum undir Almannaverkinum. Búfólkini á einstøku sambýlunum eiga felagskassarnar. Tað er annað árið, at Landsgrannskoðanin grannskoðar roknskapirnar hjá felagskassunum.

Endamálið við felagskassunum er, at búfólkini skulu rinda tað, sum vanligi raksturin av sambýlinum kostar. Størstu útreiðslurnar eru til mat og drykkjuvørur. Reglur um umsiting av felagskassunum eru í K. nr. 2/2005 og rundskrivi nr. 9003/2009. Bókhaldið er í Búskaparskipan landsins undir "ogn og skuld hjá øðrum", og vanlig krøv eru til roknskap og grannskoðan.

Fíggjarstøðan rættari nú.

Samanumtikið geva roknskapirnir eina rættvísandi mynd av virkseminum í 2020. Samanborið við 2019 eru stórir batar viðvíkjandi rættleikanum av fíggjarstøðuni. Enn eru tó nøkur ivamál og feilir; harímillum at vøru- og tænastuskuld ikki sæst í einstaka felagskassanum, og at nakrar peningastovnskontur ikki eru í samsvari við kontuavrit frá bankunum pr. 31. desember 2020.

9.11 Fyribils forsorgarhjálp § 9 (LG 2020/212-217)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað fyribilshjálp við grundarlagið í forsorgarlógini, tilhoyrandi kunngerðum og innanhýsis mannagongdum hjá Almannaverkinum. Játtanin er á høvuðskontu 12.21.7.01, undirkontu 01.

Endamálið við at veita fyribils fíggjarliga hjálp er at forða fyri, at lívskorini hjá persóni og familju hansara versna munandi, tá ið tey í eitt skifti ikki eru før fyri at vinna sær og sínum til uppihalds. Treytirnar eru tær somu, uttan mun til um søkt verður um hjálp vegna eina almannahending ella vegna arbeiðsloysi.

Við stakroyndum kannaðu vit nøkur útgjøld í 2019, hvussu Almannaverkið tryggjar sær, at móttakarar lúka treytirnar fyri at fáa fyribilsveiting, og um útgoldnu upphæddirnar eru rættar sambært lóg og kunngerð. Vit kannaðu eisini allar rættingarnar í Búskaparskipan landsins.

Lógargrundarlag

Ásetingar um fyribilshjálp til uppihald eru í forsorgarlógini Lbk. nr. 100/1988[36] og í vegleiðingum og skrivligum mannagongdum hjá Almannaverkinum.

[36] Ikki longur galdandi, avloyst av Ll. nr. 72/2020.

Fyribilsveiting er heimilað í § 9 í forsorgarlógini, og í stk. 2, eru ásetingar um, hvussu stuðulin verður veittur, t.e. eftir: forsyrgjaraskyldu mótvegis børnum, um persónur býr einsamallur ella er sambúgvandi og eftir aldri á persóni. Hevur umsøkjari fleiri enn 2 børn at uppihalda, kann hann fáa hægri veiting í avmarkað tíðarskeið. Eisini er møguligt at fáa bústaðarískoyti til hægri bústaðarútreiðslur, um persónur hevur tørv á bústaði av ávísum slagi vegna djúptøknar sálarligar trupulleikar, sosialar trupulleikar ella likamligt brek. Støddin á hækkaðu veitingini verður ásett við heimild í K. nr. 13/2013 "um ískoyti til høgar bústaðarútreiðslur".

Fyribilsveiting er ein føst upphædd, sum er skattskyldug, og er ætlað til mat, klæði og fastar útreiðslur. Hægra veitingin til forsyrgjarar av børnum skal eisini nøkta tørvin hjá børnunum til mat, klæði, frítíðarítriv o.t.

Fyri at umsøkjari skal kunna fáa fyribilshjálp, skulu hann og hjúnafelagin hava troytt sínar arbeiðsmøguleikar. Høvuðsreglan er, at forsorgarhjálp kann ikki veitast fólki, sum eru undir útbúgving, men undantøk eru heimilað.

Ein fyritreyt fyri fíggjarligari hjálp eftir forsorgarlógini er, at hvørki umsøkjari ella hjúnafelagi eiga ogn av týdningi. Undantaksvís kann síggjast burtur frá minni ogn, sum kann varðveitast við atliti at bústaðar-, vinnu- ella útbúgvingarendamáli. Persónar, sum eiga ogn, ið kann nøkta fíggjarliga tørvin, skulu brúka ognina, áðrenn hjálp verður veitt eftir forsorgarlógini.

Sambært forsorgarlógini skal ein meting gerast av, um onnur hjálp skal veitast, í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir at fyribilshjálpin var játtað. Tá verður atlit tikið at, um persónurin lýkur treytirnar fyri fyriskipan sambært lóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Sambært leiðbeining hjá Almannaverkinum eigur fyribilshjálp at halda uppat, so skjótt sum til ber. Høvuðsreglan er, at hjálpin í mesta lagi kann veitast í 12 mánaðir, men tað eru framtíðarútlitini hjá tí einstaka, ið eru avgerandi fyri, hvussu langt tíðarskeiðið kann blíva.

Roknskapartøl

Játtanin á høvuðskontu 12.21.7.01 er ein nettojáttan. Sambært § 40, stk. 3, í forsorgarlógini endurrinda kommununnar landinum útreiðslur fyri forsorg vegna vantandi barnaansing.

Roknskapartøl 2019 og 2020 á undirkontu 01 "Fyribils uppihaldsveiting":

t.kr.

Heiti	2019	2020
Tilskot til einstaklingar	39.499	36.940
Flyting frá kommununum til landið	-296	-359
Tilsamans	**39.203**	**36.581**

Veitingarnar verða roknaðar út sum prosentpartur av dagpeningaupphæddini uttan frítíðarløn[37]. Frá 1. mai 2019 vóru upphæddirnar til fyribilshjálp eftir § 9 í forsorgarlógini:

	% av dagpeningaupph.	kr./mðr.
Einsamallur forsyrgjari (ei aldurstreyt)	90%	16.491
Sambúgvandi forsyrgjari (ei aldurstreyt)	70%	12.826
Einsamallur ikki-forsyrgjari > = 25 ár	75%	13.742
Sambúgvandi ikki-forsyrgjari > = 25 ár	50%	9.162
Ikki-sambúgvandi við foreldur < 25 ár	40%	7.329
Sambúgvandi við foreldur < 25 ár	22%	4.031

[37] Hægsta dagpeningaveiting er í mesta lagi 80% av lønini sambært sáttmála ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Í 2019 eru 5% løgd afturat upphæddini til bundna eftirløn. Eftirlønargjaldið verður rindað til ein góðkendan eftirlønarveitara, samstundis sum veitingin verður flutt.

Grannskoðan við stakroyndum

Landsgrannskoðanin valdi 10 stakroyndir úr Heildarskipanini til at kanna nærri. Samanumtikið var einki at finnast at skjalfestingunum av málsviðgerðunum.

Í Búskaparskipan landsins eru 296 t.kr. skrásettar sum krøv til kommunur fyri vantandi barnaansing. Sambært Almannaverkinum hevur fíggjardeildin eftirlit við, at rokningarnar verða goldnar.

Í 2019 eru fleiri rættingar í Búskaparskipan landsins, t.e. útgjøld, annulleraði útgjøld og inngjøld; Landsgrannskoðanin hevur eftirkannað allar rættingarnar. Í flestu førum var upprit í málsbókini, ið vísti til grundgevingarnar. Landsgrannskoðanin hevði nakrar spurningar til Almannaverkið, ið tey hava svarað.

Onkuntíð ger Almannaverkið avtalur við borgarar um afturgjald av veiting. Tá stovna tey avtalurnar sum innkrevjingarmál. Útgjaldsdeildin fylgir við, um avtalurnar verða hildnar.

9.12 Hjálparamboð v.m. § 18 (LG 2019/212-0217)

Í seinastu frágreiðing umrøddi Landsgrannskoðanin játtanina til hjálparamboð v.m. Heimild til hjálparamboð var í § 18 í forsorgarlógini, Lbk. nr. 100/1988.

Játtanin er á høvuðskontu 12.21.7.01, undirkontu 06. “Hjálparamboð v.m. § 18”, og er til stuðul til persónlig hjálparráð og hjálparamboð til láns, keyp av bili og broytingar í heiminum sambært. Í 2019 vóru 31 mió.kr. brúktar.

Almannaverkið málsviðger allar umsóknir um hjálparamboð v.m. í Heildarskipanini, og avgreiðir útreiðslurnar til persónlig hjálparráð tann vegin.

Umsóknir um hjálparamboð verða eisini málsviðgjørdar í Heildarskipanini, men tær játtanirnar hava ikki altíð nakra útreiðslu við sær, tí játtaða tólið kann vera á goymslu. Tilsvarandi er ein útreiðsla til hjálpartól ikki neyðturviliga knýtt at einari játtan. Er tørvur á tólum at hava á goymsla, keypir Hjálpartólamiðstøðin tey.

Stuðul til bilar v.m. og útreiðslur til broytingar í heimum verða avgreiddar ígjøgnum Búskaparskipan landsins. Í báðum førum helt Landsgrannskoðanin, at játtan eigur at vera knýtt at útreiðsluni.

Útreiðslur eiga at vera knýttar at einari játtan.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at allar rokningar fyri bilar og bústaðarbroytingar, nú hava málsnummar á. Málsnummarið er skrásett í feltinum til viðmerking.

Hjálpartól

Goymslan hjá Hjálpartólamiðstøðini er ikki skrásett í Búskaparskipan landsins, men Almannaverkið brúkar Navision til goymslustýring.

Landsgrannskoðanin valdi nakrar stakroyndir úr goymslulistanum, og kannaði rætt-leikan av honum, saman við starvsfólkum á Hjálpartólamiðstøðini.

Goymslustýringin er ikki nóg neyv til at tryggja virðini og hava greiði á, hvar hjálpartólini eru. Landsgrannskoðanin mælti til, at goymslan og goymslulistarnir vórðu dagførdir regluliga og í minsta lagi eina ferð um árið, og at Almannaverkið orðaði vegleiðing um,

Goymslustýringin er ikki nóg neyv til at tryggja virðini.

hvat skal skrásetast á goymslulistanum. Almannaverkið tók undir við tilmælinum og ætlaði at eftirhyggja skipanina.

Landsgrannskoðanin bað eisini um lista yvir hjálpartól, sum pr. 31. desember 2019 vóru úti hjá borgarum. Sambært Almannaverkinum var ivasamt, hvussu neyvur listin var, tá ið goymslustýringin ikki var fullfíggjað. Landsgrannskoðanin eftirkannaði tí ikki rættleikan av listanum yvir hjálpartól, ið vóru lænt út til borgarar.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sambært Almannaverkinum, er listin gjørdur og vísir hjálpartól, sum eru lænt út til borgarar pr. 01. september 2021.

9.13 Ískoyti til hoyritól sambært § 18b (LG 2020/212-0217)

Landsgrannskoðanin hevur grannskoðað ískoyti til hoyritól á høvuðskontu 12.21.7.01 "Vanlig forsorg, lógarbundin játtan" undirkonta 09 "Hoyritól". Í 2019 vóru 4,8 mió.kr. goldnar og í 2020 vóru 4,2 mió.kr. goldnar. Hoyriklinikkin og bókhaldið á Landssjúkrahúsinum umsita játtanina.

Endamálið var at kanna, um roknskapartølini eru røtt, t.v.s. at útreiðslur og inntøkur hava heimild í lóg og kunngerð, um roknskaparliga skjalfestingin er nøktandi, og at kunna okkum nærri um umsitingina av ískoytinum, sum verður latið, tá ið persónur keypir sær hoyritól frá privatum veitara.

Lógargrundarlag og mannagongdir

Við heimild í § 18c í forsorgarlógini[38] hevur landsstýrismaðurin lýst K. nr. 96/2008 "um stuðul til hoyritól". Sambært kunngerðini verður stuðul veittur til hoyritól um persónur hevur niðursetta hoyrn og er vístur til hoyritólaviðgerð av serlækna.

Fyri at fáa stuðul til hoyritól skal tólið vera neyðugt fyri at vera í arbeiði, bøta munandi um varandi avleiðingar av sjúkuni/brekinum ella lætta munandi um í gerandisdegnum.

Hoyriklinikkin á Landssjúkrahúsinum hevur skrá yvir allar brúkarar av hoyritólum, bæði tey, ið hava fingið tól frá Hoyriklinikkini og tey, ið hava keypt tól frá privatum veitarum. Í 2019 fingu 1539 persónar hoyritól.

Egingjaldið er 2.000 kr. fyri hvørt hoyritól.

Stuðul til hoyritól kann ikki verða veittur oftari enn fjórða hvørt ár. Persónurin skal rinda eitt egingjald fyri hvørt hoyritól, í mesta lagi 2.000 kr. Veitingin av hoyritóli frá Hoyriklinikkini er íroknað kanningar, viðlíkahald og umvælingar, men ikki battarí o.t.

Hoyriklinikkin tekur avgerð um, hvat besta og bíligasta tólið er. Persónur kann ikki velja at fáa eitt dýrari hoyritól frá Hoyriklinikkini við at rinda meirkostnaðin sjálvur.

Serlæknaváttan

Vanliga mannagongdin fyri at fáa hoyritól er, at kommunulækni ávísir persón til serlæknan á Landssjúkrahúsinum, og um serlæknin metir, at persónur hevur tørv á hoyritóli, kunnar hann viðkomandi um Hoyriklinikkina á Landssjúkrahúsinum og um møguleikan at fara til privatan veitara.

Sambært Hoyriklinikkini er ikki neyðugt við nýggjari serlæknaváttan, tá ið 4 ár eru liðin og nýtt hoyritól kann veitast, um niðursetta hoyrnin er varandi og ikki er broytt.

Kunngerðin um stuðul til hoyritól setir ikki krav um, hvør serlækni í oyra-, nøs- og hálssjúkum skal vísa til serviðgerð, men sambært Landssjúkrahúsinum tekur Hoyriklinikkin ikki persónar inn við váttan frá privatstarvandi serlækna. Fólk, sum hava

[38] Lbk. nr. 100/1988.

hoyritól frá privatum veitara, koma eisini á Hoyriklinikkina at fáa nýtt, eftir at tólið er vorðið 4 ár.

Privatur veitari

Um persónur keypir hoyritól frá privatum veitara, fær hann ískoyti frá Hoyriklinikkini. Ískoytið er í mesta lagi 4.000 kr. fyri hvørt hoyritól, men kann ikki vera hægri enn veruligi kostnaðurin av hoyritólunum íroknað kanning, viðlíkahald og umvælingar. Ískoyti verður ikki veitt til keyp av battaríum ella filtrum.

Stuðul til hoyritól frá privatum veitara er í mesta lagi 4.000 kr. fyri hvørt hoyritól.

Ein privat fyritøka selur hoyritól í Føroyum. Fyritøkan hevur egnan serlækna, sum kannar og váttar, at persónur hevur somikið niðursetta hoyrn, at viðkomandi hevur brúk fyri hoyritóli.

Hoyriklinikkin fær faktura frá fyritøkuni upp á hvørt einstakt ískoyti. Á fakturunum er ikki upplýst, hvussu nógv keypari hevur rindað, ella hvat hann hevur rindað fyri. Fyri at tryggja, at upphæddirnar, sum landskassin rindar eru rættar, mælti Landsgrannskoðanin Hoyriklinikkini til at útvega avrit av samlaðu rokningini. Hoyriklinikkin var í samskifti við privata veitaran um tey viðurskiftini.

Bókhaldsskjøl vísa ikki samlaða kostnaðin fyri hvørt hoyritól.

Bókhald

Talan er í høvuðsheitum um trý sløg av bókingum: keyp av hoyritólum, egingjøld fyri hoyritól, og ískoyti til hoyritól, ið verða veitt av privatum veitara.

Egingjøldini verða í flestu førum goldin við gjaldkorti og bókað eftir bankauppgerðum. Tað er tí ikki møguligt at eyðmerkja, hvør hevur goldið. Eisini eru fleiri kreditnotur og rættingar; tí er sera torført at kanna t.d., hvussu nógv hoyritól eru keypt, ella um egingjøldini eru røtt.

Ikki møguligt at eftirkanna rættleikan av bókingum.

Landsgrannskoðanin mælti til at bóka soleiðis, at møguligt er at stemma av.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landssjúkrahúsið broytt mannagongdirnar soleiðis, at tað er lættari at tryggja samanhangin millum útreiðslur og inngjøld fyri einstøku hoyritólini.

Goymslustýring

Hoyriklinikkin hevur ikki skipaða goymslustýring, men starvsfólkini kenna arbeiðið somikið væl, at tey vita, hvat stovnurin eigur inni.

Eingin skipað goymslustýring.

Landsgrannskoðanin kann ikki sanna, um virðini eru til staðar, tá ið stovnurin ikki hevur skipaða goymslustýring. Vit kunnu ikki eftirkannað, um ein útreiðsla er játtað sambært galdandi reglum, tá ið útreiðslan ikki kann eyðmerkjast til eina játtan ella finnast á goymslu. Sambært Landssjúkrahúsinum fara tey í 2021 í tættari samstarv við innkeypsfelagið AMGROS, og tað fevnir millum annað um meira skipaða goymslustýring.

Egingjald

Egingjøld fyri hoyritól verða vanliga rindað við móttøkuna á Hoyriklinikkini, har stovnurin hevur gjaldkortterminal. Summi rinda við bankaflyting, og onkur við kontantum peningi. Hoyriklinikkin hevur egnan kassa, sum verður gjørdur upp umleið tvær ferðir um árið.

Í nøkrum førum hevur Hoyriklinikkin gjørt avtalu við brúkarar um at rinda egingjaldið í smáum, tá ið teir ikki megna at rinda alt í einum. Landsgrannskoðanin ivaðist í, um heimild er at lata hoyritól, uttan at alt egingjaldið er goldið. Sambært landsstýrismanninum hevur Landssjúkrahúsið greitt frá, at eingin ítøkilig lógarheimild er til slíkar avtalur, og tí verður farið burtur frá teimum.

Hoyritól latin, uttan at alt egingjaldið er goldið.

9.14 Arbeiðsfremjandi tiltøk (LG 2017/212-0217)

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum frágreiðingum umrøtt grannskoðan av høvuðskontu 12.21.7.02 “Arbeiðsfremjandi tiltøk”.

Avtalað løn sambært § 24 í Ll. nr. 63/2012
Landsgrannskoðanin kannaði nøkur mál viðvíkjandi løn, sum arbeiðstakarar kunnu avtala við fyritíðarpensjónistar, og sum er lægri enn sáttmálaløn. Nøkur mál snúðu seg um persónar í starvi í royndartíð, uttan løn. Landsgrannskoðanin ivast í, um heimild er fyri royndartíð uttan løn í fyriskipanini.

Tá ið ásett er í lógini, at avtala skal gerast í samráði við viðkomandi fakfelag, helt Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at fakfeløg verða kunnað í hvørjum einstøkum føri.

Landsstýrismaðurin var samdur við Landsgrannskoðanina, at tað hevði týdning, at fakfeløg vórðu kunnað í hvørjum einstøkum føri, men lógin fyriheldur seg ikki til, hvør hevur ábyrgd av at kunna fakfelagið í sambandi við eina avtalu. Landsstýrismaðurin ætlaði at taka málið upp við Almannaverkið, soleiðis at fakfeløgini verða kunnað um einstøku avtalurnar á ein smidligan hátt.

Í 2019, 2020 og aftur í september 2021 kunnaði landsstýrismaðurin um, at einki nýtt er í málinum.

10. Fíggjarstøða

10.1 Fíggjarstøða (LG 2020/300-0000)

Fíggjarstøðan í landsroknskapinum er ein samandráttur av fíggjarstøðuni hjá øllum "vanligum" landsstovnum, sum eru við í fíggjarlógini. Harafturat eru nakrir postar, sum eru felags, t.d. størsti parturin av tøka peninginum og skuldini. Fíggingargrunnurin frá 1992 er við undir "kapitalinnskot". Partafeløg, sum landið eigur, eru tikin við undir "virðisbrøv".

Landsgrannskoðanin hevur í stóran mun bygt grannskoðanina av postum í fíggjarstøðuni 2020 á tey eftirlit og tær avstemmanir, ið Gjaldstovan støðugt fremur.

Fíggjarstøðan við árslok 2016 til 2020.

mió.kr.

	2016	2017	2018	2019	2020
OGN					
Kapitalinnskot	460	487	390	399	402
Virðisbrøv	1.521	1.556	1.591	1.626	1.791
Útlán	122	121	109	101	91
Áogn o.a.	543	601	665	657	735
Tøkur peningur	2.905	3.479	3.666	3.478	4.729
Ogn tilsamans	**5.551**	**6.244**	**6.421**	**6.261**	**7.748**
SKULD					
Langfreistað skuld	4.124	5.133	4.608	2.472	4.069
Stuttfreistað skuld	1.951	1.021	1.060	2.445	2.438
Útjavningarkonta	-524	90	753	1.344	1.241
Skuld tilsamans	**5.551**	**6.244**	**6.421**	**6.261**	**7.748**

10.1.1 Kapitalinnskot (LG 2020/300-0102)

Kapitalinnskot fevnir um Fíggingargrunnin frá 1992.

Við árslok 2020 fevnir kapitalinnskotið um Fíggingargrunnin frá 1992, sum eigur 33,4% av P/f BankNordik.

t.kr.

Kapitalogn í landsfyritøkum	2018	2019	2020
Kapitalogn við ársbyrjan	487.311	389.911	399.130
Javning, kapitalognin samsvarar við eginognina í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum	-97.400	9.219	3.007
Kapitalogn við ársenda	**389.911**	**399.130**	**402.137**

Kapitalognin verður javnað eitt ár afturút.

Í 2019 hækkaði kapitalognin í Fíggingargrunninum 9,2 mió.kr., frá 389,9 mió.kr. til 399,1 mió.kr., og í 2020 hækkaði hon 3,0 mió.kr. til 402,1 mió.kr. Kapitalognin verður javnað hvørt ár, soleiðis at hon samsvarar við eginpeningin í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum fyri roknskaparárið frammanundan. Sostatt verður ognin í landsroknskapinum javnað eitt ár afturút.

Av tí at roknskapurin hjá Fíggingargrunninum fyri farið roknskaparár ikki er tøkur fyrr enn eftir, at landsroknskapurin er liðugur, og fyri ikki at bóka eitt fyribils tal út frá einari

meting, hevur Gjaldstovan valt at nýta tølini úr seinast lidna roknskapinum hjá grunninum.

Í ársfrásøgnini hjá Fíggingargrunninum fyri 2019 var ognarparturin í P/f BankNordik bókaður til 364,3 mió.kr., sum svaraði til kursvirðið á partabrøvunum 31. desember 2019. Virðið var 1,7 mió.kr. hægri enn við árslok 2018, tá ið kursvirðið var 362,6 mió.kr. Leiðslan greiðir í ársfrágreiðingini frá, at kursurin á partabrøvunum hjá BankNordik hækkaði úr 108,5 við árslok 2018 í 109 við árslok 2019.

Við árslok 2020 var eginpeningurin í Fíggingargrunninum 547,0 mió.kr., ella 144,8 mió.kr. hægri enn við árslok 2019. Sambært ársfrásøgnini 2020 er høvuðsorsøkin til hækkingina, at virðið á partabrøvunum í BankNordik er hækkað. Við árslok 2020 var kursurin 152.

Fíggingargrunnurin frá 1992 fór í solventa likvidatión í desember 2020.

Fíggingargrunnurin fekk ikki útgoldið vinningsbýti frá BankNordik í 2020. Grunnurin fór í solventa likvidatión 22. desember 2020.

Landsgrannskoðanin hevur samanborið tølini 2019 og 2020 í roknskapinum hjá Fíggingargrunninum frá 1992 við tølini í landsroknskapinum, umframt at vit hava eftirroknað ognarpartin í BankNordik. Landsgrannskoðanin hevur einki at finnast at.

Løgtingið hevur mælt til at fáa greiði á roknskaparpostinum og at fáa skrásett grunnar o.l.

Í nógv ár hevur Løgtingið mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum, t.d. sum "Kapitalogn í landsfyritøkum".

Í 2013 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at hesir grunnar verða ikki tiknir við í landsroknskapin, men verða partur av samlaða almenna roknskapinum.

Í 2014, 2015 og aftur í 2016 greiddi landsstýrismaðurin frá, at arbeitt var framvegis við spurninginum, hvussu samlaði almenni roknskapurin skuldi gerast upp. Ætlanin var, at Frítíðargrunnurin, eins og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, skuldi bóka beinleiðis í Búskaparskipan landsins.

Grunnarnir eru tiknir við sum notur til landsroknskapin undir partinum "Eksternir grunnar". Í framtíðini er ætlanin, at eginpeningurin í Húsalánsgrunninum, Búnaðargrunninum, Granskingargrunninum, Mentanargrunninum og Vinnuframagrunninum verður tikin við í landsroknskapin undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t."

Eftir er at fáa greiði á, hvussu Arbeiðsloysisskipanin, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, Framtaksgrunnurin og Realurin kunnu takast við í landsroknskapin.

Í august 2017 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeitt var við nýggjum lógaruppskoti fyri Realin, har støða eisini skuldi takast til tilknýti til landsroknskapin.

Í 2018 og aftur í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at tað framhaldandi var arbeitt fram ímóti einum fullfíggjaðum landsroknskapi. Arbeiðið fór fram í stigum. Í 2018 var miðað ímóti, at í landsroknskapinum fyri 2018 skuldi eginpeningurin í eksternu grunnunum takast við undir "Innistandandi í landsfyritøkum, grunnum o.t." Sambært landsstýrismanninum var tað ikki gjørt kortini.

Arbeitt var framvegis við nýggjum lógaruppskoti um Realin. Landsstýrismaðurin kunnaði um, at lógaruppskotið fór at vera sent til hoyringar í apríl 2019. Í uppskotinum var ásett, at Realurin verður skrásettur í landsroknskapinum, men verður ikki tikin við í fíggjarlógini. Tað eydnaðist ikki at fáa uppskotið fyri Løgtingið, áðrenn tingið fór heim í mai 2019.

Arbeitt verður við at dagføra lógina um Realin.

Í september 2021 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at *"uppskot um broyting í løgtingslóg fyri Realin var í apríl 2019 til almenna hoyring. Politiskar raðfestingar gjørdu, at uppskotið ikki varð latið Løgtinginum. Sitandi samgonga og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hava sett sær fyri at fáa ein meira fullfíggjaðan almennan roknskap. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur í sambandi við løgmansrøðuna á ólavsøku 2021 boðað frá, at ætlanin er at leggja uppskot um dagførda lóg fyri Realin í hesari tingsetuni. Eftir ætlan verður uppskotið klárt til politiska støðutakan tíðliga í 2022."*

10.1.2 Virðisbrøv

t.kr.

Skrásett í landsroknskapinum	2018	2019	2020	Til skjals
P/f Vágatunnilin	160.300	160.300	160.300	Ja
P/f Norðoyatunnilin	235.000	235.000	235.000	Ja
P/f Føroya Tele	77.948	77.948	77.948	Ja
P/f Postverk Føroya	43.000	43.000	43.000	Ja
P/f Fiskaaling	17.375	17.375	17.375	Ja
P/f Føroya Lívstrygging	11.667	11.667	11.667	Ja
P/f Vága Floghavn	807.818	807.818	822.818	Ja
P/f Atlantic Airways	86.912	86.912	186.912	Ja *)
P/f Elektron	2.347	2.347	2.347	Ja
P/f Føroya Dátusavn	0	0	0	Ja
Sp/f Ítróttavedding	20	20	20	Nei
P/f Smyril Line	32.760	32.760	32.760	Ja
P/f Tjaldur	140	140	140	Nei
P/f Føroya Banki	1	1	1	Ja *)
P/f Visit Faroe Islands	500	500	500	Nei **)
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	115.000	150.000	200.000	Nei **)
Partabrøv tilsamans	**1.590.788**	**1.625.788**	**1.790.788**	

*) Partabrøvini eru skrásett elektroniskt og tí pappírsleys. Útskrift er fingin til vega frá Værdipapircentralen.
**) Partabrøv verða ikki útskrivað longur.

Í 9 feløgum eigur landið allan partapeningin:

t.kr.

Roknskapartøl 2020	Brutto-vinningur	Ársúrslit	Samlað ogn	Egin-peningur
P/f Vágatunnilin	8.894	333	202.389	191.189
P/f Norðoyatunnilin	11.215	1.919	275.561	266.208
P/f Føroya Tele (samtak)	204.525	31.199	765.794	529.864
P/f Postverk Føroya (samtak)	68.951	-2.361	123.743	35.959
P/f Fiskaaling	16.328	-624	15.187	-2.593
P/f Vága Floghavn (samtak)	30.696	-16.947	897.069	831.018
P/f Atlantic Airways	44.293	-104.571	764.936	245.733
P/f Visit Faroe Islands	6.021	10	8.092	543
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	-1.491	-3.686	2.924.711	181.260
Tilsamans	**389.432**	**-94.728**	**5.977.482**	**2.279.181**

Samlaða úrslitið hjá feløgunum var 94,7 mió.kr. í halli eftir skatt, og samlaði eginpeningurin 2,3 mia.kr. Í 2019 var samlaða úrslitið hjá feløgunum, har landið eigur allan partapeningin 59 mió.kr. og eginpeningurin 2,3 mia.kr.

Í 2020 áttu minnilutapartaeigararnir 2,9 mió.kr. í dótturfelagi hjá P/f Vága Floghavn.

Samlað roknskapartøl hjá feløgunum

Roknskapartølini 2011 til 2020, fyri feløg sum landið eigur allan partapeningin í:

t.kr.

Ár	Brutto-vinningur	Ársúrslit	Samlað ogn	Egin-peningur
2011	732.782	-268.123	7.241.118	2.201.249
2012	608.022	-513.502	3.730.656	1.631.006
2013	620.290	91.263	3.898.691	1.710.169
2014	660.020	67.148	4.201.625	1.819.871
2015	866.069	48.714	4.856.817	2.038.028
2016	607.125	71.277	5.835.015	1.990.572
2017	618.316	86.093	5.885.239	2.088.516
2018	580.528	86.576	6.097.371	2.196.207
2019	585.746	59.057	5.947.786	2.255.562
2020	389.432	-94.728	5.977.482	2.279.181

Virðismeting

Gjaldstovan hevur ásett reglur fyri, hvussu partabrøv eiga at verða goymd. Tá ið tey verða keypt, skulu tey verða latin Gjaldstovuni. Somu reglur eru galdandi fyri onnur virðisbrøv. Reglurnar viðgera ikki upp- og niðurskrivingar av partapeningi.

Skrásetti parta-peningurin gevur ikki ábending um virðið á feløgunum.

Í landsroknskapinum 2020 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, yvirkurs og útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um ítøkiliga virðið á feløgunum.

Innara virðið á 14 feløgum, samanborið við keypsvirðið sambært landsroknskapinum fyri 2020:

t.kr.

	Keypsvirðið sambært landsroknskapinum	Innara virðið
P/f Vágatunnilin	160.300	191.189
P/f Norðoyatunnilin	235.000	266.208
P/f Vága Floghavn *)	822.818	831.018
P/f Føroya Tele	77.948	529.864
P/f Postverk Føroya	43.000	35.959
P/f Fiskaaling	17.376	-2.593
P/f Føroya Lívstrygging	11.667	22.989
P/f Atlantic Airways	186.912	245.733
P/f Elektron	2.347	6.459
P/f Smyril Line	32.760	57.691
P/f Tjaldur	140	12.225
Sp/f Ítróttavedding	20	35
P/f Visit Faroe Islands	500	543
P/f Eystur- og Sandoyartunlar	200.000	181.260
Partabrøv tilsamans	**1.790.788**	**2.378.580**

*) Parturin hjá minnilutapartaeigarum (Atlantic Airways) var 2,9 mió.kr.

Sum sæst í yvirlitinum, er keypsvirðið í nøkrum førum munandi lægri enn innara virðið.

Vinningsbýti frá partafeløgum, har landskassin er einasti partaeigari:

t.kr.

	2018	2019	2020
P/f Føroya Tele	20.000	35.000	34.000

Í 2020 fekk landskassin harafturat 391 t.kr. frá P/f Tjaldur.

10.1.3 Útlán

t.kr.

	2018	2019	2020
Útlán ársbyrjan	302.016	291.384	286.010
Tilgongd í árinum	9.650	10.641	8.584
Frágongd í árinum	-20.283	-16.015	-151.350
Útlán ársenda brutto	**291.384**	**286.010**	**143.244**
Sett av ímóti tapi	-183.075	-185.068	-52.078
Sambært roknskapinum	**108.308**	**100.942**	**91.166**

Heitið útlán fevnir um veðhaldsútlegg, lestrarlán, ymisk vinnulán, serlán, kurslán og stuðulslán. Tilgongdin stavar í høvuðsheitum frá, at nýggj lestrarlán eru veitt og frágongdin stavar í høvuðsheitum frá, at lán eru avskrivað og at lestrarlán eru goldin aftur. Samanlagt eru útlánini lækkað 9,8 mió.kr. netto frá 2019 til 2020.

Virðið á veðhalds-útleggum, serlánum og stuðulslánum er sett til 0. Fleiri lán eru avskrivað í 2020.

Sett er av ímóti tapi. Virðini á veðhaldsútleggum, serlánum, kurslánum og stuðuls-lánum sambært roknskapinum eru sett til 0 kr. Orsøkin til at avsetingarnar eru lækkaðar frá 2019 til 2020 er, at ein stórur partur av lánunum, sum nú eru avskrivað, vóru avsett. Avsetingin svarar í høvuðsheitum til útlán til privata vinnu, sum ikki frammanundan eru avskrivað ella løgd um til rentu- og avdráttarfrí útlán.

Rentu- og avdráttarfrí útlán

t.kr.

	2018	2019	2020
Rentu- og avdráttarfrí lán ársbyrjan	284.677	271.872[39]	271.872
Tilgongd í árinum	0	0	0
Frágongd í árinum	-20.305	0	-62.278
Rentu- og avdráttarfrí lán ársenda	**264.372**	**271.872**	**209.594**
Sett av móti tapi	-264.372	-271.872	-209.594
Sambært roknskapinum	**0**	**0**	**0**

Talan er um lán til Framtaksgrunnin, sjálvsognarstovnar, studningslán, eldrasambýli og Postverk Føroya. Sí notu nr. 3 í landsroknskapinum. Nøkur rentu- og avdráttarfrí lán eru avskrivaði í 2020, t.d. lán til Framtaksgrunnin 30 mió.kr. og lán til sjálvs-ognarstovnar 27,6 mió.kr., harav 14,5 mió.kr. til Føroya Handilsskúla á Kambsdali.

Avsetingin móti tapi, minkar stórtsæð við frágongdini í útlánum.

Sambært landsroknskapinum eru rentu- og avdráttarfrí lán tikin við í roknskapin við virðinum 0 kr., av tí at talan er um treytað lán, sum bert skulu rindast aftur, um bygningar o.t., sum lán eru veitt til, verða brúkt til annað, enn upprunaliga endamálið.

Rentu- og avdráttarfrí lán eru sett til 0, tí talan er um treytað lán. Nøkur lán eru avskrivað í 2020.

10.1.4 Áogn o.a.

Skatta-, toll- o.t. skuldarar

t.kr.

	2018	2019	2020
Áogn landskassans brutto	475.870	452.093	440.402
Sett av ímóti tapi	-113.493	-114.203	-96.018
Sambært roknskapinum	**362.377**	**337.890**	**344.383**

[39] 7,5 mió.kr. eru á muni ímillum ultimo 2018 og primo 2019. Gjaldstovan hevur gjørt rættingina í sambandi við at Mentamálaráðið hevur yvirtikið lán hjá Føroya Handilsskúla á Kambsdali í Hypotekbankanum, sum ikki var skrásett í BSL

Frá 2019 til 2020 er áognin hækkað 6,5 mió.kr. netto. Sambært landsroknskapinum eru størstu broytingarnar:

	t.kr.
Broytingar 2019 til 2020	
Meirvirðisgjald	31.909
Vanligur landsskattur	23.548
Felagsskattur	1.592
Framleiðslugjald	-2.248
Kapitalvinningsskattur	-3.642
Tøkugjald á alivinnu	-13.635
Tollavgjøld	-29.172

Tænastu-, vøru- og aðrir skuldarar

Talan er um tænastu- og vøruskuldarar hjá Apoteksverkinum, Landsverki, Kringvarpinum, Rúsdrekkasølu landsins og øðrum stovnum. Aðrir skuldarar eru m.a. inntøkur og endurgjøld, sum vanliga eru tíðaravmarkað. Eisini eru tað millumrokningar við landsstovnar, lønarútgjaldsskipanir, skipanir hjá TAKS, kommunur o.a.

Niðanfyri eru upphæddirnar útgreinaðar:

	2018	2019	2020
Avgjald á fiskatilfeingi	13.316	41.482	81.991
Tíðaravmarkingar	71.200	82.337	80.574
Apoteksverkið	21.475	16.996	44.735
Landsverk, inntøkufíggjað virksemi	16.429	25.073	16.877
Landssjúkrahúsið	4.674	6.041	9.394
Fróðskaparsetur Føroya, stuðulsf. virksemi	6.895	7.079	8.105
Heilsufrøðiliga starvsstovan	6.080	5.067	6.988
Gjald til Heilsutrygd	6.028	6.224	6.541
Talgildu Føroyar	47	6.292	5.703
Koronukanningar, gjald frá ferðandi	0	0	5.563
Rúsdrekkasøla landsins	7.577	6.174	5.165
Kringvarp Føroya	5.457	5.890	4.616
Tryggingareftirlitið	4.036	4.088	3.752
Vinnumálaráðið	0	0	3.401
Trivnaðartænastur	2.070	1.131	3.185
Strandfaraskip landsins	4.254	3.543	3.182
Fjarskiftiseftirlitið	3.152	3.425	3.164
Ymiskir skuldarar	74.067	42.279	43.800
Tilsamans sambært roknskapinum	**246.759**	**263.121**	**336.735**

Fleiri hækkingar og lækkingar eru, sum netto geva eina hækking á 73,6 mió.kr. frá 2019 til 2020. Størstu hækkingarnar eru á "Avgjald á fiskatilfeingi" og "Apoteksverkið".

Goymslur

	2018	2019	2020
Sambært roknskapinum	56.170	56.376	53.535

Í tølunum eru vørugoymslurnar hjá Rúsdrekkasølu landsins, Apoteksverkinum, Strandfaraskipum landsins, Námi (útgávuvirksemi), Glasi, Miðnámi á Kambsdali, Landsverki, KT Landsins og Tekniska skúla í Klaksvík.

Frá 2019 til 2020 er virðið á goymslunum lækkað 2,8 mió.kr. netto. Talan er um smærri goymslubroytingar.

Ognir og útbúnaður (LG 2020/300-0101)

Í 2017 var roknskaparkunngerðin broytt við K. nr. 110/2017. Sambært § 20 í kunngerðini skulu stovnar gera yvirlit yvir ognir, so sum verkløg, bygningar, maskinur, før, innbúgv og annan virðismiklan útbúnað. Yvirlitini skulu fevna um ognir og útbúnað, hvørs keypsvirði er oman fyri 50 t.kr. Ognirnar og útbúnaðurin skulu skrásetast í

Búskaparskipan landsins, um ikki stovnurin hevur fingið loyvi til at nýta egna búskaparskipan.

Reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað vera ikki hildnar.

Landsgrannskoðanin kann enn eina ferð staðfesta, at reglurnar um at skráseta ognir og útbúnað eru ikki hildnar.

Í 2017 vísti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum á, at ásetingin um ognaryvirlit í roknskaparkunngerðini var broytt, men tað vantaði tøknilig menning av ognaryvirlitum í Búskaparskipan landsins til tess at fáa skrásett ognir við virði yvir 50 t.kr.

Í 2018 greiddi landsstýrismaðurin frá, at ognarmodulið í Búskaparskipan landsins var broytt, soleiðis at størri stovnar við fakligum førleika fingu atgongd til at skráseta til- og frágongd av ognum. Smærri stovnar skuldu framvegis venda sær til Gjaldstovuna fyri at fáa ognirnar skrásettar.

Í 2019 kunnaði landsstýrismaðurin um, at arbeiðið við játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskiftum verður uppraðfest, við m.a. at fáa aðalráð og stovnar at dagføra ognaryvirlitini.

Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum er postur, nevndur "Immateriellur og materiellur útbúnaður, grundøki, bygningar, løgur o.t.", men eingin upphædd er ásett. Sjálvt um upprunaviði á ognum og avskrivingar eru skrásettar í Búskaparskipan landsins, ber ikki til at nýta tey til fíggjarstøðuna, av tí at nógvar ognir eru ikki skrásettar, og virðið á skrásettu ognunum, sjáldan er dagført.

10.1.5 Tøkur peningur

Tøkur peningur fatar um gjaldføri landsins. Sambært § 10, stk. 1, í Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" umsitur Landsbankin gjaldføri landsins eftir ásetingum frá landsbankanevndini. Sambært stk. 2 er endamálið við umsitingini:

- at landið altíð hevur neyðugt gjaldføri tøkt, soleiðis at tað kann halda sínar skyldur,
- at landsins gjaldføri verður fyrisitið væl við atliti at tryggleika, herundir at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin verður sum minst, og
- at landsins gjaldføri verður rentað til marknaðarkor.

Sambært § 10, stk. 3 og 4, fevnir gjaldføri landsins um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum o.ø. Gjaldførið verður roknað sum landsins kassapeningur, innistandandi í peningastovnum og óveðsettar virðisbrævaognir.

Í fíggjarstøðuni er tøki peningurin býttur í tveir bólkar:

1. virðisbrøv o.t., og
2. bankakontur, girokontur og kassapeningur.

Virðisbrøv o.t.

Landsbanki Føroya hevur sett part av tøka peninginum í stuttfreistað virðisbrøv, sum eru tikin við til marknaðarvirðið. Posturin nevnist "Virðisbrøv o.t."

mió.kr.

	2018	2019	2020
Sambært roknskapinum	3.278	3.052	4.191

Landsbankin hevur dagligu umsitingina av plaseringini av gjaldførinum hjá landinum. Plaseringin byggir á íløguinstruks frá landsbankanevndini, har ásetingar eru um m.a., hvussu nógv kann plaserast í ávís sløg av virðisbrøvum.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært íløgureglunum í Ll. nr. 116/2016, og eisini um tær eru sambært íløguinstruksinum frá landsbankanevndini. Einki var at finnast at.

Bankakontur og kassapeningur

t.kr.

	2018	2019	2020
Sambært roknskapinum	388.575	425.187	538.040

Banka- og girokontur

Nógvur peningur í peningastovnum og virðisbrøvum er ikki við í landsroknskapinum.

Roknskaparposturin vísir ikki, hvussu nógv landskassin tilsamans hevur standandi á banka- og girokontum. Fleiri landsstovnar og -grunnar við leysum tilknýti til fíggjarlóg ella landsroknskap hava nógvan pening standandi í virðisbrøvum og á peningastovnskontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum.

Í 2020 kann upphæddin greinast sundur í tær kontur, sum Landsbankin og Gjaldstovan umsita, og tær, sum aðrir stovnar í landsroknskapinum umsita.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um:

- kontuavrit fra peningastovnum stemma við Búskaparskipan landsins,
- peningur í fremmandum gjaldoyra er tikin við í roknskapin við røttum virði,
- saldur av plaseringum hjá Landsbankanum eru rætt skrásettar í landsroknskapinum og Búskaparskipan landsins,
- Landsbankin liggur inni við ov nógvum gjaldføri, og
- reglurnar um minstagjaldføri eru hildnar.

Ad. 4) Landsbankin hevur gjørt innanhýsis reglugerð um, hvussu nógvur tøkur peningur kann standa í føroyskum peningastovnum, í hvørjum peningastovni sær og samanlagt. Við árslok 2020 var innistandandi í peningastovnunum í samsvari við reglugerðina.

Ad. 5) Sambært § 11 í Ll. nr. 116/2016 skal landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fyriskipa, at landsins gjaldføri, sambært § 10, stk. 3 og 4, í minsta lagi samsvarar við 15% av bruttotjóðarúrtøkuni í undanfarna ári. Landsbankanevndin skal í august mánað áseta minstagjaldførið. Landsbankin hevur greitt frá, at av tí at bruttotjóðarúrtøkan fyri undanfarna ár ikki altíð er gjørd upp, tá ið landsbankanevndin skal áseta minstagjaldførið, brúkar bankin seinasta uppgjørda talið, eisini um talan er um fyribilstal. Sambært Landsbankanum tekur minstagjaldførið fyri 2020 útgangsstøði í framrokningini av bruttotjóðarúrtøkuni fyri 2018.

Gongdin í tøka peninginum 2018 til 2020:

Tøki peningurin er hækkaður.

mió.kr.

	2018	2019	2020
Gjaldførið sambært roknskapinum	3.666	3.478	4.729
Harav minstagjaldføri	2.670	2.830	2.890
Munur millum gjaldføri og minstagjaldføri	**996**	**648**	**1.839**

Lógin ásetir, at gjaldføri fevnir um alt gjaldførið hjá allari landsumsitingini, øllum landsstovnum v.m., og sum er trygt og lætt tøkt. Gjaldførið fevnir eisini um óveðsett virðisbrøv. Sambært Landsbankanum kemur allur tøki peningurin í fíggjarstøðuni undir hesar treytir, og verður tí roknaður sum gjaldføri hjá landskassanum.

Tøki peningurin hjá landskassanum er hækkaður 1.251 mió.kr. frá 2019 til 2020, meðan kravið til minstagjaldføri er hækkað 60 mió.kr., t.v.s. at munurin millum tøka peningin (gjaldførið) og minstagjaldførið er øktur við 1.191 mió.kr. frá 2019 til 2020.

Landsgrannskoðanin hevði ikki aðrar viðmerkingar til gjøgnumgongdina enn tær, sum eru til pkt. 4 og 5.

Kassapeningur
Landsgrannskoðanin hevur framt nøkur kassaeftirlit í 2020, har vit hava stemmað kassapening av við kassauppgerðir, Búskaparskipan landsins v.m. Hava stovnarnir peningastovnskontur, eru tær stemmaðar av við kontuavrit frá peningastovnum og Búskaparskipan landsins. Eisini hava vit kannað konturnar fyri óvanligar bókingar í ávís tíðarskeið. Kassaeftirlitini eru umrødd undir hvørjum stovni sær.

10.1.6 Skuld

Innanlandsskuld, langfreistað

t.kr.

	2018	2019	2020
Sambært roknskapinum	4.607.809	3.816.981	5.419.335

Við árslok 2020 var talan um 5 lánsbrævarøðir:

- FO-LB 210622, áljóðandi 1.350 mió.kr., sum fall til gjaldingar 22. juni 2021.
- FO-LB 220602, áljóðandi 1.300 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 2. juni 2022.
- FO-LB 230627, áljóðandi 550 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 27. juni 2023.
- FO-LB 250602, áljóðandi 1.645 mió.kr., sum fellur til gjaldingar 2. juni 2025.
- FO-LB 320503, áljóðandi NOK 550 mió.kr. (svarandi til 387,9 mió.kr. við árslok 2020), sum fellur til gjaldingar 3. mai 2032.

Við árslok 2020 var samlaða *áljóðandi* skuldin 5.232,9 mió.kr.

Í 2020 eru 2.945 mió.kr. tiknar í nýggjum láni og 1.345 mió.kr. eru rindaðar aftur til fallið lán.

Frá fíggjarárinum 2016 eru lánini gjørd upp eftir marknaðarvirði.

Landsbankin selur meginpartin av brævalánunum uttanlands. Heitið á roknskapar-postinum, "Innanlandsskuld, langfreistað", er tí helst ikki so beinrakið.

Partur av langfreistaðu skuldini, ið fellur til gjaldingar í komandi ári

t.kr.

	2018	2019	2020
Sambært roknskapinum	1.100.000	1.345.000	1.350.000

Veruligu afturgjøldini vóru sambært Landsbankanum:

- Í juni 2019 fullu eftir skránni 1.100 mió.kr. av FO-LB 190620 til gjaldingar. Hinvegin var FO-LB 200611 hækkað 300 mió.kr.
- Í juni 2020 fullu eftir skránni 1.345 mió.kr. av FO-LB 200611 til gjaldingar.
- Í juni 2021 fullu eftir skránni 1.350 mió.kr. av FO-LB 210622 til gjaldingar.

Stuttfreistað skuld (onnur skuld)

t.kr.

	2018	2019	2020
Sambært roknskapinum	1.027.285	1.099.875	1.087.928

Talan er í høvuðsheitum um vanligar kreditorar, millumrokningar við kommunur, tíðaravmarkingar og skuld, sum er greidd til útgjaldingar frá ymiskum skipanum. Skrásettu upphæddirnar í landsroknskapinum samsvara við sundurgreiningar, sum liggja aftanfyri.

10.2 Útjavningarkonta (LG 2020/300-0203)

Útjavningarkontan líkist ikki "kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Ognirnar í landsroknskapinum verða virðismettar øðrvísi, og í roknskapinum eru virði ikki sett á materiellu støðisognirnar, so sum bygningar, skip og vegir, eru ikki virðisásett í roknskapinum. Útjavningarkontan hevur tí so at siga bert eitt tøkniligt endamál.

t.kr.

	2019	2020
Salda 1. januar	752.480	1.344.038
RLÚ-úrslit	283.798	-298.437
Búskapargrunnur Føroya	276.745	26.072
Ymiskar broytingar	31.016	168.928
Salda 31. desember	**1.344.038**	**1.240.601**

"Ymiskar broytingar" eru broytingar í fíggjarstøðuni, sum ikki verða førdar yvir raksturin. Talan er m.a. um tøkniligar munir, sum standast av broytingum í roknskapar-meginreglum, rættingum av skeivum bókingum, sum viðvíkja undanfarnum árum, avtøkum av grunnum, úrslitum hjá internum grunnum, broytingum í avsetingum, mótbókingum til útlánsroknskap og mótbókingum til kapitalinnskot.

Tvær rættingar gjørdar í fíggjar-støðuni við ársbyrjan.

Javning av fíggjarstøðu við ársbyrjan

Í landsroknskapinum 2020 eru tvær rættingar gjørdar í fíggjarstøðuni við ársbyrjan, t.e. av postunum: “Aðrir skuldarar” og “Útjavningarkonta”.[40]

Aðrir skuldarar

Rættingin av “Aðrir skuldarar” er greinað soleiðis:

t.kr.

Heiti	31. des. 2019	Javning av primo	1. jan. 2020
Flutt til kommunur, skattur av pensjónsinngjøldum	0	19.512	19.512
Javning av primo tilsamans		**19.512**	

Rættingin er tikin við á kontu 0363 “Millumrokning við kommunur”, og mótkontan er “Onnur skuld”.

Sambært Ll. nr. 49/2013 “um eftirløn (Eftirlønarlógin)” hava øll, sum ikki hava nátt fólkapensjónsaldur og sum hava fulla skattskyldu til Føroyar, skyldu at spara saman til egna eftirløn. Eftirlønarskatturin er 40%.

Við broyting í Eftirlønarlógini, sum kom í gildi 1. januar 2019, skulu persónar, sum hava ársinntøku, ið er lægri enn 330 t.kr., rinda 30% í eftirlønarskatti av inntøku upp til 235 t.kr. og síðani hækkar prosentið stigvíst upp til 40% av inntøkuni 330 t.kr. ella hægri.

Av øllum eftirlønarinngjøldunum verða fyribils afturhildin 40% í eftirlønarskatti, og tá ið endaliga skattskylduga ársinntøkan er staðfest, verður avlopsskattur teirra, sum skulu rinda minni enn 40% í eftirlønarskatti, endurrindaður á eftirlønarkontu hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara.

Í 2019 hava kommunurnar fingið ov nógv útgoldið í forskotskatting av pensjónum, tí er ágóðin hjá landskassanum 19,5 mió.kr. 1. januar 2020.

Saldan 1. januar 2020 er hækkað við 19,5 mió.kr., av tí at kommunurnar høvdu fingið ov nógv útgoldið av forskatting av pensjónum í 2019, og peningurin var ikki kravdur aftur.

[40] Primojavningarnar eru greinaðar í yvirlitum á síðu 236 og 237 í landsroknskapinum 2020.

Útjavningarkonta
Rættingin av útjavningarkontuni er greinað soleiðis:

t.kr.

Heiti	31. des. 2019	Javning av primo	1. jan. 2020
Apoteksverkið	66.551	230	66.321
Javning av primo tilsamans		**230**	

Fíggjarstøðuposturin "Útjavningarkonta" er lækkaður við 230 t.kr., orsakað av at munur hevur verið í útjavningarkontuni hjá Apoteksverkinum síðani 2016. Mótkontan til rættingina er “Onnur skuld”.

Sambært viðmerkingunum í landsroknskapinum stavar upphæddin frá, at Apotekið hevði skuldskrivað lønarskyldur á útjavningarkontuna eftir fráboðan í 2017, um hvussu ásetingar í rundskrivi um tíðaravmarkan av lønum skuldi tulkast. Fráboðanin var tikin aftur, men av tí at Apotekið ikki hevur fingið tey boðini, er hesin feilurin staðfestur og bókaður burtur.

10.3 Fyrisiting av gjaldføri og skuld (LG 2020/300-0104 og 0202)

Landsbanki Føroya fyrisitur gjaldføris- og skuldarviðurskifti landsins. Ll. nr. 116/2016 "um Landsbanka Føroya og Føroya váðaráð" kom í gildi 1. januar 2017 og setti úr gildi Ll. nr. 140/2012 "um landsins gjaldføris- og skuldarfyrisiting".

Í broti 4.11 undir fíggjarmálum er greitt frá Landsbankanum og grannskoðanina av stovnsrakstrinum. Í broti 10.1 undir fíggjarstøðuni er stutt greitt frá um tøkan pening og skuld landsins.

10.3.1 Porteføljuskipanin

Landsbankin brúkar donsku skipanina, nevnd PandaConnect til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti. Bankin hevur einans rættindi til at spyrja í skipanini.

Bókingar fara ikki sjálvvirkandi í Búskaparskipan landsins.

Bókingarnar í PandaConnect fara ikki sjálvvirkandi yvir í Búskaparskipan landsins. Tá ið mánaðurin er liðugur, sendir skipanin Landsbankanum eina fílu við broytingum frá mánaðinum frammanundan. Tølini verða bókað í Búskaparskipan landsins umvegis kontubrúgv. Landsbankin stemmar PandaConnect av við Búskaparskipan landsins. Bankin hevur ikki formligt loyvi frá Fíggjarmálaráðnum til PandaConnect skipanina, men hevur heitt á Gjaldstovuna um at fáa loyvi.

Landsbankin fær grannskoðanarváttan um skipanina hvørt ár. Landsgrannskoðanin hevur mett um grannskoðanarváttanina, og hevur kannað:

- um øll trygdartiltøk verða hildin (innritan, funktiónsskilnaður, trygdaravrit o.s.fr.), og
- um samsvar er ímillum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins.

Einki var at finnast at.

10.3.2 Gjaldførið hjá landinum

Við árslok 2020 vóru skrásettar 4.729 mió.kr. í tøkum peningi í landsroknskapinum; harav 4.191 mió.kr. í virðisbrøvum o.t. Við árslok 2019 var tøki peningurin 3.478 mió.kr., tá vóru 3.052 mió.kr. í virðisbrøvum o.t.

Í talvuni er tøki peningurin sambært Búskaparskipan landsins sundurgreinaður:

t.kr.

Tøkur peningur	2017	2018	2019	2020
Lánsbrøv	2.959.285	2.855.638	2.523.675	3.637.450
Lánsbrøv, rentuáogn	8.274	8.071	8.211	11.177
Partabrøv	442.986	543.231	644.146	727.212
Onnur virðisbrøv	94.948	105.173	132.976	100.542
Repohandlar[41]	-149.996	0	0	0
Ogn hjá øðrum	-423.727	-234.421	-256.548	-285.301
Virðisbrøv tilsamans	***2.931.770***	***3.277.692***	***3.052.460***	***4.191.080***
Bankakontur, landskassin	162.748	231.786	274.505	160.585
Útlendskar bankakontur	335.143	82.686	123.245	301.099
Ogn hjá øðrum	0	371	0	0
Aðrar bankakontur og kassar	49.677	73.731	27.437	76.356
Tilsamans	**3.479.338**	**3.666.266**	**3.477.647**	**4.729.120**

Virðisbrøvini eru skrásett í landsroknskapinum við marknaðarvirðinum. Landsbankin hevur greitt frá, at øll virðisbrøvini eru skrásett í PandaConnect. Somuleiðis eru útlendskar peningastovnskontur, sum hava við virðisbrøv at gera, skrásettar í PandaConnect, og svara upphæddirnar á teimum til nærum allan peningin á útlendsku kontunum.

Aðrar peningastovnskontur eru ikki skrásettar í PandaConnect, hvørki útlendskar ella føroyskar. Talan er um kontur, sum Gjaldstovan og aðrir almennir stovnar umsita.

Plasering av gjaldførinum

Reglurnar, um hvussu gjaldførið hjá landinum skal handfarast, standa m.a. í lógini um Landsbankan og í ásetingum frá nevndini fyri bankan.

Landsgrannskoðanin hevur kannað:

- um Landsbankin hevur nøktandi og dagførdar skrivligar mannagongdir um, hvar hann plaserar gjaldførið,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru sambært Ll. nr. 116/2016,
- um plaseringarnar av gjaldførinum eru í tráð við instruksin frá landsbankanevndini, og
- um Landsbankin heldur seg til roknskaparinstruksin frá landsbankanevndini viðvíkjandi plaseringum av gjaldføri.

Landsgrannskoðanin hevði einki at finnast at.

Transaktiónsslóðin ikki nóg góð.

Landsgrannskoðanin skal tó vísa á, at transaktiónsslóðin millum porteføljuskipanina og Búskaparskipan landsins er ikki nóg góð, tá ið tað ikki ber til at finna allar skrásetingar av bókingum í Búskaparskipan landsins, uttan at fara aftur til porteføljuskipanina at finna transaktiónirnar.

Landsbankin hevur víst á, at bankin hevur transaktiónsslóðina, tí at bankin goymir øll skjalprógv. Landsbankin kundi viðheft skjalprógvini í Búskaparskipan landsins, men heldur, at tað er ov nógv og kann ørkymla.

Úrslitið av plasering av gjaldførinum

Sambært landsroknskapinum 2020 vóru rentur av innistandandi 73,2 mió.kr. Ávikavist 13,9 mió.kr. og 22,8 mió.kr. eru fluttar til Búskapargrunnin (§ 89 og internur grunnur) og "Frávik fyri rentuinntøkur" á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.2.01.01 "Rentur av innistandandi" samsvarar við játtanina, sum er 36,5 mió.kr. í inntøkum. Av teimum 13,9 mió.kr. til Búskapargrunnin, hevur Landsbankin fingið 730 t.kr. í ómaksgjaldi.

[41] Repohandlar: Endurkeypsavtalur, t.e. avtalur, sum fevna um sølu og at keypa lánsbræv aftur til ásetta tíð.

Í talvuni eru rentuinntøkur o.a. sundurgreinaðar.

t.kr.

Heiti	2019		2020	
	Játtan	*Roknskapur*	*Játtan*	*Roknskapur*
Rentur og ógreinað		-5.780		-18.038
Vinningsbýti		-23.124		-38.766
Staðfestir kurs-/gjaldoyramunir		-4.644		39.177
Ikki staðfestir kurs-/gjaldoyramunir		-157.285		-56.695
Rentur, bankar		337		1.123
Kostnaðir		-809		-19
Innanh. flyt. millum alm. grunnar		28.569		13.947
Innanh. flyt. millum alm. stovnar		122.036		22.770
Tilsamans	**-40.700**	**-40.700**	**-36.500**	**-36.500**

Sum sæst í talvuni, eru stórar broytingar í kursmunum, serliga ikki staðfestu mununum.

Sambært ársfrágreiðingini hjá Landsbankanum var avkastið av íløgurøktini 1,91% í 2020. Í 2019 var tað 6,3%, og miðal avkastið 2016 til 2020 var 2,7%.

Landsbankin hevur eftirlitsfund hvønn mánað, og skrivar frágreiðing um fundin, og tað, sum er gjørt fyri at fylgja fundinum upp.

Benchmark fyri 2020 er 0,94%. Avkastið av plaseringunum hjá Landsbankanum liggur tí yvir benchmarkið. Benchmark fyri 2019 var 5,97%.

Sambært Landsbankanum er benchmarkið ásett fyri hvønn aktivklassa sær, og er ásett eftir miðalvektunum á teimum ymisku aktivklassunum. Benchmark eru ikki fyri alternativar íløgur og kontur.

Í ársfrágreiðingini hjá Landsbankanum 2020 er avkastið býtt eftir ymisku virðis-brøvunum, sum bankin hevur gjørt íløgur í:

Slag	Miðal íløga mió.kr.	Avkast mió.kr.	Avkast %	Býtið %
Partabrøv	647	68,9	10,7	16,6
Statslánsbrøv	40	-0,1	-0,2	1,0
Realkredittlánsbrøv	2.612	18,1	0,7	66,8
Kredittlánsbrøv	116	4,7	4,0	3,0
Hárentulánsbrøv	228	-6,4	-2,8	5,8
Alternativar íløgur	130	-9,5	-7,3	3,3
Onnur fíggjaraktiv	136	-0,8	-0,6	3,5
Tilsamans	**3.909**	**74,9**	**1,9**	**100,0**

Sum sæst í talvuni, standa partabrøvini fyri 16,6% av samlaðu íløguupphæddini, men avkastið av partabrøvunum er 92% av samlaða avkastinum.

10.3.3 Landskassaskuld - brævalán

Heimild at læna

Sambært § 42 í Ll. nr. 103/1994 "um stýrisskipan Føroya" kunnu lán ella borgan, ið skuldbinda Løgting, landsstýri ella stovnar undir landinum, ikki verða tikin ella veitt uttan við heimild í lóg. Sambært § 1 í Ll. nr. 116/1991 "um lántøku til landskassan og umlegging av landskassalánum" verður landsstýrinum heimilað landskassans vegna at taka lán til at rinda avdráttir av lánum, til afturrindan av lánum og til framskundaða afturrindan av lánum í Føroyum og uttan fyri Føroyar.

Landsgrannskoðanin hevur kannað lániheimildirnar fyri árini 2011 til 2020. Einki var at finnast at.

Lánini í samsvari við prospektini

Í sambandi við lántøku ger Landsbankin prospekt (kunningartilfar) til íleggjarar og onnur. Í prospektinum er m.a. kunning um búskaparviðurskifti, upplýsingar um útgevaran av lánsbrøvunum og upplýsingar um lánsbrøvini, so sum samlað upphædd, renta, kursur, lánitíð og fondskota.

Landsgrannskoðanin hevur kannað, um lánini, sum vóru virkin við árslok 2020, eru í samsvari við prospektini. Tvey nýggj brævalán eru stovnað í 2020, ávikavist FO-LB 250602, áljóðandi 1.645 mió.kr. og FO-LB 220602, áljóðandi 1.300 mió.kr. Einki var at finnast at.

Skráseting av brævalánum

Í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum síggjast brævalánini sum langfreistað innanlandsskuld. Í notu 8 eru sundurgreiningar, sum vísa marknaðarvirði og viðhangandi rentu. Notan vísir eisini samanhangin millum navnvirði og marknaðarvirði, eitt yvirlit yvir einstøku brævalánsrøðirnar, umframt hvussu stórur partur av skuldini fellur til gjaldingar í komandi ári, og hvussu stór restskuldin er um 5 ár.

Við árslok 2020 er bókaða virðið á brævalánunum 5.419 mió.kr. Við ársbyrjan var tað 3.817 mió.kr. Lánsupphæddirnar í landsroknskapinum eru grundaðar á marknaðarvirðið umframt tíðargreinaðar rentur sambært roknskaparmeginreglunum.

t.kr.

Brævalán	**2019**			**2020**		
	Lán	*Lánsbýti*	*Tilsamans*	*Lán*	*Lánsbýti*	*Tilsamans*
Marknaðarvirði	3.703.249	95.638	3.798.887	5.295.758	111.763	5.407.521
Viðhang. renta	20.174	-2.080	18.094	13.372	-1.558	11.814
Tilsamans	**3.723.423**	**93.558**	**3.816.981**	**5.309.130**	**110.205**	**5.419.335**

Lánsbýti: Sonevndur swap, sum t.d. kann fevna um lán, rentu og gjaldoyra.
Viðhangandi renta: Tíðargreinað renta viðvíkjandi roknskaparárinum, goldin eftir roknskaparlok.

Síðani 2016 eru brævalánini virðisásett til marknaðarvirði, og kursbroytingar rakstrarførdar.

Kursmunurin er hækkaður.

Í talvuni niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin greinað restskuldina á brævalánunum, sum vóru virkin ávikavist við árslok 2019 og við árslok 2020. Við árslok 2020 er samlaði kursmunurin hægri, enn hann var við ársbyrjan. Broytingin er tikin við í raksturin, sum ikki staðfestur kursmunur, undir høvuðskontu 20.50.1.01 "Rentur at gjalda".

t.kr.

FO-LB	**Restskuld við byrjan 2020**	**Virði við byrjan 2020**	**Munur**	**Restskuld við árslok 2020**	**Virði við árslok 2020**	**Munur**	**Broytt markn. virði**
200611	1.345.000	1.354.361	-	-	-	-	-
210622	1.350.000	1.368.117	18.117	1.350.000	1.355.819	5.819	-12.299
320503	447.883	447.883	0	447.883	447.883	0	0
320503 - gjaldoyra		-30.598	-30.598		-59.968	-59.968	-29.370
320503 - lánsbýti		95.638	95.638		111.763	111.763	16.125
230627	550.000	563.486	13.486	550.000	562.370	12.370	-1.117
220602	0	0	0	1.300.000	1.308.021	8.021	5.915
250602	0	0	0	1.645.000	1.681.634	36.634	41.536
Tils.	**3.692.883**	**3.798.887**	**96.643**	**5.292.883**	**5.407.521**	**114.639**	**20.791**

FO-LB 320503: Lánið er í norskum krónum, men er býtt um við (swappað til) danskar krónur. Gjaldoyramunurin og virðið á lánsbýtinum eru víst fyri seg.
FO-LB 220602: Kursmunur við útgávu -2.106 t.kr. (útgivið til kurs 100,162).
FO-LB 250602: Kursmunur við útgávu 4.902 t.kr. (útgivið til kurs 99,702).

Landsbankin ætlar ikki at rinda lánið, sum er í norskum krónum og swappað til danskar krónur, aftur fyri tíð. Tá ið lánið verður rindað aftur í 2032, verður kursmunurin 0.

Sambært Landsbankanum er Nordea "marketmaker" á landskassans lánsbrøvum, t.v.s. at Nordea regluliga ásetir kursir á lánsbrøvum til besta kursin, tey kunnu koma fram til.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við árslok 2020	Tíðargr. renta	Rentudagur	Dagar	Roknað renta í %	Ásett renta í %
210622	1.350.000	3.551	22-06-2020	192	0,5000	0,5000
320503	387.915	6.866	03-05-2020	237	2,6886	2,7000
230627	550.000	1.761	27-06-2020	187	0,6250	0,6250
220602	1.300.000	0	02-06-2020	212	0,0000	0,0000
250602	1.645.000	1.194	02-06-2020	212	0,1250	0,1250
	5.232.915	***13.372***				
320503 - lánsbýti	-387.915	-6.895	03-05-2020	237	-2,7000	-2,7000
320503 - lánsbýti	447.883	5.337	03-05-2020	237	1,8100	1,8100
Tilsamans	**5.292.883**	**11.814**				

Rentudagar: Í FO-LB 320503 verða nýttir 30/360 dagar í mánaðinum/árinum; í øðrum lánum eitt vanligt ár.
FO-LB 320503: Lánið í norskum krónum er til kursvirðið í donskum krónum við árslok 2020; lánið er býtt um við danskar krónur.

Í talvuni hevur Landsgrannskoðanin eftirroknað tíðargreinaðu rentuna av hvørjum láni sær í mun til restskuldina við árslok 2020. Rentan á norska láninum er 2,7%, men er býtt um til danskar krónur við 1,81% rentu. Rentumunurin verður góðskrivaður landinum. Tær 29 t.kr., sum eru á muni millum tíðargreinaðu rentuna á FO-LB 320503 og lánsbýtið, eru orsakað av at ein rentudagur meira er roknaður av lánsbýtinum enn av láninum.

Skráseting av rentuútreiðslum o.ø.

Sambært landsroknskapinum 2020 eru rentur av skuld 43,9 mió.kr., og 17,8 mió.kr. eru fluttar til "Frávik fyri rentuútreiðslur" á § 80 undir RLÚ II, soleiðis at roknskapurin fyri 20.50.1.01 "Rentur at gjalda" samsvarar við játtanina, ið er 26,1 mió.kr.

Í talvuni eru rentuútreiðslur o.a. sundurgreinaðar:

t.kr.

Heiti	2019		2020	
	Játtan	*Roknskapur*	*Játtan*	*Roknskapur*
Goldnar rentur		48.140		30.381
Broytt tíðaravmarkað renta o.a.		-8.414		-5.904
Rentur tilsamans		***39.726***		***24.476***
Staðfestir kursmunir		-13.013		-7.998
Ikki staðfestir kursmunir		26.393		20.416
Kursmunir tilsamans		***13.380***		***12.418***
Ómaksgjøld o.a.		1.100		5.909
Aðrar rentuútreiðslur		850		1.099
Innanh. flyt. millum alm. stovnar		-11.557		-17.802
Tilsamans	**43.500**	**43.500**	**26.100**	**26.100**

Goldnar rentur: Í Búskaparskipan landsins eru renturnar ikki greinaðar í goldnar og tíðargreinaðar rentur – upphæddirnar eru roknaðar sambært yvirliti úr Pandaskipanini.

Nettoútreiðslurnar av rentum og kursmunum eru lækkaðar

Nettoútreiðslurnar av rentum og kursmunum av brævalánunum eru 36,9 mió.kr. í 2020; í 2019 vóru tær 53,1 mió.kr.

Í talvuni niðanfyri eru goldnar rentur og tíðargreinaðar rentur í 2020, býttar á brævalánini. Landsgrannskoðanin hevur roknað, hvat samlaða rentuupphæddin fyri hvørt lánið er út frá einari miðalsaldu á lánunum í árinum. Roknaða rentan er samanborin við ásettu rentuna á hvørjum láni sær.

t.kr.

FO-LB	Miðalsalda í 2020	Goldin renta	Broytt tíðargr. renta	Renta tilsamans	Roknað renta í %	Ásett renta í %
200611	672.500	13.450	-7.460	5.990	0,9973	1,0000
210622	1.350.000	6.750	10	6.760	0,4994	0,5000
320503	402.600	9.903	-551	9.352	2,3552	2,7000
230627	550.000	3.438	5	3.442	0,6242	0,6250
220602	650.000	0	0	0	0,0000	0,0000
250602	822.500	0	1.194	1.194	0,1250	0,1250
Tilsamans	***4.447.600***	***33.541***	***-6.802***	***26.739***		
Lánsbýti	-402.600	-11.267	522	-10.745	-2,7698	-2,7000
Lánsbýti	447.883	8.107	0	8.107	1,8100	1,8100
Tilsamans	**4.492.883**	**30.381**	**-6.280**	**24.101**		

Sambært landsroknskapinum 2020 eru rentuútreiðslurnar 24.476 t.kr. Samanborið við landsroknskapin er munurin 376 t.kr. Hinvegin var "ikki staðfesta kurstapið" í landsroknskapinum 20.416 t.kr. Tað gevur 376 t.kr. størri útreiðslu, samanborið við útrokningina í talvuni á síðu 196, har munurin á marknaðarvirðinum á brævalánunum við árslok samanborið við virðið við ársbyrjan er eftirroknaður. Samanlagt er eingin munur. Sambært Pandaskipanini er talan um ikki staðfestan gjaldoyravinning.

Miðalrentan á lánunum er lækkað; miðalsaldan er hækkað.

Í 2020 eru renturnar av brævalánunum 24.476 t.kr. og í 2019 vóru tær 39.726 t.kr. Høvuðsorsøkin til lækkingina er, at miðalrentan á lánunum er lækkað. Sambært ársfrágreiðingini hjá Landsbankanum frá 2020, var miðalrentan við ársenda 2019 0,86%, meðan hon var lækkað til 0,51% við ársenda 2020. Hinvegin er miðalsaldan á lánunum hækkað, frá 4.068 mió.kr. í 2019 til 4.493 mió.kr. í 2020.

Útreiðslur av rentu, kursi og lánsbýti í árinum

Í talvuni niðanfyri eru brævalánini samanhildin við samlaðu rakstrarbroytingarnar av lánunum í árinum.

t.kr.

FO-LB	Restskuld við árslok 2020	Renta smb. roknskapi	Kursbroyt. o.a. smb. roknskapi	Rakstrar-broytingar tilsamans
200611	0	5.990	0	5.990
210622	1.350.000	6.760	-12.299	-5.539
320503	447.883	6.714	-13.245	-6.530
230627	550.000	3.442	-1.117	2.326
220602	1.300.000	0	5.915	5.915
250602	1.645.000	1.194	41.536	42.731
Tilsamans	**5.292.883**	**24.101**	**20.791**	**44.892**

Aðrar rentuútreiðslur

Aðrar útreiðslur enn rentur og kursmunir av brævalánunum eru 7.008 t.kr., t.e. gjøld fyri skráseting, eftirlit o.a. Í 2020 eru 5,9 mió.kr. rindaðar í ómaksgjaldi, í sambandi við at tvey nýggj brævalán vóru stovnað. Nakað av útreiðslum eru av føroyskum peningastovnskontum hjá Landsbankanum og Gjaldstovuni.

Játtanin til Landsbankan rindar útreiðslurnar av sjálvari porteføljuskipanini. Útreiðslur í sambandi við plasering av gjaldføri, t.d. kurtaga, fara av høvuðskontu 20.50.2.01 "Rentuinntøkur av innistandandi".

Í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at Landsbankin bjóðaði íløgurøktina í 2018 út. Frá 1. januar 2019 hevur landskassin havt 5 íløgurøktarar, Nordea, SEB, Handelsbanken, Nykredit og Sydbank. Sambært Landsbankanum er avtalan fyribils galdandi til ársenda 2021.

Útbjóðing av høvuðsbankasambandi fyribils útsett.

Ætlanin var eisini at bjóða út høvuðsbankasambandið, men ætlanin er fyribils útsett, tí at hvítvaskgøla hjá Danske Bank og COVID-19 hava órógvað.

Játtanir undir § 20 til rentur av brævalánum og plaseringum

Skuld og gjaldføri landsins verða virðisásett til marknaðarvirði.

Landsgrannskoðanin hevur í undanfarnum ársfrágreiðingum umrøtt meginreglurnar fyri virðisásetingum av skuld, sum Landsbankin fyrisitur. Í 2016 vóru meginreglurnar broyttar soleiðis, at brævalánini verða tikin við í roknskapin til marknaðarvirði. Fígging landsins mælti til broytingina í 2015, soleiðis at somu meginreglur eru galdandi fyri fíggjarliga ogn og skuld. Fígging landsins vísti á, at onnur lond hava tjóðbanka, sum hevur tiltøkupeningin hjá landinum um hendi, og tá síggjast rentur o.a. ikki beinleiðis í landsroknskapinum.

Landsgrannskoðanin hevur vísst á, at roknskaparmeginreglurnar eiga á bestan hátt at endurspegla tær avgerðir, sum eru tiknar í fíggjarárinum. Eitt høvuðsendamál við fíggjarlógini og landsroknskapinum er at halda saman tað, sum er brúkt ella rátt yvir, við tað sum er samtykt. Tann mest rættvísandi myndin av landsroknskapinum er tí tær upphæddir, sum samsvara við tær avgerðir, sum ein landsstýrismaður ella stovnsleiðsla tekur.

Er endamálið við at taka lán einans at fíggja almennan rakstur, og lánini ætlandi ikki verða innfríað fyri tíð, hava kursbroytingar á hvørjum ári ikki útreiðslur ella inntøkur við sær í samlaðu lánstíðini. Rentan, sum hevur útreiðslur við sær hvørt ár, endurspeglar veruligu avgerðirnar. Árligu kursbroytingarnar geva tí ikki betri upplýsingar - sum við plaseringunum -, men kunnu hinvegin heldur órógva veruligu myndina av útreiðslunum av skuldini.

Játtanir og roknskapir fyri ávikavist rentur av skuld og rentur av innistandandi síðani 2016.

t.kr.

	2016	2017	2018	2019	2020
Rentur av skuld					
Játtan	54.000	20.000	18.000	43.500	26.100
Roknskapur					
Rentur	75.791	54.331	50.746	39.726	24.476
Kursbroytingar	-16.608	21.079	-27.702	13.380	12.418
Ómaksgjøld o.a.	3.825	4.114	649	1.950	7.008
Javning	-9.008	-59.524	-5.693	-11.557	-17.802
Rentur av innistandandi					
Játtan	-26.700	-25.800	-31.900	-40.700	-36.500
Roknskapur					
Samlaður vinningur	-86.734	-79.724	45.193	-191.305	-73.217
Javning	60.034	53.924	-77.093	150.605	36.717

Í ársfrágreiðingini 2017 vísti Landsgrannskoðanin á, at útreiðslurnar av rentum, kursbroytingum o.ø. vóru 80 mió.kr. Játtanin var 20 mió.kr. Sjálv rentan var 54 mió.kr. Landsgrannskoðanin ivaðist tí í, um broyttu roknskaparmeginreglurnar høvdu við sær, at bókaðu útreiðslurnar á bestan hátt endurspeglaðu tær avgerðir og tiltøk, sum vóru framd innan játtanarøkið.

Í 2020 er játtanin 26,1 mió.kr. til rentur av skuld. Í talvuni sæst, at rentuútreiðslurnar eru 24,5 mió.kr., og útreiðslurnar av kursbroytingum eru 12,4 mió.kr.

Í 2019 greiddi landsstýrismaðurin frá, at í fíggjarlógini fyri 2019 var játtanin til rentuútreiðslur á § 20 "Inntøkur" ásett sum effektiva rentan við upptøku av lánsbrævaskuldini, soleiðis at hon endurspeglar miðalrentustig í mun til støddina á skuldini.

Javning av rentuútreiðslum og -inntøkum millum § 20 og § 80

Frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 undir RLÚ II.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum hevur Landsgrannskoðanin eisini umrøtt broytingarnar í upplýsingunum um rentu o.a. Nú er viðgerðin av rentuinntøkum og rentuútreiðslum, kursbroytingum o.ø. soleiðis, at inntøkur og útreiðslur, sum hava verið í árinum, eru tiknar við undir § 20, sum er partur av RLÚ I, meðan tær mánaðarliga eru javnaðar soleiðis, at frávikið í mun til játtan verður flutt til § 80 "Rentur", sum er partur av RLÚ II.

Ivasamt, um tað er rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Landsgrannskoðanin helt tað vera ivasamt, um tað var rætt at javna ella flyta millum høvuðskontur, soleiðis at nýtslan samsvarar við játtanina.

Í fíggjarlógini 2020 er greitt frá undir høvuðskontu 20.50.1.01 "Rentur at gjalda", at fyri rentuútreiðslurnar verður effektiva rentan brúkt. Metingin av rentuútreiðslunum er grundarlag undir bæði játtan og roknskapi, og frávik ímillum játtan og nýtslu verða skrásett sum óvanligar útreiðslur og inntøkur.

Landsbankin hevur greitt frá, at frá 2015 hevur bankin mett um rentuútreiðslurnar við at brúka effektivu rentuna á lánsbrævarøðunum, tá ið metingin var gjørd. Tað er viðkomandi, um broytingar verða gjørdar í lántøkuni í úrtíð, men av tí at ætlanin ikki er at rinda lánini aftur fyri tíð, hevur Landsbankin, frá og við 2019, brúkt effektivu rentuna á lánunum, við upptøku. Tað eigur í framtíðini at endurspegla rættari rentukostnað í fíggjarlógini.

Í landsroknskapinum 2020 eru rentuútreiðslurnar undir § 20 javnaðar við 17,8 mió.kr. og rentuinntøkurnar við 36,7 mió.kr. Í javningini av rentuinntøkunum eru 13,9 mió.kr. í muni, sum sambært Búskaparskipan landsins er nettopartur hjá Búskapargrunninum av samlaðu íløgurøktini, frádrigið 730 t.kr. í umsitingargjaldi til Landsbankan.

11. Orðalisti

AMEG – Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin.

Benchmark – er ein miðvís kanning og meting, sum verður gjørd fyri at samanlíkna úrslitini hjá fyritøkum.

Brúkararættindi – rættindini hjá tí einstaka til at stovna, lesa, broyta ella strika dátur í KT-skipanum.

Búskaparskipan landsins (BSL) – felagsheiti fyri allar skipanirnar, sum Gjaldstovan umsitur.

Darktrace – amerikansk-bretsk fyritøka, sum er serkøn í trygd á netinum.

Dygdarskipan – samanløgd skipan hjá kommunulæknunum til eftirútbúgving og gransking.

Eksternir grunnar – grunnar, sum ikki eru tiknir við í fíggjarstøðu landskassans, og sum hava sjálvstøðugan roknskap.

Eykajáttanarlóg – broytingar, sum Løgtingið ger í játtanum, eftir at fíggjarlógin er samtykt.

Fígging Landsins – fyrrverandi deild hjá Gjaldstovuni, sum umsat gjaldførið hjá landinum.

Fíggjargrannskoðan – er at ansa eftir, at roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, sum roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

Flexsalda – tal av tímum, eitt starvsfólk eigur á ella skyldar.

Fyrisitingargrannskoðan – er at ansa eftir, at tað er hóskandi atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um.

Grannskoðanarlógin – løgtingslóg nr. 25/1999 “um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.”

Heildarskipanin – í frágreiðingini meinast við nýggju Heildarskipanina hjá Almannaverkinum.

Høvuðskonta – játtanir verða veittar á høvuðskontum, og tað er høvuðskontan, ið er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um.

Innheintingarskipanin hjá TAKS (IK-skipanin) – er ein KT-skipan til at krevja inn skatt o.a., sum er fallið til gjaldingar.

Innaneftirlit – tey tiltøk, sum leiðslan setir í verk fyri at fáa nóg stóra vissu fyri, at roknskapurin er rættur og álítandi, at raksturin er effektivur, og at lógir og reglur verða hildnar.

Inntøkufíggjað virksemi – er virksemi, ið ber handilsligan dám. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann loyva stovnum at hava inntøkufíggjað virksemi. Nærri reglur um inntøkufíggjað virksemið eru í kap. 6 í K. nr. 84/2011 “um rakstrarjáttan”.

ISAE 3402 – altjóða standardur, sum verður brúktur í sambandi við grannskoðanir og váttanir, sum skulu geva høga vissu fyri tryggum umhvørvi hjá tænastuveitarum, herundir KT-veitarum.

Løgujáttan – játtanarslagið løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum, skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.

Kervisgrannskoðan – grannskoðan av KT-skipanum.

Keypsportalurin – portalur har lýst verður alment, tá ið almennir stovnar skulu keypa vørur ella tænastur.

Kontuskipan landsins – kontuplanur fyri tað almenna. Reglur fyri, hvussu útreiðslur og inntøkur skulu flokkast í landsroknskapinum.

KT Landsins – deild hjá Gjaldstovuni, sum hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT-tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.

Landsnet – tænasta, sum KT Landsins veitir. Tænasturnar fevna um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT-support til brúkarar.

Landsroknskapurin – samlaði ársroknskapurin hjá landinum og fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri farið fíggjarár og aktiv og passiv landsins. Gjaldstovan setir landsroknskapin upp.

Løgfrøðiliga-kritisk grannskoðan – grannskoðan av, at roknskapurin er samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði.

PandaConnect – porteføljuskipan til at fyrisita gjaldføris- og skuldaraviðurskifti.

Rakstrarjáttan – játtan, sum fevnir um at seta starvsfólk og at halda útreiðslur í hesum sambandi, herímillum at keypa vørur, tænastur o.a.

RLÚ – er ein stytting fyri Rakstur, Løgu og Útlán.

RLÚ I – ársúrslit av vanligu postunum í landsroknskapinum.

RLÚ II – RLÚ I pluss úrslit av óvanligum postum.

Roknskapargóðkenningarskipanin – stytt RGS, er ein KT-skipan, sum góðskutryggjar tann almenna roknskapin við góðkenningum av stovnsroknskapum.

Roknskaparkunngerðin – Kunngerð nr. 22/2007 “um roknskaparverk landsins”.

Roknskaparlógin – løgtingslóg nr. 33/1994 “um landsins almenna roknskaparhald v.m.”

Roknskaparreglugerð – reglugerð við ábyrgdar- og heimildarreglum fyri roknskaparhaldið hjá stovnum.

Roknskaparrundskrivið – Roknskaparrundskriv frá Fíggjarmálaráðnum frá 2001 um vegleiðing um roknskaparreglugerðir.

Ræðisrættur – er at hava ræði á einari kontu ella játtan.

Serbreytir – serligt skipað miðnám.

Setanarpolitikkur landsins – partur av starvsfólkapolitikkinum hjá landinum. Setanarpolitikkurin hevur til endamáls at tryggja, at stovnar seta umsøkjarar, ið, úr einum heildarsjónarmiði, eru best egnaðir til starvið, og tryggja, at umsøkjarar, sum ikki fáa starv, kunnu vera vísir í, at avgerðin er farin fram á rættan hátt.

SLA – Service Level Agreement - er heiti á einari KT-rakstrar- og viðlíkahaldsavtalu millum partar.

Standardkonta (St.kt.) – Sundurgreinar inntøkurnar og útreiðslurnar í t.d. sølu, lønir, vørukeyp, tænastuveitingar o.a.

Standardroknskaparkonta (StRk) – Neyvari útgreining av standardkontu.

Stuðulsfíggjað virksemi – virksemi undir rakstrarjáttan, sum ikki er av handilsligum slag, og sum er fíggjað við stuðli.

Stýrisskipanarlógin – Ll. nr. 103/1994 "um stýrisskipan Føroya", v.s.b.

Støðla – er í verandi fíggjarárið at útreiðsluføra eina útreiðslu, ið fer at verða hildin í komandi fíggjarárum/seta av til væntaðar útreiðslur.

TotalView – er skipan, sum fleiri almennir stovnar brúka til at skráseta tíðarnýtslu v.m.

Transaktiónsslóð – eisini nevnd viðskiftisslóð – er treytin um at allar skrásetingar skulu kunna finnast í roknskapinum og at tølini í roknskapinum skulu kunna loysast upp í tær skrásetingar, sum tey eru samansett av.

Trygdarpolitikkur – er ein yvirskipaður politikkur, ið tekur atlit at váðum, ið hótta.

Undirkonta – verður brúkt, tá ið neyðugt er at býta eina játtan sundur í fleiri virkisøki.

Útjavningarkonta – minnir um eginpeningskontuna í roknskapum hjá privatum virkjum, men er tó meiri tøknilig, m.a. tí at ogn og skuld vera virðisásett øðrvísi.

Váðameting – er at eyðmerkja og greina teir vandar, sum mest sannlíkt kunnu raka stovnin meint.

Vaktætlan (el. Vaktplan) – KT-skipan at ráðleggja arbeiðstíð í og at avgreiða lønir við.

Verklagslóg – er lóg, sum eigur at verða løgd fyri Løgtingið, tá ið íløguætlan er 10 mió.kr. ella størri.

Verkætlan – er t.d. bygging av einum bygningi ella vegi og granskingarverkætlanir.

Verkætlanarleiðsla – leiðslan fyri einari verkætlan.

VFS-skipan – er stytting fyri Viðskiftafólkaskipan, ein "gomul" málsviðgerðaskipan hjá Almannaverkinum, sum nú er eitt arkiv.

Víðkað fyrisitingargrannskoðan – ein størri og meira víðfevnd kanning, enn vanlig fyrisitingargrannskoðan, sum løgtingsgrannskoðararnir kunnu biðja um.

Vinnugluggin – skipan hjá TAKS til at lata inn roknskapir o.a.